Jørn Astrup Hansen
Jóan Pauli Joensen

# Føroyar og bankarnir í 100 ár



Jørn Astrup Hansen
Jóan Pauli Joensen

# Føroyar og bankarnir í 100 ár

Jørn Astrup Hansen
Jóan Pauli Joensen

# Føroyar og bankarnir í 100 ár

Føroyar og bankarnir í 100 ár

Útgevari: Føroya Banki
Uppseting: Vasti
Perma: Ingi Joensen, Grafikstudio
Myndir: Kalmar Lindenskov, Álvur Haraldsen,
Jens Kr. Vang, Per á Hædd
og Føroya Fornminnissavn
Prent: Formula TryXager
ISBN: 99918-3-205-X

# Føroyar og bankarnir í 100 ár

*Góðu føroyingar!*

Tann 1. mars 2006 vóru 100 ár liðin, síðan Føroya Banki á fyrsta sinni beyð kundum sínum á gátt í einum lítlum húsum í Niels Finsensgøtu í Havn. Hetta hevur bankin valt at hátíðarhalda á ymsan hátt í føðingardagsárinum. Skipað er fyri stórum føðingardagsveitslum kring landið fyri kundum bankans, og bókin, tygum hava í hondini, hevur til endamáls at varpa ljós á bankasøgu Føroya og samfelagsligu menningina seinastu 100 árini. Hon verður latin øllum húskjum í Føroyum sum gáva.

Bankarnir hava havt ein sera týðandi leiklut í samfelagnum farnu øldina. Teir hava gjørt tað møguligt hjá framfýsnum vinnulívsfólkum at gera ætlanir til veruleika, og teir hava givið privatfólkum umstøður at seta føtur undir egið borð. Men bankarnir hava eisini, tá samfelagið av og á rak út á streymasjógv og kom í fíggjarligt óføri, verið miðdepil í teimum hørðu uppgerðum, sum stóðust av bakkøstunum.

Føroyingar høvdu í mong ár tveir bankar, Føroya Banka og Sjóvinnubankan. Hesir báðir bankarnir vórðu orsakað av búskaparkreppuni í 1990'unum lagdir saman í ein banka, ið tók búmerkið hjá Sjóvinnubankanum og fekk sær navnið Føroya Banki.

Føroyska samfelagið tók stór tøk fyri at varðveita bankaskipanina í 1990'unum. Afturlítandi kunnu vit staðfesta, at verkætlanin eydnaðist betur, enn nakar hevði droymt um. Bankin hevur meiri enn vunnið innaftur ta íløgu, ið landsstýrið gjørdi í bankarnar, og landsstýrið eigur ein banka, ið óivað kann seljast við munandi vinningi.

Samanlagdi bankin hevur tað í dag sum ein ferðugur unglingi. Hann er sterkur, væl fyri og til reiðar at taka av komandi avbjóðingum. Men hann ber samstundis við sær eina ríka og hendingaríka søgu, sum hann ikki gloymir.

Tá søgan um bankarnar skuldi skrivast, valdi Føroya Banki at biðja fyrrverandi forstjóran í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, og Jóan Paula Joensen, professara, taka sær av arbeiðinum. Jørn Astrup Hansen hevur við sínum skarpa og lætta penni víst, at hann kann skriva um torskild fíggjarviðurskifti, so øll skilja hann. Jóan Pauli Joensen hevur við sínum stóra søguliga granskingararbeiði víst, at hann hevur eitt innlit í Føroya fólkalív og søgu sum fáur.

Verkið, sum teir báðir lata úr hondum, er eftir okkara tykki eitt valaverk. Rithøvundarnir hava fingið fríar hendur at skriva søguna og hava býtt uppgáv-

una millum sín soleiðis, at Jørn Astrup Hansen hevur skrivað um bankarnar í 100 ár. Hetta er fyrri partur av bókini. Seinni partur, sum Jóan Pauli Joensen hevur skrivað, er ein ferð gjøgnum samfelagsmenningina í Føroyum í tíðarskeiðnum uppundir og eftir, at Føroya Banki varð stovnaður í 1906.

Nógv av tí, sum kemur fram í hesi bók, er ikki umrøtt gjølla fyrr. Tað er tí okkara vón, at lesararnir fara at halda bókina vera bæði upplýsandi og spennandi. Tað er eisini okkara vón, at eitt nú miðnámsskúlarnir fara at taka væl ímóti hesum verki. Søgan um bankarnar og samfelagið, tá Føroyar mentu seg frá bóndasamfelag til veiðisamfelag og síðan ídnaðarsamfelag, er ein áhugaverd og lærurík søga, sum okkara ungfólk eiga at kenna.

## Á veg ímóti einskiljing

Bankin, ið letur frá sær hetta søguliga verkið, er ein sterkur og sunnur banki, sum stendur við eitt vegamót. Á sumri 2005 var vaktarskifti á brúnni hjá Føroya Banka. Jørn Astrup Hansen fór frá sum forstjóri, og nýggjur forstjóri gjørdist Janus Petersen, ið hevði verið stjóri í bankanum síðan 1994. Tann 1. februar 2006 varð Súni Schwartz Jacobsen eisini settur sum stjóri.

Nýggja leiðslan hevur saman við nevnd bankans sett kósina av nýggjum. Strategiska ætlanin fyri bankan miðar stutt og greitt eftir at fáa Føroya Banka at vaksa bæði heima og uttanlands. Og úrslitini síggjast longu. Bankin hevur í seinastuni skundað munandi undir íløguhug føroyinga við eitt nú at bjóða kundum at gera íløgur í trygg lánsbrøv. Nýggj produkt sum SkáaLán, FastLán og RentuLoft eru komin á marknaðin, og útlánini til vinnulívið og innlán bankans eru nógv vaksin.

Í juni 2006 gjørdist bankin limur í Virðisbrævamarknaði Føroya og íslendska virðisbrævamarknaðinum, ICEX. Føroya Banki kann við hesum limaskapi virka sum meklari á marknaðinum og ráðgeva teimum fyritøkum, sum vilja lata seg skráseta har. Bankin hevur í sama viðfangi sett á stovn eina corporate finance deild, so bankin nú er førur fyri at veita alla neyðuga ráðgeving, tá fyritøkur verða seldar og keyptar. Eisini hevur bankin saman við øðrum stovnað framtaksfelagið Løkir og er í ferð við at stovna nýtt bústaðarsølufelag.

Ein onnur stór avbjóðing hjá bankanum, nú hann fer um tey 100, er, at hann skal einskiljast. Løgtingið samtykti 2. mai 2006 við stórum meiriluta, at Fíggingargrunnurin frá 1992, sum eigur 99,4 prosent av partabrøvunum í bankanum, skal fara undir at selja síni partabrøv. Ætlanin er at einskilja bankan soleiðis, at bankin verður skrásettur á Virðisbrævamarknaði Føroya, so bankin kann gerast ogn hjá einum breiðum eigaraskara.

Í uppskotinum hjá Fíggjarmálaráðnum, sum løgtingið samtykti, varð sagt, at

tað eru atlit at føroyska virðisbrævamarknaðinum og førleikamenning av føroyska fíggjarsektorinum, ið liggja aftan fyri hetta valið. Eisini varð staðfest, at løgtingslimir síggja ein ávísan vanda í, at serkunnleiki og menning av ymiskum førleikum kunnu verða flutt av landinum, um ein útlendskur strategiskur íleggjari keypir bankan.

Nevnd og stjórn bankans taka fult undir við, at bankin verður einskildur, og at einskiljingin verður framd soleiðis, sum løgtingið hevur sett sær fyri. Einskiljingin er eitt natúrligt stig at taka, eftir at bankin hevur vunnið innaftur tær 2,7 milliardir krónurnar, sum landið brúkti at fáa Sjóvinnubankan og Føroya Banka á rættkjøl aftur undir kreppuni. Fyri at lætta um søluna útlutaði Føroya Banki á vári 2006 eigarunum 600 milliónir krónur í søguliga stórum vinningsbýti.

## Nýggjar tíðir og vøkstur

Um tað mundið, tá Føroya Banki varð stovnaður, kollveltust liviumstøðurnar í Føroyum á so mangan hátt. Vit fingu telefon. Vit fingu telegraf. Vit fingu ljós. Vit fingu skipaðan politikk. Og fiskivinnan tók seg fram við miklari ferð. Sum úrslit av hesum framtakshugi skaptist tørvur á einum banka. Í dag er menningin ikki minni. Tøkniliga er heimurin allur bundin saman í internet og aðrar elektroniskar skipanir. Alsamt fleiri tænastur av alskyns slagi verða tí sjálvvirkandi.

Hetta er ein fyrimunur fyri peningastovnarnar, tí teir fáa veitt betri, skjótari og tryggari tænastur. Í dag taka fólk pengar út í sjálvtøkum og gjalda sínar rokningar umvegis netbankan heimanífrá. Ung sum eldri keypa eisini í handlum við FR-kortum, ið rættiliga hava kollvelt alla gjaldsmidling í samfelagnum. Føroysku peningastovnarnir hava á fyrimyndarligan hátt samstarvað um allar hesar nýggju tænasturnar gjøgnum Elektron.

Men peningastovnarnir kappast eisini støðugt. Fyrr var kappingin serliga millum Sjóvinnubankan og Føroya Banka, men síðan bankarnir báðir vórðu lagdir saman, og lógarverkið í 1994 varð broytt soleiðis, at sparikassarnir eisini kundu fara at virka sum bankar, hevur kappingin serliga staðið millum samanlagda bankan og sparikassarnar. Og síðan útlendskir peningastovnar fóru at gera vart við seg í Føroyum, er kappingin harðnað uppaftur meira.

Herda kappingin ger, at Føroya Banki á ongan hátt kann taka sær av løttum. Menning og nýhugsan eru lyklaorð fyri at fáa bankan at vaksa. Avgerandi er eisini, at bankin er opin fyri at leita út á aðrar leiðir enn tær heimligu. Arbeitt verður tí fram ímóti at víðka virksemi bankans til eisini at umfata uttanlandsvirksemi. Nú landamørkini hvørva, og kapitalur, arbeiðsmegi, tænastur og vørur ferðast frítt millum lond, ið fyrr vóru heilt afturlatin, er hetta ein sjálvsøgd leið at fara.

Men meðan nútíðin bjóðar av, kann vera læruríkt at dvølja eitt bil við upprunan. Hann lesa vit um í hesi bók. Bankin takkar Jørn Astrup Hansen og Jóan Paula Joensen fyri avrikið. Ein tøkk fer eisini til hini, ið vóru við til at skapa bókina. Vasti, ið tók sær av prentilgerðini, Jógvan Jespersen, ið týddi tekstin hjá Jørn Astrup Hansen til føroyskt, Una Arge, ið skipaði tilfarið til prentingar, Inga Joensen, ið tilevnaði permuna, og Erling Isholm, ið gjørdi navnayvirlitið aftast í bókini. Haldane Joensen og Ólavur Øster á Føroya Fornminnissavni veittu eins og Dimmalætting og Sosialurin køna hjálp í sambandi við myndir og tekningar.

Kanska verða ikki allir lesarar samdir um, at søgan um Føroyar og bankarnar í 100 ár átti at verið skrivað soleiðis, sum hon her verður løgd fram. Men sum høvundarnir vísa á, so hava teir sjálvir valt tey evni, teir lýsa, og niðurstøðurnar eru teirra egnu. Hetta er eftir okkara tykki rætti mátin at skriva søgu. Høvundarnir skulu við egnum kanningararbeiði sum grundarlag hava frælsi at gera sínar egnu niðurstøður. Góðan lesihug!



Jóhan Páll Joensen

*nevndarformaður*



Janus Petersen

*forstjóri*

# Innihald

## Bankarnir í 100 ár

*Jørn Astrup Hansen*


**Fyrsti bankin í Føroyum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17**

Keypmenn og bankamenn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17

Ólavur á Heygum tekur fyrsta stigið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

Landmandsbankin stovnar Føroya Banka . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

Føroya Banki letur upp . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

**Lunnar lagdir undir ein nýggjan banka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23**

Sjóvinnulánsgrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23

Nýggj manning á brúnna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24

Sjóvinnubankin sjósettur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26

**Seinni heimsbardagi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30**

Føroyar verða hersettar. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30

Politiskt skifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

Føroyar fáa egið gjaldoyra. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

Frá fiskiskapi til transitthandil . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34

Ov nógvur peningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 36

Sterlingpundini hjá Sjóvinnubankanum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37

Føroyar fara úr sterlingblokkinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 38

**Árini eftir kríggið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39**

Útbygging av trolaraflotanum. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39

Sjóvinnubankin í trupulleikum. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41

Reyðabók . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 52
Sjóvinnubankin fór upp í hvalaveiðu. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62
Nýggjar fíggingarkeldur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 64
Tjóðbankin veitir hjálp . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66

**Nýggjar tíðir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 68**
Ráfiskagrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 69
Við veðhaldi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Bankarnir vaksa ov skjótt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
Ávaringarnar ikki tiknar í álvara . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 85

**Bankakreppan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 88**
Hann øtlar veðrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 88
Tann 6. oktober. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 91
Náttin millum januar og februar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 94
Partabrævabýtið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 96
Ein roynd til samanlegging. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 98
Skyldan hjá móðurfeløgum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 100
Samanleggingin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 103
Fíggingargrunnurin frá 1992 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 103

**Bankamálið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 108**
Ein vánaligur handil? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 108
Gørtz-nevndin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 109
Kanningarnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 110
Staðfesting av politiskari ábyrgd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 113
Landsstýrið stevnir stjórnini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 114
Semjan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 116
Politiskt eftirspæl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 117

**Endurreisingin** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **119**
Trygd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 119
Elektron . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 123
Fiskasølan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 130
Fiskiídnaðurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 138
Bústaðarmarknaðurin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 142
Kommunuskuldin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 147

**Eftirskrift** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **152**

**Yvirlit yvir nevndarlimir og stjórar** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **156**

## Føroyar í 100 ár

*Jóan Pauli Joensen*

**Inngangur**. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **163**

**Land, amt og kommuna** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **164**
Løgtingið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 165
Embætismenn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 170
Læknar og heilsuviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 171
Bygdir, markatal, prestagjøld og kommunur . . . . . . . . . . . . . . . 175

**Politikkur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **181**
Sjálvstýri og samband. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 182
Á løgtingi og ríkisdegi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 184
Fráhald og rúsdrekka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 187
Tilboðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 188

Rúsdrekkabann í 85 ár . . . . . . . . . . 191
Próstur, málið, fúla bók og Merkið . . . . . . . . . . 194
Vinna og politikkur . . . . . . . . . . 199
Heimastýrið . . . . . . . . . . 200

**Sambinding . . . . . . . . . . 204**
El, telefon og postur . . . . . . . . . . 204
Smiril og Smyril . . . . . . . . . . 209
Mjólkarbátarnir . . . . . . . . . . 211
Aðrar leiðir . . . . . . . . . . 213
Havnarløg og vegir . . . . . . . . . . 215
Til útheimin sjóvegis og loftvegis . . . . . . . . . . 218

**Skúli og útbúgving . . . . . . . . . . 222**
Lærarskúlin . . . . . . . . . . 223
Bygdaskúli og framhaldsskúli . . . . . . . . . . 224
Studentaskúli og miðnámsútbúgvingar . . . . . . . . . . 226
Skipara- og maskinútbúgvingar. . . . . . . . . . . 228
Aðrir skúlar og útbúgvingarmøguleikar . . . . . . . . . . 229

**Keypmenn og kontrabøkur . . . . . . . . . . 231**
Fríhandlarnir . . . . . . . . . . 231
Skipakeyp . . . . . . . . . . 233
Kontrabókskipanin . . . . . . . . . . 234
At fortjena og at skriva . . . . . . . . . . 237

**Fiskimenn og fiskafólk . . . . . . . . . . 241**
Útróður og bátar . . . . . . . . . . 241
Fjarfiskiskapur . . . . . . . . . . 247
Fiskaarbeiði á landi . . . . . . . . . . 256

**Til Havnar vit fara . . . . . . . . . . 264**
Miðstaður og keypstaður . . . . . . . . . . 264

**Til sálar og likams . . . . . . . . . . 272**
Kirkjan . . . . . . . . . . 273
Brøðurnir . . . . . . . . . . 274
Heimamissiónin . . . . . . . . . . 275
Aðrar rørslur . . . . . . . . . . 277

**Gerandisdagur í eina øld . . . . . . . . . . 280**
Undirstøðan . . . . . . . . . . 280
Arbeiðsmøguleikar . . . . . . . . . . 281
Inniløga . . . . . . . . . . 282
Lívskorini . . . . . . . . . . 284
Ringar tíðir . . . . . . . . . . 286
Eftir kríggið . . . . . . . . . . 288

**Hús og bústaður . . . . . . . . . . 289**
Tey gomlu húsini . . . . . . . . . . 289
Siðalagsbroytingar . . . . . . . . . . 291
Nýggj hús . . . . . . . . . . 292
Stovurnar . . . . . . . . . . 294
Onnur hús . . . . . . . . . . 297

**Samandráttur . . . . . . . . . . 299**

**Navnayvirlit . . . . . . . . . . 302**



## Jørn Astrup Hansen, høvundur

*Jørn Astrup Hansen, sum er føddur í 1942 í Sædding í Vesturjútlandi, fór úr skúlanum sum 13 ára gamal. Hann starvaðist í sínum ungu árum innan landbúnaðin, men fekk seinni eina handils- og skrivstovuútbúgving. Í 1965 tók hann hægri handilsskúlaprógv á keypmannaskúlanum í Kolding. Eftir at hava verið uttanlands í eini tvey ár fór hann í 1967 at lesa við universitetið í Århus, har hann í 1973 tók prógv sum cand. oecon.*

*Síðan 1974 hevur Jørn Astrup Hansen starvast í fíggjarheiminum, fyri tað mesta í bankaheiminum. Í tíðarskeiðnum frá 1975-91 starvaðist hann í Midtbank, har hann tey síðstu trý árini var ein av stjórunum. Í 1992 varð hann tilknýttur Baltica Forsikring sum stjóri í einum dótturfelag.*

*Tann 1. januar 1993 tók Jørn Astrup Hansen við sum stjóri í Sjóvinnubankanum, og tá bankarnir vórðu lagdir saman í 1994, gjørdist hann forstjóri í Føroya Banka. Landsstýrið noyddist í 1992-93 at tilføra bankunum tilsamans 2,7 mia. kr. í nýggjum kapitali. Hesa upphædd hevði Føroya Banki í fullan mun vunnið aftur, tá Jørn Astrup Hansen legði frá sær sum stjóri í bankanum 1. mai 2005. Hann flutti tá aftur til Keypmannahavnar at búgva.*

*Jørn Astrup Hansen, ið sum bankastjóri var sera virkin í samfelagskjakinum, varð í februar 2006 valdur í Búskaparráðið, har hann nú er formaður.*

**1. partur**

*Jørn Astrup Hansen*

# Bankarnir í 100 ár

# Fyrsti bankin í Føroyum

## Keypmenn og bankamenn

Eftir at einahandilin varð tikin av í 1856, átóku fleiri av teimum stóru handilsvirkjunum sær uppgávur, ið mintu um bankavirksemi. Í kapping við Færø Amts Sparekasse, ið varð stovnaður í 1832, bjóðaðu handilsvirkini viðskiftafólkum sínum rentu, um tey lótu peningin standa í virkjunum. Í Føroyum høvdu vit fingið kontrabøkur – ikki bankabøkur.

Richard B. Thomsen (1950) hevur lýst skipanina við kontrabókunum soleiðis:

*Den monetære situation var naturligvis ikke ideel, eftersom bankforbindelserne laa saa langt borte som København. Til gengæld hørte kontante afregninger ogsaa til sjældenhederne. Alt blev bogført indtil efteråret, når kutterne blev lagt op, og besætningen afmønstrede. Samtidig kom saa de tunge guldforsendelser fra Danmark. Men hvad skulle sømanden slæbe dette guld med sig til? Grave det ned i jorden? Nej, han indskød sin fortjeneste i den handel, hvor han virkede og kunne opnaa 3 pct. p.a.*

*Saaledes blev købmanden paa Færøerne bankier, og tusinder, som skippere, fiskere og arbejdere satte på rente i forretningen, gav ham et finansielt rygstød, som ubetinget var medvirkende til gennemførelsen af den hurtige fiskeri- og forretningsmæssige ekspansion.*

Tað vóru ikki øll, sum tóku væl ímóti Føroya Banka, tá hann varð stovnaður sum tann fyrsti bankin í Føroyum. Oddamaðurin í sjálvstýrisrørsluni, Jóannes Patursson, hevði hoyrt um ein banka á donsku vestindisku oyggjunum, sum gav út egnar pengaseðlar, og hann vónaði, at Føroya Banki á sama hátt skuldi fara at geva út føroyskar pengaseðlar. Jóannes Patursson var vónbrotin, tá hann sannaði, at tað ikki var ætlanin. Men tað vóru serliga keypmenninir, sum vóru ivasamir um, hvør nytta var í einum banka. Richard B. Thomsen minnist aftur á hetta soleiðis:

*Bankernes hovedformaal skulle naturligvis være det at ophjælpe og støtte erhvervene, ikke mindst fiskeriet. Men i første omgang lød den forjættende tale nærmest som en absurditet. Banken splittede nemlig automatisk tillidsforholdet mellem købmanden og hans folk, der kom og forlangte deres penge for at sætte dem ind i banken. Disse udbetalinger forfaldt ofte på det mest ugunstige tidspunkt. Og derfor maatte købmanden selv gaa i banken for at laane de samme penge tilbage igen, men på andre vilkaar og med prioriteterne hængende over hovedet.*

## Ólavur á Heygum tekur fyrsta stigið

Olaf Johannes Olsen, Ólavur á Heygum, kongsbóndi í Vestmanna, varð valdur í løgtingið í 1903. Sama ár legði hann uppskot fyri tingið um at velja eina nevnd at kanna møguleikarnar fyri at seta ein banka á stovn í Føroyum. Ólavur á Heygum var ikki bert kongsbóndi og løgtingsmaður. Hann var eisini handilsmaður og reiðari – ein av tátíðar undangongumonnum.

Uppskotið hjá Ólavi á Heygum vann ikki frama í løgtinginum, sum gjørdi av at útseta málið fyribils í eitt ár. Tann framburðshugaði Ólavur á Heygum legði sama uppskotið fram aftur í 1904, og tá bar tað ávøkst. Ein nevnd við fimm limum fekk til uppgávu at kanna málið nærri, og Ólavur á Heygum gjørdist sjálvur formaður í nevndini.

Nevndin metti, at tað ikki var nóg mikið av peningi í Føroyum til at stovna ein sjálvstøðugan føroyskan banka, og 12. august í 1904 heitti nevndin á Den danske Landmandsbank um at stovna eina deild í Føroyum. Landmandsbankin helt ikki, at tað var rætt at stovna eina deild í Føroyum, men nevnd bankans avgjørdi í desember í 1904 at seta 200.000 kr. av til partapening í einum sjálvstøðugum banka í Føroyum. Landmandsbankin boðaði samstundis frá, at hann vónaði, at eisini føroyskir partaeigarar fóru at koma við partapeningi. Lógarkravið var, at partapeningurin skuldi vera í minsta lagi 300.000 kr.

Í Føroyum varð málið umhugsað, og í september í 1905 boðaði løgtingið Landmandsbankanum frá, at tað helt tað vera ynskjandi, at bankin varð stovnaður skjótast gjørligt, og løgtingið hevði ynski um, at Landmandsbankin sjálvur teknaði allan partapeningin upp á 300.000 kr., tó soleiðis at føroyskir partaeigarar tey næstu fimm árini fingu møguleika fyri at tekna eina samsvarandi upphædd í partapeningi.

## Landmandsbankin stovnar Føroya Banka

Nú kom rættilig gongd á málið. Landmandsbankin sendi stjóran C. Christensen til Føroya at útvega fyribils hølir til bankan og at fyrireika bygging av einum banka. 2. februar í 1906 varð partafelagið Føroya Banki stovnað í hølunum hjá Landsmandsbankanum við Holmens Kanal í Keypmannahavn. Í lýsing í Dimmalætting og Tingakrossi tann 24. februar í 1906 bjóðaði nevndin at tekna partapening.

*P R O S P E K T U S*

*Indbydelse til Tegning af Aktier i Aktieselskabet*

***FØROYA BANKI***

*I Overensstemmelse med et af Færøernes Lagting fremsat Ønske har Den Danske Landmandsbank, Hypothek- og Vekselbank, Aktieselskab i Kjøbenhavn, tilsagt sin Medvirken ved Oprettelsen af et Bankinstitut på Færøerne til Fremme af Øernes økonomiske Udvikling.*

*I Henhold hertil er oprettet*

*FØROYA BANKI i Thorshavn*

*med en Aktiekapital på Kr. 300.000,-, hvis Tilstedeværelse er garanteret af Landmandsbanken i Kjøbenhavn.*

*Føroya Banki, der begynder sin Virksomhed den 1. Marts d.A., vil få foreløbigt Lokale i Poulsens Ejendom paa den østlige Side af Nyevej, indtil Bankens egen Bygning er opført.*

*Bankens Aktiekapital, Kr. 300.000.- fremlægges herved til offentlig Tegning i Tiden fra 1. Marts til 31. Maj d.A. til Parikurs. Dog har Landmandsbanken i Kjøbenhavn reserveret sig ret til at overtage indtil Halvdelen af Kapitalen, hvorfor eventuel Reduktion af tegnede Aktiebeløb forbeholdes.*

*Thorshavn og Kjøbenhavn, Februar 1906.*

*Bankraadet*

Landmandsbankin teknaði í fyrsta umfari 150.000 kr. av partapeninginum, sum varð lutaður út á 1.500 partabrøv á 200 kr., og bankin veitti eisini trygd fyri hinum 150.000 kr. Gjaldstreytirnar vóru lagaligar. Ein fjórðingur skuldi rindast, tá partabrøvini vórðu teknað, og síðan ein fjórðingur ávikavist 1. juni, 1. september og 1. desember í 1906.

Áhugin fyri at keypa partabrøv var lítil, og tá freistin var úti, høvdu aðrir partaeigarar bert teknað 14.400 kr. T.F. Thomsen, Føroya elsta fyritøka, sum í august 2006 kundi hátíðarhalda sín 150 ára føðingardag, teknaði einsamøll 5.000 kr., ið var ein triðingur av upphæddini, sum varð teknað í Føroyum. Triðja ættarlið, T.F. Thomsen, sat annars síðan í nevndini hjá Føroya Banka (1930-38). Landmandsbankin kom sostatt at eiga 95,2 pst. av nýggja bankanum. Við at selja partabrøv til kundar bankans minkaði ognarparturin hjá Land-


Trangisvaag d 1/3. 1906.

Føroya Banki!
Thorshavn

Jeg tillader mig herved at anmode
Dem tegne mig for
25 Aktier a 200 Kroner i Aktieselska-
bet Føroya Banki. – Beløbet tager
jeg mig den Frihed at vedlægge kroner
Kr 5000. i Check laat Privatbanken
i Kjøbenhavn, hvorfor Deres ærede An-
erkjendelse udbedes.
Med megen Agtelse
H G Thomsen

*Tá einahandilin varð avtikin í 1856, keypti T.F. Thomsen bygningarnar hjá handlinum á Tvøroyri. Sonur hansara, Hans Georg Thomsen, ið tók við sum stjóri í 1872, keypti í 1906 partabrøv í Føroya Banka. Triðja ættarlið, Richard B. Thomsen, var meira afturhaldin viðvíkjandi bankunum í endurminningum sínum 44 ár seinni*

mandsbankanum, sum árini gingu, og á heysti 1992 átti hann 61 pst. av partapeninginum.

Tá vit hugsa um, hvussu alt byrjaði, so kann tað tykjast harmiligt, at leikluturin hjá Landmandsbankanum, sum seinni fekk navnið Danske Bank, í føroysku bankasøguni endaði, sum hann gjørdi í 1993-94.

## Føroya Banki letur upp

Tann 1. mars í 1906 læt Føroya Banki upp í leigaðum hølum í húsunum hjá Wilhelm Poulsen beint yvir av núverandi bygninginum hjá Føroya Banka í Niels Finsensgøtu. Men her helt bankin til í stutta tíð. Longu í november sama ár flutti bankin í nýggja bankabygningin í Tórsgøtu, sum kostaði 60.000 kr. at byggja. Tórshavnar Kommuna keypti seinni bygningin, har Tilhaldið húsast í dag. Í mong ár helt Tekniski Skúli í Tórshavn til í gamla Føroya Banka.

Føroya Banki hevði opið allar gerandisdagar millum kl. 11 og 14, og fríggjadag og leygardag var eisini opið millum kl. 18 og 19. Í fyrstu nevnd bankans vórðu valdir C. Bærentsen, amtmaður, ið var formaður, Jacob Lützen, keypmaður, Tórshavn, N. J. Mortensen, keypmaður, Tvøroyri, og Emil Glückstadt og E. Rasmussen, báðir stjórar í Landmandsbankanum í Keypmannahavn. Fyrstu 30 árini sótu ikki færri enn fimm amtmenn í formansstólinum, og ikki fyrr enn í 1936 fekk bankin aftur ein føroyskan nevndarformann, tá Zacharias Heinesen varð valdur til formann. Hann røkti hetta starvið til 1944.

Etatsraad Emil Glückstadt, sum var sonur navnframa Isak Glückstadt, ið varð fyrsti stjórin í Landmandsbankanum, tók við stjórastarvinum har eftir pápan í 1910. Emil Glückstadt fór úr nevndini í Føroya Banka í 1922 í sambandi við, at Landmandsbankin fór á húsagang. Emil Glückstadt, sum seinni varð ákærdur fyri fíggjarsvik, varð fongslaður í mars í 1923. Hann doyði fyri egnari hond í juni í 1923, áðrenn dómur var fallin í málinum.

Bankakreppan í 1920-árunum og tann djúpa fíggjarkreppan í 30-árunum høvdu við sær eina dapra tíð fyri virksemið hjá bankunum. Ikki bert í Føroyum. Tær mongu bankakreppurnar høvdu við sær, at sparikassarnir vunnu seg fram.



*Í hesum húsunum á Nyvej í Havn, nú Niels Finsensgøta, læt Føroya Banki upp 1. mars 1906*

**Tøl úr roknskapunum hjá Føroya Banka**

| *Mió. kr.* | *1906* | *1910* | *1915* | *1920* | *1925* | *1930* | *1935* | *1940* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Útlán | 0,2 | 0,7 | 0,9 | 3,0 | 4,2 | 3,4 | 3,9 | 4,4 |
| Innlán | 0,3 | 0,5 | 1,2 | 5,1 | 3,4 | 3,6 | 2,5 | 6,2 |
| Eginpen. | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,6 | 0,9 | 1,0 | 1,0 | 0,9 |

Tølini fyri virksemið hjá Føroya Banka í árunum millum kríggini vísa, at lítil vøkstur var í hesum tíðarskeiði.

Hóast hesa gongdina hevði Føroya Banki dirvi til at taka næsta stigið í 1922, tá fyrsti útbankin varð stovnaður. Fyrsta deildin varð sett á stovn á Tvøroyri í 1922, og hetta vísir, hvussu frammarlaga Suðuroyggin var vinnuliga fyrst í 20. øld. Tað gingu 20 ár, áðrenn næsta deildin uttan fyri Havnina varð stovnað í Miðvági, og í 1955 varð ein deild latin upp í Klaksvík.

Í mai í 1956 fór Føroya Banki undir at byggja nýggjan bankabygning á einum grundstykki við Steinatún millum Tórsgøtu og Niels Finsensgøtu. Bankin hevði keypt stykkið frá Sjóvinnubankanum, sum hevði havt ætlanir um at byggja sær høvuðssæti í miðbýnum. Tá Sjóvinnubankin hevði stoypt grundina, noyddist hann at sleppa byggiætlanunum av tí djúpu kreppu, sum bankin kom í fyrst í 50-árunum.

# Lunnar lagdir undir ein nýggjan banka

## Sjóvinnulánsgrunnurin

Í 1925 vóru føroysk skip fyri fyrstu ferð til toskafiskiskap í Vesturgrønlandi. Grønlandsfiskiskapurin, sum tók seg skjótt fram, kravdi stórar íløgur. Flestu skipini høvdu bert seglini á at líta, og tað var ikki nøktandi til sigling í Grønlandi. Í 1925 høvdu bert eini 20 fiskiskip motor, men longu fimm ár seinni var talið komið upp í 150.

Hetta setti stór krøv til fígging. Føroya Banki strekti seg langt, men bankin hevði ikki nóg mikið av peningi til at klára fíggingina einsamallur. Í januar í 1929 tók Føroya Skipara- og Navigatørfelag stig til at stovna Sjóvinnulánsgrunnin, sum skuldi luttaka í fíggingini av vinnuni. Felagið sendi hetta opna brævið til Føroya fólk:

### *Sjóvinnulánsgrunnur*

*Soleiðis sum sjóvinnan nú á døgum verður drivin her í Føroyum eru allar útreiðslur so nógvar ferðir størri enn fyri einum 10-12 árum síðan. Somuleiðis eru peningaviðurskiftini ikki einans trong, men ofta forðandi bæði fyri teir, ið nú dríva sjóvinnu, og eisini fyri teir, ið vilja leggja slóð av nýggjum.*

*Um ikki her fæst annað skil á, verður óliviligt í Føroyum, uttan lagalig lánivilkor fær vinnulív okkara ongan munagóðan bata.*

*Arbeitt verður upp á at fáa bøtt um lógina um statslán til hóskandi fiskiskip. Men sjálvt um hon – sum væntandi er – fæst í gott lag, so verður tað aldeilis neyðsynt at útvega teimum, ið fáa sær skip, lætta atgongd til pening til at dríva tey. Sum nú er, hevur tað forkomið mongum manni, at hann ikki í einari knappari vend hevur kunnað útvegað nakrar fáar túsund krónur.*

*At fáa settan á stovn ein peningagrunn, haðan menn kunnu fáa rímilig lán til fiskivinnu, má verða hildið fyri at vera tað, sum í fyrstu syftu mestur tørvur er á her hjá okkum.*

*Føroya skipara- og navigatørfelag vendir sær tí til øll tey í Føroyum, ið beinleiðis hava við fiskivinnu at gera, og eisini til hvønn góðan Føroying, ið vil landi sínum frama, um at ganga saman til at stovna ein lánigrunn, sjóvinnuni til bata.*

*Vit hugsa okkum at fáa settan á stovn ein peningagrunn, minst 300.000 krónur, í lutum upp á 100 krónur. Fyri at gera tað møguligt fyri ein og hvønn at taka lut í hesum grundleggjandi og landsgagniliga verki, verður peningainngjaldið sundurbýtt*

*upp á 10 hálvár, soleiðis at ein lutur upp á 100 krónur verður at rinda við 10 krónum í mai – juni mánaðum og við 10 krónum í december mánaði í 5 fylgjandi ár, fyrstu ferð í mai-juni 1929.*

*Føroya skipara- og navigatørfelag tekur sær upp á at standa til svars fyri, at peningurin, sum inn kemur, fyri fyrst verður settur í sparikassa ella banka, og tá ið 100.000 krónur eru inn komnar, at stevna lutaeigarunum til fundar til at samtykkja virkistreytir og velja nevnd, ið standa skal fyri lánigrunninum. Atkvøðurætt á hesum fundi hevur hvør lutaeigari eftir lutum sínum.*

*Eingin eigur at kunna fáa lán úr lánigrunninum, uttan hann er lutaeigari.*

*Tórshavn, 12. januar 1929*
*I nevnd Føroya Skipara- og Navigatørfelags*

*Thomas M. Thomassen Niels Nielsen J. H. Hjalt*
*Jens Pauli Andreasen David Joensen*

*Á aðalfundinum í Skiparafelaginum, 12. jan. 1929 varð straks teknað í lutapeningi 11.200 kr.*

*Listar, har hvør sum vil kann tekna seg, verða sendir út um bygdirnar og gingið verður við lista i Tórshavn. Eisini kann ein tekna sig hjá skrivara Skiparafelagsins, Richard Long i Tórshavn, ið gevur allar upplýsingar hesum viðvíkjandi.*

Tað var merkisvert, at tað var felagið hjá yvirmonnunum og ikki reiðararnir, sum tóku hetta stigið. Hetta endurspeglar helst væl ta serligu ognarmentanina, sum eyðkennir fiskivinnuna.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag samtykti at seta 5.000 kr. í grunnin, og fiskimannafelagið kom við øðrum 5.000 kr. Føroya Skipara- og Navigatørfelag skipaði fyri húsainnsavning, og tann ótroyttiligi skrivarin hjá felagnum, Richard Long, royndi við greinum í bløðunum at skapa áhuga fyri grunninum. Men tað vísti seg at vera torført at røkka málinum um at fáa til vega 300.000 kr. í grundkapitali. Búskaparkreppan, sum skrædlið í Wall Street í oktober í 1929 hevði við sær, ávirkaði eisini støðuna í Føroyum, og innsavningin steðgaði upp. Tíðirnar vóru ringar, og lítið av peningi var millum fólk.

## Nýggj manning á brúnna

Nú kom nýggj manning á brúnna. Chr. Holm Jacobsen, keypmaður, bjóðaði nevndini í Skipara- og Navigatørfelagnum til fundar tann 21. februar 1931. Bert eitt mál var á dagsskránni: Stovning av einum banka við hjálp frá stovnsfænum



*Chr. Holm Jacobsen*
*1887-1966*

*Chr. Holm Jacobsen, sum var útlærdur skómakari, menti seg í 1930 og 40-árunum til ein tann fremsta vinnulívsmannin í Føroyum. Chr. Holm Jacobsen, ið innflutti olju, bygdi í 1932 teir fyrstu oljutangarnar á Viðarnesi. Men hansara virksemi spenti víða. Í 1934 tók hann stig til at stovna P/f Uvak. Fyrsta skipið hjá felagnum var dampskipið Anana, ið á grønlendskum merkir móðir. Við eini manning upp á 160 mans flutti Anana á sumri í 1935 ikki minni enn 27 smábátar til Vesturgrønlands, har teir róðu út hetta summarið.*

*Í 1931 skeyt Chr. Holm Jacobsen upp fyri Skipara- og Navigatørfelagnum at stovna ein banka, Sjóvinnubankan, við tí peningi, sum felagið hevði savnað í Sjóvinnulánsgrunninum. Í 1932 gjørdist Chr. Holm Jacobsen fyrsti nevndarformaður í bankanum – eitt starv, sum hann mátti siga frá sær, tá kapitalgrundarlag bankans í 1951 mátti endurreisast.*

*Chr. Holm Jacobsen, sum í 1925-27 var limur í Tórshavnar Býráð, tók í 1935 saman við Thorstein Petersen stig til at stovna Vinnuflokkin, sum hann umboðaði á tingi frá 1936 til 1940.*

hjá Sjóvinnulánsgrunninum. Á fundinum luttók eisini Thorstein Petersen, sakførari. Nú mátti røkka ella støkka.

Fundurin samtykti at senda hesa fráboðan til bløðini.

*Vegna tann ringa peningastand, ið hevur verið í Føroyum í vetur, og fyri sum skjótast at geva tí føroysku sjóvinnuni ta hjálp, hon treingir til, hevur nevndin fyri Føroya skipara- og navigatørfelag saman við øðrum monnum byrjað arbeiðið fyri at seta á stovn ein banka, sum ætlan er at navngeva Føroya Sjóvinnubanki, og skal hesin banki serstakliga taka sær av sjóvinnumálum. Ætlanin er, at spurningurin á fundi í mai mánaði í ár skal leggjast fyri lutaeigarunum í Sjóvinnulánsgrunninum.*

*Arbeiðið er byrjað: Nú mugu allir føroyingar virka, soleiðis at bankin kann verða settur á stovn í heyst.*

*Chr. Holm Jacobsen hevur rætt og plikt til at samankalla til fundar, tá ið ivingarsamir spurningar taka seg upp, inntil onnur nevnd á lógligan hátta er vald á aðalfundi.*

Arbeiðið við at savna pening til Sjóvinnulánsgrunnin helt fram uttan íhald. Tann 25. februar 1931 stóð henda áheitanin at lesa í bløðunum:

Gagna tær sjálvum
og Føroyalandi!!!
Set pening í
Sjóvinnulánsgrunnin
og mæl øðrum til at gera tað sama.

Tann 30. mai 1931 var aðalfundur í Sjóvinnulánsgrunninum, sum nú hevði teknað 220.000 kr., harav tó bert 50.000 kr. vóru inngoldnar. Richard Long, skrivari, setti fram uppskot um, at *nevndin fær heimild til at virka fyri stovnan av nýggjum banka eftir besta tykki*. Richard Long grundaði sítt uppskot á, at hóast grunnurin varð stovnaður við tí endamáli at fremja keyp av nýggjum skipum, so vóru tíðirnar broyttar, og nú var tað rakstrarfíggingin, sum tyngdi fiskivinnuna.

Sambært fundarstjóranum Louis Zachariasen varð uppskotið um at royna at stovna ein banka samtykt við 1.006 atkvøðum fyri og 2 ímóti. Nýggir menn komu í nevndina í Sjóvinnulánsgrunninum, sum nú varð mannað við Jaspur A. Hjelm. Chr. Holm Jacobsen, Johs. Olaus Joensen, Jákup Joensen (Jakku við Stein), J. F. Kjølbro, Richard Long og Thorstein Petersen.

Ætlanin var, at nýggi bankin skuldi lata upp longu í oktober í 1931. Men tað eydnaðist ikki. Bankalógin kravdi, at kapitalurin skuldi vera í minsta lagi 300.000 kr., og í minsta lagi helvtin skuldi vera inngoldin. Nevndin í Sjóvinnulánsgrunninum heitti á løgtingið um at seta 60.000 krónur í, men so nógvan pening hevði løgtingið ikki at ráða yvir í setuni 1931-32.

Árið eftir setti løgtingið kortini 60.000 kr. í grunnin, men løgtingið mátti læna 15.000 kr. frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag til endamálið. Felagið, sum upprunaliga hevði sett 5.000 kr. í Sjóvinnulánsgrunnin, mátti hækka sín part við 15.000 kr., fyri at kapitalkravið kundi verða rokkið.

## Sjóvinnubankin sjósettur

20. september 1932 boðaði nevndin í Sjóvinnulánsgrunninum til stovnandi aðalfund í bankanum. Aðalfundurin, sum varð hildin í Fráhaldshúsinum 6. oktober 1932, samtykti at stovna P/f Sjóvinnubankan við einum partapeningi upp á 300.000 kr., har av helvtin, ella 150.000 kr., skuldi inngjaldast. Føroya Løgting var størsti partaeigari við 60.000 kr., og næststørsti partaeigarin var Skipara- og Navigatørfelagið við 20.000 kr.

Grein 1 í viðtøkum bankans var stutt og greitt orðað: *Navn felagsins er P/f*




*Sjóvinnubankin læt upp í hesum húsunum í Gongini í Havn 15. desember í 1932. Jógvan Waagstein teknaði*



*Fyrstu bankabókina í Sjóvinnubankanum átti Asloy Holm Jacobsen, dóttir nevndarformannin Chr. Holm Jacobsen. Hon setti 15. desember 1932 50 kr. í bankan*

*Sjóvinnubankin. Heimstaður tess er Tórshavn. Endamál felagsins er bankayrki.* Meira undrunarverd var orðingin í grein 2: *Í starvi sínum verður bankin serliga at hugsa um tørv fiskivinnunar.* Henda greinin, sum stóð óbroytt í viðtøkum bankans heilt fram til, at bankin varð lagdur saman við Føroya Banka í 1994, fekk stóran týdning fyri bankan hesi góðu 60 árini.

Í fyrstu nevndina hjá Sjóvinnubankanum vórðu valdir Jaspur A. Hjelm, keypmaður, úr Vági, Chr. Holm Jacobsen, keypmaður, Johs. Olaus Joensen, fulltrúi, Jákup Joensen, skipaeftirlitsmaður, og Richard Long, yvirlærari, allir úr Tórshavn. Johs. Olaus Joensen umboðaði løgtingið, Jákup Joensen og Richard Long umboðaðu skipara- og navigatørfelagið, meðan Jaspur A. Hjelm og Chr. Holm Jacobsen umboðaðu tann stóra meirilutan, sum umskipaði 220.000 kr. av stovnsfænum í Sjóvinnulánsgrunninum til partapening í bankanum.

Á nevndarfundi dagin eftir skipaði nevndin seg við Chr. Holm Jacobsen sum formanni og Johs. Olaus Joensen sum næstformanni. Thorstein Petersen varð settur sum stjóri í bankanum. Tann 15. desember 1932 læt bankin upp í teimum seinni so kendu hølunum í Gongini.

Sjóvinnubankin sigldi við smáum seglum tey fyrstu árini. Í 30-árunum vóru

ringar tíðir í Føroyum eins og í so nógvum øðrum londum, og virksemi og fíggjarjavni bankans stóðu so at siga í stað, til seinni heimsbardagi brast á, og Føroyar vórðu drignar upp í kríggið.

Undir krígnum stovnaði Sjóvinnubankin sína fyrstu deild í Sørvági í oktober 1942. Bretska hersetingarvaldið, sum hevði umleið 4.000 mans í Vágum, heitti á bankan um at stovna deildina. Áheitanin fór fyrst til Føroya Banka, men hann hevði ikki gjørt sær heilt greitt, at nú vóru tveir bankar í Føroyum. Føroya Banki bíðaði ov leingi. Tí fekk Sjóvinnubankin møguleikan. Næsta deildin hjá Sjóvinnubankanum varð ikki stovnað fyrr enn í 1955 í Klaksvík. Farið varð undir at byggja deildina longu í 1949, men trupla tíðin hjá bankanum fyrst í 50-árunum gjørdi, at hon ikki læt upp fyrr enn í 1955. Síðan gekk skjótt at stovna fleiri deildir kring landið.

# Seinni heimsbardagi

## Føroyar verða hersettar

Týskland hersetti Danmark 9. apríl í 1940. Bretska stjórnin gjørdi skjótt av, og longu tveir dagar seinni kunngjørdi Winston Churchill, bretski flotamálaráðharrin, í eini røðu í undirhúsinum, at bretar høvdu tikið stig til at herseta Føroyar:

*We are also at this moment occupying the Faroe Islands, which belong to Denmark and which are a strategical point of high importance, and whose people showed every disposition to receive us with warm regard. We shall shield the Faroe Islands from all the severities of war and establish ourselves there conveniently by sea and air until the moment comes when they will be handed back to the crown and people of a Denmark liberated from the foul thraldom into which they have been plunged by German aggression.*

Tann 13. apríl í 1940 kom krússarin *Suffolk* á Havnina, og ein landgonguherdeild við 200 flotahermonnum undir leiðslu av oberstloytnanti T. B. W. Sandall kom í land. Meðan teir sungu *Roll out the Barrell*, masjeraðu teir niðan í Klubban og Tórshøll, har teir skuldu halda til. Hóast tað var friðarligt í Havnini, mótmælti løgtingið – sum tað skuldi – í eini yvirlýsing, at *»et andet, om end venligtsindet, rige landsatte soldater«*. Yvirlýsingin endaði tó við at ásanna, at *»intet andet valg er«*.

Við hersetingini varð sambandið kvett millum Føroyar og Danmark. Hetta var ein nýggj støða hjá løgtinginum og donsku umsitingini í Føroyum. Okkurt mátti gerast.

Fólkaflokkurin, sum var stovnaður í 1939, stillaði fyrstu ferð upp á løgtingsvalinum 30. januar 1940 og fekk 6 av teimum 24 løgtingssessunum. Í apríl 1940 setti flokkurin fram krav um, at Føroyar skuldu fáa sjálvstýri frá Danmark og verða skipaðar sum eitt sjálvstøðugt ríki. Sum støðan var tá, var hetta kanska ikki so kollveltandi. Men hetta læt seg ikki gera, tí Bretland hevði ikki góðtikið føroyskt sjálvstýri. Churchill hevði vissað um, at oyggjarnar fóru at verða latnar aftur til Danmark, tá kríggið var av. Hesa støðu váttaði bretski konsulin í Føroyum í eini fráboðan til amtmannin 3. mai 1940: *»Det er i det hele den britiske regerings ønske, at øerne fortsat skal administreres af amtmanden i samarbejde med Færøernes lagting, således at forbehold kun tages med hensyn til sådanne sikkerhedsforanstaltninger, som måtte blive nødvendige for besættelsestroppernes sikkerhed.«*

## Politiskt skifti

Sjálvstýri var ikki ein møguleiki, og 9. mai 1940 samtykti meirilutasamgongan í løgtinginum millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin eina fyribils stýrisskipan í Føroyum. Í kunngerð nr. 1 frá 1940 staðfesti amtmaðurin tveir dagar seinni samtyktina:

***Bestemmelser om midlertidig styrelsesform på Færøerne***

***§1*** *De ved nærværende bestemmelsers ikrafttræden gældende love, anordninger og retsforskrifter forbliver i kraft i så vidt omfang, som efter forholdene muligt.*

***§2*** *Hvor der i gældende lovgivning m.v. er tillagt en minister beføjelse til administrativ udfærdigelse af forskrifter, udøves disse beføjelser af amtmanden efter indhentet erklæring fra lagtingets landsnævn.*

***§3*** *Lovforskrifter, der vedrører Færøerne, vedtages af lagtinget – efter forslag fra lagtinget eller amtet – og stadfæstes og kundgøres af amtmanden.*

***§4*** *Lovforskrifter, der vedrører statskassens midler, udfærdiges og kundgøres af amtmanden efter indhentet erklæring fra lagtinget eller vedkommende lagtingsudvalg.*

***§5*** *Der udfærdiges snarest muligt forskrifter til praktisk ændring af de nugældende regler om anke og kære af retsafgørelser.*

*Færø Amt, den 9. maj 1940*
*Hilbert*

Nú var tað løgtingið og ikki danski ríkisdagurin, sum samtykti lógirnar fyri Føroyar, meðan amtmaðurin yvirtók nógvar uppgávur, sum stjórnin og ríkisdagurin higartil høvdu útint. Fleiri – og møguliga eisini Hilbert sjálvur – hildu, at amtmaðurin var vorðin kongur í Føroyum. Hóast seinni heimsbardagi endaði í Danmark í mai 1945, var fyribils stýrisskipanin galdandi til 1. apríl í 1948, tá hon varð avloyst av heimastýrisskipanini.

Fólkaflokkurin atkvøddi ímóti fyribils stýrisskipanini, og undir krígnum vóru viðurskiftini kaldlig millum amtmannin og Thorstein Petersen, leiðaran í Fólkaflokkinum.

## Føroyar fáa egið gjaldoyra

Tá sambandið millum Føroyar og Danmark var kvett, varð neyðugt at nýskipa peninga- og gjaldoyraviðurskiftini í Føroyum. Eftir áheitan frá bretska konsulinum vórðu 31. mai í 1940 samtyktar fleiri fyribils fyriskipanir um peningaviðurskiftini í Føroyum. Í kunngerð sama dag varð bann sett fyri at flyta danskar peningaseðlar og myntir millum Føroyar og onnur lond. Amtmaðurin skuldi stempla allar danskar peningaseðlar, sum vóru í umfari í Føroyum, við áskriftini *»Kun gyldig på Færøerne«*. Tann 30. juni 1940 vórðu allir óstemplaðir seðlar skiftir um við nýggjar, stemplaðar seðlar. Eftir hetta høvdu óstemplaðir seðlar ikki longur gildi sum gjaldoyra í Føroyum.

Eftir samtykt í løgtinginum staðfesti amtmaðurin í kunngerð nr. 48 frá 18. desember 1940 *»midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Seddelomløb, Valutaforhold og Handel med Udlandet med videre.«* Kunngerðin kom í gildi sama dag, og hon setti samstundis úr gildi tær reglur, sum høvdu verið galdandi fyri valutaeftirlit v.m.

Eftir kunngerðini skuldi ein valutamiðstøð setast á stovn í Føroyum. Í kunngerðini varð m.a. ásett: *»at køb og salg af fremmed valuta kun må finde sted gennem bankerne på Færøerne; at enhver på Færøerne hjemmehørende person og ethvert på Færøerne hjemmehørende selskab eller firma uden unødigt ophold skal overdrage til en bank på Færøerne ethvert beløb i fremmed valuta, som den pågældende besidder eller fremtidigt erhverver; at det til bankerne overdragne valutabeløb af pågældende bank skal omveksles til kroner eller indsættes på en særlig valutakonto i den færøske bank for vedkommendes regning; at afregningskursen for 1 pund sterling er 22,40 kr., at bankerne – i den udstrækning, det pålægges bankerne at omveksle fremmed valuta – kan kræve denne valuta omvekslet til kroner af amtet på Nationalbankens vegne; og at bankerne kun må afgive fremmed valuta mod aflevering af en valutaattest, dvs. en tilladelse fra Valuta-Centralen.«*

Eftir avtalu við bretsku stjórnina varð avgjørt at geva út nýggjar føroyskar peningaseðlar, ið skuldu avloysa donsku peningaseðlarnar, sum vóru í umfari í Føroyum. Seðlarnir vórðu prentaðir í London, og í fyrsta umfari varð samlaða upphæddin 5 mió. kr. Bretskir myndugleikar veittu trygd fyri seðlaumfarinum við at seta eina samsvarandi upphædd í bretskum pundum í bretskar bankar. Bretskir myndugleikar borgaðu fyri, at føroysku peningaseðlarnir kundu vekslast um til pund til kursin 22,40 kr. Føroyskir pengaseðlar kundu ikki longur vekslast um til gull – men til pund.

Nýggju seðlarnir vórðu settir í umfar 1. mars 1941. Færø Amt gav seðlarnar út vegna Danska Tjóðbankan sum gyldugt gjaldoyra í Føroyum, og Hilbert, amtmaður, hevði undirskrivað seðlarnar. Teir næstu tríggjar mánaðirnar út-

flýggjaðu bankarnir nýggjar seðlar fyri teir gomlu, sum eftir 1. juni í 1941 ikki longur kundu brúkast í Føroyum. Seinni varð seðlaumfarið økt við 10 mió. kr., og í 1945 vóru føroyskir peningaseðlar fyri eitt virði upp á 15 mió. kr. í umfari.

Tann 27. mars 1941 avtalaðu bretska stjórnin og føroyskir myndugleikar eina skipan um fíggjarligu viðurskiftini millum Bretland og Føroyar. Í Føroyum varð vald ein bretsk-føroysk nevnd, sum skuldi seta avtaluna í verk og hava eftirlit við henni.

Føroyskir myndugleikar fingu álagt at avmarka innflutningin av øllum vørum mest møguligt, og føroyingar skuldu helst keypa allar vørurnar úr Bretlandi. Har tað ikki bar til at útvega vørurnar úr Bretlandi, útvegaðu bretskir myndugleikar føroyskum innflytarum neyðugt gjaldoyra eftir somu treytum, sum vóru galdandi fyri bretskar innflytarar. Bretskt-føroyska umsitingin skuldi umsita útlendskt gjaldoyra, sum bankarnir ráddu yvir. Umsóknir um útlendskt gjaldoyra skuldu viðgerast í bretskt-føroysku nevndini, men bretskir myndugleikar tóku fyrivarni fyri, at teir endaliga skuldu góðkenna allar umsóknir.

Virðið á pundinum varð enn eina ferð sett til 22,40 kr., og í sáttmálanum varð ásett, at virðið bert kundi broytast eftir avtalu millum umsitingina í Føroyum og bretsku stjórnina. Avtalan skuldi vera í gildi, til kríggið var av. Síðan kundu báðir partar siga hana upp við freist upp á ein mánað. Føroyar vórðu vorðnar partur av sterlingblokkinum.

Kunngerðin frá 18. desember 1940 varð seinni broytt, so Valutamiðstøðin fekk heimild til at áseta nærri reglur um rættin og skylduna hjá bankunum at veksla upphæddir í sterlingpundum, um umstøðurnar gjørdu tað neyðugt. Við hesi heimild ásetti Valutamiðstøðin 26. apríl 1941 ta avmarking, at tá umbønir komu um at fáa ágóða í sterlingpundum vekslaðan til krónur, skuldu bankarnir í fyrsta umfari bert veksla helvtina av upphæddini. Hin helvtin skuldi vekslast so hvørt, sum bankarnir útvegaðu sær krónur við sølu av sterlingpundum. Við hesum mistu bankarnir rættin til frítt at veksla sterlingpund.

Amtið yvirtók vegna Danska Tjóðbankan eftir áheitan tann ágóða, sum viðskiftafólkini eftir hesi skipan áttu í bankunum í sterlingpundum. Amtið rindaði bankunum við føroyskum seðlum, ella varð upphæddin standandi sum ein ágóði, ið bankarnir áttu hjá amtinum.

Sum grundgeving fyri at avmarka atgongdina til frítt at veksla ágóðan í sterling segði Valutamiðstøðin tann 26. apríl 1941:

*Under Overvejelserne af, hvorledes Omvekslingsspørgsmålet bør ordnes, har Valuta-Centralen haft for Øje dels Nødvendigheden af, at Adgangen til Omveksling lettes saa meget, at Eksportørerne af Ferskfisk bliver i Stand til at opfylde deres Krone-Forpligtelser og dermed fortsætte den for Færøernes samlede Økonomi vitale Eksport, dels Nødvendigheden af at begrænse Adgangen til Omveksling saa meget, at*

*man ikke gennem en stærkt forøget Seddelcirkulation og en fri Adgang til Anvendelse af Kronetilgodehavender unødigt bidrager til en Inflation.*

*Valuta-Centralen vilde have fundet det ønskeligt, om man kunde have gennemført en Ordning, hvorefter Bankerne for egen Regning havde overtaget en Del af det forventede Sterlingoverskud, men Bankerne har ikke ment at kunne paatage sig Forpligtelser i saa Henseende.*

*Herefter har Valuta-Centralen med Landsnævnets Tilslutning opnået Bistand fra Amtet paa Statskassens Vegne til Overtagelse af en væsentlig Del af de fremkommende Sterling efter de nærmere Regler i den udsendte Bekendtgørelse, som er tiltraadt af Bankerne.*

Gjaldførið var so ríkiligt í Føroyum, at myndugleikarnir vóru noyddir til at seta avmarkingar í verk. Orsøkin var, at seinni heimsbardagi hevði havt við sær, at fyritreytirnar hjá føroysku fiskivinnuni vóru grundleggjandi broyttar.

## Frá fiskiskapi til transitthandil

Á sumri í 1940 fór føroyski fiskiflotin eins og í árunum frammanundan til Íslands og Grønlands. Veiðan varð seld sum saltfiskur ella klippfiskur. Men undir krígnum tók ein sera lønandi fiskamarknaður seg upp í Bretlandi. Stórur partur



*Føroyingar mistu nógv skip í vandasiglingini undir seinna heimsbardaga. Eitt teirra var Nýggjaberg*

av bretsku trolarunum var umbygdur til hertænastu. Á bretska marknaðinum var tí trot á fiski og matvørum yvirhøvur, og fiskaprísirnir vóru góðir.

Frá 1941 varð føroyski fiskiflotin umskipaður. Nakrir trolarar og útróðrarbátar vóru framvegis til fiskiskap, men annars var flotin – sluppirnar og skonnartirnar – riggaðar til at flyta ísfisk millum Ísland og Bretland. Í 1941 gjørdu føroysk skip 522 túrar til Bretlands við tilsamans 30.000 tonsum av fiski til bretska marknaðin. Í 1942 vórðu gjørdir 528 túrar við tilsamans 33.000 tonsum. Undir krígnum útvegaðu føroysk skip meira enn ein fimting av øllum tí fiski, sum kom á bretska marknaðin. Men hetta var vandasigling. 4 trolarar, 15 sluppir og 6 skonnartir gingu burtur undir krígnum, meðan 132 sjómenn sjólótust.

Íslendingar høvdu onki ímóti at lata føroyingar taka sær av hesi vandasigling, og føroyingar vóru tí einsamallir á marknaðinum. Prísirnir vóru góðir, og siglingin kastaði nógv av sær. Føroyskir reiðarar og stórhandilsmenn høvdu stóran vinning av hesum transitthandli við fiski. Føroysk feløg vórðu ofta stovnað bert við tí endamáli at keypa ísfiskalastir í Íslandi og sigla tær til fiskamarknaðin í Aberdeen og øðrum skotskum havnum. Tað umhvørvið, sum góðu tíðirnar undir krígnum høvdu við sær í Havnini, lýsir William Heinesen í *Den sorte gryde*, sum var skaldsøgan, ið gav honum viðurkenning sum rithøvundur í 1949.

Fyrst í 1945 vildu íslendingar sleppa upp í part og yvirtóku ein stóran part av hesum handli. Íslendingar, sum høvdu sitið hendur í favn, meðan virkisfúsir føroyskir reiðarar og keypmenn høvdu vunnið nógvan pening, hækkaðu í januar 1945 prísin á ísfiski so nógv, at møguleikarnir hjá føroyingum fyri lønandi vinnu av hesum handli versnaðu munandi.

Í Íslandi vóru ikki nóg nógv skip til henda útflutningin, og 9. februar 1945 gjørdi íslendska stjórnin avtalu um at leiga 61 føroysk skip til at flyta ísfisk á bretska marknaðin. Helvtin av skipunum skuldi verða í hesi sigling til 1. juni 1945 og hin helvtin til 1. oktober 1945. Leigugjøldini góvu reiðarunum og fiskimonnunum góðan vinning, meðan virksemið hjá bankunum hinvegin gjørdist minni.

### Føroyskur útflutningur til Bretlands undir krígnum

| *Ár* | *1940* | *1941* | *1942* | *1943* | *1944* | *1945* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mió. kr. | 13,2 | 33,4 | 44,1 | 41,4 | 49,3 | 30,2 |

Føroyskir reiðarar og stórhandilsmenn vunnu sær stóra áogn í enskum pundum, sum teir høvdu skyldu til at lata bankunum. Reiðararnir kundu bert brúka sterlingpund til at útgera skipið, meðan tað lá í bretskari havn. Føroyski ágóðin

í sterlingpundum vaks á henda hátt frá 248.000 £ í januar 1941 til 2.792.000 £ í juli 1945.

## Ov nógvur peningur

Bretsku pundini vórðu vekslað í bankunum og síðan latin amtinum vegna Danska Tjóðbankan. Fíggjarjavnarnir hjá bankunum broyttust so nógv krígsárini, at teir vóru ikki til at kenna aftur. Hetta var ikki minst galdandi fyri gjaldførið.

Við árslok í 1941 vóru samlaðu ognirnar hjá Føroya Banka 22,3 mió. kr. Í útlendskum bankum stóðu 3,5 mió. kr., sum svaraði til upphæddina í sterlingpundum, ið var sperrað hjá kundunum. Meira enn helvtin av fíggjarjavnanum, 13 mió. kr., var ágóði í krónum, sum bankin átti á hjá Færø amt vegna danska statin. Upphæddin stavaði frá sterlingpundunum, sum bankin hevði vekslað hjá amtinum. Bankin kundi biðja um at fáa pening útgoldnan frá amtinum, og rentan var umleið 0,75 pst. p.a., ið var tað sama, sum amtið fekk fyri sín sterlingágóða í bretskum bankum.

Fýra ár seinni, við árslok í 1945, vóru ognirnar hjá Føroya Banka komnar upp á 40,1 mió. kr., Nú var bankans krónuágóði hjá amtinum komin upp á 33,8 mió. kr., men samstundis átti tó Færøernes Oppebørselskontor á *den danske stats konto for Færøerne* ein ágóða hjá bankanum upp á 7,9 mió. kr.

Hetta vísir, at fíggjarjavnin hjá bankunum, og harvið teirra skyldur, í stóran mun vóru ávirkaðir av teimum serligu viðurskiftunum, sum ráddu undir krígnum. Tað hevði ikki verið møguligt at brúka valutainntøkurnar. Í hesi støðuni gav amtmaðurin í 1942 vegna Handilsmálaráðið bankunum undantak frá ásetingunum í greinunum 7 og 11 í bankalógini  um krøvini til eginpening og gjaldføri. Tá bankarnir gjørdu upp krøvini til eginpening og gjaldføri, kundu teir eftir hetta síggja burtur frá skyldunum, sum svaraðu til ágóðan hjá Færø amt.

Men kríggið fekk ein enda og somuleiðis tey óvanligu gjaldoyraviðurskiftini í Føroyum. 16. august 1945 gjørdu bretska og danska stjórnin eina gjaldsavtalu, har virðið á bretska sterlingpundinum varð ásett til 19,34 kr. Henda avtalan var ikki galdandi fyri Føroyar. Føroysk-bretska avtalan frá 27. mars 1941 var framvegis galdandi, og Føroyar vóru framvegis limir í sterlingblokkinum. Tí kostaði eitt pund sterling framvegis 22,40 kr. í Føroyum.

Tann 8. september 1945 ásetti løgtingið við góðkenning frá bretsku stjórnini *midlertidige bestemmelser for Færøerne om kronekursen*. Eftir hesum var kursurin fyri krónurnar, sum vórðu brúktar í Føroyum, ásettur til tað sama sum í hinum partinum av ríkinum, nevniliga 19,34 kr. fyri eitt pund sterling. Tann 26. oktober 1945 ásetti Valutamiðstøðin í kunngerð, at reglurnar um afturhald

í sterlingágóðanum skuldu setast úr gildi. Sterlingpund, sum stóðu á konto hjá útflytarunum, kundu hereftir í fullan mun vekslast til gamla kursin upp á 22,40 kr. Sama var galdandi fyri óútgoldna løn, sum var forvunnin innan 15. november 1945.

## Sterlingpundini hjá Sjóvinnubankanum

Niðurskrivingin av virðinum á pundinum kom tí ikki sum tjóvur á nátt. Kortini kom Sjóvinnubankin illa fyri, tí hann lá inni við stórum upphæddum í sterlingpundum.

Leiðslan í Sjóvinnubankanum hevði undir krígnum ikki bjartar vónir um framtíðarvirðið á donsku krónuni, og bankin hevði tí í stóran mun latið vera við at veksla ágóðan í sterling til ásetta kursin upp á 22,40 kr. Við árslok 1944 hevði Sjóvinnubankin 578.120 £ standandi í bretskum bankum, og virðið á hesum var í roknskapinum sett til 12.776.453 kr. Tann 8. september 1945, tá kursurin á pundinum varð niðurskrivaður, hevði bankin 635.774 £ standandi í bretskum bankum.

Tá kríggið var av, fekk leiðslan í Sjóvinnubankanum eitt sindur bjartari vónir um framtíðarvirðið á donsku krónuni, og tann 16. mai 1945 bað bankin Færø amt um at veksla 250.000 pund sterling. Tann 19. mai 1945 boðaði amtið bankanum frá, at tað framvegis vegna Danska Tjóðbankan var sinnað at taka ímóti sterlingpundum í sama mun sum higartil. Hinvegin metti amtið ikki, at tað uttan góðkenning frá donsku stjórnini kundi átaka sær at veksla eina so óvanliga stóra upphædd upp á 250.000 £. Amtið boðaði samstundis frá, at tað, so skjótt sum umstøðurnar loyvdu tí, vildi leggja málið fyri Forsætismálaráðið.

Tann 10. august 1945 skrivaði Forsætismálaráðið til Færø amt, at tað, vísandi til kunngerðina frá 18. desember 1940, framvegis metti seg hava skyldu til at veksla sterlingágóðan til kurs 22,40 kr. Men Forsætismálaráðið helt hinvegin ikki, at henda skylda var galdandi fyri gomlu sterlinggoymsluna hjá Sjóvinnubankanum.

Áðrenn svarið kom frá Forsætismálaráðnum, hevði Sjóvinnubankin stevnt amtinum tann 14. juli 1945. Tann 17. januar 1946 fall dómur í Føroya Rætti. Færø Amt varð dømt til vegna ríkiskassan at veksla 190.000 £ til kurs 22,40 kr. Meðan rættarmálið varð viðgjørt, hevði amtið vekslað 60.000 £ til kurs 22,40. Amtið kærdi dómin til Eystara Landsrætt.

Í landsrættinum víðkaði Sjóvinnubankin sítt krav til, at amtið hevði skyldu til at veksla alla sterlinggoymsluna til kurs 22,40. Landsrættardómurin varð sagdur 29. januar 1948. Landsrætturin gav Sjóvinnubankanum viðhald í, at

amtið hevði skyldu til at veksla alla sterlinggoymsluna upp á 635.774 £ til kurs 22.40. Harumframt skuldi amtið gjalda 5 pst. í rentu um árið frá 15. desember 1947, tá bankin legði sína endaligu uppgerð fyri rættin.

Í grundgevingunum segði landsrætturin, at tað ikki í kunngerðini frá 26. apríl 1941 ella í seinni kunngerðum var ásett nøkur freist fyri at veksla sterlingpund til kurs 22,40, og amtið hevði heldur ikki greitt sett bankanum nakra tíðarfreist fyri, hvussu leingi umvekslingin kundi fara fram. At bankin vann sakarmálið mótið amtinum í landsrættinum, slapp honum undan einum tapi upp á 1.945.000 kr. Óneyðugt er at siga, at dómurin hevði avgerandi týdning fyri bankan, tí við árslok 1945 var bókførdi eginpeningur bankans 1.266.000 kr., eftir at bankin í roknskapinum hevði ásett virðið á sterlinggoymsluni til kurs 22,40 kr.

## Føroyar fara úr sterlingblokkinum

Tað gekk ein tíð eftir krígslok, áðrenn peningaflutningurin millum Føroyar og Danmark kom aftur í rættlag. Í november 1945 varð ein skipan sett í verk, har tað bar til at flyta pening millum londini. Í Føroyum kundu tílíkar flytingar gerast gjøgnum Færøernes Oppebørselskontor og í Keypmannahavn gjøgnum Fíggjarmálaráðið. Peningaflytingar millum londini kundu framvegis ikki fara fram gjøgnum bankarnar.

Ikki fyrr enn í 1948 kundi peningur aftur flytast frítt millum Føroyar og Danmark. Hetta hendi í sambandi við, at Føroyar fóru úr sterlingblokkinum. Í handilsavtalunum, sum Danmark og Bretland gjørdu eftir kríggið, varð fyrivarni tikið fyri støðu Føroya. Danmark og Bretland vóru samd um, at Føroyar skuldu hava møguleika fyri at tingast við bretsku stjórnina, áðrenn endalig støða varð tikin um framtíðar viðurskiftini millum Føroyar og Bretland.

Á heysti í 1948 vóru umboð fyri løgtingið í London og tingaðust við bretsku stjórnina. Við stuðli frá donsku stjórnini setti føroyska sendinevndin fram ynski um, at Føroyar skuldu verða verandi í sterlingblokkinum. Hinvegin ynskti bretska stjórnin av prinsipiellum grundum at siga upp sterlingavtaluna frá 1941, og 1. desember í 1948 fóru Føroyar úr sterlingblokkinum. Frá bretskari síðu varð hinvegin staðfest, at hesi viðurskifti ikki fóru at ávirka handilssambandið millum londini. Bretar ynsktu, at góða handilssambandið varð varðveitt og styrkt.

Tað gingu nógv ár, áðrenn Føroyar aftur fingu ein tílíkan leiklut á uttanríkispolitiska pallinum.

# Árini eftir kríggið

## Útbygging av trolaraflotanum

Fiskaprísirnir vóru framvegis góðir, tá kríggið var av í 1945. Í Føroyum vóru góðar vónir um, at høgu prísirnir fóru at halda sær í eini 4-5 ár afturat. Nú ráddi um at útvega skip bæði skjótt og brátt. Føroyski flotin var niðurslitin, og ein triðingur av flotanum var gingin burtur undir krígnum. Stórar íløgur vóru neyðugar, um føroyski fiskiflotin skuldi fáa gagn av teimum góðu tíðunum.

Eftir kríggið høvdu føroysku peningastovnarnir óvanliga gott gjaldføri. Tann stóri vinningurin av at sigla við ísfiski til bretska marknaðin hevði havt við sær stóra uppsparing, og við árslok í 1945 vóru innlánini fýra ferðir so stór sum útlánini. Men hetta fekk ein bráðan enda. Í tíðarskeiðnum fram til endan av fyrra hálvári í 1951 øktust útlánini hjá bankunum úr 6,5 mió. kr. upp í 54 mió. kr.

Serliga Sjóvinnubankin fór av fullum huga undir at fíggja eina útbygging av flotanum. Stóru innlánini og meira afturat vórðu brúkt til at fíggja eina sera framsøkna ætlan um at útbyggja trolaraflotan. Í 1939 vóru 10 trolarar í føroyska flotanum. Í 1948 var talið vaksið upp í 38. Størsti trolaraflotin í Norðuratlantshavi var undir føroyskum flaggi. Skipini, sum komu í flotan, vóru yvirhøvur



*Nógvir trolarar komu til landið eftir kríggið. Jóannes Patursson hjá Uvak kom í mai 1947*

gamlir, kolfýrdir trolarar, ið vórðu keyptir úr Bretlandi og Íslandi. Í 1939 fíggjaði Sjóvinnubankin 8 av teimum 10 trolarunum í flotanum, og bankin fíggjaði 28 av teimum 32 trolarunum, sum komu afturat tey fyrstu árini eftir kríggið. Hetta skuldi vísa seg at verða ein vanlukkulig avgerð, tá ið av tornaði.

Uttan iva var keypsprísurin fyri trolararnar ov høgur. Gjaldførið var ríkiligt, og íløguhugurin stórur. Tí varð ikki altíð víst tað neyðuga varsemið, tá skipini vórðu keypt. Bretsku trolararnir høvdu gjørt hertænastu undir krígnum og máttu tí umbyggjast, áðrenn teir aftur kundu fara til fiskiskap. Bretsku skipasmiðjurnar vórðu bidnar um kostnaðarmetingar av at umbyggja og seta skipini í stand. Tey fyrstu árini eftir kríggið vóru tíðirnar ótryggar, og ongin vildi geva bindandi boð. Sum oftast hildu kostnaðarmetingarnar ikki. Skipasmiðjurokningarnar vórðu munandi størri, enn roknað varð við, og bankin mátti játta størri fígging. Hetta tyngdi gjaldførið. Ikki fyrr enn ov seint varð ásannað, at tað helst hevði verið betri at bygt nýtt. Men tá var ov seint. Kassin var tómur. Støðan skuldi seinni vísa seg at gerast vanlukkulig.

Í september 1945 varð virðið á donsku krónunum uppskrivað mótvegis pundinum. Virðið á einum pundi lækkaði úr 22,40 kr. niður í 19,34 kr. Tann 1. september í 1946 legði Bretland 10 pst. í innflutningstolli á ísfisk. Eftir bert einum ári var prísurin á føroyskum fiski á bretska marknaðinum øktur við 27,4 pst., roknað í bretskum pundum. Longu í 1947 vóru Føroyar tí noyddar til at taka upp aftur saltfiskaframleiðsluna. Prísirnir vóru nøktandi, men saltfiskurin setti munandi størri krøv til gjaldførið, sum bæði reiðararnir og bankarnir høvdu trupult við at útvega. Fyri at útvega sterkan valuta vórðu í 1948 ásettar reglur, sum áløgdu trolarunum skyldu til at selja ein part av veiðuni á bretska marknaðinum fyri á tann hátt at útvega sterlingpund.

## Fiskaútflutningurin í árunum eftir kríggið

| | *Feskfiskur* | | | *Salt- og klippfiskur* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *1.000 t* | *Kr./kg* | *Mió.kr.* | *1.000 t* | *Kr./kg* | *Mió. kr.* |
| 1946 | 32 | 0,76 | 24 | 7 | 1,71 | 12 |
| 1947 | 27 | 0,72 | 19 | 23 | 1,61 | 37 |
| 1948 | 24 | 0,85 | 20 | 30 | 1,70 | 51 |
| 1949 | 11 | 0,81 | 9 | 30 | 1,60 | 48 |
| 1950 | 3 | 0,88 | 3 | 35 | 1,69 | 59 |
| 1951 | 10 | 0,80 | 8 | 32 | 1,78 | 57 |

Trupulleikin, sum í fyrsta umfari varð hildin at vera gjaldføristrot, skuldi seinni vísa seg at vera meira álvarsligur. Fiskivinnan gav hall. Tað kámaði rakstrarmyndina, at reiðararnir ikki treytaleyst mettu rentur – og als ikki avskrivingar – sum rakstrarútreiðslur. Ofta vórðu avskrivingarnar ásettar, tá avgerð varð tikin um, hvussu avlopið skuldi brúkast. Hetta var framvegis ikki ókent í føroyskari fiskivinnu 30-40 ár seinni.

Alt gekk skeiva vegin tey fyrstu árini eftir kríggið. Trolararnir vóru í verri standi, enn roknað varð við. Umvælingarnar á skipasmiðjunum vórðu ikki gjørdar til lítar, og hetta var serliga galdandi fyri maskinaríið. Tað gjørdi ikki støðuna betri, at tað um hetta mundið var trot á maskinmeistarum í Føroyum við neyðugum førleika. Veturin 1948-49 varð fiskiflotin eisini raktur av einum drúgvum verkfalli. Í september 1949 fall virðið á donsku krónuni við meira enn 30 pst. mótvegis dollaranum, eftir at Danmark knýtti krónuna at bretska pundinum.

Kursfallið og kríggið í Korea, sum brast á í 1950, hevði við sær, at prísurin á koli tvífaldaðist eftir fáum mánaðum. Vánaligt salt, sum varð innflutt úr Norðurafrika í 1950, gjørdi saltfiskin mislittan, og stórar nøgdir máttu koyrast burtur. Útlitini vóru døpur.

## Sjóvinnubankin í trupulleikum

Í november 1949 framdi Bankaeftirlitið vanligt eftirlit í Sjóvinnubankanum. Eftirlitið, sum fyrr hevði víst á vandan í, at bankin so einvíst fíggjaði fiskivinnuna, gjørdi bankaleiðsluni greitt, at neyðugt varð at seta munandi meira av ímóti tapi. Í november 1949 stóðu 1,35 mió. kr. á avsetingarkontuni, og Thorstein Petersen lovaði Bankaeftirlitinum, at bankin í roknskapinum fyri 1949 fór at seta 650 tús. kr. afturat av móti tapi. Men so stórar vóru avsetingarnar ikki, tá saman um kom. Eftir avsetingar upp á 270 tús. kr. hevði bankin í 1949 eitt avlop upp á 229 tús. kr.

### *Onki avlop í 1950*

Í november 1950 heitti bankin á Bankaeftirlitið um at veita undantak frá grein 7 í bankalógini, sum ásetti, at eginpeningurin í minsta lagi skuldi vera 10 pst. av skyldunum. 20. januar 1951 gav Handilsmálaráðið bankanum eitt tílíkt undantaksloyvi, sum var galdandi til síðst í august 1951. Men nú var niðurteljingin byrjað. Handilsmálaráðið heitti samstundis á bankaeftirlitið um at gera eina nýggja kanning av Sjóvinnubankanum. Bankin var komin á eftirlitslistan hjá myndugleikunum.



*Thorstein Petersen*
*1899-1960*

*Thorstein Petersen, ið var útbúgvin løgfrøðingur, var ein av teimum, sum stóð á odda fyri at stovna Sjóvinnubankan í 1932. Thorstein Petersen gjørdist fyrsti stjóri bankans og sat í hesum starvi til í januar 1951, ein mánað eftir at hann hevði tikið við sum landsstýrismaður.*

*Thorstein Petersen umboðaði Fólkaflokkin í løgtinginum frá 1940 til 1954. Hann var harumframt valdur í Fólkatingið frá 1943 til 1950. Sum tann sterki leiðarin í Fólkaflokkinum og løgtingsformaður lýsti hann tann 18. september 1946 Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð.*

*Skrædlið í Sjóvinnubankanum seint á sumri í 1951 og tað eftirfylgjandi sakarmálið móti leiðslu bankans beindi fyri politisku yrkisleiðini hjá honum. Thorstein Petersen, sum 15. september 1951 mátti leggja frá sær sum landsstýrismaður, varð valdur aftur í Fólkatingið 21. mai 1957. Men longu 5. juli misti hann tingsessin aftur, tí mánaðin frammanundan hevði hann fingið dóm í Hægstarætti fyri sín lut í skrædlinum hjá bankanum.*

Tann 30. januar 1951 gjørdi stjórnin í bankanum uppskot til roknskap fyri 1950, sum vísti eitt avlop upp á 550 tús. kr. Grannskoðari bankans kravdi hinvegin, at munandi størri avsetingar vórðu gjørdar móti tapi. Málið varð viðgjørt á einum fundi í Bankaeftirlitinum tann 16. apríl 1951. Á fundinum luttóku Kristian Djurhuus, løgmaður, Ingolf Kirkholm, statsgóðkendur grannskoðari, Leif Waagstein, landsrættarsakførari, Arne Eken, bankainspektørur, og Thorstein Petersen, sum tá var landsstýrismaður. Thorstein Petersen tók við sum landsstýrismaður 15. desember 1950, og hann fór frá sum stjóri í bankanum 30. januar 1951. Sostatt var hvørki nevnd ella stjórn bankans umboðað á hesum fundinum, og tað hevur eftir øllum at døma ongin heft seg við.

Seinni samtykti nevnd Sjóvinnubankans á fundi 9. mai 1951 at avskriva alt avlopið í 1950. Av framflutta avlopinum frá 1949 upp á 190 tús. kr. mælti nevndin aðalfundinum til at útluta 18 tús. kr. í vinningsbýti og at flyta 172 tús. kr. til 1951. Fyri at fleiri avsetingar ikki skuldu tyngja bankan enn meira, átóku nevndin, Roland Hansen, stjóri, Leif Waagstein, landsrættarsakførari, og Thorstein Petersen sær at veðhalda fyri eini samlaðari upphædd upp á 870 tús. kr. Nevndarformaðurin og Thorstein Petersen átóku hvør í sínum lagi at veðhalda fyri ávikavist 500 tús. og 150 tús. kr. Hetta var eitt óvanligt stig.

## *Bankaeftirlitið á vitjan*

Í tíðarskeiðnum frá 3. til 20. juli í 1951 var Bankaeftirlitið aftur í Føroyum og kannaði Sjóvinnubankan. Niðurstøðan hjá Bankaeftirlitinum var í fyrstu syftu, at tørvur var á at avseta eina góða mió. kr. afturat móti tapi. Eftir hetta var bókførdi eginpeningurin 1,4 mió. kr. Bankaeftirlitið metti harumframt, at við eina endurreising av bankanum varð neyðugt at niðurskriva eginpeningin við í minsta lagi 0,5 mió. kr. afturat. Bankaeftirlitið metti tó, at partapeningur bankans upp á 0,3 mió. kr. ikki var í vanda hóast tær stóru, neyðugu avskrivingarnar.

Bankaeftirlitið fanst at leiðslu bankans fyri m.a. at hava veitt lán uttan trygd til persónar og feløg, sum annars vóru viðskiftafólk í Føroya Banka. Bankaeftirlitið álegði Sjóvinnubankanum at útvega roknskapir frá teimum, sum høvdu fingið lán uttan nøktandi trygd, og tað vísti seg í juli 1951, at nógvir roknskapir fyri 1950 vóru framvegis ikki latnir inn.

Á vári í 1951 hevði Sjóvinnubankin fingið bráðfeingis gjaldføristrupulleikar. Við veðhaldi frá danska statinum hevði bankin í 1950 fingið ein kreditt frá Kjøbenhavn Handelsbank upp á 3 mió. kr., sum varð latin víðari til Føroya Fiskasølu til at fíggja framleiðsluna av saltfiski og klippfiski. Sjóvinnubankin var ikki førur fyri at gjalda kredittin aftur, tá hann fall til gjaldingar 1. apríl 1951. Umboð fyri bankan settu seg í samband við stjórnina, sum játtaði at leingja veðhaldið fyri kredittinum í Handilsbankanum við einum ári. Síðst í mai 1951 varð gjaldførið hjá fiskasøluni og Sjóvinnubankanum styrkt við einum inngjaldi upp á 1 mió. kr., sum fiskasølan lænti frá nýstovnaða elfelagnum SEV. Men longu síðst í juni var gjaldførið aftur næstan vónleyst, sum Bankaeftirlitið tók til.

Bankaeftirlitið metti støðuna soleiðis, at Sjóvinnubankin hevði rent seg fastan við atliti til gjaldførið, og at bankin í roynd og veru hevði steðgað sínum gjaldingum. Sum neyðhjálp gav Føroya Banki tilsøgn um ein kreditt upp á 1 mió. kr., men eftir tilmæli frá Bankaeftirlitinum tók bankin stutt eftir hesa tilsøgn aftur.

Á síni vitjan í Føroyum hevði Bankaeftirlitið høvi til at luttaka á einum fundi í landsstýrinum tann 19. juli 1951. Kristian Djurhuus, løgmaður, hevði sent út fundarboð við stuttari freist. Á fundinum luttóku løgmaður og landsstýrismenninir Thorstein Petersen og Richard Long, Peter Sofus Hansen, stjóri í Føroya Banka, Roland Hansen, stjóri í Sjóvinnubankanum, Dánjal Niclasen, formaður í umboðsnevndini hjá Føroya Fiskasølu, Johan Dahl, nevndarformaður í L/f Grønlandsfelagnum, Jens Chr. Johannesen, stjóri í fiskasøluni og Grønlandsfelagnum, og Arne Eken, bankainspektørur.

Nú hendi okkurt. Jens Chr. Johannesen hevði dagin fyri sett seg í samband við løgmann og boðað honum frá, at hann varð noyddur til at siga seg úr stjóra-

starvinum í fiskasøluni og Grønlandsfelagnum, um feløgini ikki fingu betri fíggingarmøguleikar. Onki gjaldføri var eftir í skipanini. Sum tíðin var liðin, vóru tað støðugt fleiri, sum nú viðurkendu, at raksturin hjá stórum pørtum av vinnulívinum ikki var lønandi. Vanliga fatanin á fundinum í landsstýrinum var, at alt samfelagið steðgaði upp, um peningur ikki varð fingin til vega innan eina ella í mesta lagi tvær vikur.

Dánjal Niclasen gjørdi støðuna upp soleiðis: *Vi maa konstatere, at de Penge, vi* (fiskasølan) *skal bruge, ikke kan skaffes på Færøerne. Der er ingen Tid at spilde, såfremt vi ikke maa se en Standsning i Øjnene. Pengene maa komme nede fra, saa vi maa afgjort vende os den Vej med det samme.* Um tað vantandi lønsemið í vinnuni staðfesti Dánjal Niclasen, *at samtlige politiske Partier paa Færøerne bør inddrages i dette Arbejde, saaledes at Færingerne samlet gaar ind for en Løsning af Rentabilitetsspørgsmaalet.* Eisini í 50-árunum vórðu eyguni vend móti planbúskaparligum loysnum, tá harðast leikaði á.

Løgmaður tók undir við sjónarmiðunum hjá Dánjal Niclasen. Her máttu øll partapolitisk atlit leggjast til viks, og øll máttu standa saman um eina loysn. Á fundinum varð avgjørt at senda eina sendinevnd til Keypmannahavnar at tingast við tjóðbankan og stjórnina. Løgmaður skuldi kunna ríkisumboðsmannin um avgerðina. Fundarfrásøgnin hjá Thorstein Petersen endar soleiðis:



*Louis Højgaard, Roland Hansen og Rasmus Olsen*

| | |
|---|---|
| Lagmanden: | *Maaske De, hr. Bankinspektør, vil ledsage mig til Rigsombudsmanden til Orientering?* |
| Bankinspektøren: | *Jeg er til Tjeneste.* |

Tað skuldi vísa seg seinni, at næstan tann sama støðan sum fyrst í 1950-árunum endurtók seg í Føroyum 40 ár seinni. Men ikki kann sigast annað enn, at tá var samskiftið millum partarnar øðrvísi.

Allir partar høvdu fingið nakað at hugsa um. Bankaeftirlitið fór aftur til Keypmannahavnar uttan at hava avgreitt málið. Í døgunum frá 24. til 27. juli vóru tingingar í Keypmannahavn við Bankaeftirlitið og stjórnina. Í føroysku sendinevndini vóru Dánjal Niclasen, Jens Chr. Johannesen og Roland Hansen.

Tørvur var á beinan vegin at útvega bankanum umleið 4 mió. kr., og roknað varð við, at bankin sum frá leið helst hevði tørv á 8-10 mió. kr. afturat. Fyri at loysa bráðfeingis tørvin hjá bankanum veittu Landmandsbankin og Handilsbankin hvør eitt lán upp á 2 mió. kr. Staturin veitti trygd fyri lánunum, sum skuldu gjaldast aftur tríggjar mánaðir seinni. Seinni veitti landsstýrið statinum trygd fyri upphæddini.

Undir samráðingunum í Keypmannahavn komu partarnir ásamt um at seta í verk eina gjølliga kanning av gjaldførisstøðuni í Føroyum. Í august setti forsætismálaráðið síðan eina nevnd, sum ikki bert skuldi kanna viðurskiftini hjá føroyska vinnulívinum, men eisini búskapin hjá tí almenna. Á hesum grundarlagi skuldi nevndin koma við uppskotum um, hvørjar endurreisingar vóru neyðugar, og hvussu gjaldføristrupulleikarnir kundu loysast.

Í nevndina vórðu valdir Svend Andersen, skrivstovustjóri, ið seinni gjørdist stjóri í Danska Tjóðbankanum, Harald Jensen, fulltrúi í Statistisk Departement, og Niels Elkær-Hansen, skrivstovustjóri í Forsætismálaráðnum. Elkær-Hansen varð formaður í nevndini, og í 1954 varð hann tilnevndur ríkisumboðsmaður í Føroyum. Tann 24. august í 1951 kom nevndin til Føroyar. Nógv virksemi var í Havnini hesar dagarnar síðst í august. Arne Eken var komin til Føroyar at ráðgeva nevndini, og Henrik Meiner, undirstjóri í Danska Tjóðbankanum, var komin til Føroyar vegna seðlabankan at kunna seg um støðuna. Grannskoðarin hjá Sjóvinnubankanum, Ingolf Kirkholm, ríkisgóðkendur grannskoðari, var eisini komin til Føroyar.

Roknað varð við, at Bankaeftirlitið fór at útgreina síni krøv til Sjóvinnubankan, tá úrslitið av kanningini hjá nevndini fyrilá. Samanumtikið var hýrurin góður. Thorstein Petersen var tann 30. august 1951 vertur við ein privatan døgurða fyri nevndini, Eken, bankainspektøri og Meiner, undirstjóra. Av ótta fyri, at Eken skuldi lata seg blíðka av hugnanum og tí góða matinum, mælti Meiner til, at Elkær-Hansen – og ikki Eken – skuldi halda røðuna fyri vertinnuni.

Undir einum døgurða, sum C. Aa. Vagn-Hansen, ríkisumboðsmaður, í november 1949 hevði hildið fyri bankainspektørinum og leiðslunum í teimum báðum bankunum umframt nøkrum øðrum oddamonnum í býnum, hevði Eken vakt uppmerksemi við at umrøða Sjóvinnubankan so rósandi, at Chr. Holm Jacobsen, eftir tí hann sjálvur segði, ikki hevði havt eina betri løtu í lívinum. Eken helt aftaná, at røða hansara var yvirtulkað, men leiðslan í Sjóvinnubankanum kendi tey næstu árini minnini um hesi rósandi orðini sum ein fløva.

## *Innrás í Sjóvinnubankanum*

Men tá Pressens Radioavis var farin í luftina fríggjadagin 31. august 1951 kl. 18.45, kom rættiligt lív í. Thorkil Kristensen, fíggjarmálaráðharri, sum eisini varð nevndur Thorkil Livrem, hevði verið á fundi í Fólkatingsins fíggjarnevnd um gjaldføristrupulleikarnar í Føroyum. Fíggjarmálaráðharrin hevði undir hesum samráðingum endurgivið úr eini frágreiðing, sum Bankaeftirlitið tann 8. august 1951 hevði sent Handilsmálaráðnum um viðurskiftini í Sjóvinnubankanum. Radioavísin helt seg frá fundinum kunna upplýsa, at *ret forbløffende forretningsmetoder og den mangel på indsigt, som bankens ledelse med Thorstein Petersen som direktør havde udvist ved finansiering særligt af trawlfiskeriet, havde givet sig udslag i likviditetskrisen og store tab på bankens engagementer.*

Thorstein Petersen mótmælti hesum dagin eftir í einum fjarriti til Thorkil Kristensen. Stjórnin sendi eitt flogfar til Føroyar eftir Kristian Djurhuus, Eken og Meiner, sum vórðu boðsendir til tingingar í Keypmannahavn. Í Laksegade, har Bankaeftirlitið hevði skrivstovu, var nú eldur í. Og í Føroyum kom fjáltur á fólk, sum gjørdu innrás í Sjóvinnubankanum at taka út síni innlán. Í neyðini mátti bankin brúka eina serliga føroyska áseting, har ein peningastovnur kann nokta at útgjalda meira enn 300 kr. um vikuna til eitt viðskiftafólk.

Vandi var fyri, at Sjóvinnubankin fór at verða stongdur, og fyrst í september 1951 vóru samráðingar í Føroyum og í Keypmannahavn um eina endurreising av bankanum. Við hesum fyri eygað var ein serkøn nevnd við Ingolf Kirkholm, ríkisgóðkendum grannskoðara, Johan Dahl, stjóra í Vági, og Thomas Thomasen, stjóra í Tryggingarsambandinum, biðin um at gera eina nýggja meting av Sjóvinnubankans útlánum. Thomas Thomasen var ikki ókendur í føroyska bankaheiminum. Hann var í 1950 komin í nevndina í Føroya Banka. Í neyðini noyddist Sjóvinnubankin at lata kappingarneytan sleppa at hyggja í sínar bøkur.



*Thomas Thomasen*
*1909-2001*

*Thomas Thomasen fór sum 17-ára gamal í læru á dómaraskrivstovuni, har hann seinni gjørdist fulltrúi. Eftir 23 ár á dómaraskrivstovuni tók Thomas Thomasen í 1948 við sum stjóri í Tryggingarsambandinum Føroyar eftir Jens av Reyni. Hetta starvið læt hann í 1973 sonin Marius Thomassen yvirtaka.*

*Meðan Marius Thomassen var nevndarlimur í Sjóvinnubankanum frá 1971 til 1988, var Thomas Thomasen limur í nevndini í Føroya Banka frá 1950 til 1982. Tey síðstu níggju árini var hann nevndarformaður.*

*Thomas Thomasen hevði frammanundan í tíðarskeiðnum 1943-50 verið aðalfundarvaldur grannskoðari í Sjóvinnubankanum.*

Bankaeftirlitið hevði í juli 1951 mett, at ein endurreising kravdi avsetingar upp á góðar 1,5 mió. kr. Nevndin hækkaði hesa upphæddina upp í 2,4 mió. kr. Upphæddin svaraði til 8 pst. av skuldarum bankans. Í mun til Bankaeftirlitið valdi nevndin ikki at taka við trygdina upp á 870 tús. kr., sum leiðsla bankans hevði veitt. Sostatt var sera gott samsvar millum metingina hjá Bankaeftirlitinum í juli 1951 og metingina hjá sakkønu nevndini tveir mánaðir seinni.

## *Fyrsta endurreisingin*

Allur tiltakspeningur mátti avskrivast og bankin fáa nýggjan kapital. Inngoldnar vórðu 1,2 mió. kr. í partapeningi. Føroya Fiskasøla og Føroya Sjóvátrygging nýteknaðu 0,5 mió. kr. í part. Partapeningurin, sum síðan stovnsetingina í 1932 hevði verið óbroyttur 0,3 mió. kr., kom sostatt upp á 1,5 mió. kr., harav fiskasølan og sjóvátryggingin komu at eiga 2/3. Landsstýrið veitti 2 mió. kr. í ábyrgdarpeningi. Upphæddin varð endurfíggjað við einum statsláni.

Boðað varð til eykaaðalfund í Sjóvinnubankanum tann 24. september 1951. Nevndin, sum bjóðaði sær til at leggja frá sær, segði, at tað var hennara avgjørda fatan, *at en meget stor del af de penge, som nu er hensat, alligevel ikke er tabt, således at de senere kan komme banken til gode.* Henda fatan vísti seg ikki at halda í longdini.

Í nýggju nevndina vórðu valdir Johan Dahl, stjóri í Vági, Martin Djurhuus, postmeistari í Tórshavn, Petur Egholm, reiðari í Tórshavn, J. F. Kjølbro, stjóri í Klaksvík, og Dánjal Niclasen, stjóri í Sørvági. J. F. Kjølbro varð valdur til for-

mann og Dánjal Niclasen til næstformann. Einar Sølvsteen, sum fyrr hevði verið bankastjóri í Nørresundby, tók í oktober 1951 við sum stjóri í bankanum.

J. F. Kjølbro var nú ikki bert formaður í nevndini í Sjóvinnubankanum. Hann var eisini stjóri í Norðoya Sparikassa. Hetta var ov nógv í einum. Í skrivi frá 2. november 1951 boðaði bankainspektørurin frá, at hann var noyddur til at heita á Kjølbro um at fáa viðurskiftini skipað í samsvari við grein 8 í sparikassalógini, sum ásetir, at tann, ið er stjóri í einum sparikassa, ikki samstundis kann luttaka í leiðsluni í einum øðrum peningastovni. *Jeg formoder, at De kan lade Deres søn eller en anden midlertidigt overtage stillingen i sparekassen i den tid, De fungerer i banken,* skrivaði bankainspektørurin hjálpsamur til Kjølbro. Góð ráð skortaðu ikki.

Tann 18. desember 1951 varð boðað til eykaaðalfund í Norðoya Sparikassa. Her avgjørdi umsjónarráðið at lata verandi formann í umsjónarráðnum fara upp í stjórnina, meðan Kjølbro tók við formanssessinum í umsjónarráðnum. Kjølbro var annars ikki tann einasti í nevnd bankans, sum samstundis hevði álitisstarv í einum av sparikassunum. Johan Dahl, ið eins og Kjølbro júst var komin í nevnd bankans, var formaður í umsjónarráðnum í Suðuroyar Sparikassa.

## *Onnur endurreisingin*

Nevndin, sum í august 1951 hevði fingið til uppgávu at kanna vanligu búskaparligu viðurskiftini í Føroyum, handaði seinni á heysti í 1951 løgtinginum og donsku stjórnini eina drúgva frágreiðing. Við støði í frágreiðingini vórðu samráðingar tiknar upp millum stjórnina og heimastýrið um danskan stuðul til at endurreisa føroyska vinnulívið. Stjórnin hjá Erik Eriksen legði undir samráðingunum dent á, at endurreisingin fyrst og fremst mátti verða eitt føroyskt mál, men at danir vóru sinnaðir at hjálpa, um tað í Føroyum vórðu tikin neyðug stig at fáa búskapin aftur á beina kós.

Eftir at løgtingið hevði havt møguleika fyri at umhugsa støðuna nærri, heitti tingið á stjórnina um at taka upp aftur tingingarnar um danskan stuðul, og tann 18. januar 1952 kom ein føroysk samráðingarnevnd undir leiðslu av Kristian Djurhuus, løgmanni, til Keypmannahavnar. Í sendinevndini luttóku annars Martin Holm, formaður í fíggjarnevnd løgtingsins, teir báðir føroysku fólkatingslimirnir Johan Poulsen og Petur Mohr Dam, Jóhan Danielsen, stjóri í Færø Amts Sparekasse, Peter Sofus Hansen, stjóri í Føroya Banka, og Einar Sølvsteen, stjóri í Sjóvinnubankanum.

Sjóvinnubankin fór beinan vegin við dagsskránni. Sølvsteen hevði vent sær til Bankaeftirlitið, tá hann kom til Keypmannahavnar. Har kundi hann greiða frá, at Sjóvinnubankin, sum í september 1951 hevði avsett 2,4 mió. kr., nú hevði ásannað, at neyðugt var at avseta 2,8 mió. kr. afturat. Av hesum fór 1 mió. kr.

**Nøkur útvald roknskapartøl hjá Sjóvinnubankanum**

| *Kr.* | *1933* | *1939* | *1940* | *1942* | *1944* | *1946* | *1948* | *1950* | *1951* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Útlán, mió. | 0,6 | 1,3 | 1,5 | 3,8 | 5,2 | 12,3 | 16,9 | 27,4 | 22,0 |
| Innlán, mió. | 0,4 | 0,6 | 3,1 | 11,7 | 16,6 | 15,0 | 21,6 | 20,4 | 18,4 |
| Eginp., mió. | 0,3 | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1,3 | 1,5 | 2,3 | 2,4 | 1,5*) |
| Inntøkur, tús. | 41 | 138 | 190 | 533 | 768 | 772 | 1.306 | 1.646 | 1.332 |
| Útreiðslur, tús. | 34 | 89 | 114 | 282 | 430 | 451 | 788 | 1.080 | 1.206 |
| Avsetingar, tús. | 4 | 10 | 9 | 6 | 41 | 46 | (169) | 566 | 4.532 |
| Úrslit, tús. | 3 | 39 | 67 | 245 | 297 | 275 | 687 | 0 | (4.406) |

**) Umframt 2,0 mió. kr. í ábyrgdarpeningi*

til P/f Uvak og P/f Sperm, sum rak hvalastøðina við Áir. Bankin hevði útvegað sær roknskapirnar hjá teimum báðum feløgunum fyri 1951, og tað vísti seg nú, at fíggjarliga støðan hjá teimum var ein onnur, enn roknað varð við undir fyrstu endurreisingini í september 1951.

Í minni enn eitt hálvt ár hevði Sjóvinnubankin verið noyddur at avseta 5,2 mió. kr. Hetta var næstan 20 pst. av bókførdu útlánunum, og meira enn dupult so nógv sum bókførdi eginpeningurin við árslok 1950.

Nú vórðu samráðingarnar um búskaparligu støðuna í Føroyum fyribils útsettar, og Sølvsteen varð sendur aftur til Føroya fyri saman við nevndini at gera eina ætlan um endurrreising av Sjóvinnubankanum. Nevndin valdi tó at geva skarvin yvir og læt tann 1. februar 1952 Sjóvinnubankan steðga sínum gjaldingum. Bankin varð stongdur.

Sølvsteen fór aftur til Keypmannahavnar saman við Dánjal Niclasen, næstformanni í nevndini, at luttaka í teimum framhaldandi samráðingunum um endurreising bankans. Eisini Hákun Djurhuus, sum tann 15. september 1951 avloysti Thorstein Petersen sum landsstýrismann, kom upp í føroysku samráðingarnevndina í Keypmannahavn.

Tann trygd, sum fyrrverandi nevnd og stjórn bankans hevði veitt í sambandi við roknskapin fyri 1950, varð mett at kunna virðissetast til 0,5 mió. kr. Eftir hetta varð partapeningurin niðurskrivaður við 99 pst. úr 1,5 mió. kr. niður í 15 tús. kr., og ábyrgdarpeningurin varð niðurskrivaður við 40 pst. ella 800 tús. kr. Nú var avsetingartørvurin nøktaður. Men hinvegin var eginpeningurin mistur í hesi tilgongdini. Peningurin var mistur, longu áðrenn sakførari bankans hevði havt stundir til at skráseta hækkingina av eginpeninginum frá 24. september 1951.

Føroyska samráðingarnevndin og stjórnin gjørdu nú avtalu um at veita Sjóvinnubankanum 2,1 mió. kr. í kapitali. Stjórnin, sum treytaði sær, at tað í Føroyum vórðu teknaðar í minsta lagi 0,5 mió. kr. í nýggjum partapeningi, veitti løgtinginum eitt lán úr danska statskassanum upp á 2,95 mió. kr. Løgtingið setti síðan 1,6 mió. kr. sum ábyrgdarpening og 1,35 mió. kr. sum eitt vanligt innlán í Sjóvinnubankan.

Gjaldførið hjá Sjóvinnubankanum varð eisini tryggjað. Fíggjarmálaráðharrin fekk heimild til at lata statin veita Sjóvinnubankanum upp í 4 mió. kr. til taks til at endurfíggja stuttfreistað útgerðarlán. Við veðhaldi frá løgtinginum veitti Danski Tjóðbankin vegna Fíggjarmálaráðið Sjóvinnubankanum ein kreditt upp á 5 mió. kr. Hesin dráttarrættur, sum stóð við í tvey ár, hevði til endamáls at sissa innlánskundar bankans. Tjóðbankin gav eisini tilsøgn um, uttan statsveðhald, at veita Sjóvinnubankanum enn meira arbeiðskapital við at endurdiskontera góðar handilsvekslar og vekslar, sum vórðu veittir fyri lán í fiskagoymslunum.

Aage L. Rytter, ráðharri fyri handli, ídnaði og sjóvinnu, legði tann 20. februar 1952 uppskot fyri Fólkatingið um lóg um endurreising av P/F Sjóvinnubankanum. Dagin eftir fekk uppskotið bæði fyrstu, aðru og triðju viðgerð í Fólkatinginum, sum einmælt samtykti lógaruppskotið. Tað var enntá tíð til at geva lógaruppskotinum nevndarviðgerð. Í 1952 hevði Danmark eina skipan við tveimum tingum, og fríggjadagin tann 22. februar tók Landstingið undir við lógini, sum kongur undirskrivaði sama dag.

Í Føroyum varð løgtingið boðað til fundar hósdagin tann 21. februar 1952, so tingið kundi taka støðu til sín leiklut í endurreisingini av Sjóvinnubankanum. Tann 22. februar 1952 varð boðað til eykaaðalfund í bankanum, so skotbráið var stutt. Og støðan skuldi vísa seg at gerast enn verri. Seint seinnapartin mikudagin hevði løgmaður boðað Sølvsteen frá, at løgtingsviðgerðin mátti útsetast, tí Petur Mohr Dam, formaður í Javnaðarflokkinum, var farin til Suðuroyar. Hetta hevði við sær, at eisini eykaaðalfundurin í bankanum mátti útsetast. Ein ráðaleysur Sølvsteen yvirtalaði løgmann at senda *Thorshavn* til Suðuroyar eftir Petur Mohr Dam.

Løgtingið kom síðan saman fríggjadagin 22. februar 1952 kl. 10.00. Men løgtingsviðgerðin av málinum var trupul. Petur Mohr Dam og Javnaðarflokkurin, sum hildu, at ongin orsøk var til at gera tilveruna óneyðuga lætta hjá Thorstein Petersen og Fólkaflokkinum, tóku Sjóvinnubankan sum gísla. Longu undir samráðingunum í Keypmannahavn var Petur Mohr Dam trekur til at luttaka í eini endurreising av Sjóvinnubankanum, uttan so at tað eisini fall okkurt til Arbejdernes Trawlerdrift, ið var eitt samvinnufelag á Tvøroyri, sum Javnaðarflokkurin og fakfelagið Fylking høvdu tikið stig til at stovna.



*Dánjal Niclasen*
*1902-1971*

*Danjal Niclasen fekk, saman við Leif Waagstein, eftir kríggið til uppgávu at royna at endurstovna Føroya Fiskaeksport, sum var givið við sínum virksemi í 1942. Hetta førdi til, at L/f Føroya Fiskasøla varð stovnað 16. juli 1948. Dánjal Niclasen gjørdist formaður í umboðsnevndini, meðan Leif Waagstein gjørdist formaður í starvsnevndini.*

*Dánjal Niclasen tók í 1958 við sum stjóri í Føroya Fiskasølu eftir Jens Chr. Johannesen. Hann røkti hetta starv til 1969.*

*Dánjal Niclasen hevði ein týðandi leiklut, tá Sjóvinnubankin varð endurreistur í 1951-52. Hann varð valdur í nevndina í bankanum í september 1951, og varð hann valdur til næstformann. Í 1956 tók hann við sum nevndarformaður í Sjóvinnubankanum eftir J. F. Kjølbro. Hetta starv røkti hann til 1971.*

Landsstýrið skeyt upp, at løgtingið helt privatu partaeigararnar, sum í september 1950 høvdu teknað 200 tús. kr. í nýggjum partapeningi, skaðaleysar. Hetta skuldi gerast á tann hátt, at løgtingið bjóðaði sær til at yvirtaka partabrøvini, sum nú vóru niðurskrivað til 2 tús. kr., fyri upprunaliga virðið upp á 200 tús. kr. Hetta vildi Petur Mohr Dam, sum frammanundan hevði biðið um at sleppa at síggja partaeigaralistan, ikki hoyra talu um. Harafturímóti skeyt Javnaðarflokkurin upp, at løgtingið teknaði partapening í Sjóvinnubankanum heldur enn at veita ábyrgdarpening. Petur Mohr Dam mælti soleiðis í fyrsta lagi til, at løgtingið skuldi tekna 1,0 mió. kr. í partapeningi, og í øðrum lagi, at løgtingið skuldi tekna 0,2 mió. kr. við rætti til at hækka upphæddina við 0,3 mió. kr. Uppskotið hjá Petur Mohr Dam, sum kravdi, at fólkatingslógin mátti broytast, hevði havt við sær, at løgtingið kom at eiga ávikavist 66 pst. ella 49 pst. av partapeninginum í bankanum.

Tá Sjóvinnubankin seinnapartin fríggjadagin setti aðalfundin, var løgtingið framvegis ikki komið til eina semju um at luttaka í endurreisingini. Fiskasølan umhugsaði at ganga frá sínum lyfti um at tekna partapening, og Leif Waagstein, ið skuldi verða fundarstjóri, var ikki møttur. Dánjal Niclasen, sum átók sær at leiða aðalfundin, greiddi frá endurreisingarætlanini. Síðan helt formaðurin, sum fáar tímar frammanundan hevði vrakað uppskotið hjá Sølvsteen til frágreiðing, eina áminningarrøðu uttan handrit. Fundarstjórin boðaði síðan frá, at aðalfundurin fyribils varð niðurlagdur og tikin upp aftur kl. 19.00 dagin eftir.

Eftir at danska stjórnin hevði havnað broytingaruppskotinum hjá Javnaðarflokkinum til lógina um endurreising av P/F Sjóvinnubankanum, sum fólkatingið hevði samtykt dagin fyri, samtykti løgtingið klokkan trý leygarnáttina at luttaka í endurreisingini. Tá hevði viðgerðin í løgtinginum vart í 17 tímar. Løgtingið avgjørdi ikki at tekna partapening og heldur ikki at halda privatu partaeigararnar skaðaleysar. Leygarkvøldið tann 23. februar 1952 kundi Sjóvinnubankin taka aðalfundin upp aftur og samtykkja endurreisingina av kapitalgrundarlagi bankans.

Fiskasølan og sjóvátryggingin teknaðu í part 250.000 kr. í nýggjum partapeningi, og við hesum kom partapeningurin upp á 515 tús. kr. Tann 27. februar 1952 kundi bankin lata upp aftur.

## Reyðabók

Undir samráðingunum í Keypmannahavn boðaði Aage L. Rytter, handilsmálaráðharri, leiðslu Sjóvinnubankans frá, at tað var ein fyritreyt fyri, at stjórnin luttók í endurreisingini, at ein kanning varð gjørd av bankanum. Nevndin í bankanum helt seg ikki hava heimild til at biðja um eina kanning, men vildi hinvegin heldur ikki seta seg ímóti eini tílíkari. Nevndin læt upp í hendurnar á løgtinginum at taka støðu til spurningin.

Frá føroyskari síðu hevði tað fleiri ferðir verið sett fram ynski um eina kanning av orsøkunum til skrædlið í bankanum, og eftir grein 9 í lógini um endurreising av P/f Sjóvinnubankanum, sum varð samtykt einsljóðandi í Fólkatinginum og løgtinginum, varð álagt forsætismálaráðharranum innan árslok 1952 at senda fíggjarnevndini hjá Fólkatinginum og Føroya Løgtingi eina frágreiðing um øll viðurskifti í sambandi við tær báðar endurreisingarnar av bankanum, herundir orsøkirnar til tey tap, sum høvdu ført til, at bankin steðgaði upp.

Forsætismálaráðið setti síðan í mai 1952 eina kanningarnevnd. Í hana komu H. L. Thomsen, stjóri í Yvirverjustovninum, ið varð formaður, Viggo Kampmann, fyrrv. fíggjarmálaráðharri og stjóri í Hypotekbankanum, og Olaf Nielsen, bankastjóri. Niels Madsen, ið seinni í nógv ár var departementstjóri í løgmálaráðnum, var skrivari hjá nevndini. Við atliti til eina gjøgnumgongd av bókum bankans setti nevndin Alexander Tveede, ríkisgóðkendan grannskoðara, sum ráðgeva.

Longu í desember 1952 fyrilá frágreiðingin hjá nevndini, tann sonevnda Reyðabók, ið kom at verða grundarlagið fyri at reisa revsirættarliga ákæru móti Thorstein Petersen, Chr. Holm Jacobsen, Niels G. Mortensen, Leif Waagstein og Roland Hansen. Viðvíkjandi Thorstein Petersen og Chr. Holm Jacobsen hefti nevndin seg við *den hensynsløshed, hvormed de havde udsat midler, der var betroet*

*dem til forvaltning, for åbenbar risiko, samt den grove forsømmelighed, de havde lagt for dagen over for de selskaber, hvis ledelse var overladt dem.*

Men hvussu bar tað til, at bankin kom í hesa støðuna?

## *Politisk fyrilit*

Sambært grein 2 í viðtøkunum *verður bankin í starvi sínum serliga at hugsa um tørv fiskivinnunar.* Henda ásetingin stóð ikki bert á prenti. Hon varð tikin í álvara. Tá á stóð, varð hon tikin fram um endamálsgreinina. Tað var ein stórur partur av trupulleikanum. Leiðsla bankans hevði tikið atlitið til tørvin hjá fiskivinnuni fram um lógina. Leiðslan kom soleiðis undir ábyrgd við ikki at hava tikið neyðugt fyrilit til partaeigararnar og serliga innlánararnar. Peningur, ið var latin bankanum í varðveitslu, varð ikki umsitin við nóg stórum umhugsni. Í síni frágreiðing til kanningarnevndina skrivar Alexander Tveede, ríkisgóðkendur grannskoðari, m.a.

*Banken må siges at have ydet en meget vidtstrakt kredit og har »sendt gode penge efter dårlige penge«. ...Det er min opfattelse, at bankens kunder har fundet det naturligt, at banken skal bære risikoen ved virksomhedernes drift.... Den samfundsopgave, banken naturligt har måttet påtage sig, har under disse forhold ikke fået den begrænsning, som er absolut påkrævet for en bank.*

Leiðsla bankans, serliga stjórin og nevndarformaðurin, sótu í leiðandi politiskum sessum. Saman vóru teir í 1935 undangongumennirnir, tá Vinnuflokkurin, sum var spírin til Fólkaflokkin, varð stovnaður. Chr. Holm Jacobsen umboðaði Vinnuflokkin á tingi frá 1936 til 1940, tá Fólkaflokkurin við Thorstein Petersen á odda tók við. Tað kann tykjast, sum um leiðslan ikki altíð gav sær nóg gott far um at skilja millum politiskt virksemi og bankavirksemi. Um hesi viðurskifti viðmerkti kanningarnevndin annars:

*Motiverne til deres (direktørens og formandens) handlinger har dog næppe udelukkende været egennyttige. Når de har ønsket for enhver pris at holde liv i en række af de virksomheder og selskaber, herunder Sperm, som banken finansierede, har det selvfølgelig haft forbindelse med, at de ved aktiebesiddelser eller ved indtagelse af ledende stillinger var nært knyttet til disse foretagender, men på den anden side har bevæggrunde af politisk og national karakter, navnlig ønskeligheden af at skabe og opretholde store erhvervsforetagender på Færøerne, utvivlsomt foreligget jævnsides hermed.*

## *Sjóvinnubankin uttan eftirlit í fimm ár*

Við heimild í stýrisskipanini ásetti amtmaðurin við kunngerð frá 17. juni 1940, at eftirlitið við bankum og sparikassum í Føroyum fyribils skuldi útinnast av einum ella fleiri persónum, sum Færø amt tilnevndi. Til at taka sær av eftirlitinum tilnevndi amtið síðan K. T. Andreasen, dómarafulltrúa, og N. Mortensen, skrivstovustjóra á Færøernes Oppebørselskontor.

Danska bankaeftirlitið hevði so seint sum í juli 1939 gjørt eina kanning av viðurskiftunum hjá Sjóvinnubankanum, og tey fyrstu krígsárini bað fyribils eftirlitið bert um mánaðar- og ársfjórðingsjavnar umframt roknskapir frá peningastovnunum. Sjóvinnubankin noktaði kortini púra fyri at lata fyribils eftirlitinum nakað tilfar yvirhøvur. Bankin helt upp á, at teir persónar, sum amtið hevði tilnevnt, vóru ógegnigir, og bankin skeyt upp, at eftirlitsuppgávan í staðin fyri varð latin upp í hendur á íslendska bankaeftirlitinum ella einum fulltrúa í Hambros Bank, sum hevði kunnleika um skandinaviskar bankar. Hetta førdi til eitt drúgt stríð millum amtmannin og løgtingið øðrumegin og Thorstein Petersen og Sjóvinnubankan hinumegin.

Tann 18. august 1944 álegði amtið við heimild í bankalógini teimum einstøku limunum í nevnd bankans dagbøtur á 50 kr., til roknskapir og annað tilfar varð latið inn. Men hetta gjørdi ongan mun. Tann 8. september 1944 rindaði nevndin tær falnu dagbøturnar. Men roknskapirnir vórðu framvegis ikki latnir inn. Síðan varð revsimál reist móti leiðslu bankans, og nevndarlimirnir vórðu dømdir hvør at rinda eina bót upp á 1.000 kr. við eini umskiftisrevsing upp á 12 daga hefti. Meira hendi ikki. Roknskapirnir vórðu ikki útflýggjaðir.

Tann 28. september 1944 legði Thorstein Petersen málið fyri ein eykaaðalfund í Sjóvinnubankanum. Aðalfundurin samtykti at mótmæla, at eftirlitið varð útint av teimum persónum, sum amtið hevði tilnevnt. Víðari varð sagt í fundarsamtyktini, at bankin sum higartil fór at verða stýrdur av aðalfundinum, eini nevnd við fimm limum, stjóranum og tveimum grannskoðarum. Aðalfundarsamtyktin endaði við at kunngera, at teir innlánarar, sum ikki hildu, at viðurskiftini vóru nóg trygg, frítt kundu taka sínar pengar úr bankanum.

Henda heilt óvanliga aðalfundarsamtyktin varð kunngjørd í bløðunum 4. oktober 1944. Anton Andresen, ið var fundarstjóri á aðalfundinum, og Thorstein Petersen høvdu undirskrivað samtyktina. Nevnd bankans gjørdi hinvegin ikki so nógv vart við seg. Sjóvinnubankin var vorðin ein finna í politiska talvinum hjá Thorstein Petersen móti amtmanninum.

Nú kom løgtingið upp í leikin. Tann 1. desember 1944 heitti løgtingið á amtmannin um taka stig til, at bankin skjótast gjørligt kom undir eftirlitið, og um neyðugt at brúka tvingsil. Bankin noktaði framvegis fyri at útflýggja nakað

tilfar yvirhøvur, og tann 20. desember 1944 vórðu nevndarlimirnir pantaðir fyri tær falnu tvingsilsbøturnar. Heldur ikki hetta broytti støðuna. Eftir at amtið við gildi frá 1. januar 1945 hækkaði dagbøturnar upp í 250 kr., læt bankin kortini í skrivi frá 3. januar 1945 inn roknskapir og annað tilfar.

Eftirlitið kundi nú staðfesta, at bankin síðan juni 1941 ikki hevði lokið grein 7 í bankalógini, sum er tað fyrsta og týdningarmesta boðið í lógini, ið ásetir kravið til eginpeningin. Við árslok í 1944 var eginpeningurin bert 5,6 pst. av skyldum bankans og ikki 10 pst., sum lógin ásetti. Tann 25. januar 1945 boðaði eftirlitið frá, at tað kom á vitjan í bankanum. Eftirlitið varð kortini útsett orsakað av sakarmálum, sum bankin hevði reist móti amtinum.

Í mai 1945 varð kanningin av bankanum fyribils útsett. Sambandið við Danmark var tikið upp aftur, og Bankaeftirlitið kundi aftur taka við uppgávuni. Tann 7. september 1945 fjarritaði amtmaðurin soljóðandi til Bankaeftirlitið: *Det midlertidige Banktilsyn ophævet saaledes at Tilsynet nu paa ny er hos Dem Stop.* Tað er orsøk til at halda, at tað var ein lætti hjá Hilbert at kunna senda hetta fjarritið.

## *Atknýtt feløg*

Tað er ein høvuðsregla í bankalógini, at ein banki ikki má reka annað virksemi enn bankavirksemi. Tað gjørdi Sjóvinnubankin helst heldur ikki. Men gjøgnum sína lánveiting, sínámillum ognarrætt, og serliga við at somu persónar vóru í ymsum nevndum og stjórnum, hevði Sjóvinnubankin í roynd og veru avgerandi ávirkan í nógvum feløgum, sum vóru sera stórir kundar í bankanum. Bankin sat báðu megin borðið.

Tey vælkendu dømini eru Chr. Holm Jacobsen, sum bæði var nevndarformaður og ein sera stórur kundi í bankanum, og feløgini Trygd, Uvak og Sperm, sum vórðu stovnað í ávikavist 1932, 1934 og 1944 eftir áheitan frá bankanum. Hetta var eisini galdandi fyri feløgini Mercato, Trolkol og Signabøur, sum vóru stovnað árini 1947-49. Øll hesi seks feløgini hildu til á somu skrivstovu, og tey vóru øll stórir lántakarar í Sjóvinnubankanum.

Thorstein Petersen var nevndarformaður í Sperm. Hann var eisini stjóri og nevndarlimur í Trygd, hann var næstformaður í nevndini í Uvak, og hann var óábyrgdur íognari í Mercato. Chr. Holm Jacobsen var nevndarformaður í Trygd og Uvak og óábyrgdur íognari í Mercato. Leif Waagstein var stjóri í Uvak, stjóri og nevndarlimur í Trolkol, næstformaður í Sperm og óábyrgdur íognari í Mercato. Niels G. Mortensen, sum hevði verið grannskoðari í Sjóvinnubankanum frá 1935 til árslok 1944, var nevndarformaður í Signabøur, stjóri í Sperm og Trolkol, ábyrgdur íognari í Mercato, skrivstovustjóri í Uvak og prokurist í Trygd.

Tað hevur sína orsøk, at tað í dag er ásett í bankalógini, at bankastjórar hvørki sum nevndarlimir, starvsmenn ella á annan hátt mugu luttaka í leiðslu ella rakstri av øðrum vinnufyritøkum enn bankanum. Ein tílík áseting var ikki í bankalógini á døgum Thorstein Petersens, og tað gjørdist hansara lagna. Thorstein Petersen helt seinni uppá, at hann hevði havt sera lítið við viðurskiftini í P/f Sperm at gera, at hann onki hevði havt við dagligu avgerðirnar og bókhaldið at gera. Hann helt somuleiðis uppá, at tað, sum hann hevði havt við roknskapirnar hjá felagnum at gera, var av lítlum týdningi. Hann var, sum hann sjálvur lýsti tað, bert nevndarformaður í felagnum.

Eftir grein 12 í bankalógini kundu lánini hjá einum kunda ikki fara upp um 35 pst. av eginpeningi bankans. Eftir tilmæli frá stjórnini kundi bankin tó læna einum kunda upp til 50 pst. av eginpeninginum, men tá skuldu í minsta lagi tveir triðingar av nevndini taka undir við tí. Í hvørjum einstøkum føri skuldi Bankaeftirlitið hava fráboðan um hetta. Tað var serliga henda ásetingin, men kortini ikki bert hon, sum gav Sjóvinnubankanum so stórar trupulleikar.

Bankin hevði veitt ov nógvum kundum ov stór lán. Serliga P/f Sperm, sum hevði brúk fyri nógvum kapitali, samstundis sum raksturin gav hall, kravdi meira, enn bankin orkaði. Ein partur av útlánsvirksemi bankans fevndi tí um óbeinleiðis fígging. Eitt eyðkenni fyri feløgini var, at tey vóru bundin saman og í stóran mun fíggjaðu hvørt annað. Eini tvey av feløgunum høvdu eftir øllum at døma ikki annað sjálvstøðugt endamál. Við at veita øðrum feløgum lán, sum endaðu hjá Sperm, breyt leiðslan grein 12 í bankalógini. Tað sama gjørdi seg galdandi, tá bankin við at útseta skuldskrivingar á kontuni hjá Sperm veitti felagnum lán í stríð við ásetingarnar í grein 12.

Tá ið lánini hjá einum felag vóru í vanda fyri at gerast ov stór, vórðu mótrokningar gjørdar millum feløgini, og ofta tók bankin stig til hesar flytingar. Á henda hátt kundi tað henda, at trygg krøv hjá einum felag vórðu skift um við minni trygg krøv. Tað er at undrast yvir, at hetta kundi halda fram so leingi. Tann 22. februar 1952 segði sakførari bankans Bankaeftirlitinum frá, at tað kundi gerast ótespiligt, um flytingarnar millum Uvak og hini feløgini vórðu kannaðar. Tað vóru ikki allir, sum vóru í góðari trúgv.

Men tað var ikki bert í Føroyum, at mistøk vórðu gjørd. Í 1946 heitti Bankaeftirlitið á Handilsmálaráðið um at taka støðu til, um Uvak og Sperm ikki vóru at rokna sum samanbundin feløg ella ein konsern. Tað metti Handilsmálaráðið ikki, hóast somu persónar gingu aftur í báðum feløgum, og at teir samstundis vóru ráðandi í Sjóvinnubankanum. Veruleikin var, at tey bæði feløgini vóru at rokna sum ein konsern, og at Sjóvinnubankin eisini var at rokna sum partur av hesi konsern.

Formliga var bankin aloftast førur fyri at halda ásetingarnar í bankalógini



*Thorstein Petersen heldur røðu, tá grundarsteinurin til nýggja bygningin hjá Sjóvinnubankanum í Niels Finsensgøtu verður lagdur fyrst í fimtiárunum. Stutt eftir kom Sjóvinnubankin í trupulleikar, og seinni yvirtók Føroya Banki byggingina. Bygningurin stóð liðugur í 1958*

um, hvussu stór lánini hjá tí einstaka kundanum kundu vera. Í veruleikanum varð tó gingið uttan um lógina, men hetta varnaðist Bankaeftirlitið ikki fyrr enn í 1952. Og tá var ov seint. Bankin var farin á húsagang, og ákæra varð reist móti leiðslu bankans fyri at hava brotið bankalógina. Men eisini Bankaeftirlitið mátti tola atfinningar, og í februar 1952 var stjórin í eftirlitinum, Arne Eken, banka-inspektørur, biðin um at halda frí í longri tíð.

Á sínum vitjanum í bankanum hevði Bankaeftirlitið annars fleiri ferðir víst nevndini og stjórnini á vandan við, at trygdin aftanfyri nógv av teimum stóru útlánunum ikki var nøktandi.

Og longu í 1945 hevði Bankaeftirlitið sagt frá sínum ivasemi um teir mongu kasjettarnar hjá Thorstein Petersen.

## *Tørvandi umhugsni*

Bankin fór ofta ógvuliga lætt um sína lánsveiting. Nevndarformaðurin og Thorstein Petersen tykjast at hava havt eina heldur grunna fatan av roknskapum. Teir tykjast at hava verið samdir um, *at regnskabet skulle se pænt ud, og at man ikke kunne være bekendt at komme med et regnskab, der ikki viste udbytte.* Chr. Holm Jacobsen upplýsti í rættinum um viðurskiftini hjá P/f Uvak, har hann var nevndarformaður, *at han var mest optaget af, at der blev fisket meget, medens det regnskabsmæssige interesserede ham mindre.* Hvat ein tílíkur hugburður kann hava við sær, er ikki torført at ímynda sær. Í P/f Sperm hevði hann við sær, at roknskapirnir vóru skeivir og villeiðandi.

Tað er ivaleyst so, at nevndin í Sperm fór ov lætt um sítt starv. Tað sama var møguliga eisini galdandi fyri nevndina í bankanum. Reglugerðin fyri stjórnina varð ongantíð fylgd, og tað vóru ikki nakrar fastar ásetingar um, hvussu nevndin skuldi luttaka, tá størri lán vórðu veitt. Stjórin og nevndarformaðurin tóku ofta einsamallir avgerð um størri lánsveitingar uttan at kunna hinar nevndarlimirnar. Nevndarbókin, sum var ófullfíggjað, varð í flestu førum bert undirskrivað av formanninum og stjóranum. Næstformaðurin kærdi sína neyð um, at Chr. Holm Jacobsen og Richard Long ofta høvdu skund og støðugt sótu og hugdu at klokkuni á nevndarfundunum.

Í 1940 varð Jacob Michael (Kal) Jacobsen, keypmaður í Klaksvík, valdur í nevndina fyri Jaspur A. Hjelm. Tá Jacob Joensen doyði í 1948, 79 ára gamal, kom Jacob Pauli Christiansen, skipsførari í Tórshavn, í nevndina fyri hann. Richard Long, sum gjørdist landsstýrismaður í desember 1950, fór úr nevndini 30. januar 1951, og fyri hann varð valdur Th. Pauli Dahl, yvirlækni í Tórshavn. Hann fór tó longu úr nevndini aftur á eykaaðalfundinum tann 24. september í 1951, og hevði hann sostatt eina stutta starvstíð í bankanum. Nevndarformað-

urin Chr. Holm Jacobsen og næstformaðurin Johs. Olaus Joensen sótu hinvegin báðir í nevndini í 19 ár. Teir komu í nevndina, tá bankin varð stovnaður í 1932, og sótu har til eykaaðalfundin í september 1951.

Sum víst er á, var nevndin merkt av, at hon var óvanliga støðug, og limirnir sótu nógv ár í nevndini. Jacob Pauli Christiansen hevði sitið í nevndini í trý ár, áðrenn nevndarvalið varð fráboðað partafelagsskránni. Kanska varð farið ov lætt um nevndarábyrgdina. Richard Long, sum var yvirlærari, vildi aftan á vera við, at hann luttók á fáum nevndarfundum, tí tað var ógjørligt at útvega skikkaðar vikarar til at undirvísa fyri hann. Tað vísti seg kortini, at hann í roynd og veru hevði møtt lutfalsliga væl upp á nevndarfundunum.

Thorstein Petersen var stjóri í bankanum, frá hann var stovnaður í 1932, til hann legði frá sær við ársskiftið 1950-51, tá hann gjørdist landsstýrismaður. Hann var ikki heilt greiður yvir, nær hann fór frá sum stjóri. Sjálvur helt hann, at hann helst var farin frá tann 15. desember, møguliga tann 31. desember 1950. Men sambært nevndarbókini er Thorstein Petersen ikki farin frá sum stjóri fyrr enn 30. januar 1951, tá Roland Hansen, bókhaldari bankans, tók við sum stjóri.

Men nærveran hjá Thorstein Petersen í bankanum var kortini at hóma eftir hetta. Í apríl 1951 hevði hann tingingar í Keypmannahavn við grannskoðanina og Bankaeftirlitið um avsetingarnar hjá Sjóvinnubankanum í 1950. Gjaldføristrupulleikarnir hjá Sjóvinnubankanum førdu í sama mánaði til fundir í Forsætismálaráðnum, og sambært fundarfrásagnunum varð bankin har umboðaður av virkandi stjóranum Roland Hansen. Hann virkaði sum stjóri í minni enn tvey ár.

Tað, sum stendur eftir, er, at Thorstein Petersen ivaleyst hevur havt alt ov nógv onnur jørn í eldinum til eisini at kunna røkja starvið sum bankastjóri til lítar. Hann upplýsti sjálvur, at hann í árunum frá 1945 til 48 brúkti meira enn ein triðing av síni tíð til politiskt arbeiði, og næstan ein fjórðing av tíðini var hann staddur uttanlands. Hesi lagnutungu árini hjá bankanum raðfesti hann sostatt bankastjórastarvið til minni enn eitt hálvtíðarstarv.

Thorstein Petersen hevði lisið løgfrøði og hevði rikið egna advokatskrivstovu síðan 1929, tá hann í 1932 gjørdist stjóri í bankanum 33 ára gamal. Men Thorstein Petersen hevði ikki nakran fakligan kunnleika um bankavirksemi. Hann var heldur politikari. Kanningarnevndin hevði ta fatan, at leiðsla bankans var við undirlutan.

## *Dómurin verður feldur*

Tann 12. oktober 1955 varð Thorstein Petersen í Eystara Landsrætti dømdur í 8 mánaða fongsul fyri brot á bankalógina, partafelagslógina og revsilógina, og

hann misti samstundis rættin til at reka sakføraravirksemi med alla. Chr. Holm Jacobsen varð dømdur í 60 daga hefti og Niels G. Mortensen fongsul í 4 mánaðar. Leif Waagstein, sakførari bankans, varð dømdur í 30 daga hefti, og Roland Hansen skuldi gjalda 60 dagbøtur á 25 kr.

Í dómi sínum legði landsrætturin dent á, at teir ákærdu við lítið umhugsaðum flytingum av stórum peningaupphæddum millum ymsar fyritøkur, ofta fjalt aftan fyri skeivar og villeiðandi bókingar og við flytingum í bókum Sjóvinnubankans í sambandi við ábyrgdarleysa lánveiting, høvdu elvt til, at onnur høvdu tapt eina peningaupphædd, sum tilsamans kom upp á fleiri milliónir krónur. Hetta tap mátti tað almenna bera í sambandi við endurreisingarnar av bankanum.

Rættaruppgerðin, sum húsagangurin hjá Sjóvinnubankanum 1951-52 hevði við sær, tók bankanum fast. Fyri teir ákærdu var málið ein persónlig vanlukka. Serliga neit tað undanfarnu leiðsluni fast, at ákæra varð reist fyri mandatsvik. Landsrætturin legði kortini í dóminum dent á, *at det afgørende motiv for de tiltalte ikke havde været opnaaelsen af egen personlig vinding.*

At drívmegin hjá Thorstein Petersen ikki var at arbeiða fyri egið gagn, sæst av, at hann í november 1948 sjálvur tók eitt lán í bankanum upp á 350 tús. kr., sum hann lænti víðari til P/f Sperm. Hetta varð gjørt fyri at avmarka lánini hjá Sperm, sum vóru komin upp til hægsta markið eftir bankalógini. Hetta hevði svarað til, at bankin sjálvur hevði havt veitt Sperm lánið móti sjálvskuldarborgan frá Thorstein Petersen, og má metast at hava havt til endamáls at ganga uttan um bankalógina. Men til egið gagn var tað ikki.

Á vári 1951 veitti leiðsla Sjóvinnubankans og Thorstein Petersen, sum tá var farin frá sum stjóri, ábyrgdarskyldur fyri tilsamans 870 tús. kr., so bankin kundi leggja roknskapin fyri 1950 fram. Thorstein Petersen, sum átók sær skyldur upp á 150 tús. kr., legði afturat í einum skrivi tann 15. mai til Bankaeftirlitið *...men er dette at forstaa saaledes, at jeg ikke agter at holde noget af det, jeg besidder, tilbage den Dag, det maatte blive aktuelt, at der blev tale om et Tilsvar. Jeg var med til at starte Banken og har altid personligt følt mig økonomisk forpligtet for Bankens Gældsforpligtelser med alt, hvad jeg til enhver Tid besidder.*

Um nevndarformannin Chr. Holm Jacobsen, sum átók sær skyldur yvirfyri bankanum upp á 500 tús. kr., skrivaði Thorstein Petersen í brævinum til Bankaeftirlitið *...men dette er faktisk Udtryk for det samme som for mit Vedkommende, at han føler sig fuldt ud solidarisk med Banken paa enhver Maade.* Orsøk er til at halda, at hetta var sannførandi. Thorstein Petersen og Chr. Holm Jacobsen kendu Sjóvinnubankan sum sítt hjartablóð. Bankin misti ongan pening upp á lánini hjá Thorstein Petersen og Chr. Holm Jacobsen, sum var ein tann størsti kundin í bankanum.

Við kongligari náðargerð í mai 1956 slapp Chr. Holm Jacobsen undan revsingini. Thorstein Petersen fekk seinni loyvi til at skjóta dómin inn fyri Hægstarætt. Har fekk hann ein linari dóm. Hægstirættur, sum fríkendi Thorstein Petersen í ákæruni um mandatsvik, broytti 28. juni 1957 dómin til 40 daga fongsul, og rætturin avgjørdi eisini, at hann ikki skuldi missa rættin til at reka advokatvirki.

## *Ein politisk uppgerð?*

Undir tí spentu støðuni, sum tók seg upp í 50-árunum í Føroyum, vóru tað nógv, sum hildu, at sakarmálini móti leiðslu Sjóvinnubankans vóru ein uppgerð hjá gamla hjálandaveldinum við Thorstein Petersen. Men tað er neyvan grundarlag fyri hesi uppfatan. Tey fyrstu árini hjá unga heimastýrinum fóru myndugleikarnir í Keypmannahavn varisliga fram móti Sjóvinnubankanum og Thorstein Petersen, sum umframt at vera bankastjóri eisini stóð á odda fyri sjálvstýrisrørsluni.

Fram til á sumri 1951 hevði Sjóvinnubankin fingið langt tjóður. Í samfull 10 ár leyk bankin ikki krøvini í bankalógini um eginpening. Ofta leyk bankin heldur ikki lógarkrøvini um gjaldføri. Eftir kríggið hevði Bankaeftirlitið hvørt ár, fyrstu ferð í 1945, biðið bankan um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Og líka so ofta vóru viðurskiftini ikki fingin í rættlag. Bankin megnaði tað helst ikki. Kortini góðtók Bankaeftirlitið, at bankin helt fram við at taka ímóti innláni. Í 1947, 48, 49 og aftur í 50 vóru fleiri av lánunum omanfyri hægsta markið í lógini. Handilsmálaráðið gjørdi hvørja ferð bankan varan við hetta. Og so hendi ikki meira.

Viðurskiftini millum bankainspektørin og Sjóvinnubankan tykjast eftir umstøðunum at hava verið vinarlig. Tað tykist, sum um Bankaeftirlitið gekk sera langt fyri at hjálpa bankanum, har tað var gjørligt. Eftir skrædlið í september 1951 var Bankaeftirlitið fyri almennum atfinningum fyri ikki at hava røkt sínar skyldur. Í einum skrivi til Handilsmálaráðið 11. oktober 1951 vardi Arne Eken, bankainspektørur, seg við m.a. hesum orðum:

*Der har altid været enighed om, at det ville være uheldigt at rejse offentlig kritik eller retlig tiltale paa grundlag af smaa og uformelle spørgsmaal, som kunne bringes i orden ved forhandling.*

*Ved sagens behandling i indeværende aar har der været enighed om det ønskelige i, at Sjóvinnubankin bevaredes af hensyn til pengeomsætningen i det færøske samfund som helhed og til ønskeligheden af, at den specielt færøske bank ikke blev tvunget til lukning, saafremt det paa nogen maade kunne undgaas.*

Annars vóru longu á heysti 1951 ætlanir um rættarsókn móti leiðslu Sjó-

vinnubankans fyri brot á bankalógina. Í einum skrivi frá 21. desember 1951 til Ríkisumboðsmannin í Føroyum skrivar Handilsmálaráðið um hetta:

*...at regeringen under hensyn til de særlige forhold på Færøerne og til sagens udvikling ikke har anset det for rigtigt at udsætte banken for ny uro ved at foranledige retssager rejst og derfor har besluttet, at der ikke skal rejses tiltale for de begåede overtrædelser af banklovens forskrifter.*

Tað er tí trupult at síggja nakað samband millum skrædlið í Sjóvinnubankanum og sakarmálini móti leiðslu bankans øðrumegin og politiska virksemið hjá Thorstein Petersen hinumegin. Hinvegin kanst tú hava eina kenslu av, at tað, at Færø amt í 1945 bar seg undan at veksla sterlinggoymsluna hjá Sjóvinnubankanum, hevði ikki so lítið samband við tey spentu viðurskiftini, sum vóru millum Thorstein Petersen og C. Aa. Hilbert, amtmann. Hóast nakrar grundgevingar vóru fyri støðuni hjá amtinum, so var gongdin í málinum merkt av, at amtmaðurin vildi vinna Thorstein Petersen neisir.

## Sjóvinnubankin fór upp í hvalaveiðu

Í 1955 kom Sjóvinnubankin aftur í trupulleikar. Stórhvalaveiðan miseydnaðist, og bankin mátti yvirtaka hvalastøðirnar við Áir og í Lopra. Vandi var fyri, at meira enn helvtin av partapeningi bankans var mistur. Hesaferð gingu føroyskir myndugleikar – og eisini teir donsku – óvanliga stillisliga um hurðarnar. Men tann 8. desember 1956 kundi tann gløggi lesarin lesa henda tíðindastubban í dagblaðnum Børsen:

*Under Hensyn til den betydelige erhvervsmæssige og sociale Interesse, der for Færøerne ligger i, at Hvalfangsten opretholdes, har Danmarks Nationalbank efter Samraad med Regeringen og det færøske Landsstyre ydet Statsministeriets færøske Låneudvalg et Lån på 3,3 Mill. Kroner. Herved sættes Låneudvalget i Stand til at meddele Garanti for Hvalfangerselskabernes samtlige Engagementer med P/f Sjóvinnubankin.*

*Der skulle ved Ordningen være skabt en Mulighed for, at Hvalfangsten kan fortsætte.*

Aftanfyri henda stuttorðaða tíðindastubban fjaldi seg ein sera undrunarverd gongd. Veruleikin var, at trygdin, sum varð veitt 23. november 1956, tryggjaði lánini hjá Sjóvinnubankanum í hvalabátunum, so roknskapurin fyri 1955, 11 mánaðar seinkaður, nú kundi metast at vera rætt framlagdur. Tað kom heldur ongantíð á ovasta bredda í bløðunum, at Kjøbenhavns Handelsbank eftir áheitan frá Tjóðbankanum samstundis veitti eina trygd upp á 2,1 mió. kr. afturat, fyri at tryggja møgulig tap upp á eina røð av útgreinaðum lánum.

Men hvalaveiðan kundi ikki halda fram. Tað gekk so illa, sum tað kundi ganga. Av samlaðu lánunum upp á 5,4 mió. kr., sum tað í 1956 í samstarvi við

Tjóðbankan varð veitt trygd fyri, mátti Sjóvinnubankin seinni avskriva 5 mió. kr. sum taptar. Alt tapið varð bókað í Keypmannahavn.

Tað var ikki bert hvalaveiðan, men eisini Sjóvinnubankin, sum var í andróðri í 1955. Men viðurskiftini vórðu greidd so stillisliga, at sjálvt ikki grannskoðari bankans, Sigfried Skaale, legði nakað til merkis. Í 40 ára minnisritinum hjá bankanum, sum varð givið út í 1972, lýsir Sigfried Skaale 1955 sum eitt gott ár hjá Sjóvinnubankanum, og avlopið áðrenn avsetingar var 378 tús. kr.

Læknastríðið í Klaksvík førdi í 1955 til eina krígslíknandi støðu millum Føroyar og Danmark. H. C. Hansen, forsætismálaráðharri, fekk eina heldur kaldliga móttøku, tá hann vitjaði í Føroyum í august 1956, og hann hevði onki ynski um, at donsk-føroysku viðurskiftini aftur skuldu standa ovast á breddanum í donsku bløðunum. Men stjórin í Bankaeftirlitinum, sum í sambandi við roknskaparframløguna fyri 1955 hevði sett kikaran fyri tað blinda eygað, varð noyddur at fara í sjúkrafarloyvi. Arbeiðið hjá eftirlitinum í Sjóvinnubankanum kostaði honum stjórastarvið.

Bankaeftirlitið sendi fyrst í februar 1952 tveir medarbeiðarar til Føroyar, so teir kundu stuðla leiðslu Sjóvinnubankans í tann mun, tað var neyðugt. Medar-



*Hvalabátarnir Heykur, Sirra og Terji við bryggju í Havn*



*Rasmus Olsen*
*1911-1988*

*Rasmus Olsen varð føddur í Svínoy, og byrjaði hann sum næmingur í Sjóvinnubankanum, stutt eftir at hann var settur á stovn. Hann gjørdist seinni kassameistari, og undir krígnum varð hann settur sum leiðari á deild bankans í Sørvági. Rasmus Olsen, sum í 1951 varð útnevndur til bókhaldara, tók í 1958 við sum stjóri í bankanum eftir Erik Elberling.*

*Rasmus Olsen hevði ta fatan, at gjaldsviljin í stóran mun var arvaliga treytaður. Í hvussu so er hevði hann størri áhuga fyri familjuviðurskiftunum, enn hvussu nógvan tøkan pening fólk høvdu, tá tey komu í bankan at biðja um lán. Men Rasmus hevði gott skil á kredittmeting. Sjóvinnubankin misti ikki nógvan pening í hansara tíð.*

*Eftir at hava starvast í meira enn 50 ár í Sjóvinnubankanum legði Rasmus Olsen frá sær sum stjóri í 1984.*

beiðararnir hjá Bankaeftirlitinum høvdu lyndi til at halda, at Sølvsteen í sínum uppskoti í januar 1952 um eyka avsetingar upp á 2,8 mió. kr. møguliga hevði tikið heldur rívan til. Tað tyktist teimum, at Sølvsteen hevði slept endanum, tí trupulleikarnar høvdu hópað seg upp. Umboðini hjá Bankaeftirlitinum hildu, at tað harðbalna veðurlagið við myrkri og regni og avmarkaðu karmarnir at virka innanfyri høvdu gjørt, at Sølvsteen hevði fingið tað, sum í Svøríki verður nevnt *lappesyge.* Hann var helst vorðin hugtungur. Gongdin seinni gav ikki grund til at halda, at ov rívan varð tikið til í 1952.

Í 1956 avloysti Erik Elberling Sølvsteen sum stjóra í Sjóvinnubankanum. Elberling sat í starvinum í tvey ár, til Rasmus Olsen tók við í 1958.

## Nýggjar fíggingarkeldur

Við skrædlinum í Sjóvinnubankanum í 1951-52 – og serliga við læknastríðnum í Klaksvík – hevði danska stjórnin havt eina uppliving, sum setti ein dapran dám á viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Tey næstu árini vórðu fleiri stig tikin, sum øll høvdu til endamáls at menna føroyska búskapin.

Tann 23. august 1953 boðaði Erik Eriksen, forsætismálaráðharri, frá, at fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum hevði tikið undir við, at 10 mió. kr. av danska partinum av Marshall-hjálpini skuldi brúkast til endamál í Føroyum. 2 mió. kr. vórðu settar av til ein trygdargrunn til ein realkredittstovn, sum skuldi kunna

veita langfreistað veðlán o.a., og 8 mió. kr. vórðu settar av sum lán til endurreising av føroyskum vinnufyritøkum. Tó skuldu rentur og avdrøg av lánunum gjaldast inn í trygdargrunnin hjá realkredittstovninum.

Síðan varð vald ein nevnd, sum skuldi umhugsa allar spurningar í sambandi við stovnsetingina av realkredittstovninum og gera eitt grundað uppskot til lóg um stovnsetingina. Arbeiðið hjá nevndini byrjaði tó ikki fyrr enn eftir stjórnarskiftið í september 1953, tá Hans Hedtoft tók við sum forsætismálaráðharri. Viggo Kampmann, fíggjarmálaráðharri, gjørdist formaður í nevndini. Hann var eisini limur í nevndini, sum í 1952 skuldi kanna viðurskiftini í sambandi við skrædlið í Sjóvinnubankanum.

Við fólkatingslóg nr. 60 frá 12. mars 1955 varð Færøernes Realkreditinstitutt sett á stovn. Realurin fekk til uppgávu at veita langfreistað lán við veð í fiskiskipum, sum høvdu heimstað í Føroyum. Realurin fekk eitt stovnsfæ upp á 10 mió. kr., umframt eitt rentufrítt lán upp á 2 mió. kr. frá Danska Tjóðbankanum. Lánið varð ikki avdrigið tey fyrstu 20 árini. Tað tók drúgva tíð at fáa stovnað Realin, sum var fyrsti ávøksturin av arbeiðinum hjá Elkær-Hansen nevndini.

Tað hevur verið siðvenja, at løgtingið letur landskassan luttaka í skipabygging hjá privatum reiðaríum. Undir seinna heimsbardaga varð avlopið á løgtingsfíggjarlógini lagt í Vinnulánsgrunnin. Í seinnu helvt av 40-árunum veitti grunnurin trolaraflotanum lán. Í fyrru helvt av 50-árunum vóru lánini avskrivað sum tapt. Men nú komu tær fyrstu løgtingslógirnar um stuðulslán og landskassaveðhald, og tær gjørdu – saman við lánimøguleikunum, sum vórðu skaptir við Realinum – tað møguligt hjá virkisfúsum monnum, sum høvdu 10 pst. í eginpeningi, at gerast reiðarar. Rættilig gongd kom á skipabyggingina. Bert í árunum frá 1956-64 komu 64 nýggj stállínuskip í flotan. Búskapurin var komin á føtur aftur.

Realurin fíggjaði yvirhøvur sítt virksemi við at geva út lánsbrøv við statsveðhaldi, sum vórðu seld á danska kapitalmarknaðinum. Eftir áheitan frá stjórnini hjá J. O. Krag átók Danski Tjóðbankin sær í 1967 at yvirtaka lágt rentaðu lánsbrøvini hjá Realinum fyri kurs 100. Tjóðbankin kom tí at bera kurstapið av lánsbrøvunum. Skipanin bar í sær ein munandi stuðul til Realin og føroysku fiskivinnuna, og í síðsta enda rindaði staturin, sum fær árliga avlopið hjá Tjóðbankanum. Sum liður í avtaluni frá 10. juni 1998, ið endaði bankamálið, yvirtóku føroyskir myndugleikar Realin í november 1998. Hann hevði tá 440 mió. kr. í eginpeningi.

Tað er vert at merkja sær, at Færøernes Realkreditinsitut varð sett á stovn áðrenn Danmarks Skibskreditfond, sum varð stovnaður í juni 1961. Skipskreditfonden hevur annars síðan 1964 veitt lán til føroysk reiðari við somu treytum, sum donsk reiðarí hava fingið. Við árslok 1992, tá statsstuðulin til Skips-

kreditfonden og Realin helt uppat, var restskuldin hjá Skipskreditfonden í Føroyum 336 mió. kr.

Miðskeiðis í 50-árunum fekk Kreditforeningen af Kommuner i Danmark møguleikar fyri at veita føroyskum kommunum lán, og í seinnu helvt av 50-árunum víðkaði Kongeriget Danmarks Fiskeribank sítt virkisøki til eisini at fevna um Føroyar.

Í 1964 varð *Investeringsfonden for Færøerne* settur á stovn við tí endamáli at veita lán til útbygging av undirstøðukervinum. Mett varð, at hetta kundi hjálpa til at fleirtátta føroyska vinnulívið. Frá 1964 til 1980 fekk Íleggingargrunnurin tilsamans 140 mió. kr. frá danska statinum. Upprunaliga tilnevndi forsætismálaráðharrin nevndina í grunninum, men síðan 1. apríl 1976 hevur føroyska heimastýrið tilnevnt nevndarlimirnar. Men Íleggingargrunnurin er framvegis danskt málsøki.

Stjórnin og landsstýrið samdust í apríl 2005 um at brúka ein part av stovnsfænum hjá grunninum til at útbyggja og nýmótansgera Vága Floghavn, sum er felagsmál, ið Statens Luftfartsvæsen fíggjar. Í sambandi við hetta skulu føroyskir myndugleikar yvirtaka floghavnina og raksturin av henni.

## Tjóðbankin veitir hjálp

Eftir áheitan frá Viggo Kampmann, forsætismálaráðharra, átók Danski Tjóðbankin sær í 1962 ta heilt óvanligu uppgávuna fyri ein miðbanka at veita gjaldføri til eina privata vinnufyritøku. Talan var um størstu fyritøkuna í Føroyum, P/f J. F. Kjølbro í Klaksvík, sum var í vanda fyri at fara á húsagang.

Kampmann, sum í 1955 hevði havt leiklutin sum semingsmaður í Klaksvíkstríðnum, hevði millum danskar politikarar orð á sær sum tann, ið kundi loysa trupulleikar í føroyskum viðurskiftum. Leikluturin hjá Tjóðbankanum í trupulleikunum hjá J. F. Kjølbro vísir væl, hvussu langt danska stjórnin vildi ganga fyri at sleppa undan nýggjum trupulleikum í Føroyum. Og Kjølbro kundu teir ikki bara lata fara.

Luttøkan hjá Tjóðbankanum í J. F. Kjølbro hevði við sær, at Føroya Banki og Sjóvinnubankin sluppu undan at átaka sær eitt størri tap. Báðir bankar høvdu í 1962 veitt P/f J. F. Kjølbro lán, sum svaraðu til helvtina av eginpeninginum.

Tjóðbankin, sum fekk veð í meirilutanum av partabrøvunum í P/f J. F. Kjølbro, fekk í veruleikanum ræði yvir felagnum. Tjóðbankin var av álvara komin í kløtur. Hann mátti fleiri ferðir veita J. F. Kjølbro meira pening, til felagið í 1969 varð endurreist. Partapeningurin varð niðurskrivaður til 1 pst. av áljóðandi virðinum, og síðan umskipaði Tjóðbankin sín ágóða í felagnum til nýggjan partapening.

Tjóðbankin kendi seg ikki væl sum virkiseigara í Føroyum, og í 1971 varð partapeningurin í J. F. Kjølbro fluttur yvir í nýstovnaða Føroyagrunnin frá 1971. Grunnurin fekk til endamál at veita stuðul til vinnuútbúgvingar hjá ungum føroyingum innan fiskivinnu, handverk, ídnað og tílíkt.

Tað skuldu ganga 35 ár, áðrenn ungir føroyingar hoyrdu nakað um hetta.



*Manningin í Sjóvinnubankanum í 1960'unum. Rasmus Olsen stendur niðast við trappuna*

# Nýggjar tíðir

Í seinnu helvt av 20. øld broyttust fyritreytirnar hjá føroysku fiskivinnuni grundleggjandi, so hvørt sum londini í Norðuratlantshavi fluttu fiskimørkini út. Føroyar svaraðu aftur við eisini at flyta sítt fiskimark út. Í 1959 varð markið flutt frá 3 út á 6 fjórðingar, í 1964 út á 12 fjórðingar og í 1977 út á 200 fjórðingar. Fremmandu trolararnir vórðu riknir úr føroyskum sjógvi. Gongdin hevði við sær, at skip, ið høvdu roynt á mið- og fjarleiðum, fóru at fiska undir Føroyum. Útróðrarmenninir, sum høvdu kappast við bretar og týskarar um fiskin, skuldu nú kappast móti sínum egnu landsmonnum. Og ikki bert um upsan, men eisini um tey dýraru fiskasløgini sum tosk og hýsu.

Í hesum broytingartíðum skipaði Atli P. Dam í januar 1975 nýtt landsstýri millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Samgongan, sum helt fram eftir valið í november 1978, kom at sita í seks ár, til Pauli Ellefsen í januar 1981 skipaði nýtt landsstýri millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Landsstýrissamgongan hjá Atla Dam frá 1975 til 1981 umboðaði eina broytingartíð í føroyskum politikki. Samgongan, sum eisini gekk undir navninum



*Nærløgd starvsfólk í Føroya Banka halda skil á tølum og pappírum. Myndin er tikin í 1970*

yvirtøkusamgongan, yvirtók í 1976 Postverkið eftir grein 2 í heimastýrislógini. Eftir grein 9 í heimastýrislógini yvirtók landsstýrið í 1975 ein part av almennu forsorgini, í 1976 partar av heilsuverkinum og í 1979 fólkaskúlan. Grein 9 yvirtøkurnar fevna bert um umsitingina og ikki fíggjarligu ábyrgdina, men í 2002 yvirtóku Føroyar eisini fíggjarligu ábyrgdina av almennu forsorgini og skúlaverkinum.

Higartil hevði danski staturin luttikið í fíggingini av felagsmálum í Føroyum við eini endurgjaldsskipan. Við gildi frá 1. januar 1988 varð endurgjaldsskipanin yvirhøvur broytt til eina blokkstuðulsskipan. Stuðulin frá danska statinum var ikki longur oyramerktur til ávís umsitingarøkir, og blokkstuðulin úr Danmark var inntøkuførdur á fíggjarlógini saman við hinum inntøkunum hjá landskassanum. Broytingarnar sóust skjótt í verki. Stuðulin úr Danmark skapti størri rásarúm á føroysku fíggjarlógini. Peningurin kundi brúkast til onnur endamál, og tað varð eisini gjørt. Á vinnuøkinum var politikkurin hjá landsstýrinum hjá Atla Dam, at tað almenna skuldi luttaka, so gongd kundi fáast á búskaparliga vøksturin.

Broytingarnar settu stór krøv til fyrisitingina og eftirlit við umsitingini. Men longu í 1988 var landsstýrisfyrisitingin ovbyrjað.

## Ráfiskagrunnurin

Í 1963 varð Prísásetingarnevndin sett á stovn. Í nevndini, sum ásetti minstaprísir fyri ráfisk fyri alt landið, høvdu útróðrarmenninir og fiskakeypararnir líka nógv umboð. Landsstýrið luttók í nevndini sum triðjipartur og uppmaður. Men útróðrarmenninir, sum við ársskiftið 1974-75 høvdu skipað seg í Meginfelag Útróðrarmanna, settu nú krav um eina endurskoðan av prísásetingarskipanini, sum kundi tryggja støðugar minstaprísir.

Í mai 1975 samtykti løgtingið, at Ráfiskagrunnurin skuldi avloysa Prísásetingarnevndina.

Endamálið var, at grunnurin skuldi tryggja tí partinum av flotanum, sum landaði til virkini í Føroyum, ein støðugan avreiðingarprís yvir longri tíðarskeið. Men grunnurin fekk eisini til uppgávu at tryggja flakavirkjunum eitt hóskandi skiftisavlop. Grunnurin umsat sostatt eina prísútjavningarskipan, sum bygdi á tveir prísir. Avreiðingarprísir vórðu ásettir fyri skipini og avrokningarprísir fyri flakavirkini.

Grunnurin ásetti 14. hvønn dag avrokningarprísir, sum virkini skuldu gjalda fyri ráfiskin. Avrokningarprísurin, sum varð ásettur í mun til útflutningsprísin og roknaða framleiðslukostnaðin, skuldi tryggja flakavirkjunum – eisini teimum, sum vóru minst virkisfør – eitt nøktandi skiftisavlop. Avreiðingarprísurin til skip-

ini varð ásettur fyri fýra mánaðir í senn. Avreiðingarprísurin, sum bygdi á egnar metingar hjá grunninum um útlitini, skuldi tryggja, at skipini kláraðu raksturin.

Við ávikavist avgjaldi og stuðli skuldi grunnurin útjavna fiskaprísirnar yvir longri tíð. Vóru avreiðingarprísirnir hægri enn avrokningarprísirnir, rindaði grunnurin reiðaríunum munin. Vóru avrokningarprísirnir hægri enn avreiðingarprísirnir, skuldu reiðaríini hinvegin gjalda grunninum munin.

Grunnurin hevði í byrjanini eina nevnd við sjey limum: 2 umboðaðu Ráfiskakeyparafelagið, 1 Meginfelag Útróðrarmanna, 1 Fiskimannafelagið, 2 landsstýrið og sjeyndi limurin, sum var formaður, varð valdur av hinum seks nevndarlimunum í felag. Grunnurin broyttist við tíðini til eitt planbúskaparligt ódjór.

Roknað varð við, at grunnurin fór at verða sjálvfíggjandi. Landsstýrið átók sær tó at tryggja eitt møguligt gjaldførishall. Grunnurin kundi havt javnvigað. Men tað gjørdi hann ikki. Tað varð latið ov nógv út, og ov lítið varð tikið inn. Tað var ikki tann neyðuga javnvágin í nevndini í grunninum. Ein meiriluti dámdi betur útgjald enn inngjald. Grunnurin, sum broyttist til eitt sjálvtøkuborð, kom at umsita eina risastóra almenna stuðulsskipan til fiskivinnuna og fiskiídnaðin.




*KREPPUHJÁLP: Í 80'unum kundi vera trupult at halda skil á, hvar allur stuðulin endaði. Óli P. teknaði*

Virksemið hjá Ráfiskagrunninum varð seinni víðkað, so grunnurin eisini skuldi stýra veiðitrýstinum eftir teimum einstøku fiskasløgunum. Hetta varð gjørt við at minka prísmunin millum tey dýru og tey bíligu fiskasløgini. Tað gjørdist tí meira lønandi hjá trolarunum at leggja seg eftir at fiska upsa og seinni eisini kongafisk og svartkjaft, meðan tað gjørdist minni lønandi hjá útróðrarmonnunum at fiska tosk og hýsu. Í hesi tilgongdini gloymdi fiskivinnan alt um marknaðarbúskap. Útreiðslurnar hjá trolarunum, sum royndu á djúpum vatni eftir bíligum fiskasløgum, vóru munandi størri enn søluvirðið á heimsmarknaðinum.

Tað varð ikki bert útgoldin prísstuðul gjøgnum Ráfiskagrunnin. Lønjavningargrunnurin tryggjaði fiskimonnunum minstuløn og útróðrarmonnum minstaforvinning, og í 1985 varð Stuðulsnevndin sett á stovn. Hon skuldi umsita ymsar stuðulsskipanir til fiskimenn og reiðarar. Samlaði rakstrarstuðulin, sum varð goldin feskfiskaflotanum gjøgnum Lønjavningargrunnin, Ráfiskagrunnin og Stuðulsnevndina, kom upp á vitleysar upphæddir.

Í 1990 tóku føroysku flakavirkini ímóti 107 tús. tonsum. Fiskurin varð avroknaður til virðið á útflutningsmarknaðinum, sum var 3,43 kr. fyri kilo. Harumframt vórðu útgoldnar 3,79 kr. fyri kilo í samlaðum rakstrarstudningi, umframt at 0,47 kr. fyri kilo vórðu útgoldnar í inntøkutrygd. Reiðararnir og fiskimenninir fingu 7,69 kr. fyri hvørt kilo av fiski, sum ikki var verdur meira enn 3,43 kr. Munin upp á 4,26 kr. rindaði landskassin. Prísirnir góvu vinnulívinum ein heilt skeivan boðskap. Tað var bert dekningur fyri 43 pst. av inntøkunum hjá fiskivinnuni. Afturberingin var farin út um alt mark. Føroyar livdu ikki longur í veruleikanum.

Markið var nátt. Ongin peningur var eftir í landskassanum. Ein avtøka av stuðulsskipanunum, herundir Ráfiskagrunninum og Stuðulsnevndini, varð sett í verk í 1990.

Frá 1978 til 1992 var samlaði rakstrarstudningurin til fiskivinnuna 3,7 mia. kr. Minni enn ein tíggjunda partur av studninginum varð útgoldin sum inntøkutrygd. Mesti parturin av studninginum varð útgoldin gjøgnum Ráfiskagrunnin og Stuðulsnevndina sum ymiskir rakstrarstudningar.

Fyrrverandi fiskivinnustjórin, Kjartan Hoydal, feldi í 1997 ein lemjandi dóm yvir skipanina:

*Í veruleikanum virkaði skipanin soleiðis, at landskassin tryggjaði inntøkur til manning, skipaeigarar, virki og fiskasølu, sama hvør prísurin var, og sama hvør fiskiskapurin var og kanska serliga sama hvussu væl tær ymisku fyritøkurnar vórðu riknar* (§19-nevndins frágreiðing um 80-árini).

## Við veðhaldi

Stuðulsskipanirnar høvdu við sær ein brádligan vøkstur í íløgunum í Føroyum. Stuðulin úr Ráfiskagrunninum var vorðin ein partur av grundarlagnum fyri íløgunum. Tað loysti seg at fiska í landskassanum. Nýggj skip máttu byggjast. Og løgtingið hjálpti til.

Í 1960-árunum samtykti løgtingið nýggjar stuðulslógir, sum gjørdu tað møguligt hjá landsstýrinum at veðhalda landskassans vegna fyri lánum til vinnuna. Í 1970-árunum og 80-árunum vórðu enn fleiri lógir samtyktar um stuðul og veðhald. Høvuðslógin á økinum er løgtingslóg nr.13 frá 2. mai 1967 um veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip. Lógin var óvanliga stutt orðað:

*Landsstýrinum er heimilt saman við Fíggjarnevndini landskassans vegna at ganga í veð fyri prioritetslánum til nýbygd fiskiskip. Hetta veðhald má tilsamans ikki fara upp um 50 mió. kr.*

*Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða í løgtingssetuni 1969.*

Lógin kom ikki aftur til viðgerðar í løgtinginum. Hvørki í 1969 ella seinni. Kortini var lógin grundarlagið fyri eini røð av veðhaldum fyri prioritetslánum í nýggjum fiskiskipum. Árini frá 1975 til 85 vaks talið av feskfiskatrolarum í flotanum úr 1(!) upp í 70, harav tveir triðingar vóru partrolarar. Eftir lógini hevði landsstýrið heimild til at lata landskassan veðhalda fyri tilsamans upp til 50 mió. kr. Hóast tað læt landsstýrið landskassan átaka sær veðhaldsskyldur fyri umleið 2,3 mia. kr. So seint sum í august 1988, tá alt var farið av kós, fekk landsstýrið heimild frá løgtinginum til at lata veðhaldsskyldurnar hjá landskassanum fara upp um 50 mió. kr.

Undir landsstýrissamgonguni millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin, sum sat frá 1981-85, fingu Føroyar sín fyrsta stóra »skipapakka«. Við heimild í løgtingslóg nr. 15 frá 31. mars 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum, sum seinni varð broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 20. mai 1981, veitti landsstýrið stuðulslán og landskassaveðhald til at byggja upp ein handilsflota við 28 nýmótans fraktskipum, herav 9 vóru gass- og kemikaliutangaskip. Øll verkætlanin fór um koll, og tapini vórðu stór. Bæði hjá landskassanum og privatu íleggjarunum.

Men hetta tók ikki mótið frá landsstýrinum undir leiðslu av Atla Dam, sum tók við í 1985.

Tann 20. mai 1985 samtykti løgtingsins fíggjarnevnd eftir tilmæli frá landsstýrinum at lata landskassan veita stuðulslán og veðhald til 16 nýbygd fiskiskip fyri eitt samlað virði upp á 1,5 mia. kr. Hetta var uttan samanbering tann mest stórtøkna íløguavgerðin í 80-árunum. Hetta var ein tjansur at taka, sum kundi

samanberast – og helst var størri – enn tjansurin, sum Sjóvinnubankin tók við at útbyggja trolaraflotan tey fyrstu árini eftir kríggið. Úrslitið varð heldur ikki minni vanlukkuligt. Men hesuferð vóru fleiri um at gjalda, nevniliga skattgjaldararnir.

Tey samlaðu tapini upp á landskassaveðhaldini í 80-árunum eru seinni gjørd upp til 1,6 mia. kr. Men landsstýrið veitti ikki bert veðhald. Landsstýrið læt eisini landskassan veita lán. Við heimild í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum vórðu í 80-árunum veittar munandi upphæddir til fiskivinnuna sum stuðulslán, likviditetslán og kurstapslán. Eisini vórðu stórar upphæddir veittar í upphøggingarstuðli. Lánini hjá landsstýrinum vóru í stóran mun sermerkt á tann hátt, at tað hvørki skuldi rindast renta ella avdrøg. Tað var í hvussu so er oftast tað, ið hendi.

Samlaðu tapini hjá landsstýrinum upp á lán og veðhald í 80-árunum eru seinni mett til umleið 3 mia. kr. Verður rakstrarstuðulin til fiskivinnuna roknaður uppí, læt landskassin sostatt vinnuni tilsamans 6,4 mia. kr. í 80-árunum.

**Landskassastuðul og tap upp á vinnuna í 80-árunum**

| *Vinnugrein* | *Mió. kr.* | *Mió. kr.* |
|---|---|---|
| Fiskivinna og sjóvinna | | |
| Rakstrarstuðul | 3,4 | |
| Upphøggingarstuðul | 0,3 | |
| Tap av lánum og veðhaldum | 2,1 | 5,8 |
| Handverk og ídnaður | | |
| Stuðul | 0,2 | |
| Tap av lánum og veðhaldum | 0,2 | 0,4 |
| Landbúnaðarstuðul | | 0,2 |
| Tilsamans | | 6,4 |

Tá litið verður aftur á hetta tíðarskeið, kann tað tykjast, sum um tað heldur var landsstýrið enn vinnan, sum var drívmegin aftan fyri hesar stórtøknu byggiætlanir. Ein av fremstu embætismonnunum í miðfyrisitingini greiddi í august 1999 løgtingsins grein 19-nevnd frá, at tað var vanliga fatanin, *at »skipapakkarnir« komu sum eitt úrslit av, at allir landsstýrismenn fingu nøkur skip til nøkur av sínum (onkran av síni ætt, sínum vinum, síni bygd, sínum veljarum osfrv.).*

Tað var kortini ikki ein og hvør, sum kundi gera seg verdan til at fáa landskassaveðhald til eitt nýtt skip. Eginpeningur var neyðugur. Í øllum lógum hava verið krøv um eginpening. Soleiðis stóð í løgtingslóg nr. 21 frá 1. juni 1978 um

endurnýgging av fiskiskipaflotanum, at *lánsveiting er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10% av virði skipsins.*

Tað gjørdist kortini skjótt ein vanlig fatan, at eginpeningurin ikki altíð var veruligur, og í 1986 setti landsstýrið tað sonevndu eginpeningsnevndina, sum skuldi kanna viðurskiftini nærri. Nevndin, sum legði sína frágreiðing fram 22. august 1986, kundi staðfesta um galdandi mannagongd, at *váttan frá sakførara ella banka um, at umsøkjarin hevur tann kravda eginpeningin innistandandi á einari konto, verður góðkend sum prógv fyri, at eginpeningurin finst.*

Ein óhóskandi mannagongd hevði tikið seg upp, har ein peningastovnur gav landsstýrinum eina váttan, sum til dømis kundi verða orðað soleiðis:

*Eftir áheitan frá P/f ABC skulu vit hervið siga frá, at felagið í dag hevur standandi á konto xxx.xxx-x hjá okkum kr. x.xxx.xxx,xx.*

*Við heilsan*

Hetta er jú ein váttan, sum kann fevna um alt – og onki. Øll vistu, at hesar váttanir ikki kundu brúkast sum prógv um eginpening. Reiðararnir vistu tað, og peningastovnarnir vistu tað. Landsstýrið visti tað eisini, og tað fall tað dómur um í Heygadrangsmálinum í 1992, har fýra bankafólk vórðu ákærd fyri svik móti landsstýrinum. Sambært ákæruritinum høvdu teir ákærdu flutt pening, veitt lán o.a. við tí endamáli, at reiðaríið yvir fyri landsstýrinum kundi prógva, at tað ráddi yvir tí kravda eginpeninginum.

Teir ákærdu vórðu allir fríkendir. Grundgevingarnar vóru m.a.:

*at man siden 1956 har opereret med krav om egenkapital i forbindelse med tilskud til anskaffelse af fiskeskibe, uden at der har været anvendt en regnskabsmæssig definition af begrebet.*

*at forståelsen af begrebet egenkapital har været genstand for politisk debat, således at afgrænsninger er foretaget bl.a. ved afstemninger i finansudvalget.*

*at accept af lån som egenkapital må ses som udtryk for en politisk beslutning, der indebærer en erkendelig svækkelse af egenkapitalkravet.*

*at de politiske myndigheder sædvanligvis havde viden om de økonomiske forhold hos personerne bag de enkelte projekter.*

Áðrenn tað kom so langt, hevði landsstýrið roynt at fáa tamarhald á hesum løgna eginpeninginum. Í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum stendur stutt og greitt í 3. stk: *Reglur um eginpening verða ásettar av landsstýrinum.* Við heimild í hesi lóg ásetti landsstýrið í kunngerð nr. 44 frá 11. mai 1989 um eginpening, at:

*Eginpeningurin skal vera minst 10 % av virði skipsins. Um ikki annað er ásett í hesi kunngerð, skal eginpeningurin allur vera kontant inngoldin og má ikki hava pant í skipinum.*

Nú vóru næstan 3 ár liðin, síðan eginpeningsnevndin hevði latið sína frágreiðing. Tær stóru skipabyggingarnar vóru lidnar, sum oftast við einum neyðarsligum úrsliti. Nú kundi ein kunngerð um eginpening ikki verða til stóran ampa. Øll gongdin var lítið virðilig fyri teir, sum spældu við. Reiðararnir og skipasmiðjurnar, løgtingið og landsstýrið, sakførararnir og grannskoðararnir, og eisini bankarnir. Allir luttóku teir í hesum *dance macabre* í 80-árunum, og allir áttu at havt vitað betur. Hóast bankarnir ikki kundu fremja svik móti einum landsstýri, sum var vitandi um tað, sum veruliga fór fram, so áttu teir sjálvsagt ikki at hava luttikið við teimum sonevndu váttanunum um eginpening. Kravið um eginpening, sum landsrætturin so turrisliga staðfesti, varð lokið á ein hátt, sum mátti metast at vera óvanligur.

Tey, sum ráddu fyri borgum í 80-árunum, sviku sína ábyrgd. Tá veitslan var av, lótu tey Palleba gjalda fyri gildið og uppruddingina.

## Bankarnir vaksa ov skjótt

Sjóvinnubankin varð hart raktur av teimum truplu tíðunum í 50-árunum. Føroya Banki, sum kláraði seg betur, slapp kortini heldur ikki snikkaleysur. Føroya Banki mátti í 1952 seta munandi upphæddir av ímóti tapi, *men banken har kunnet drive sin virksomhed, således at man har været i stand til at konsolidere bankens stilling yderligere*, sum nevndarformaðurin Edward Mitens, landsrættarsakførari, lýsta tað í 1956 í 50-ára minnisriti bankans.

Um Føroya Banka brúkti Mitens annars ofta heitið *vor bank* – tað var tað sama sum tey søgdu í Holmens Kanal í Keypmannahavn. Í Sjóvinnubankanum brúktu tey hinvegin heitið *okkara banki*.

Alt stóð í stað í 50-árunum, eisini Føroya Banki. Inn- og útlán broyttust ikki nógv, og tað gjørdi bankin heldur ikki. Á heysti 1955 vóru samlaðu útlánini hjá Føroya Banka einans 27,4 mió. kr.



*Edward Mitens*
*1889-1973*

*Edward Mitens var sonur Josefinu og Niels Juel Mortensen, sum sat í nevnd bankans frá 1906 til 1929. Edward Mitens, sum tók løgfrøðisligt embætisprógv í 1912, arbeiddi sum advokatur og sýslumaður frá 1913 til 1939, tá hann gjørdist skrivstovustjóri í løgtinginum. Hann var í hesum starvi til 1949.*

*Áðrenn hann gjørdist skrivstovustjóri í løgtinginum, hevði hann havt eina drúgva yrkisleið sum virkin politikari. Hann umboðaði Sjálvstýrisflokkin í løgtinginum frá 1916 til 1929 og var løgtingsformaður í 1928 - 30 og aftur í 1936 - 38. Hann var harumframt fólkatingsmaður frá 1915 til 1918 og limur í Tórshavnar Býráð í 1925-28.*

*Edward Mitens varð í 1945 valdur í nevndina í Føroya Banka, og hann hevði sæti har til 1973. Í tíðarskeiðnum 1950-73 var hann nevndarformaður, og við 23 árum í formanssætinum er hann tann, sum hevur sitið longst sum formaður. Í 1984 varð Mortensen ættin á Tvøroyri aftur umboðað í nevndini, tá bróðursonur Mitens, Niels Juel Mortensen, varð valdur í nevndina.*

**Útlán hjá Føroya Banka, oktober 1955**

| *Vinnugrein* | *Mió. kr.* | *Pst.* |
|---|---:|---:|
| Fiskivinna | 13,9 | 50,7 |
| Handil | 4,1 | 15,0 |
| Handverk og ídnaður | 2,5 | 9,1 |
| Privat | 1,4 | 5,1 |
| Løgtingið | 1,0 | 3,7 |
| Kommunur, SEV íroknað | 4,5 | 16,4 |
| Tilsamans | 27,4 | 100,0 |

Men miðskeiðis í 60-árunum byrjaði eitt tíðarskeið við góðum tíðum í føroyska samfelagnum og í bankunum, sum skuldi vísa seg at vara í samfull 25 ár. Serliga í tíðarskeiðnum frá 1975 til 1989 var stór ferð á búskapinum. Fiskimarkið varð flutt út á 12 fjórðingar í 1964 og út á 200 fjórðingar í 1977, og hetta førdi til vøkstur í fiskiflotanum. Tá fiskimarkið varð flutt út í 1964, svaraði Bretland aftur við at áseta kvotur á innflutningin av føroyskum ísfiski. Hetta hevði við sær,

at stórur áhugi var í Føroyum fyri at byggja flakavirkir, so fiskurin kundi koma upp á land í Føroyum og verða skorin til flak. Ofta vóru tað lokalar kreftir, sum tóku seg saman um at útvega bygdini eitt flakavirki fyri at skapa arbeiðspláss.

Vøksturin í búskapinum, sum rættiliga tók dik á seg eftir 1975, tá tað almenna átók sær ein virknan leiklut í vinnulívinum, hevði við sær ein stóran vøkstur í íløgunum og ein stóran vøkstur í virkseminum hjá bankunum. Í 1990 var fíggjarjavnin hjá Føroya Banka 100 ferðir størri enn fyri bert 30 árum frammanundan. Hjá Sjóvinnubankanum, sum hevði eitt veikari útgangsstøði, var vøksturin enn størri. Í 1990 var fíggjarjavnin 143 ferðir størri, enn hann var í 1960. Føroysku bankarnir koyrdu við fullari ferð. At síggja til gekk tað gott. Bankarnir kundu staðfesta framúr góð úrslit á hvørjum ári. Tað skuldi seinni vísa seg, at tað ikki vórðu tikin nóg stór atlit til tapsvandan av teimum skjótt vaksandi útlánunum og trygdarveitingunum.

**Nøkur tøl úr fíggjarjavnunum**

| *Mió. kr.* | *1960* | *1970* | *1980* | *1990* |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Ogn tils., FB | 64 | 205 | 1.214 | 6.379 |
| Ogn tils., SB | 35 | 142 | 914 | 4.982 |
| Innlán, FB | 52 | 167 | 809 | 3.495 |
| Innlán, SB | 28 | 112 | 601 | 2.611 |
| Eginpeningur, FB | 5 | 18 | 123 | 535 |
| Eginpeningur, SB | 4 | 13 | 78 | 406 |

*FB: Føroya Banki, SB: Sjóvinnubankin*

Til miðskeiðis í 70-árunum fíggjaðu báðir bankarnir síni útlán við egnum innlánum, sum vóru størri enn útlánini. Men eftir 1975 vuksu útlánini skjótari enn innlánini. Nú fóru bankarnir undir at útvega sínum kundum lán úr útlendskum bankum. Móti trygd frá føroyska bankanum kundu føroyskar fyritøkur taka upp lán á peningamarknaðinum í Keypmannahavn, London og Luxembourg. Tørvandi gjaldføri var ikki longur nøkur forðing fyri útlánsvirkseminum.



*Sjóvinnubankin fór undir at byggja sær nýtt høvuðssæti í Húsagøtu í Havn í 1985. Her eru húsini reist. Tíggju ár seinni gjørdist bygningurin høvuðssæti hjá samanlagda Føroya Banka*

**Útlán og trygdir 1960-90**

| *Mió. kr.* | *1960* | *1970* | *1980* | *1990* | *Vøkstur, % p.a.* |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroya Banki | 44 | 158 | 1.038 | 5.211 | 17,3 |
| Sjóvinnubankin | 19 | 95 | 670 | 3.971 | 19,5 |
| Tilsamans | 63 | 253 | 1.708 | 9.182 | 18,1 |
| Føroya Sparikassi *) | 40 | 93 | 419 | 2.365 | 14,6 |

**) Trygdir eru ikki íroknaðar tølini fyri Føroya Sparikassa*

Í 1990 vóru útlánini og trygdirnar hjá bankunum 50 pst. størri enn innlánini. Bankarnir høvdu sett seg í váða. Uttanlandslánini vóru ofta stuttfreistað við eini afturgjaldstíð heilt niður í 3-6 mánaðir. Hendi tað, at ivi varð sáddur um lánføri hjá Føroyum ella bankunum, kundu bankarnir sum veðhavarar brádliga koma í ta støðu, at teir ikki kundu endurnýggja lán, sum fullu til gjaldingar. Og

tann støðan kann fella ein banka, sum ikki ansar eftir sjálvur at hava nóg mikið av gjaldføri. Hesa læru fingu føroysku bankarnir at kenna í 1992.

## *Ein peningamaskina*

Í teimum góðu tíðunum í seinni helvt av 80-árunum fylgdu føroysku bankarnir ikki til fulnar rentulækkingini á danska peningamarknaðinum. Føroyar gjørdust eitt hárentuøki innan danska peningamarknaðinum, meðan tær høvdu verið eitt lágrentuøki fyrst í 80-árunum. Høga rentustigið hevði við sær, at peningurin varð verandi í Føroyum, og gjaldførið vaks. Frá 1980 til 1990 vuksu innlánini í peningastovnunum úr 2 upp í 9 mia. kr. Tað hendi eitt ella annað, sum ávirkaði fíggjarjavnan hjá peningastovnunum.

Tað er sjáldsamt, at ein partur av einum valutaøki, sum í hesum føri tí danska, kundi áseta sítt egna rentustig. Ongin kann ímynda sær, at ein danskur landslutur kundi áseta sítt egna rentustig, sum var øðrvísi enn rentustigið í restini av landinum. Tað eru tvær orsøkir til, at hetta í eina tíð bar til í Føroyum. Teir føroysku lántakararnir høvdu avmarkaðar møguleikar fyri at gjalda dýru lánini í føroysku peningastovnunum aftur við lánum úr donskum peningastovnum. Nógvir av teimum høvdu ikki nøktandi lánføri og kundu neyvan taka lán í einum donskum peningastovni uttan borgan frá einum føroyskum peningastovni.

Men avgerandi orsøkin til, at tað bar til í longri tíð at hava eitt serføroyskt rentustig, var føroyska rentuskattalógin, sum hevði verið óbroytt síðan 1953. Fram til 1992 vóru rentuinntøkur av innláni í føroyskum peningastovnum skattafríar. Tað skuldi einans gjaldast $^{1}/_{2}$ pst. av innláninum um árið í rentuskatti. Vinnurekandi kundu draga rentuútreiðslurnar frá í skattskyldugu inntøkuni, meðan privatir skattgjaldarar kundu draga 42 pst. av rentuútreiðslunum frá í skattinum.

Hetta var ein ófør peningamaskina. Er útlánsrentan t.d. 10 pst. og innlánsrentan 8 pst., so ber til at vinna pening við at taka lán og seta peningin á bók. Kundin hevur 7,5 pst. eftir í nettorentu av innláninum, meðan hann fyri lánið rindar 5,8 pst. eftir skatt. Peningastovnurin hevur ein rentumun upp á 2 pst., fyri skatt, meðan kundin, sum fær 3,7 pst. netto frá skattavaldinum, hevur ein vinning upp á 1,7 pst. eftir skatt. Bankin rindar sjálvsagt skatt av rentumuninum upp á 2 pst, men tað er skattavaldið, sum rindar fyri hetta gildið.

Aftaná hevur nógv verið tosað um, hvussu stóra ávirkan henda skattaarbitragan hevði á skeivu búskaparligu gongdina í 80-árunum. So leingi útlendskir lánveitarar ikki luttóku í fíggingini av hesum virksemi, var skaðin helst avmarkaður. Skattaarbitragan skapti ikki í sjálvum sær fígging, ið kundi brúkast til íløgur

ella nýtslu. Hon fevndi um bókingar í peningastovnunum, bókingar, sum útjavnaðu hvørja aðra. Eitt viðskiftafólk kundi taka eitt lán í bankanum upp á t.d. 1 mió. kr., seta peningin á bók í sparikassanum og geva bankanum sparikassabókina sum trygd fyri láninum. Hetta virksemið var avmarkað til at vera ein spurningur millum skattgjaldaran og skattavaldið, og skattgjaldarin mátti hava skattskylduga inntøku fyri at kunna luttaka í hesum.

Í stóran mun høvdu fólk bæði innlán og útlán í sama peningastovni, og tað var ikki altíð, at banka- ella sparikassabókin varð løgd sum trygd fyri lánunum. Skattaarbitragan var hjá nógvum ein ótilvitaður partur av gerandisdegnum. Nógvir føroyingar luttóku í hesum spæli, uttan at teir yvirhøvur vóru greiðir yvir tað. Í Føroyum hevur verið tann óvanliga siðvenjan, at fólk spara upp, samstundis sum tey hava lán í sethúsunum. Innlánsrentan var munandi lægri enn útlánsrentan, og hevði samsvar verið í rentuskattingini, hevði tað loyst seg betri at niðurgjalda lánini við innláninum. Og tað var tað, sum hendi, tá rentuinntøkur fyrst í 90-árunum vórðu gjørdar skattskyldugar. Fíggjarjavnarnir hjá peningastovnunum minkaðu.

Tað er als ongin ivi um, at ójavnin í rentuskattingini í stóran mun var orsøkin til ógvusliga vøksturin í fíggjarjavnunum hjá peningastovnunum. Frá 1970 til



*Bygningurin, sum meira enn nakar annar bygningur hevur verið ímyndin um Føroya Banka. Hann er nú 50 ára gamal*

kreppan gjørdist sjónlig fyrst í 90-árunum, vuksu útlánini hjá føroysku bankunum við í meðal 18,2 pst. um árið. Í Danmark var samsvarandi talið 10,7 pst. um árið. Vanliga sæst vøkstur í útlánunum hjá peningastovnunum aftur sum vøkstur í búskapinum. Men í 70-árunum og 80-árunum vaks føroyski búskapurin ikki við 18 pst. um árið. Ein partur av vøkstrinum í útlánunum varð brúktur til innlán við skattaabitragu fyri eyga.

Á heysti í 1992 metti skattavaldið, at føroyskir skattaborgarar høvdu 2-2,5 mia. kr. av læntum peningi standandi á bók við skattaarbitragu fyri eyga. Hetta var helst ein varislig meting.

## Gongdin í útlánum

| *Indeks* | *1970* | *1980* | *1990* | *Vøkstur % p.a.* |
|---|---|---|---|---|
| Føroya Banki og Sjóvinnub. | 100 | 611 | 2.821 | 18,2 |
| Danskir peningastovnar | 100 | 257 | 763 | 10,7 |

Tað er uttan iva rætt, at skattaarbitragan ikki var nøkur týdningarmikil, og als ikki tann týdningarmiklasta orsøkin til tað stóra skrædlið í 1992. Skattaarbitragan var fyrst og fremst ein moralskur spurningur. Helt tú, at blóðtrýstið var ov høgt, fórt tú til læknan, og helt tú, at skattatrýstið var ov høgt, fórt tú til ein grannskoðara. Tað var oftast lættari hjá honum enn hjá læknanum at finna tann rætta heilivágin. Við at fylgja góðum ráðum kundi tú sjálvur gera av, hvussu nógv tú vildi lata til samfelagið. Í skattaumsitingini og eisini í peningastovnunum varð hildið, at tað var ósømiligt, at borgararnir sjálvir kundu gera av, um teir vildu gjalda skatt. Skattaarbitragan elvdi til eitt ótilviljað umbýti av skattabyrðuni. Í tíðini við høga rentustignum førdu skattafríu rentuinntøkurnar til, at býtið av virðunum í føroyska samfelagnum gjørdist enn skeivari.

Tað hevur ofta verið kastað peningastovnunum fyri, at teir áttu sín lut í skattaarbitraguni. Tað er at heingja bakara fyri smið. Politikararnir høvdu gjørt eitt stórt hol í skattalógina, sum gjørdi tað møguligt hjá fólki at fremja skattaarbitragu. Tað vóru politikararnir, sum høvdu ábyrgdina av at tetta hetta holið aftur. Ongin hevði væl roknað við, at peningastovnarnir fóru at spenna seg fyri vognin og krevja, at renturnar skuldu gerast skattskyldugar.

Ósamsvarið í skattligu viðgerðini av rentuinntøkum og rentuútreiðslum var á ein hátt ein óbeinleiðis stuðulsskipan til føroyskt peningastovnsvirksemi. Reiðararnir fingu sítt gjøgnum Ráfiskagrunnin, og peningastovnarnir fingu sítt gjøgnum rentuskattaskipanina.

Lat okkum taka eitt dømi, sum vísir ósamsvarið í rentuskattingini. Í donskum krónum er útlánsrentan 12 pst. p.a. og innlánsrentan 8 pst. Og lat okkum siga, at útlánsrentan er tann sama í Føroyum og í Danmark, nevniliga 12 pst. Um Palleba setir sín sparipening á bók í einum donskum peningastovni, er rentuinntøkan skattskyldug. Er skattastigið 50 pst., hevur hann 4 pst. eftir av rentuni eftir skatt. Setir hann hinvegin peningin á bók í einum føroyskum peningastovni fyri 8 pst. p.a., hevur hann 7,5 pst. eftir av rentuni eftir skatt. Føroyski peningastovnurin kann sostatt lækka innlánsrentuna úr 8 niður í 4,5 pst. og framvegis vera kappingarførur.

Við somu útlánsrentu upp á 12 pst. p.a. kunnu føroyskir peningastovnar sostatt hava ein rentumun upp á 7,5 pst. og framvegis vera kappingarførir við donsku peningastovnarnar, sum hava ein rentumun upp á 4 pst.

Tað er hugsandi, at teir føroysku peningastovnarnir hava latið kundarnar fingið ein part av hesum rentufyrimuni. Men tað er ongin ivi um, at vit her hava staðfest ein týðandi part av orsøkini til teir ómetaliga góðu roknskapirnar hjá føroysku peningastovnunum í 80-árunum og í árunum frammanundan. Teir føroysku peningastovnarnir vóru dopaðir. Teir vórðu stuðlaðir eins og alt annað vinnulív. Hesin óbeinleiðis stuðul hevði við sær, at umsitingin av føroysku peningastovnunum gjørdist sera dýr. Á heysti í 1992, tá kreppan brast á, vóru 101 banka- og sparikassadeildir í Føroyum. Hetta átti at givið okkum okkurt at hugsa um.

Tann 1. juli 1992 byrjaði ein harðliga tiltrongd tillaging av skattligu viðgerðini av rentuinntøkum og rentuútreiðslum. Gamla rentulógin frá 1953 varð sett úr gildi, og rentuinntøkur gjørdust skattskyldugar. Tann 1. januar 1995 var fult samsvar í rentuskattaskipanini.

## *Realkredittur á føroyskan hátt*

Higartil høvdu vit í Føroyum havt *skatta*arbitragu. Tað var ikki nakað, sum tosað varð hart um, og nógv luttóku í skattaarbitraguni, uttan at tey yvirhøvur vóru greið yvir tað. Miðskeiðis í 80-árunum fingu vit eisini *rentu*arbitragu. Og hon tók rættiliga dik á seg.

Sambært heimastýrislógini eru kredittfeløg o.t. føroyskt sermál. Virksemið hjá realkredittfeløgunum í Føroyum skulu sostatt skipast eftir føroyskari lóggávu. Men miðskeiðis í 80-árunum var ongin føroysk realkredittlóg. Tá tey donsku kredittfeløgini fóru at vísa føroyska marknaðinum áhuga, gjørdi landsstýrið eina avtalu við feløgini. Eftir hesi avtalu kundu realkredittfeløgini bert veita lán til nýggjar vinnubygningar og bert við góðkenning frá landsstýrinum í hvørjum einstøkum føri. Lán kundu ikki veitast við veð í teimum sonevndu



*Esbern Simonsen*
*1917-1996*

*Esbern Simonsen, sum var ættaður uttan fyri Garðar í Hoyvík, var sonur Elsu Mariu og Símun Simonsen.*

*Eftir at hava tikið prógv í millum- og realskúlanum í Havn gjørdist Esbern Simonsen í 1936 næmingur í Føroya Banka. Esbern Simonsen hevði eina óvanliga góða yrkisleið í bankanum og gjørdist við árunum eitt allahandafólk í bankanum. Tað gjørdist eitt orðatak í bankanum, at tað, sum Esbern ikki visti, var ikki vert at vita, og tað, sum Esbern ikki kláraði, hevði tú ikki brúk fyri at klára.*

*Í 1949 varð Esbern Simonsen settur sum prokuristur. Síðan gjørdist hann bókhaldari og skrivstovustjóri, til hann í 1969 gjørdist limur í stjórn bankans. Hetta starv røkti hann til 1986, tá hann legði frá sær vegna aldur, eftir at hava starvast 50 ár í bankanum. Øll árini kundi tú hvønn dag síggja Esbern ferðast úr Hoyvík oman í miðbýin og niðan aftur. Á súkklu.*

frívirðunum. Men henda ásetingin var – sera heppið, sum tað seinni skuldi vísa seg – ikki galdandi fyri flakavirkini.

Miðskeiðis í 80-árunum var rentustigið í Føroyum munandi hægri enn í Danmark. Tað var ein fyrimunur at útvega fígging frá donskum realkredittlánum heldur enn at taka veðlán í einum føroyskum peningastovni. Og nú gekk tað skjótt. Frá 1985 og til byrjanina av 1989 øktust donsku realkredittlánini í Føroyum upp í 2,3 mia. kr. Tá høgdi landsstýrið bremsurnar í, men tað hevði helst onga serstaka ávirkan, tí tá vóru ávaringarljósini farin at lýsa hjá realkredittfeløgunum.

Realkredittlánini høvdu sjálvsagt við sær, at gjaldførið í føroyska samfelagnum øktist munandi. Tað gjørdi ikki støðuna betri, at lánini vanliga vórðu veitt sum sonevnd »forhandarlán«. Lánini vórðu útgoldin móti eini bankatrygd, longu tá farið varð undir byggingina. Tá byggingin var liðug, sleptu realkredittstovnarnir bankatrygdini móti, at bankin læt teimum tinglýsta pantibrævið í bygninginum.

Nú skuldi ein hildið, at forhandarlánið kundi havt fíggjað byggingina, og at tað við øðrum orðum kundi havt verið brúkt sum eitt byggilán. Men soleiðis var mannagongdin ikki í Føroyum. Byggiharrin tók eitt vanligt byggilán og setti forhandarlánið á bók í bankanum. Rentuútreiðslurnar av byggiláninum og forhandarláninum vórðu drignar frá í skattskyldugu inntøkuni. Rentuinntøkurnar vóru harafturímóti skattafríar. Nú var skattaarbitragan væl skipað. Og hon var so stór í vavi, at tað veruliga gjørdi mun.

Tá forhandarlánið ikki varð brúkt til at fíggja bygging ina, men varð sett á innlánsbók, so var endamálið *skatta*arbitraga, sum var gjørlig eftir teimum serligu ásetingunum um skatting av rentuinntøkum í føroyskum peningastovnum. Tá lántakarin yvirhøvur valdi at fíggja byggingina í Danmark og ikki í Føroyum, varð endamálið *rentu*arbitraga.

Í seinnu helvt av 80-árunum høvdu teir føroysku peningastovnarnir eitt høgt, serføroyskt rentustig, og tað var í stríð við alt vanligt skynsemi. At donsku realkredittstovnarnir í 1985 við stuðli frá landsstýrinum fóru undir at oysa realkredittlán á føroyska marknaðin, var júst ein avleiðing av, at føroyska rentustigið als ikki var í samsvari við altjóða rentustigið og serliga ikki tað danska.

Spurningurin er, hví føroysku peningastovnarnir ikki fylgdu danska rentustignum. Her ber ikki til at finna nakra skilagóða frágreiðing. Men greitt er, at teir føroysku peningastovnarnir framvegis høvdu ta fatan, at tað bar til at hava eitt egið føroyskt rentustig. Henda fatan bygdi m.a. á ta serføroysku rentuskattaskipanina. Og so hava peningastovnarnir helst eisini rurað seg í svøvn við eina fatan av, at útlendskir lánveitarar ikki høvdu fría atgongd til føroyska marknaðin. Hesa fyritreyt var landsstýrið við síni avtalu við teir donsku realkredittstovnarnar júst í ferð við at seta úr gildi.

Tá teir føroysku sparikassarnir og teir báðir stóru bankarnir valdu ikki at lata rentufallið úti í heimi við seg koma og hildu fast við eitt alt ov høgt rentustig, so er neyvan nakar ivi um, at ein týðandi orsøk var, at ein nýggjur gestur var komin í dunnuhylin, nevniliga Fossbankin.

Í januar 1986 byrjaði P/f Fossbankin, sum Helgi Fossádal tók stig til at stovna, sítt virksemi. Hægri innlánsrenta var eitt av fremstu tilboðunum hjá nýggja bankanum. Hetta var sum at festa í gamalt hoyggj. Tað vóru meira enn 50 ár síðan, at ein banki varð stovnaður í Føroyum. Teir gomlu bankarnir og sparikassarnir vóru heilt ørkymlaðir. Ta stuttu tíð Fossbankin virkaði, fekk hann eina ávirkan, sum var í øvugtum lutfalli til støddina á bankanum.

Teir føroysku peningastovnarnir vórðu fangaðir í eini fellu, teir sjálvir høvdu sett. Við tí høgu rentuni floymdi peningur inn í føroyska samfelagið. Tað var vorðin ein fyrimunur at læna, ikki bert frá donsku realkredittstovnunum, men eisini frá útlendskum bankum. Teir føroysku peningastovnarnir fingu ov ríkiligt gjaldføri. Og við tí høga rentustignum í Føroyum kundi tað hava ein tapsvanda við sær, um gjaldførið, sum var til avlops, varð flutt á danska peningamarknaðin. Teir føroysku peningastovnarnir fóru av fullum huga út í kappingina um at læna pening út í Føroyum. Hetta var ein ónd ringsrás.

Seinni hevur tað í Føroyum verið eitt lyndi til at yvirmeta tann leiklut, sum realkredittfeløgini høvdu í Føroyum í 80-árunum. Serliga tykist tað at hava verið eitt lyndi til at seta kreppuna í samband við útlánsvirksemið hjá realkredittfeløg-

unum. Tað er eyðsýnt, at realkredittfeløgini við eini lítið umhugsaðari og til tíðir ábyrgdarleysari lánveting gjørdu sítt til, at føroyski búskapurin fór av kós. Men tað var tann serføroyska rentuskattaskipanin og tað serføroyska rentuskattastigið, sum ruddaðu slóð fyri realkredittlánunum, sum øll annars vórðu góðkend av landsstýrinum.

Realkredittstovnarnir læntu einar tvær mia. kr. út í Føroyum, og teir avskrivaðu helst helvtina sum tap. Tað var í roynd og veru ein góður handil – fyri Føroyar.

## Ávaringarnar ikki tiknar í álvara

Tær óvanliga góðu tíðirnar, sum høvdu sermerkt føroyska samfelagið síðan 1983, byrjaðu at fjara burtur í byrjanini av 1989. Tíðirnar vóru um at broytast. Tað varð greitt, tá landsstýrið á sumri í 1989 noyddist at fremja fleiri búskaparlig og politisk inntriv. Kreppuloysnin fevndi um eina røð av sosialum sparingum, dýrtíðarviðgerðin varð sett úr gildi, og tvungin uppsparing varð sett í verk. Gerandisdagurin var komin aftur. Men tað var bara ov seint. Og tað var ikki sum at siga tað at venda skútuni. Tann 6. oktober 1992 var búskapurin læstur fastur.

Øll gongdin hevði seinni við sær eina ávísa sjálvrannsakan. Á heysti 1995 setti løgtingið ta sonevndu grein 19-nevndina til *at útgreina og lýsa tey viðurskifti, tær fyritreytir og framferðir, politiskt og umsitingarliga, sum hava verið atvoldin til skeivleikar og mistøk í 80-árunum.* Nevndin gjørdi eina frágreiðing, sum á heysti 2000 varð løgd fyri løgtingið til støðutakan. Men longu í januar 1998 hevði Kanningarnevndin viðvíkjandi føroyska bankamálinum latið sína frágreiðing úr hondum. Føroyingar høvdu fingið nóg mikið av frágreiðingum, og uttan stórvegis almennan áhuga tók løgtingið stutt og greitt grein 19-frágreiðingina til eftirtektar.

Grein 19-nevndin kannaði millum annað frágreiðingarnar hjá ráðgevandi nevndini hjá forsætismálaráðnum viðvíkjandi Føroyum. Uppgávan hjá nevndini var at fylgja við búskaparligu gongdini í Føroyum og at skriva frágreiðing til forsætismálaráðharran, tá hon metti tað vera neyðugt. Ráðgevandi nevndin, ið varð sett í 1964, samstundis sum Íleggingargrunnurin fyri Føroyar varð stovnaður, varð niðurløgd sum avleiðing av semjuni, sum landsstýrið og stjórnin gjørdu í bankamálinum í juni 1998. Nevndin skrivaði sína síðstu frágreiðing í desember 1999.

Grein 19-nevndin staðfestir, at ráðgevandi nevndin í 80-árunum skrivaði eina røð av atfinningarsomum frágreiðingum um gongdina í føroyska búskapinum. Sum árini gingu, og atfinningarnar ongar avleiðingar fingu, hvesti nevndin pennin. Men tað gjørdi ongan mun.

Grein 19-nevndin endurgevur m.a. hesi brot úr frágreiðingunum hjá ráðgevandi nevndini:

*Der skal imidlertid meget kraftige indgreb til for at genskabe ligevægt i den færøske økonomi, og alt tyder på, at de hidtil trufne ikke er tilstrækkelige til at nå dette mål (1982).*

*Når henses til den store og voksende udlandsgæld såvel som den bestående usikkerhed for fiskeriet og de priser, der fremover kan opnås ved eksporten af færøske fiskeprodukter, er der derfor behov for indgreb, der kan føre økonomien over i en mere sund udvikling (1983).*

*Alternativet til en omlægning af fiskeripolitikken og en stramning af den økonomiske politik forekommer imidlertid blot at være en udsættelse af løsningen af problemerne samtidig med, at disses omfang vil stige. Risikoen for afhængighed af finansieringskilder uden for Færøerne vil samtidig vokse (1984).*

*Der er behov for alvorlige indgreb, som kan bidrage til at genskabe ligevægt i den færøske økonomi. Udviklingen igennem det seneste år har vist, at dette behov består uændret (1985).*

*Det vil være uforsvarligt, om man tillader højkonjunkturen at fortsætte (1988).*

*Der findes ingen nemme løsninger. Men det er meget vigtigt at stile mod en kraftig reduktion af subsidierne. Foretages der ikke betydelige indgreb til forbedring af landskassens budgetbalance, vil underskuddet på betalingsbalancen og gældsætningen til udlandet fortsætte. Det kan føre til en situation, som kan blive umulig at kontrollere (1989).*

Búskapur er ikki námsvísindi. Búskaparfrøðingar taka tí altíð eitt ávíst fyrivarni, tá teir siga sína hugsan. Við hesum í huga mugu frágreiðingarnar hjá ráðgevandi nevndini sigast at hava verið óvanliga atfinningarsamar. Tað kann undra, at frágreiðingarnir ikki fingu onkran at rakna við í Føroyum ella í Keypmannahavn.

Ráðgevandi nevndin var í mong ár einsamøll um at gera metingar av føroyska búskapinum. Aðrar óheftar metingar vórðu ikki gjørdar. Hóast frágreiðingarnar vórðu skrivaðar til forsætismálaráðið, vórðu tær eisini sendar landsstýrinum. Helst hava føroyskir politikarar havt eitt ávíst lyndi til ikki at taka tað heilt fyri fult, sum ein nevnd, ið danska Forsætismálaráðið hevði sett, kundi finna upp á at skriva. Summi mettu frágreiðingarnar sum »nýggjárslyftir«, onnur sum »dómadagstalu«. Heilt fram til seinnu helvt av 80-árunum høvdu fleiri av fremstu politikarunum í Føroyum ta fatan, at tær vanligu búskaparligu lógirnar ikki vóru galdandi fyri Føroyar.

Sjálvt um danska orðalagið í frágreiðingunum hjá ráðgevandi nevndini kundi virka heldur herskið, so fær tú kortini eina kenslu av, at nevndin ikki í nóg stóran mun hevði hugsað um føroysku móttakararnar. Hon átti kanska at verið

enn meira kontant í sínum orðavali. Í Føroyum er ikki vanligt at pakka orðini inn.

Men heldur ikki í Forsætismálaráðnum høvdu frágreiðingarnar hjá nevndini við sær, at stig vórðu tikin til at tryggja tann føroyska búskapin. Sambært Jógvani Sundstein hevði læknastríðið í Klaksvík fyrst í 50-árunum havt við sær ein ótta í Danmark fyri at leggja seg út í føroysk viðurskifti. Tað kann tað ikki noktast fyri. Helst hevur stjórnin ikki hildið, at hon kundi leggja seg út í viðurskiftini, uttan at heimastýrið tók sær tykni av hesum. Men eitt tílíkt fyrilit tók tann danska stjórnin ikki á heysti í 1992. Kanska hevði tað verið betri, um lagt varð uppí nakað fyrr.

Í síni frágreiðing til grein 19-nevndina førdi Jógvan Sundstein fram, at tann stóri og støðugt vaksandi danski ríkisstuðulin var ein av høvuðsorsøkunum til ta sera óhepnu gongdina í Føroyum í 80-árunum.

Tann føroyski búskapurin var í seinnu helvt av 80-árunum merktur av, at hann var sera ovhitaður, og Føroyar vóru – lutvíst sum avleiðing av einum misskiltum rentupolitikki – um at drukna í gjaldføri. Tað er ikki óhugsandi, at Danmark við at avmarka ríkisstuðulin í eina tíð kundi havt medvirkað til at tálma búskapinum í Føroyum. Í øllum føri hevði tað verið ein boðskapur, sum neyvan bara hevði farið aftur við borðinum eins og ávaringarnar frá ráðgevandi nevndini.

# Bankakreppan

## Hann øtlar veðrið

Føroya Banki og Sjóvinnubankin løgdu í fyrsta ársfjórðingi 1992 fram roknskapirnar fyri 1991. Føroya Banki hevði 39 mió. kr. í avlopi og Sjóvinnubankin 21 mió. kr. í avlopi. Um úrslitini vóru góð ella vánalig, var ikki full semja um í bløðunum. *Árið 1991 royndist væl hjá Sjóvinnubankanum,* kunngjørdi Dimmalætting. Fjúrtandi var meira ivasamur: *Teprasta árið í mansaldur.* Eftir at hava spurt seg fyri í bankanum, kundi Sosialurin uggandi upplýsa: *Sjóvinunubankin – ikki á húsagang.* Í sínum tíðindaskrivi upplýsti Føroya Banki, at rakstrarúrslitið í 1991 var gott. Og tað skrivaðu fjølmiðlarnir so.

**Føroya Banki og Sjóvinnubankin í 1991**

| *Mió. kr.* | *Føroya Banki* | *Sjóvinnubankin* |
|---|---|---|
| Tap og avsetingar | 164 | 144 |
| Avlop | 39 | 21 |
| Innlán | 3.337 | 2.641 |
| Útlán | 3.580 | 3.044 |
| Garantiskuldarar | 1.150 | 856 |
| Eginpeningur | 500 | 371 |
| Avsetingar | 447 | 379 |
| Avsetingar í pst. av skuldarunum | 8,6 | 8,9 |

Tann 17. august 1992 kom Fíggjareftirlitið til Føroyar at gera regluligt eftirlit í Sjóvinnubankanum. Nakað seinni – tann 7. september – kom eftirlitið á vitjan í Føroya Banka.

Eftirlitið hevði síðst gjørt eina regluliga kanning av teimum báðum bankunum í 1989. Tað er vanlig mannagongd, at peningastovnarnir verða kannaðir triðja hvørt ár, og tí var onki óvanligt í sambandi við byrjanina av kanningini í 1992. Men eftirlitið hevði verið í Føroyum í mai 1991 fyri at kunna seg um millumverandi hjá bankunum við landsstýrið og kommunurnar. Tað kundi neyvan metast sum ein vanlig hending.

Tann 27. august 1992 hevði eftirlitið »ein fyribils endaligan fund« við nevnd og stjórn í Sjóvinnubankanum. Tann endaligi fundurin við nevnd og stjórn í Føroya Banka var tann 15. september. Eigil Mølgaard, stjóri í Fíggjareftirlitinum, sum kom til Føroyar at luttaka í endaliga fundinum í Føroya Banka, nýtti

høvi til at fara á kurteisisvitjan í Sjóvinnubankanum. Tann 23. og 24. september vitjaði eftirlitið aftur Sjóvinnubankan um kanningina í august.

Uttan iva hevur tað rættiliga tíðliga staðið eftirlitinum greitt, at bankarnir vóru sera illa fyri, og at tørvur fór at verða á at útvega teimum munandi upphæddir í nýggjum kapitali. Men eftirlitið hevur helst drálað við at leggja rokningina fram, fyrr enn tað visti, um nakar kundi ella vildi gjalda hana.

Føroya Banki var ikki tann stóri trupulleikin. Ikki júst tí at støðan hjá bankanum var so nógv betri enn støðan hjá Sjóvinnubankanum. Men bankin hevði ein meirilutapartaeigara, sum hevði orku til at halda bankanum uppi. Tað var bert ein spurningur um vilja. Danske Bank hevði vissuliga sítt at síggja til í Danmark. Hafnia Holding, sum kom at geva bankanum nógv høvuðbrýggj, hevði steðgað sínum gjaldingum tann 19. august 1992. Og Baltica samtakið lá tungt í sjónum. Men framvegis. Føroya Banki var eitt lítið mál í tí samanhangi.



*Tað trongdist samanum hjá bankunum í 1990'unum. Tá hevði Sjóvinnubankin eina av sínum deildum í Gongini í Havn, har Trygd húsast í dag*

Danske Bank var ikki heilt ófyrireikaður til tað, sum fór at koma. Longu um ársskiftið 1991/92 avgjørdi Danske Bank at útvega sær størri innlit og ávirkan á raksturin hjá Føroya Banka, sum higartil hevði havt eitt óvanliga vítt sjálvræði. Tá litið verður aftur um bak, kann tað undra, at Danske Bank síðan 1954 ikki hevði havt síni egnu fólk í nevndini í Føroya Banka. Men hetta varð nú broytt.

Fyrst í mars 1992 var Jacob Brogaard, varastjóri, á vitjan í Føroya Banka. Hann var ein høgt virdur stjóri í kredittdeildini hjá Danske Bank, og afturkomin til Danmarkar sendi hann fyrst í mai 1992 tríggjar av sínum næstu medarbeiðarum til Føroyar, har teir gjøgnumgingu tveir triðingar av útlánunum hjá Føroya Banka. Í mai mánaði 1992 varð Flemming Duus, varastjóri, somuleiðis knýttur at nevnd bankans sum ráðgevi.

Í september 1992 hevði eftirlitið einar tvær ferðir samband við Danske Bank, sum tann 24. september 1992 váttaði, at hann vildi veita Føroya Banka tann kapital, sum tørvur var á.

Støðan var truplari í Sjóvinnubankanum. Her átti L/f Føroya Fiskasøla ein triðing av partapeninginum og S/f Føroya Sjóvátrygging eitt sindur meira. Tað var greitt, at fiskasølan ikki hevði fíggjarliga orku til at luttaka í eini endurreising av Sjóvinnubankanum. Eftirlitið tykist at hava havt ta fatan, at heldur ikki sjóvátryggingin kundi, ella vildi, luttaka í tann mun, sum neyðugt var. Teir báðir stóru partaeigararnir høvdu báðir umboð í nevndini. Longu í august 1992, tá eftirlitið kom við ábendingum um, at neyðugt varð at fremja avsetingar upp á 387 mió. kr. í Sjóvinnubankanum, mugu teir báðir stóru partaeigararnir hava verið greiðir yvir, at tørvur var á at útvega bankanum eina størri kapitalupphædd.

Eftir øllum at døma hevur Fíggjareftirlitið tíðliga fyrireikað seg til, at gongdin í teimum føroysku bankunum lættliga kundi føra til politiskar fløkjur. Longu tann 2. september 1992 kunnaði Eigil Mølgaard skrivstovustjóran í Ídnaðarmálaráðnum um tað, sum var í umbúna í Føroyum. Fyrsta stigið varð tikið til tað, sum seinni skuldi gerast kent undir navninum Føroyabólkurin. Bólkurin, sum hevði umboð úr ymsum ráðstovum, hevði sín fyrsta fund 21. september 1992, og 1. oktober – dagin fyri at leiðslan í Sjóvinnubankanum varð boðsend til fundar í eftirlitinum – hevði bólkurin skrivað eitt útgreinað upprit um fíggjarligu kreppuna í Føroyum. Uppritið varð handað teimum avvarðandi ráðharrunum.

Í Føroyum var kunningin til myndugleikarnar meira tilvildarlig. Longu 27. august 1992 høvdu umboð fyri eftirlitið verið á kurteisisvitjan hjá Jógvan Sundstein, sum var varaløgmaður og landsstýrismaður í fíggjarmálum. Á fundinum greiddi eftirlitið frá, at trupulleikar vóru í Sjóvinnubankanum. Tveir dagar seinni hevði leiðslan í Sjóvinnubankanum ein fund við varaløgmann. Evnið á

fundinum var støðan hjá kommununum. Vandi var fyri, at bankin mátti fremja avsetingar upp á kommunulánini.

Um miðjan september kunnaði Olaf Olsen, sum var næstformaður í nevndini í Føroya Banka, í trúnaði Jógvan Sundstein um støðuna í bankunum. Olaf Olsen greiddi Jógvan Sundstein frá, at trupulleikarnir í Sjóvinnubankanum vóru so stórir, at landsstýrið mátti koma upp í leikin, um bankin skuldi bjargast.

Jógvan Sundstein, sum vissaði Olaf Olsen um, at hann ikki vildi lata hesar upplýsingarnar fara víðari, setti seg beinan vegin í samband við stjórnina í Sjóvinnubankanum. Bankin hevði víst aftur, at hann hevði trupulleikar, sum hann ikki sjálvur var førur fyri at loysa. Síðst í september 1992 kunnaði ríkisumboðsmaðurin løgmann um, at Sjóvinnubankin var hóttur av einum skrædli.

## Tann 6. oktober

Fríggjadagin tann 2. oktober 1992 var leiðsla Sjóvinnubankans á fundi í Fíggjareftirlitinum. Eftirlitið kravdi, at bankin framdi avsetingar upp á 512 mió. kr. Fíggjareftirlitið metti, at 85 pst. av partapeninginum upp á 98 mió. kr. máttu metast at vera tapt, og eftirlitið kravdi, at bankin varð stongdur mánadagin 5. oktober, uttan so at trygd innan ta tíð kundi veitast fyri, at bankin fekk nýggjan kapital.

Nevndin í Sjóvinnubankanum, sum ikki hevði nakað uppskot til eina endurreising av bankanum, vendi sær til landsstýrið við áheitan um hjálp. Søgan frá 50-árunum varð nú endurtikin. Í loyndum noyddust løgmaður og varaløgmaður í vikuskiftinum at fara til Keypmannahavnar, har tað eftir midnátt tann 6. oktober 1992 eydnaðist at fáa eina avtalu í lag við donsku stjórnina. Hetta var 60-ára føðingardagurin hjá Sjóvinnubankanum.

### *Fyrsta felagslýsingin*

Eftir avtaluni skuldi danski staturin læna landsstýrinum 300 mió. kr., sum saman við 200 mió. kr. frá Íleggingargrunninum vórðu settar í ein nýstovnaðan grunn, ið síðan skuldi veita Sjóvinnubankanum tann neyðuga kapitalin. Grunnurin skuldi stjórnast av eini nevnd við fimm limum, harav stjórnin skuldi velja tríggjar og landsstýrið tveir.

Landsstýrið bant seg til at leggja fram eitt realistiskt fíggjarlógaruppskot fyri 1993 við javnvág millum inntøkur og útreiðslur, at fylgja eini búskaparligaripolitiskari endurreisingarætlan, sum búskaparfrøðingar, læntir frá altjóða valutagrunninum IMF, skuldu evna til, og at gera sítt til at nýmótansgera føroysku vinnulóggávuna.




*PARAPLYIR: Schlüter er til reiðar at bjarga ikki bara Sjóvinnubankanum, men eisini landsstýrinum. Seinni varð Føroya Banki eisini bjargaður, og heimastýrið varð lagt í hondjørn. Óli P. teknaði hesa 8. oktober 1992*

Tað er eyðsýnt, at her fyriliggur ein politisk heldur enn ein handilslig avtala. Stjórnin kundi havt valt at lata statin seta 300 mió. kr. í grunnin við trygd frá landsstýrinum ella valt at lata statin seta pening í grunnin við trygd í partabrøvunum í Sjóvinnubankanum. Tað gjørdi stjórnin ikki.

Landsstýrið kom sostatt at verða lántakari hjá statinum og innskjótari hjá grunninum. Og stjórnin valdi heldur enn at seta vanligar handilsligar treytir sum trygd ella veð fyri láninum at seta politiskar treytir. Tann sama mannagongdin varð brúkt, tá landsstýrið í februar og í oktober í 1993 aftur noyddist at læna pening frá statinum til at seta í bankarnar.

Tær politisku treytirnar frá statinum fyri hesum lánum til landsstýrið høvdu við sær, at bankin í seks ár – frá 1992 til 98, tá semja varð gjørd í bankamálinum – var eitt politiskt stríðsmál, bæði í Føroyum og í viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark. Tað var sera órógvandi fyri gerandisdagin í bankanum.

## *Nýggir eigarar í Sjóvinnubankanum*

Tann 6. november 1992 hevði Sjóvinnubankin eykaaðalfund í Ítróttarhøllini á Hálsi. 800 partaeigarar vóru møttir upp. Tað var ikki tí, at teir væntaðu sær ein góðan bita, tí har varð ikki borðreitt við nøkrum. Aðalfundurin samtykti at niðurskriva partapening bankans úr 98 niður í 14,7 mió. kr. Partabrøv áljóðandi 1.000 kr. vórðu niðurskrivað til 150 kr. Hetta var eisini galdandi fyri tey partabrøv, sum starvsfólkini í bankanum høvdu fingið sum gávu frá bankanum um morgunin tann 6. oktober í sambandi við, at hann fylti 60 ár henda dagin. Síðan teknaði Fíggingargrunnurin 285,3 mió. kr. í nýggjum partapeningi og 190 mió. kr. í ábyrgdarpeningi. Við tilsamans 490 mió. kr. í kapitali kundi Sjóvinnubankin fara inn í nýggja árið.

Á aðalfundinum bjóðaði gamla nevndin sær til at leggja frá sær, og Fíggingargrunnurin valdi Poul Mohr, Sverre Olsen og Jørgen Ulriksen í nevndina. Grunnurin bjóðaði eisini fiskasøluni og sjóvátryggingini, sum vóru teir báðir stóru gomlu partaeigararnir, at velja hvør sítt umboð í nevndina, og fyri teir vórðu valdir Jens Peter Arge og Nils Sørensen. Nevndin skipaði seg við Jens Peter Arge sum formanni.

## *Danske Bank styrkir sína støðu í Føroya Banka*

Tann 7. desember 1992 var eykaaðalfundur í Føroya Banka. Aðalfundurin samtykti at niðurskriva partapeningin við eini helvt – úr 137,5 mió. kr. niður í 68,75 mió. kr. – og at tekna 82,5 mió. kr. í nýggjum partapeningi til kurs 160. Danske Bank veitti trygd fyri nýtekningini, og hann teknaði 99,6 pst. av nýggju partabrøvunum. Eftir hetta var ognarparturin hjá Danske Bank øktur upp í 82 pst. Umframt hetta innskeyt Danske Bank eisini 200 mió. kr. í ábyrgdarpeningi í Føroya Banka. Tað skal sigast Danske Bank til rós, at hann ráddi minniluta partaeigarunum frá at seta meira pening í bankan.

Eykaaðalfundurin valdi Peter Fløe, undirstjóra, og Flemming Duus í nevndina. Teir komu báðir frá Danske Bank, og Flemming Duus hevði verið knýttir til nevndina sum ráðgevari. Føroya Banki var í ferð við at gerast eitt dótturfelag hjá Danske Bank.



*Hans-Jørgen Laursen 1940-*

*Hans-Jørgen Laursen, sum er føddur í Århus í 1940, varð útbúgvin í Aarhus Privatbank. Í 1966 fór hann í starv í Den danske Landmandsbank, har hann gjørdist skrivstovustjóri í 1968. Hans-Jørgen Laursen fekk sær eftirútbúgving á Handilsháskúlanum, har hann í 1971 tók diplomprógv í fígging og kredittviðurskiftum. Eisini fekk hann sær eftirútbúgving í Bretlandi og Fraklandi.*

*Í tíðarskeiðnum 1981-93 var hann forstjóri í Føroya Banka. Hann stóð sostatt á odda fyri bankanum í einum tíðarskeiði, har føroyska samfelagið og peningastovnarnir mentu seg við miklari ferð.*

*Í 1994 fór Hans-Jørgen Laursen aftur í starv sum skrivstovustjóri í Danske Bank, har hann fór frá við eftirløn í 2003.*

## Náttin millum januar og februar

Tann 1. januar 1993 fingu báðir bankarnir nýggjar stjórar. Í Sjóvinnubankanum avloysti Jørn Astrup Hansen Steingrím Nielsen, sum hevði verið stjóri síðan 1977. Jóhan Simonsen var farin frá sum stjóri í Føroya Banka í juli 1992, og nú varð stjórnin víðkað við Tage Benjaminsen, sum kom úr einum starvi sum undirstjóri í Danske Bank. Høvuðspartaeigarin táttaði sítt tak um Føroya Banka, sum í roynd og veru var um at gerast ein deild hjá Danske Bank.

Men tað var ikki bert í bankunum, at nýggj fólk tóku við. Eisini í politiska heiminum komu nýggir leikarar á vøllin. Marita Petersen tók 18. januar 1993 við sum løgmaður eftir Atla Dam, og 25. januar 1993 tók Poul Nyrup Rasmussen við sum forsætismálaráðharri eftir Poul Schlüter, sum hevði lagt frá sær 14. januar 1993, eftir at frágreiðingin í Tamila-málinum varð kunngjørd. Poul Nyrup Rasmussen skipaði eina samgongustjórn millum Sosialdemokratiska flokkin, Radikala Vinstraflokkin, Centrumdemokratarnar og Kristiliga Fólkaflokkin. Bæði tá og seinni komu føroysku bankarnir at verða eitt slítandi mál hjá teimum, sum sótu við ábyrgdini.

Í seinnu helvt av oktober 1992 gjøgnumgingu aðalfundarvaldu grannskoðararnir í Føroya Banka bankans útlán saman við grannskoðaraleiðaranum í Danske Bank og starvsfólki frá kredittdeildini í Danske Bank. Og í Sjóvinnubankanum gjøgnumgingu Sverre Olsen og Jørgen Ulriksen í november-desember 1992 vegna nevndina øll útlán, sum vóru størri enn 6 mió. kr.

Úrslitið varð, at í Føroya Banka vórðu 98 mió. kr. afturat settar av móti tapi. Tríggjar mánaðir frammanundan hevði Fíggjareftirlitið kravt avsetingar upp á

360 mió. kr., soleiðis at samlaðu avsetingarnar í 1992 vóru 458 mió. kr. Í Sjóvinnubankanum vórðu 482 mió. kr. afturat settar av móti tapi, so samlaðu avsetingarnar í 1992 vóru 994 mió. kr. Onkur hevur seinni hildið, at stóru avsetingarnar í Sjóvinnubankanum í januar 1993 vóru ein avleiðing av, at tað var komin nýggjur stjóri. Men so var ikki.

Í Sjóvinnubankanum høvdu eyka avsetingarnar við sær, at meira enn helvtin av partapeninginum varð taptur. Kapitalgrundarlagið hjá bankanum mátti endurreisast. Nevndin í bankanum samtykti á fundi fríggjadagin tann 29. januar 1993, *at der ikke ville være grundlag for at åbne banken den 1. februar 1993, medmindre der under møderne* (í Keypmannahavn í døgunum 29.-31. januar) *blev skabt sikkerhed for en tilstrækkelig kapitaltilførsel til banken.* Hesuferð varð tað leiðsla bankans, sum tók tey neyðugu stigini.



*Marita Petersen var Føroya fyrsti kvinnuligi løgmaður og higartil einasti. Ein stór ábyrgd kom at liggja á herðum hennara í kreppuárunum eftir 1992. Myndin av henni og ríkisumboðsmanninum Bent Klinte ber sín tigandi álvarsliga boðskap*

Saman við einum størri fylgi fór Marita Petersen til Keypmannahavnar leygardagin 30. januar 1993 at tingast við eina danska samráðingarnevnd undir leiðslu av Poul Nyrup Rasmussen. Fíggingargrunnurin og landsstýrið høvdu tørv á at læna 350 mió. kr. Hetta gjørdist eitt drúgt vikuskifti hjá nýggja stjóranum í Sjóvinnubankanum, sum ikki enn hevði fingið sína fyrstu mánaðarløn. Sammett við samráðingarnar í oktober 1992 valdi landsstýrið hesuferð ikki at taka leiðslu bankans við upp á ráð.

Tað gjørdist mánadagur, og vit fóru inn í februar mánað, áðrenn ein avtala kom í lag í Forsætismálaráðnum. Tíðliga mánamorgun komu boðini úr Keypmannahavn. Sjóvinnubankin var bjargaður. Bankin kundi lata upp sum vanligt, og ikki varð neyðugt at taka fram aðrar neyðloysnir.

Tann 9. mars 1993 var ársaðalfundur í Sjóvinnubankanum. Hallið í 1992 var 860 mió. kr., og aðalfundurin samtykti at niðurskriva partapeningin við 200 mió. kr. Fíggingargrunnurin, sum í november 1992 hevði teknað B-partabrøv, avskrivaði allan sín partapening. Eisini avskrivaði grunnurin ábyrgdarpeningin upp á 190 mió. kr. Síðan tilførdi Fíggingargrunnurin bankanum 350 mió. kr. í nýggjum kapitali: 200 mió. kr. sum partapening og 150 mió. kr. sum ábyrgdarpening.

Tann 12. mars 1993 var ársaðalfundur í Føroya Banka. Bankin hevði 395 mió. kr. í halli í 1992. Á aðalfundinum legði Poul Johannes Johansen frá sær sum nevndarformaður og Andreas Lava Olsen sum nevndarlimur. Í februar 1993 hevði Olaf Olsen lagt frá sær sum nevndarlimur av persónligum orsøkum. Vilhelm Johannesen var nývaldur í nevndina, sum skipaði seg við Klæmint Weihe sum formanni.

## Partabrævabýtið

Danske Bank var nú farin at himprast. Tann 8. februar 1993 sendi bankin eitt bræv í trúnaði til forsætismálaráðharran. Danske Bank skrivaði, at bankin hevði lagt sær í geyma, at *(Finansierings-)fondens formål efter vedtægterne er at indskyde og besidde ejerkapital i større færøske banker.* Seinni í brævinum skrivar Danske Bank, *at det ikke kan afvises, at en eventuel fusion af Føroya Banki og Sjóvinnubankin kunne være et særdeles nyttigt skridt i forbindelse med en samlet løsning af den færøske situation.* So kurteisliga kann tað orðast.

Ongin hevði fyrr undrast á, at tað í viðtøkunum hjá grunnunum verður víst til bank*ar*. Higartil høvdu føroyingar, í hvussu so er, fatað Fíggingargrunnin sum eitt amboð til at endurreisa Sjóvinnubankan. Ongin hevði heldur givið sær far um, at tað varð víst til teir *størru* bankarnar. Hetta fekk týdning, tá tann lítli Fossbankin á heysti í 1993 kom í trupulleikar og varð tikin undir trotarbúsvið-



*SKÚLARÆTT: Tann 30. januar 1993 mátti Marita Petersen til Keypmannahavnar at læna 350 mió. kr. Tað er Eyðun á Rógvi, ið fyrst kennir sparigrísin aftur. Óli P. teknaði*

gerð. Hjá einum banka, sum kemur í trupulleikar, er tað ikki ein fyrimunur at vera ein lítil banki.

Tann 22. mars 1993 góðkendi landsstýrið eitt partabrævabýti millum Danske Bank og Fíggingargrunnin. Grunnurin kundi sambært sínum viðtøkum ikki gera eina tílíka avtalu uttan við góðkenning frá landsstýrinum og donsku stjórnini, og búskaparnevndin hjá donsku stjórnini góðkendi partabrævabýtið longu 12. mars 1993. Avtalan førdi seinni til føroyska bankamálið. Tá hugsað verður um, hvussu ábyrgdin seinni varð staðfest, kann tað tykjast, sum um landsstýrið og stjórnin høvdu lyndi til at gloyma sín leiklut í avtaluni.

Eftir avtaluni seldi Danske Bank 52 pst. av partapeninginum í Føroya Banka til Fíggingargrunnin, sum rindaði við 30 pst. av partapeninginum í Sjóvinnubankanum og 3,12 mió. kr. í reiðum peningi. Hetta síðsta var bert fjákalótir. Tað var á vári 1993 ikki gjørligt at áseta virðið á partabrøvunum í føroysku bankunum so neyvt, at neyðugt var við hesum gjaldinum í reiðum peningi. Gjaldið til Danske Bank bendi á, at tað var farin fram ein heilt vanligur partabrævahandil. Men so var ikki. Grunnurin og Danske Bank býttu váðan sínámillum heldur enn partabrøv.

Nú átti Danske Bank 30 pst. av partapeninginum í báðum bankum, meðan grunnurin átti 64 pst. av partapeninginum í Sjóvinnubankanum og 52 pst. av partapeninginum í Føroya Banka. Fíggingargrunnurin frá 1992 og landsstýrið høvdu yvirtikið ábyrgdina sum høvuðspartaeigari og skylduna sum móðurfelag.

Tá partabrævabýtið gjørdist so tyngjandi fyri viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, skal tað helst skiljast út frá tí sera virkna leiklutinum, sum stjórnin við Poul Nyrup Rasmussen og Mogens Lykketoft á odda átóku sær við tí endamáli at fáa eina semju. Mogens Lykketoft fekk til uppgávu at sannføra landsstýrið um, at tað átti at taka av tilboðnum frá Danske Bank. Hevði Poul Nyrup Rasmussen bert boðað Knud Sørensen og Peter Straarup í Danske Bank frá, at teir sjálvir máttu seta seg í samband við landsstýrið ella Fíggingargrunnin, høvdu vit helst sloppið undan allari gøluni.

## Ein roynd til samanlegging

Við partabrævabýtinum var Fíggingargrunnurin vorðin meiriluta partaeigari í báðum bankunum. Landsstýrið hevði goldið rokningina, og útlit vóru ikki í fyrstu atløgu til, at tað bar til at finna nýggjar privatar partaeigarar, ið kundu avloysa grunnin sum eigara. Tað var greitt, at hetta mátti enda við eini samanlegging. Grunnurin kundi ikki í longdini á ein sannførandi hátt eiga tveir bankar, sum kappaðust móti hvørjum øðrum.

Møguleikin fyri eini samanlegging var til viðgerðar á nevndarfundi í grunninum tann 22. juni 1993. Nevndarformaðurin samanfataði sínar hugsanir um eina samanlegging tann 30. juni í einum uppriti, sum varð sent bankunum til ummælis. Um hetta mundið vóru partarnir vitandi um, at Fíggjareftirlitið í september 1993 ætlaði at kanna bankarnar. Í einum uppriti frá 15. juli 1993 lýstu stjórnirnar í bankunum fyrimunir og vansar við eini samanlegging.

Uppritið mælti til eina samanlegging. Báðir bankarnir vóru illa fyri eftir kreppuna. Avsetingarnar góvu ábendingar um, at inntøkugrundarlagið var munandi viknað. Harumframt høvdu broytingarnar í serføroysku rentuskattalógini ført til, at fíggjarjavnarnir vóru minkaðir – bæði hjá bankunum og kundunum.



*Høvdingar hittast. Hans-Jørgen Laursen, stjóri í Føroya Banka, heilsar upp á Jørn Astrup Hansen, tá Jørn Astrup Hansen tekur við sum stjóri í Sjóvinnubankanum í 1993*

Bankarnir vóru vorðnir munandi minni. Tí fór at verða neyðugt við umfevnandi rationaliseringum. Niðurstøðan varð, at tílíkar rationaliseringar lættast kundu gerast, um bankarnir vórðu samanlagdir.

Men eisini onnur atlit talaðu fyri eini samanlegging. Bankarnir báðir veittu í stóran mun lán til somu kundar. Ofta av tí einfaldu orsøk, at lánini vóru ov stór, til at ein føroyskur banki eftir ásetingunum í bankalógini megnaði at veita tey. Niðurstøðan var tí, at ein samanlagdur banki var betur førur fyri at røkja teir stóru kundarnar.

Eisini var tað longu í lóggávuni tikin hædd fyri teimum óhepnu avleiðingunum, sum undir øðrum fyritreytum høvdu verið avleiðingin av eini samanlegging. Nýggja banka- og sparikassalógin, sum var komin í gildi fyri bankarnar 1. juli 1993, fór frá 1. januar 1994 eisini at fevna um sparikassarnar. Hetta hevði við sær, at føroysku sparikassarnir høvdu møguleika fyri at taka kappingina upp við tann samanlagda bankan, sum á tann hátt ikki fekk nakran einkarrætt.

Fíggingargrunnurin hevði eitt avgjørt ynski um, at samanleggingin skuldi fremjast í 3. ársfjórðingi 1993 við hálvársroknskapunum sum grundarlagi. Yvir-

skipað vóru báðir bankarnir fyri eini samanlegging. Tó var í báðum bankunum, og serliga í Sjóvinnubankanum, eitt ávíst fyrivarni fyri, nær rætta løtan var at leggja saman. Fatanin í Sjóvinnubankanum var, at bankarnir hvørki hvør sær ella í felag høvdu neyðugu fíggjarligu orkuna til at fara undir eina samanlegging.

Tann 10. august 1993 sendi Fíggingargrunnurin landsstýrinum eitt skrivligt uppskot um samanlegging. Sama dag var eykanevndarfundur í Sjóvinnubankanum. Á fundinum avgjørdi nevndin at boða grunninum frá, at bankin ikki metti seg at vera føran fyri at luttaka í eini samanlegging, fyrr enn úrslitið av kanningini hjá Fíggjareftirlitinum fyrilá, og fyrr enn møguleikar høvdu verið fyri at gjøgnumganga báðar bankarnar í felag.

Tann 11. august 1993 boðaði danska stjórnin frá, at hon tók undir við eini samanlegging, og 18. august gav landsstýrið sítt viðmæli. Áðrenn endaliga støðan hjá landsstýrinum fyrilá, hevði landsstýrið havt nógv fyrivarni og viðmerkingar. Men nú var landsstýrið til reiðar at gera sítt til at fremja samanleggingina. Tann 19. august 1993 sendi landsstýrið út eitt tíðindaskriv, har boðað varð frá, at landsstýrið og danska stjórnin høvdu tikið undir við at leggja Føroya Banka og Sjóvinnubankan saman. Harumframt kunngjørdi landsstýrið, at tað hevði 560 mió. kr. tøkar til Fíggingargrunnin, um neyðugt varð at styrkja bankarnar fíggjarliga.

Tíðindaskrivið vakti blandaðar kenslur í bankunum, sum ikki vórðu tiknir við upp á ráð. Í einum felags tíðindaskrivi tann 20. august 1993 váttaðu bankarnir tó, at *teir høvdu avgjørt at fara undir tingingar við tí endamáli at leggja bankarnar saman.*

Kanningin hjá Fíggjareftirlitinum í september vísti, at 560 mió. kr. vóru ikki nóg mikið til at at halda virksemið hjá bankunum gangandi, og bankanevndirnar samtyktu á hesum grundarlagi fyribils at útseta ætlanirnar um at leggja saman. Samanleggingarroyndirnar tíðliga á heysti 1993 vóru ein misháttur millumleikur, sum allir partar seinni helst uttan iva høvdu viljað verið fyri uttan.

## Skyldan hjá móðurfeløgum

Í september 1993 kravdi eftirlitið, at 1,4 mia. kr. afturat vórðu settar av í báðum bankunum. Tann 12. oktober noyddist landsstýrið aftur til Keypmannahavnar. Hesuferð til at læna 1,3 mia. kr., sum vórðu settar í Fíggingargrunnin. At bankakreppan hevði tyngt viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, kom millum annað til sjóndar á tann hátt, at 25 luttakarar vóru á fundinum tann 12. oktober, 10 føroyskir og 15 danskir. Undir fyrstu samráðingunum millum landsstýrið og stjórnina í Keypmannahavn 5. oktober 1992 sótu bert 5 mans við borðið.

Tann 29. november 1993 var eykaaðalfundur í Sjóvinnubankanum. Aðalfundurin samtykti at avskriva allan partapeningin. Fíggingargrunnurin avskrivaði eisini ábyrgdarpeningin upp á 150 mió. kr. og teknaði síðan 100 mió. kr. í nýggjum partapeningi til kurs 675. Sama dag var eykaaðalfundur í Føroya Banka. Her varð eisini avgerð tikin um at avskriva allan partapeningin. Danske Bank avskrivaði eisini ábyrgdarpeningin upp á 200 mió. kr., og Fíggingargrunnurin teknaði síðan 150 mió. kr. í nýggjum partapeningi til kurs 790. Fíggingargrunnurin var nú einsamallur eigari í báðum bankunum. Grunnurin mátti taka við teimum skyldum, sum tað hevur við sær at vera móðurfelag.

Yvirkursurin varð skjótt etin upp. Eftir tap og avsetingar upp á 1.515 mió. kr. hevði Føroya Banki í 1993 eitt hall upp á 1.462 mió. kr. Av yvirkursinum upp á 1.035 mió. kr. fóru 1.026 mió. kr. til at rinda roknskaparliga hallið. Í Sjóvinnubankanum var í 1993 eitt hall upp á 933 mió. kr. eftir tap og avsetingar upp á 994 mió. kr. Her fóru 535 mió. kr. av yvirkursinum upp á 575 mió. kr. til at rinda roknskaparliga hallið. Av samlaða kapitalinnskotinum upp á 2.685 mió. kr. noyddist Fíggingargrunnurin í 1993 at avskriva ikki minni enn 2.386 mió. kr.

## Bankakreppan í 1992-93 í tølum

| *Mió. kr.* | *1992* | | *1993* | | *Til samans* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | *FB* | *SB* | *FB* | *SB* | *FB* | *SB* | *Tils.* |
| Tap og avsetingar | 558 | 975 | 1.515 | 994 | 2.073 | 1.969 | 4.042 |
| Úrslit | -395 | -860 | -1.462 | -933 | -1.857 | -1.793 | -3.650 |
| Kapitalinnskot | 332 | 475 | 1.185 | 1.025 | 1.517 | 1.500 | 3.017 |
| Danske Bank | *331* | | | | *331* | | *331* |
| Fíggingargrunnurin | | *475* | *1.185* | *1.025* | *1.185* | *1.500* | *2.685* |
| Minniluta partaeig. | *1* | | | | *1* | | *1* |

Tað undrar í dag, og tað gjørdi tað eisini tá, at 73 pst. av avsetingunum í Føroya Banka vórðu gjørdar eftir, at partabrævabýtið var farið fram, og eftir at Fíggingargrunnurin og landsstýrið høvdu tikið við móðurfelagsskylduni. Í Føroya Banka vóru bert 27 pst. av samlaðu tapunum og avsetingunum hesi bæði árini staðfest í 1992, meðan Sjóvinnubankin hetta árið staðfesti helvtina av sínum tapum og avsetingum. Í Føroyum skapti hetta illgruna um, at Fíggjareftirlitið hevði givið Føroya Banka serviðgerð.

Tað kann ikki vísast aftur, at Danske Bank, høvuðspartaeigarin hjá Føroya Banka, við árslok í 1992 ikki metti støðuna rætt og tí setti ov lítið av í dótturbankanum. Hinvegin kann tað tykjast sannlíkt og væl skiljandi, um Fíggjareftir-

litið á heysti 1992 í síni meting av tørvinum á avsetingum í teimum báðum bankunum skeitti eftir ognarviðurskiftunum. Partaeigararnir í Sjóvinnubankanum høvdu á heysti 1992 heilt slept endanum. Sjóvinnubankin hevði ongan at fara til eftir hjálp, um eitt nú tørvur var á gjaldføri, tí kundarnir tóku síni innlán úr bankanum. Støðan var øðrvísi hjá Føroya Banka. Høvuðspartaeigarin var størsti bankin í Danmark. Danske Bank kundi, um hann vildi tað, útvega Føroya Banka bæði neyðuga gjaldførið og kapitalin. Tað gjørdi Danske Bank eisini. Til hann ikki gjørdi tað longur!



*Tveir av royndu monnunum í Danske Bank, Flemming Duus og Tage Benjaminsen, fingu til uppgáva at brynja Føroya Banka til brúdleypið við stolta sjómannin í Húsagøtu*

Í 1992 var Føroya Banki eitt dótturfelag hjá Danske Bank. Tað ber illa til at kasta Fíggjareftirlitinum fyri, at tað hugdi meira eftir gjaldføris- og kapitalviðurskiftunum í móðurfelagnum enn í einum einstøkum dótturfelag. Tá eftirlitið í september 1993 aftur kom á vitjan í Føroyum, var Føroya Banki ikki longur eitt dótturfelag hjá Danske Bank. Fíggingargrunnurin frá 1992 var nú móðurfelag hjá Føroya Banka, og grunnurin kundi ikki uttan játtan frá landsstýrinum og stjórnini veita dótturfelagnum gjaldføri og kapital. Føroya Banki varð nú mettur á sama hátt sum Sjóvinnubankin.

Á eykaaðalfundinum í november 1993 fóru Jens Peter Arge og Nils Sørensen úr nevndini í Sjóvinnubankanum. Jóhan Páll Joensen, stjóri í Klaksvík, var nývaldur í nevndina, sum skipaði seg við Jørgen Ulriksen sum formanni.

Í Føroya Banka fór Klæmint Weihe úr nevndini, og Kjartan Hoydal var nývaldur sum umboð fyri Fíggingargrunnin. Nevndin skipaði seg við Flemming Duus sum formanni. Hans-Jørgen Laursen og Niels Juel Nattestad løgdu í august 1993 frá sær sum stjórar, eftir at teir vórðu skuldsettir í einum av skipamálunum.

## Samanleggingin

Tað vakti undran og atfinningar, at Fíggingargrunnurin eftir aðalfundin í november 1993 framvegis læt starvsmenn, ið sótu í álitisstørvum í Danske Bank, verða verandi í leiðandi størvum í Føroya Banka. Hetta gjørdi tann ringa hýrin, sum umgyrdi bankarnar árini 1992-94, enn verri, og gjørdi eisini tilgongdina í samanleggingini torførari. Eftir at Fíggingargrunnurin og føroyska samfelagið høvdu yvirtikið ognarrættin til Føroya Banka, sótu umboð fyri Danske Bank framvegis í uriasstørvum í Føroya Banka.

Í februar 1994 vóru aftur broytingar í nevndini í Føroya Banka. Vilhelm Johannesen og Svend Krosstein løgdu frá sær sum nevndarlimir, og á eykaaðalfundi tann 1. mars 1994 valdi Fíggingargrunnurin Bjarna Olsen í nevndina í Føroya Banka. Men hann sat har bert eitt stutt skifti.

Tann 11. apríl 1994 samtykti aðalfundurin í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum at leggja bankarnar saman undir navninum Føroya Banki við gildi frá 1. januar 1994. Tekniskt var Sjóvinnubankin partafelagið, ið helt fram. Fyrsti fíggjarjavnin hjá samanlagda bankanum javnvigaði við einans 4,9 mia. kr., og eginpeningurin var 279 mió. kr. Partapeningurin var settur saman av 250 mió. partabrøvum á 1 kr., sum Fíggingargrunnurin átti einsamallur. Nú var slætt borð.

Nevndarlimirnir í Sjóvinnubankanum: Jóhan Páll Joensen, Poul Mohr, Sverre Olsen og Jørgen Ulriksen hildu fram í nevndini í Føroya Banka. Sum starvsfólkaumboð vórðu Niclas Joensen og Ragnar S. Olsen valdir í nevndina, meðan danski ídnaðarmálaráðharrin eftir tilmæli frá landsstýrinum tilnevndi Jógvan Jespersen sum nevndarlim. Nevndin skipaði seg við Jóhan Páll Joensen sum formanni og Jørgen Ulriksen sum næstformanni.

Janus Petersen gjørdist nýggjur limur í stjórnini, meðan Jørn Astrup Hansen helt fram sum forstjóri í Føroya Banka.

## Fíggingargrunnurin frá 1992

Tann 2. november 1992 stovnaðu landsstýrið og danska stjórnin Fíggingargrunnin frá 1992, sum fekk heimstað í Tórshavn. Grunnurin fekk til endamál at innskjóta og eiga ognarkapital í størri føroyskum bankum sum partapening ella ábyrgdarpening, at fremja ein virknan leiklut sum eigari í avvarðandi bankum og at taka stig til ella at luttaka í bygnaðarbroytingum í føroyska vinnulívinum.

Grunnurin varð stovnaður við einum grundkapitali upp á 300 mió. kr., sum landsstýrið skeyt inn, meðan Íleggingargrunnurin veitti grunninum eitt lán upp á 200 mió. kr.



*Richard Mikkelsen*
*1920-2004*

*Richard Mikkelsen, sum byrjaði sína yrkisleið í bankaheiminum í 1937, varð í 1945 settur í starv í Danska Tjóðbankanum. Mikkelsen, sum við síðuna av sínum starvi las statsvísindi á universitetinum í Keypmannahavn, gjørdist í 1982 limur í stjórnini í tjóðbankanum, og hetta starv røkti hann til 1990.*

*Richard Mikkelsen, sum hevði ein týðandi leiklut í liberaliseringini av danska peningapolitikkinum í 80-árunum, var ein íðin rithøvundur. Hann skrivaði m.a. 4. bind av Dansk Pengehistorie, sum fevndi um árini 1960-90.*

*Í november 1992 valdi danska stjórnin Richard Mikkelsen til formann í nevndini fyri Fíggingargrunnin frá 1992. Hetta starv røkti hann til árslok 1995. Mikkelsen hevði sostatt ein avgerandi leiklut í sambandi við partabrævabýtið í mars 1993, sum ruddaði slóð fyri, at Føroya Banki og Sjóvinnubankin vórðu lagdir saman eitt ár seinni.*

Í fyrstu nevndina hjá Fíggingargrunninum tilnevndi danska stjórnin Richard Mikkelsen, fyrrverandi tjóðbankastjóra, Eskil Trolle, sakførara, og Jørgen Ulriksen, fyrrverandi bankastjóra, meðan landsstýrið tilnevndi Jalgrím Hilduberg, deildarstjóra í landsstýrinum og Johan K. Joensen, fyrrverandi sparikassastjóra. Richard Mikkelsen gjørdist fyrsti nevndarformaðurin í grunninum, meðan Jalgrím Hilduberg gjørdist næstformaður. Í viðtøkunum hjá grunninum var annars ein áseting um, at landsstýrið skuldi tilnevna allar nevndarlimirnar, tá landsstýrið hevur afturgoldið statslánini.

Av teimum 500 mió. kr., sum grunnurin ráddi yvir, fóru 475,3 mió. kr. til at endurkapitalisera Sjóvinnubankan. Í viðtøkunum varð ásett, at um grunnurin fekk meira pening tilførdan, skuldi hesin peningur brúkast eftir avgerð hjá nevndini í samráð við landsstýrið og donsku stjórnina. Viðtøkurnar ásettu eisini, at nevndin í grunninum einans kundi niðurskriva sín partapening í bankunum við góðkenning frá landsstýrinum og stjórnini. Eisini er ásett, at um grunnurin heilt ella lutvíst skal avhenda síni partabrøv ella ábyrgdarpening, kann hetta bert gerast við góðkenning frá teimum báðum stovnarunum. Nevndin í Fíggingargrunninum slapp ikki at gera, sum hon vildi.

## *Leikluturin hjá grunninum*

Tann sera rúmliga endamálsorðingin gav hinvegin almenninginum – og serliga føroysku politikarunum – eina fatan av, at grunnurin hevur óvanliga víðar heimildir. Men tað var ikki veruleikin.

Grunnurin hevði til uppgávu at hava ein virknan leiklut sum eigari av partabrøvum í bankanum. Yvirfyri bankunum átók grunnurin sær ein leiklut, sum ein og hvør annar høvuðspartaeigari hevði gjørt. Hvørki meira ella minni. Sjálvsagt var grunnurin sera virkin í árunum 1992-94. Grunnurin – og ikki bankarnir – tók avgerðirnar um endurreisingarnar, partabrævabýtið og samanleggingina, og soleiðis átti tað náttúrliga at vera. Eftir samanleggingina í apríl 1994 vóru viðurskiftini millum Fíggingargrunnin og Føroya Banka reglubundin á vanligan hátt. Grunnurin legði seg ongantíð út í tær heimildir, sum lógir og viðtøkur ásettu fyri virksemið hjá nevnd bankans. Grunnurin legði seg ikki út í tær avgerðir, sum stjórn og nevnd bankans tóku.

Sum nevnt fekk Fíggingargrunnurin frá 1992 tó eisini til uppgávu at taka stig til ella at luttaka í eini bygnaðarbroyting í føroyska vinnulívinum. Á hesum grundarlagi sendi grunnurin tann 10. desember 1992 eitt skriv til landsstýrið, har dentur varð lagdur á týdningin av, at fiskivinnupolitikkurin varð lagdur soleiðis til rættis, at fiskivinnan bygdi á eitt burðardygt grundarlag út frá skilabesta fiskiskapinum og teimum marknaðarbúskaparligu treytunum.

Í skrivinum vísti grunnurin á tørvin á at tillaga fiskiflotan til verandi veiðumøguleikar. Sum amboð til at loysa henda spurning vísti grunnurin á eina kvotaskipan, sum bygdi á eina avgjalds- ella uppboðssøluskipan. Eisini hevði grunnurin ta fatan, at ein grundleggjandi rationalisering av flakavinnuni var neyðug. Grunnurin helt, at tað var neyðugt at minka munandi um talið á flakavirkjum. Fleiri av teimum táverandi 21 virkjunum høvdu longu latið aftur, meðan enn fleiri bert brúktu ein avmarkaðan part av framleiðsluorkuni.

Tað var eyðsæð, at landsstýrið, sum 8. januar 1993 stutt og greitt takkaði fyri skrivið, ikki vildi hava hetta slagið av ráðgeving. Tann 1. februar 1993 bant landsstýrið seg tó í avtalu við donsku stjórnina til at seta eina bygnaðarnevnd og at stovna ein bygnaðargrunn. Hesin grunnurin kom tó ongantíð longur enn á tekniborðið. Og tað var helst líka so gott. Í Føroyum vóru tað frammanundan ein ørgrynna av kassum og grunnum at halda skil á.

Í sínum áliti frá 1. juli 1993 mælti bygnaðarnevndin, har Kjartan Hoydal var formaður, til at seta í verk umsetiligar kvotur til einstøku skipini. Eisini mælti nevndin til, at fiskiflotin varð skuldarsaneraður, tó uttan almennan stuðul. Í einum protokollati til eina seinni avtalu við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 bant landsstýrið seg til at fylgja tilmælinum hjá bygnaðarnevndini. Í protokollat-

inum verður sagt, at landsstýrið fer at leggja uppskot fyri løgtingið til lóg um umsetiligar kvotur, sum skuldi fáa gildi frá 1. januar 1994. Við tíðini vildi landsstýrið umhugsa at áseta eitt avgjald í sambandi við fiskikvoturnar. Tað var stjórnin, og ikki Fíggingargrunnurin, ið royndi at ávirka politikkin hjá landsstýrinum.

Kortini var Fíggingargrunnurin fyri hvøssum atfinningum fyri at leggja seg út í føroyskan vinnupolitikk og serliga fyri sín leiklut í sambandi við endurreisingina av fiskiídnaðinum. Veruleikin er, at grunnurin bert átti 4 pst. av kapitalinum í P/f Føroya Fiskavirking. Men grunnurin var virkin í arbeiðinum við at fáa undirtøku frá donsku realkredittfeløgunum fyri endurreisingini, og grunnurin átók sær eisini at royna at fáa politiska undirtøku fyri ætlanini. Tað var ikki nøkur løtt uppgáva.

Fólkaflokkurin setti samgonguna upp á spæl í spurninginum um flakavirkini. Tann 21. apríl 1993 skrædnaði landsstýrissamgongan, og tríggjar dagar seinni skipaðu Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin nýtt landsstýri við Maritu Petersen sum løgmanni.

Men Fólkaflokkurin hevði gjørt sær óneyðugt høvuðbrýggj. Tað er væl skiljandi, at landsstýrið helt, at tað kundi ávirka bankarnar, sum tað óbeinleiðis hevði eftirlitið við. Men donsku kredittfeløgini vildu als ikki lata seg ávirka politiskt. Endurreisingin av flakavinnuni var eitt mál hjá veðhavarunum at taka sær av. Teir átti 1 mia. kr. til góðar hjá flakavirkjunum. Tað var torført hjá politikarunum at venja seg við, at teir ikki longur høvdu ræði á vinnumálunum.

## *Lex Føroya Banki*

Fíggingargrunnurin frá 1992 varð stovnaður við avtalu millum landsstýrið og donsku stjórnina. Grunnurin gjørdi ársroknskap eftir ásetingunum í lógini um vinnurekandi grunnar. Men annars lýkur grunnurin ikki tær grundleggjandi løgfrøðisligu reglurnar um grunnar. Eitt nú kann stovnarin av einum grunni ikki hava ávirkan á virksemið hjá grunninum. Eftir viðtøkunum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 tilnevndu teir báðir stovnararnir allar nevndarlimirnar. Og stovnararnir avgjørdu eisini, hvussu nevndin skuldi skipa seg. Stjórnin tilnevndi formannin og landsstýrið næstformannin.

Viðtøkurnar hjá Fíggingargrunninum vóru annars merktar av, at grunnurin sá dagsins ljós í skundi. Eitt nú vóru í viðtøkunum ongar ásetingar um, hvussu grunnurin kundi brúka sítt stovnsfæ og serliga tað útbýti, sum hann fekk av partabrøvunum. Annaðhvørt er málið avgreitt í skundi, ella hevur ongin ímyndað sær, at peningur aftur kundi fara at streyma hinvegin. Eitt nú stóðust trupulleikar av, at nevndin í Føroya Banka á vári 1996 mælti aðalfundinum til, at 37,5 mió. kr. vórðu útlutaðar í vinningsbýti í roknskapinum fyri 1995.

Tað var sjálvsagt ikki nakað, sum forðaði fyri, at grunnurin kundi taka ímóti vinningsbýti. Men hvar skuldi peningurin síðan fara? Grunnurin hevði ikki lán frá landsstýrinum, sum skuldu rentast og avdragast. Landsstýrið skeyt 2.510 mió. kr. inn í grunnin. Upphæddin, sum í november 1993 varð niðurskrivað til 272 mió. kr., varð innskotin sum stovnsfæ og kundi ikki takast út aftur seinni. Í viðtøkum grunsins manglaðu ikki bert ásetingar um, hvussu peningaognin skuldi brúkast. Grunnurin hevði heldur ikki sambært vanligum grundleggjandi lógarreglum um grunnar møguleika fyri at hugsa um sínar stovnarar. Landsstýrið kundi ikki fáa lut í yvirskoti bankans. Tað var heppið, at tað vóru stovnararnir og ikki grunnurin ella bankin, sum ikki høvdu gáað um henda smálutin!

Tað varð skrivað søga, tá Fólkatingið 12. juni 1996 samtykti lóg um Fíggingargrunnin frá 1992, eisini kend sum lex Føroya Banki. Við lóg nr. 462 staðfesti drotningin, at við at broyta viðtøkurnar fyri Fíggingargrunnin kundi avgerð takast um, at grunnurin kundi útluta peningaognir til Føroya Landsstýri, tá peningurin stavaði frá dóttirfeløgum. Soleiðis varð tað gjørt.

Tað er eitt sindur speisamt, at Íleggingargrunnurin, sum á heysti 1992 skeyt 200 mió. kr. í Fíggingargrunnin, so vísiliga helt fast við, at kapitalurin skuldi veitast sum eitt lán. Í mars 1993 mátti Íleggingargrunnurin avskriva lánið.

## *Grunnurin verður føroyskur*

Tann 1. januar 1996 tók Knud Heinesen, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri, við sum formaður í Fíggingargrunninum eftir Richard Mikkelsen. Landsstýrið tilnevndi John P. Danielsen og Jógvan Ellefsen sum nýggjar nevndarlimir í grunninum.

Við semjuni frá 10. juni 1998 fór danski staturin burtur úr Fíggingargrunninum, og síðan 1. januar 1999 hevur landsstýrið tilnevnt allar nevndarlimirnar. Í hesum sambandi vórðu viðtøkur grunsins broyttar.

Endamálsgreinin hjá grunninum varð stytt. Grunnurin hevði fyrr havt til endamál at innskjóta og eiga ognarkapital í størri føroyskum bankum sum partapening ella ábyrgdarpening, at fremja ein virknan leiklut sum eigari av avvarðandi bankum, og at taka stig til ella at luttaka í bygnaðarbroytingum í føroyska vinnulívinum. Nú var endamálið hjá grunninum einans at innskjóta og eiga ognarkapital í Føroya Banka. Grunnurin kann ikki selja burtur av sínum partabrøvum í bankanum ella broyta sínar viðtøkur uttan við góðkenning frá landsstýrinum.

Tey næstu seks árini varð sjálvstýrarin settur til í Fíggingargrunninum.

# Bankamálið

Tann 31. mars 1993 kunnaði Føroya Banki Fíggjareftirlitið, Danske Bank og Fíggingargrunnin – nýggja høvuðspartaeigaran hjá bankanum – um, at bankin nú ikki leyk ásetingarnar í bankalógini um gjaldføri. Trupulleikin varð í fyrsta umfari loystur við, at Danske Bank veitti ein kreditt upp á 100 mió. kr. við veð í ágóðanum hjá bankanum í dótturfelagnum P/f Føroya Húsalán.

Tann 28. mai 1993 varð ein rammuavtala gjørd millum donsku stjórnina og landsstýrið um endurfígging av skuld landskassans. Í avtaluni verður sagt, at *landsstyret om fornødent vil tilføre midler til de to store færøske banker, hvis det viser sig påkrævet for at opfylde banklovgivningens krav om likviditet og solvens.* Í framhaldi av hesum játtaði fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum tann 25. juni landsstýrinum eitt lán upp á 1 mia. kr. Av hesum vórðu 400 mió. kr. settar á konto hjá landsstýrinum í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum, meðan 560 mió. kr. vórðu settar av til at verða tøkar til bankarnar.

## Ein vánaligur handil?

Tað er væl skiljandi, at tað kom óvart á landsstýrið, at tað so skjótt eftir partabrævabýtið vísti seg at vera ein leki í Føroya Banka. Minni enn eina viku áðrenn landsstýrið góðtók partabrævabýtið, hevði Peter Straarup, stjóri í Danske Bank, upplýst fyri løgmanni, at Føroya Banki ikki hevði bráðfeingis tørv á meira kapitali. Á einum fundi við Fíggingargrunnin 18. august 1993 spurdi løgmaður, um tað varð gjørdur ein vánaligur handil við at keypa Føroya Banka. Tað var sáddur ein ivi, ið støðugt gjørdist størri, og sum seinni endaði við, at ein kanningarnevnd varð sett.

Í skrivi frá 21. september 1993 til Mogens Lykketoft, fíggjarmálaráðharra, setti landsstýrið fram ynski um, at ein óheft kanning varð gjørt av viðurskiftunum í teimum báðum bankunum í tíðini bæði fyri og eftir 6. oktober 1992. Tað helt Lykketoft ikki var nakað gott hugskot. Í einum brævi til løgmann skrivar hann 7. oktober 1993, at tað neyvan er hóskandi at seta eina kanningarnevnd.

Ímeðan høvdu Marita Petersen, løgmaður, og Finnbogi Ísakson, varaløgmaður, vent sær til Landsgrannskoðaran fyri at hoyra hansara meting, um tað var grundarlag fyri at royna at fáa eina kanning setta í verk. Tað helt Landsgrannskoðarin, at tað helst var. Í síni meting frá 24. september 1993 vísti Landsgrannskoðarin á, at landsstýrið møguliga kundi royna at fáa avtaluna millum Fíggingargrunnin og Danska Bank um partabravabýtið ógildaða.

Fleiri grannskoðarar vóru nú komnir á leikvøllin. Við einum uppískoyti til

grannskoðarafrágreiðingina frá 20. september 1993 hevði grannskoðarin hjá Fíggingargrunninum boðað nevndini í grunninum frá, at hann sum liður í fyrisitingargrannskoðanini ætlaði at gjøgnumganga tað tilfar, sum hevði verið grundarlagið undir leiklutinum hjá grunninum í Sjóvinnubankanum og í partabrævabýtinum. Grannskoðarin upplýsti í frágreiðingini, at grannskoðanin ætlaði at taka hetta við í endaligu grannskoðarafrágreiðingina til ársroknskapin fyri 1993.

Fíggingargrunnurin kom kortini ikki at bíða so leingi. Longu 3. oktober 1993 hevði grannskoðarin skrivað frágreiðingina, sum varð send nevndarlimunum í grunninum við skrivi frá 12. oktober 1993. Í frágreiðingini ger grannskoðanin sínar viðmerkingar til grundarlagið undir partabrævabýtinum. Grannskoðanin skrivar, *at det er vor overbevisning, at de fra køberside involverede parter (Finansieringsfonden, det færøske landsstyre og den danske regering) burde have foranlediget sådanne nøjere undersøgelser af de økonomiske forhold i Føroya Banki, som sædvanligvis udføres forinden køb af majoritetsaktieposter i et selskab af den størrelse og art.*

Onkur læt innihaldið í frágreiðingini leka til Sjónvarp Føroya. Tann 26. oktober 1993 varð grannskoðarafrágreiðingin løgd fram til undirskrivingar í nevndini í Fíggingargrunninum, og sama dag sendi sjónvarpið eina sera atfinningarsama sending undir heitinum *Tá Føroya Banki bleiv Føroya banki.* Í sendingini, sum Tróndur Djurhuus legði til rættis, varð endurgivið burtur úr grannskoðarafrágreiðingini.

Tað ber til at ímynda sær, hvørjar viðmerkingar grannskoðanin hevur havt um luttøkuna hjá landsstýrinum í Sjóvinnubankanum. Landsstýrið hevði í 1992-93 veitt Sjóvinnubankanum tilsamans 825 mió. kr., og í oktober 1993 kundi tú óttast fyri, at hesin peningur var mistur. Í Føroya Banka hevði landsstýrið í oktober 1993 einans luttikið við einum umbýti av virðisleysum partabrøvum og einum »ómaksgjaldi« upp á 3 mió. kr. Tað var heppið hjá nevndini í Fíggingargrunninum – og serliga landsstýrinum og stjórnini – at almenningurin ongantíð fekk nakað at vita um viðmerkingarnar hjá grannskoðanini um kapitalinnskotið í Sjóvinnubankan.

## Gørtz-nevndin

Sendingin skapti øsing í Føroyum, og í november 1993 samtykti løgtingið eftir uppskoti frá Sjálvstýrisflokkinum at heita á forsætismálaráðharran um at seta eina serfrøðinganevnd at gera eina almenna frágreiðing. Uppskotið fekk eisini undirtøku í Fólkatinginum, og 16. mars 1994 varð sett *et uafhængigt udvalg af økonomisk sagkyndige, der skal udarbejde en redegørelse for udviklingen i den færøske økonomi, herunder bankerne, gennem 1980'erne til dagen i dag.*

Í nevndina vórðu valdir Erik Gørtz, professari, ið varð formaður, Guðmundur Magnússon, professari, og Eigil Waagstein, varastjóri. Niels Vestergaard, cand. scient. oecon, og Michael Møller, professari, vóru sera væl skikkaðir skrivarar hjá nevndini.

Gørtz-nevndin legði sína frágreiðing fram síðst í august 1994. Tað var ein framúr góð frágreiðing við eini skilagóðari greining av teimum týdningarmestu orsøkunum til kreppuna í Føroyum. Viðgerðin av bankunum er – sum eisini setningurin hjá nevndini gevur eina ábending um – eitt sindur skerd. Nevndin helt, *at resultatet af bankkrisen set ud fra en rimelighedsbetragtning måtte anses for utilfredsstillende* (fyri Føroyar). Nevndin helt sostatt, *at Danmark (Danske Bank og Indskydergarantifonden) var sluppet billigt ud af de færøske bankers krise.* Á hesum grundarlagi metti nevndin, at alt talaði fyri, *at også den danske stat bidrager til den endelige finansiering af tabet ved bankrekonstruktionerne.*

Táverandi formaðurin í Fíggingargrunninum helt, at frágreiðingin varð væl móttikin, meðan Hans Andrias Sølvará í 150 ára minningarritinum hjá løgtinginum skrivar, at í Føroyum var stór ónøgd við Gørtz-frágreiðingina, tí hon ikki staðfesti nakra ábyrgd fyri partabrævabýtinum. Føroyskir politikarar vildu fáa staðfest eina løgfrøðiliga og politiska ábyrgd. Tann 19. januar 1995 álegði løgtingið einmælt landsstýrinum at heita á stjórnina um at seta í verk eina dómarakanning av partabrævabýtinum.

## Kanningaranevndin

Sambært uppskotinum til samtyktar, sum rættarnevndin hjá løgtinginum hevði skrivað 14. januar 1995, skuldi kanningarnevndin kanna leiklutin hjá Forsætismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Ídnaðarmálaráðnum, leiklutin og ábyrgdina hjá Fíggjareftirlitinum, Fíggingargrunninum og Danske Bank, og leiklutin og ábyrgdina hjá stjórnini, nevndini og grannskoðanini í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum. Sambært einum ískoytisáliti frá 19. januar 1994 skuldi leikluturin og møgulig medábyrgd hjá Føroya Landsstýri í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtinum tann 22. mars 1993 eisini kannast.

Stjórnin metti seg ikki vera føra fyri at gera sítt til, at ein dómarakanning varð framd, eftir at Hægstirættur í 1994 hevði tikið fyrivarni fyri, um hann í framtíðini vildi luttaka í dómarakanningum. Sambært Hans Andrias Sølvará trýsti stjórnin síðan ein meiriluta í løgtinginum til at góðtaka eina kanningarnevnd.

Sambært lóg nr. 356 frá 8. juni 1995 setti løgmálaráðharrin eina kanningarnevnd, sum hevði sum setning *at undersøge og klarlægge det samlede begivenhedsforløb i forbindelse med de initiativer, der fra 1992 blev taget for at redde Sjóvinnubankin og Føroya Banki fra økonomisk sammenbrud, og frem til sammenlægningen*




*AT HJÁLPA SÆR SJÁLVUM: En nevnd fekk í 1995 til uppgávu at kanna, um stjórnin hjá Nyrup visti meira um partabrævaumbýtið, enn hon vildi vera við. Óli P. teknaði*

*af bankerne i 1994. Kommisionen skal navnlig undersøge omstændighederne omkring aktiebyttet den 22. marts 1993 mellem Danske Bank og Finansieringsfonden af 1992.*

Í kanningaranevndina vórðu valdir Jørgen Grønborg, advokatur, ið varð formaður, Erik Holst Jørgensen, statsgóðkendur grannskoðari, og Stein Wessel-Aas, bankastjóri. Løgmálaráðharrin tilnevndi Ebbe Mogensen, advokat, til at hjálpa nevndini við avhoyringunum í rættinum. Michael Rekling var avgreiðslustjóri hjá nevndini til tann 5. september 1997, tá hann noyddist at taka eitt fet aftur, eftir at ivi varð sáddur um hansara gegni. Hysteríið var um hetta mundið farið út um alt mark – bæði í Keypmannahavn og í Føroyum. Krøvini, ið vórðu sett Michael Rekling, vóru strangari enn krøvini, ið vórðu sett konu Cæsars í síni tíð.

Eftir lógini tilnevndu løgmálaráðharrin og Føroya Landsstýri hvør tríggjar persónar, sum høvdu til uppgávu at fylgja við kanningini. Løgmálaráðharrin tilnevndi Mette Kofoed Bjørnsen, fyrrverandi formann í Semingsstovninum,

Ove Nathan, professara, og Henrik Otbo, ríkisgrannskoðara. Føroya Landsstýri tilnevndi løgtingslimirnar Helenu Dam á Neystabø og Bjarna Djurholm og Leiv Harryson, landsgrannskoðara. Tað var heppið, at limirnir í fylgibólkinum ikki skuldu lúka vanlig krøv um gegni.

Tann 16. januar 1998 legði kanningarnevndin sína frágreiðing fram. Tað hevði tikið drúgva tíð – hálvt triðja ár – at koma so langt, men nevndin hevði eisini verið víða. Hon hevði gjøgnumgingið skrivligar keldur upp á umleið 100.000 síður og hevði avhoyrt 72 vitnir, harav nøkur vórðu avhoyrd fleiri ferðir. Frágreiðingin hjá nevndini var upp á 1.394 síður, og við henni vórðu lagdar 868 síður við skjølum, sum serliga fevndu um útskriftir frá avhoyringunum í býarrættinum í Keypmannahavn.

Eftir lógini um kanning av føroyska bankamálinum skuldi kanningin *kunne give grundlag for, at det efterfølgende kunne vurderes, om der kunne gøres et retligt ansvar gældende over for involverede myndigheder, virksomheder og personer.* Í síni frágreiðing førir nevndin fram, *at den ikke har taget stilling til de juridiske problemer, som sagen måtte give anledning til, og at den ikke har beskæftiget sig med spørgsmål om eventuelt ansvar eller skyld hos de i sagen involverede personer, myndigheder og organisationer.* Nevndin royndi at javnviga á eini knívsegg, tá hon orðaði sínar niðurstøður frá kanningini. Tað vóru ikki øll, sum hildu, at hon helt javnvágina.

Frágreiðingin var atfinningarsom mótvegis Danske Bank, Fíggjareftirlitinum, Fíggingargrunninum og donsku stjórnini. Nevndin helt, at um ta tíðina, tá partabrævabýtið fór fram, hevði Danske Bank orðað seg um støðuna hjá Føroya Banka á ein hátt, sum kávaði út yvir veruligu støðuna hjá bankanum. Nevndin helt, at Fíggingargrunnurin ikki hevði gjørt tær neyðugu kanningarnar av virðunum í Føroya Banka í sambandi við partabrævabýtið.

Nevndin helt harnæst, at Fíggingargrunnurin og Fíggjareftirlitið høvdu medvirkað til, at politisku myndugleikarnir kundu fáa ta (skeivu) fatan, at tað í sambandi við partabrævabýtið varð framd ein verulig gjøgnumgongd av virðunum í teimum báðum bankunum. Við orðingini í avtaluni um partabrævabýtið, har partarnir (Fíggingargrunnurin og Danske Bank) saman við Fíggjareftirlitinum høvdu gjøgnumgingið ognirnar í teimum báðum bankunum, metti nevndin, at Fíggjareftirlitið og Fíggingargrunnurin høvdu lýst partabrævabýtið sum ein vanligan handil.

Nevndin metti, at danska stjórnin hevði kunnað Føroya Landsstýri ov illa og ov seint, og at stjórnin hevði lagt eitt ósømiligt trýst á landsstýrið. Við frágreiðingini hjá kanningarnevndini á lofti fór andstøðuleiðarin í Fólkatinginum, Uffe Ellemann-Jensen, so langt, at hann vildi hava fíggjarmálaráðharran stevndan fyri ein ríkisrætt fyri at hava framt maktmisbrúk mótvegis Fíggjareftirlitinum. Uffe

Ellemann-Jensen hugsaði tá helst meira um komandi valstríðið enn um føroyska bankamálið. Ellemann-Jensen kann ikki hava kent Eigil Mølgaard, tann máttmikla stjóran í Fíggjareftirlitinum. Eigil Mølgaard var ikki ein maður, sum læt seg hótta.

Tað var spenningur í luftini, tá frágreiðingini hjá nevndini varð kunngjørd fríggjadagin 16. januar 1998 kl. 15 føroyska tíð. Frágreiðingin varð kunngjørd samstundis í Keypmannahavn og í Føroyum, og um kvøldið henda dagin høvdu Danmarks Radio og Sjónvarp Føroya sett eina felags sending á skránna, sum varð send beinleiðis úr Keypmannhavn og úr Vørðsluni í Havn.

## Staðfesting av politiskari ábyrgd

Men stjórnin og landsstýrið høvdu fingið frágreiðingina fyrr um dagin. Í mun til almenningin hevði stjórnin tí ein fyrimun upp á nakrar fáar tímar. Frágreiðingin var heilt atfinningarsom mótvegis leiklutinum hjá donsku stjórnini í málinum, og ikki minst leiklutinum hjá fíggjarmálaráðharranum. Forsætismálaráðharrin hevur uttan iva kent seg vera undir trýsti.

Eftir loysnarorðinum um, at álop er tann besta verjan, sendi Forsætismálaráðið eitt tíðindaskriv út seinnapartin fríggjadagin. Her verður sagt, *at Danske Bank havde givet landsstyret urigtige oplysninger om kapitalforholdene i Føroya Banki, og at Finansieringsfondens formand og Finanstilsynet efter rapporten havde et medansvar for, at der ikke blev givet et dækkende billede af Føroya Bankis situation.* Víðari í tíðindaskrivinum verður sagt: *Det fremgår i øvrigt af rapporten, at hverken landsstyret eller den danske regering var bekendt med, at de oplysninger, der lå til grund for aktiebyttet, ikke byggede på fyldestgørende undersøgelser.* Soleiðis skuldi tað gerast.

Skunddómstólurin varð settur í verk aftur. Líkamikið hvat tú enn helt um hetta sera fløkta málið og tann leiklut, sum ymsir myndugleikar, fyritøkur og einstakir persónar høvdu havt í tí, so mátti tað metast at vera sera undrunarvert, at stjórnin so skjótt var før fyri at fella dóm yvir øll onnur enn seg sjálva. Nyrup offraði Richard Mikkelsen og Fíggjareftirlitið og bjargaði harvið Lykketoft. Gongdin seinnapartin henda fríggjadagin var lítið virðilig.

Tann 27. januar 1998 samtykti ein meiriluti í fólkatinginum eitt uppskot til samtyktar, har tað sera høgliga verður sagt, *at det færøske landsstyre og den danske regering begge havde et ufuldstændigt grundlag for godkendelse af aktiebyttet.* Fólkatingið heitti á stjórnina um í samstarvi við landsstýrið *at undersøge muligheden for at gøre krav gældende over for Danske Bank og at genforhandle den samlede gældsafvikling, så den sker i et rimeligt forhold til færøsk økonomis bærekraft.*

## Landsstýrið stevnir stjórnini

Lagt varð upp til eina bleyta lending. Men tað gjørdist tað ikki talan um. Eitt valstríð í Danmark og eitt í Føroyum órógvaði málið. Í februar skrivaði forsætismálaráðharrin út fólkatingsval at verða 11. mars í 1998. SR-stjórnin undir leiðslu av Poul Nyrup Rasmussen varðveitti valdið. Men tað var um eitt hár gjørt. Tann avgerandi 90. fólkatingssessurin endaði í Føroyum. Hjá Javnaðarflokkinum og Jóannes Eidesgaard.

Tann 26. mars 1998 kom nývalda fólkatingið saman. Fyrst skuldi veljast nýggjur fólkatingsformaður fyri Erling Olsen, sum ikki stillaði upp aftur á valinum. Formansevnið hjá stjórnini var Birthe Weiss, meðan valevnið hjá andstøð-





*Búskaparkreppen í Føroyum í nítiárunum fylti nógv í donskum fjølmiðlum, og eins og í Føroyum fingu blaðteknarar nógv burturúr. Hesar báðar teknaði Roald Als á Politiken*



*Jóhan Páll Joensen*
*1955-*

*Jóhan Páll Joensen er føddur í 1955 í Klaksvík. Hann hevur verið sera virkin í føroyskum vinnulívi, síðan hann sum 14 ára gamal fór til skips við flakatrolaranum Stellu Karinu.*

*Jóhan Páll sigldi við Stellu Karinu, Fjalshamri og Mýlingi, til hann í 1974 fór á sjómansskúla í Havn. Haðani tók hann skipsføraraprógv sum 21 ára gamal í 1977. Eftir lokið prógv var hann stýrimaður á Nónhamri og Froyi, og frá 1979 til 1992 var hann skipari á Vesturvón. Í 1990 tók hann Hægri Handilsskúlaprógv á Handilsskúlanum á Kambsdali.*

*Eftir hálvtannað ár sum stjóri á Handils- og Frystivirkinum var hann frá november 1993 til várið 1998 við til at endurreisa Kósina í Klaksvík sum stjóri og ein av eigarunum. Hann stovnaði í 1998 MARU Seafood, sum gjørdist høvuðseigari í feløgunum Norðís, Eystís, Vestís og Suðurís. Í 2006 gjørdist P/F Kósin partur av samtakinum umframt 6 partrolarar og 2 línuskip.*

*Jóhan Páll Joensen varð valdur í nevndina í Sjóvinnubankanum í november 1993 og gjørdist formaður í Føroya Banka eftir samanleggingina í 1994 til í dag. Hann kom í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 1996, har hann hevur verið formaður síðan 2003.*

uni var Ivar Hansen. Hóast Jóannes Eidesgaard tryggjaði parlamentariska meirilutan hjá stjórnini, so atkvøddi hann ikki, tá nýggjur fólkatingsformaður skuldi veljast. Nú stóðu atkvøðurnar á jøvnum 89-89. Ein kinesiskur vasi og eitt lutakast skuldi avgera valið. Og tað vann Ivar Hansen. Gongdin skapti beiskleika í Sosialdemokratiska flokkinum og førdi til kuril á tráðnum til Føroyar.

Í Føroyum var løgtingsval 30. apríl 1998. Á valinum fingu Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin meiriluta. Skipað varð ein sjálvstýrissamgonga við Anfinni Kallsberg sum løgmanni, og tók hann við løgmansstarvinum eftir Edmund Joensen tann 15. mai 1998.

Í tí vanligu rokanini, sum valstríðið í Føroyum hevði við sær, læt landsstýrið tann 27. apríl 1998 – tríggjar dagar fyri valið – inn stevning móti donsku stjórnini og Danske Bank. Landsstýrið kravdi í stevningini, at teir stevndu í felag skuldu áleggjast at gjalda landsstýrinum 1.185 mió. kr. umframt 333 mió. kr. í rentu. Tilsamans 1.518 mió. kr.

Upphæddin upp á 1.185 mió. kr. svaraði júst til kapitalin, sum Fíggingargrunnurin skeyt inn í Føroya Banka í november 1993. Landsstýrið kravdi sostatt, at henda upphæddin, sum danski staturin hevði veitt landsstýrinum sum

lán til endurfígging av innskotinum, í roynd og veru varð veitt sum fíggjarligur stuðul til Føroyar, ið ikki skuldi rindast aftur.

Eftir at Danske Bank hevði verið noyddur til at avskriva síni partabrøv í Sjóvinnubankanum, varð kostnaðurin fyri Føroya Banka júst 1.185 mió. kr. Landsstýrið kravdi við øðrum orðum at fáa keypspeningin aftur. Men landsstýrið ynskti tó ikki, at handilin skuldi ganga aftur. Og tað hevði helst heldur ikki verið gjørligt. Landsstýrið ynskti sostatt hvørki heilt ella lutvíst at sleppa sínum ognarrætti til Føroya Banka.

## Semjan

Tann 10. juni 1998 gjørdu stjórnin og landsstýrið semju í føroyska bankamálinum. Landsstýrið fekk fult ræði yvir Fíggingargrunninum og Føroya Banka. Staturin avskrivaði 900 mió. kr. av sínum ágóða hjá landsstýrinum, og 500 mió. kr. av restskuldini vórðu endurfíggjaðar við einum rentufríum láni, sum bert skal rindast aftur, um Føroyar innan 2018 fáa inntøkur frá ráevnum í undirgrundini. Landsstýrið gjørdi virðið á avtaluni frá 10. juni 1998 upp til 1,5 mia. kr. Tað var helst ein varislig meting. Við í avtaluni var eisini ein yvirtøka av Framtaksgrunninum og Realinum, sum høvdu danskan kapital upp á tilsamans 540 mió. kr. Av endurgjaldinum upp á 900 mió. kr. játtaði Danske Bank annars seinni at rinda 300 mió. kr.

Sæð við føroyskum eygum mátti semjan metast at vera sera góð. Føroya Banki hevði síðan samanleggingina í 1994 havt eitt avlop upp á 957 mió. kr. fyri skatt, og avsetingar bankans vóru við endan av 1. ársfjórðingi 1998 upp á 1.143 mió. kr. Bankin var komin væl áleiðis við at vinna tapið hjá landsstýrinum aftur. Landsstýrið avskrivaði í 1993 tilsamans 2.386 mió. kr. upp á bankarnar. Við árslok 2004 hevði Føroya Banki síðan samanleggingina havt eitt avlop upp á 2.393 mió. kr. og hevði sottatt vunnið tapið aftur. Og tá varð enntá varisliga mett. Avsetingarkontan, sum nú var komin niður á 465 mió. kr., varð ikki virðissett.

Men í juni 1998 var ongin størri áhugi fyri, hvussu tað gekk í Føroya Banka. Hvørki í Føroyum ella í Keypmannahavn. Føroya Banki hevði í 1997 eitt metstórt avlop upp á 372 mió. kr., og í juni 1998 varð greitt, at bankin stevndi móti einum líknandi avlopi í 1998. Tað var greitt, at hetta kundi órógva grundgevingarnar hjá landsstýrinum. Men heldur ikki stjórnin í Keypmannahavn sýndi áhuga fyri viðurskiftunum hjá bankanum. Tað var brúk fyri at skapa frið í Norðuratlantshavi, og frágreiðingin hjá kanningarnevndini var ein umbering fyri semjuni, sum gjørdi enda á tí rumbli, sum seinastu seks árini hevði verið í ríkisfelagsskapinum. Av og á kundi tað tykjast, sum um føroyska bankamálið als onki hevði við Føroya Banka at gera.

Hans Andrias Sølvará skrivar, at stjórnin vildi sleppa undan einum rættarmáli, sum kundi skaða altjóða umdømið hjá ríkinum. Tað er møguligt. Men kanska er frágreiðingin meira jarðbundin. Kanska snúði hetta seg bert um, at stjórnin, eftir at Ivar Hansen varð valdur til formann í Fólkatinginum, hevði lært at telja upp í 90. Tann 26. juni 1998 skuldi stjórnin hava sín hvítusunnupakka samtyktan í Fólkatinginum. Tað hevði ikki verið gjørligt, um teir báðir føroysku fólkatingslimirnir atkvøddu sum undir formansvalinum. Tá atkvøddi Óli Breckmann saman við andstøðuni, meðan Jóannes Eidesgaard ikki greiddi atkvøðu. Við eini góðari semju við stjórnina sum viðføri greiddu teir báðir føroysku fólkatingsmenninir – ein frá hvørjum parti – ikki atkvøðu, og so var eisini hvítusunnupakkin komin til høldar.

Andstøðan, sum við føroyskari hjálp hevði fingið formanssessin í Fólkatinginum, hevði sett seg sjálva skák og mát. Við sínum hvøssu atfinningum móti stjórnini hevði andstøðan í veruleikanum givið stjórnini ein blankokekk til at gera semju í bankamálinum.

## Politiskt eftirspæl

At skrædlið og endurreisingin av bankunum hevði fingið politiskar avleiðingar, var ongin ivi um. Í semjuni frá 10. juni 1998, sum endaði bankamálið, verður sagt: *Den danske regering har noteret sig, at Færøernes Landsstyre i sin koalitionsaftale har som målsætning at oprette Færøerne som suveræn stat. Regeringen er indstillet på, at der på denne baggrund, og på Landsstyrets foranledning, indledes forhandlinger om Landsstyrets ønsker om et nyt grundlag for de fremtidige bilaterale relationer mellem Danmark og Færøerne. Der er tillige enighed om, at der sideløbende indledes forhandlinger om en overgangsordning, herunder en økonomisk overgangsordning, der tilstræber opbyggelsen af en selvbærende færøsk økonomi.* Men eitt er at boða frá sínum góða vilja, annað er, hvat tú vísir í verki.

Bindingarnar hjá heimastýrinum vórðu sleptar. Allar tær illa lýddu felags yvirlýsingarnar, sum undir kreppuni høvdu avmarkað rásarúmið hjá heimastýrinum, fullu burtur við avtaluni frá 10. juni 1998. Í henni verður sagt, *at den danske regering og Færøernes landsstyre er enige om, at ansvaret for den økonomiske politik på Færøerne ligger hos landsstyret.* Hetta síðsta minti mest um gand, tí líka síðan 1948 hevur búskaparpolitikkurin verið eitt málsøki undir heimastýrinum.

Fullveldissamráðingarnar byrjaðu 17. mars 2000. Tað vóru yvirhøvur teir somu persónarnir – bæði frá danskari og føroyskar síðu – sum í juni 1998 høvdu gjørt semjuna í bankamálinum, ið nú sótu við samráðingarborðið. Frá byrjan var stevið í samráðingunum vánaligt, og tær slitnaðu longu 26. oktober sama ár. Tað var serliga spurningurin um eina búskaparliga skiftisskipan, sum skilti partarnar.

Tað er væl hugsandi, at Nyrup-stjórnin, sum ikki longur var bundin av 90. atkvøðuni í Fólkatinginum, her helt seg hava eina møguleika fyri at gera slætt borð yvir fyri føroyska landsstýrinum. Við einum orðafelli hjá Thomas Nielsen, fyrrverandi LO-formanninum, í huga, kanst tú sita eftir við eini kenslu av, at landsstýrið í juni 1998 hevði *sejret ad helvede til.*

# Endurreisingin

## Trygd

Fram til 1932 var øll føroysk trygging – tá sæð verður burtur frá trimum minni sínámillum sjóvátryggingarfeløgum – á útlendskum og yvirhøvur donskum hondum.

Men tann 4. august 1932 boðaði Thorstein Petersen, advokatur, til fundar í býráðssalinum í Havn við hesi dagsskrá: *Fyrireikingar til stovnan av einum tryggingarfelag.* Á fundinum varð tryggingarfelagið P/f Trygd stovnað. Felagið varð stovnað við einum partapeningi upp á 52 tús. kr., harav tó bert 25 pst. vórðu inngoldin. Hetta var ikki nakað sterkt grundarlag hjá einum felag, sum hevði til endamáls at tekna øll sløg av tryggingum uttan lívstryggingar. Longu í 1934 varð partapeningurin øktur við 48.000 kr., sum allar vórðu inngoldnar.

Eitt eyðkenni fyri alt tryggingarvirksemi er, at feløgini savna kapital. Tryggingargjøldini verða goldin frammanundan. Skaðarnir koma seinni, og í hesum tíðarskeiði ræður felagið yvir peninginum. Tað var málsetningurin hjá stovnarunum, at eitt føroyskt felag kundi gera sítt til, at kapitalurin varð verandi í Føroyum, og at tað á henda hátt bar til at minka um kapitaltrotið, sum eyðkendi støðuna í Føroyum í 1920 og 30-árunum.

Felagið varð stovnað av somu undgangongumonnum, sum tóku stig til at stovna Sjóvinnubankan, og tað var tætt samstarv millum P/f Trygd og bankan. Chr. Holm Jacobsen gjørdist nevndarformaður, og Thorstein Petersen, sum eisini sat í nevndini, gjørdist stjóri í Trygd. Tey fyrstu tvey árini hevði felagið skrivstovu saman við Sjóvinnubankanum, men leigaði felagið sær seinni skrivstovu í bygninginum hjá Chr. Holm Jacobsen fyri 50 kr. um mánaðin.

Í apríl 1940 varð sambandið millum Føroyar og umheimin kvett. Hervið misti Trygd møguleikan fyri at endurtryggja váðan hjá felagnum uttan fyri Føroyar. Fyri at styrkja felagið samtykti aðalfundurin tann 2. august 1940 at hækka partapeningin við 900 tús. kr. Aftur hesuferð vórðu bert 25 pst. inngoldin, og felagið hevði nú ein partapening upp á 1 mió. kr., harav tó bert 286 tús. kr. vóru inngoldnar. Men tað skuldi vísa seg, at alt var til fánýtis.

Við *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Forsikringsvirksomhed* varð við gildi frá 1. apríl 1940 stovnað eitt føroyskt tryggingarfelag, Tryggingarsambandið Føroyar, sum fekk einkarrætt til at tekna tryggingar. Endamálið var *at samle mest muligt af Forsikringsvirksomheden på Færøerne, så længe de nuværende af Krigsforholdene følgende unormale Tilstande vedvarer.*

P/f Trygd, sum ikki ynskti at verða ein partur av Tryggingarsambandinum, fekk í 1940 loyvi til at halda fram við verandi tryggingum, men frá 1. januar

1943 fekk tryggingarsambandið hinvegin einkarrætt at tekna nýggjar tryggingar. Føroyar høvdu fingið eitt tryggingarmonopol, sum skuldi vísa seg at vara í 54 ár. So leingi stóðu tey óvanligu viðurskiftini av krígsávum við. Tú kanst undra teg yvir, hvussu tað bar til at halda einkarrættinum uppi so leingi. Kanska var sambandið millum Tryggingarsambandið og teir politisku myndugleikarnar vorðið ov tæt. Monopolið og løgtingið sótu ov tætt upp at hvørjum øðrum.

Við einkarrættinum hjá Tryggingarsambandinum var virksemið hjá Trygd avmarkað til at endurnýggja gamlar tryggingar. Sum frá leið fækkaðust kundarnir. Teir gomlu doyðu, og ongir nýggir løgdust afturat. Við árslok 1996 var talið av tryggingum hjá Trygd komið niður um 200, og tær vóru annars endurtryggjaðar hjá Føroya Brunatrygging. Tað varð etið burtur av eginpeninginum.

Við lógini um tryggingarvirksemi, sum kom í gildi 1. januar 1997, varð einkarrætturin settur úr gildi. Hereftir kundu øll føroysk tryggingarfeløg og ikki bert tey, sum vóru við í Tryggingarsambandinum, fáa loyvi til at tekna nýggjar tryggingar.




*Nýtt lív varð blást í tryggingarfelagið Trygd í 1997. Felagið varð stovnað longu í 1932. Teir somu, sum stóðu á odda fyri Sjóvinnubankanum, stovnaðu felagið*

## *Trygd aftur virkið*

Nevndin í P/f Trygd avgjørdi í 1997 aftur at gera felagið virkið. Í samráð við Føroya Banka, sum átti 27,8 pst. av partapeninginum og var størsti partaeigari í felagnum, mælti nevndin á regluligum aðalfundi tann 30. juni 1997 til at hækka partapeningin úr 820 tús. kr. upp í 20,5 mió. kr. Partaeigararnir høvdu framíhjárætt at tekna nýggja partapeningin upp á 19,680 mió. kr. Hetta var tó framvegis eitt avmarkað grundarlag samanborðið við gamla tryggingarmonopolið.

Bankin læt FB Holding, sum var eitt óvirkið dótturfelag, veita trygd fyri tekningini. Sum væntað gjørdist trygdin effektiv, og bankin kom sostatt at eiga 16.896.300 kr., ella 82 pst., av partapeninginum í Trygd. Næststørsti partaeigari var Føroya Sjóvátrygging, sum púra óvæntað sera íðið royndi at keypa frammíhjárættin til at tekna nýggjan partapening frá gomlum partaeigarum. Gomlu partaeigararnir fingu tilboð um at selja partabrøvini fyri prísir, sum onki samanhang høvdu við ta støðu, sum Trygd tá var í. Helst hevur Sjóvátryggingin ætlað at tryggja sær sýtingarrætt í avgerðum, sum skuldu takast við kvalifiseraðum meiriluta á aðalfundinum hjá kappingarneytanum. Tað var torført hjá gamla monopolistinum at venja seg við, at tíðirnar vóru broyttar.

Á aðalfundinum í juni 1997 vórðu viðtøkur felagsins broyttar, so tær samsvaraðu við lógina um tryggingarvirksemi. Føroya Banki valdi nýggja nevnd í P/f Trygd. Jørn Astrup Hansen varð valdur til nevndarformann, og Christian Andreasen, advokatur, sum eisini var limur í nevndini, varð settur sum fyribils stjóri. Longu 1. november 1997 tók Chr. C. Nielsen tó við sum stjóri í Trygd.

Tann 1. januar 1998 hevði Trygd fingið tey neyðugu loyvini til aftur at fara undir at reka brunatrygging og aðra trygging av bygningum og leysafæi. Ein samstarvsavtala varð gjørd millum Trygd og Føroya Banka um, at tryggingarnar kundu verða teknaðar í deildum bankans. Fyribils var talan um tryggingar av húsum og innbúgvi. Tann 2. februar 1998 læt Trygd upp í Tórsgøtu 16. Tryggingarmonopolið var nú brotið. Í juli 1998 fekk Trygd eisini loyvi til at tekna ferðatryggingar.

Á heysti 1998 søkti Trygd um loyvi til eisini at kunna tekna biltryggingar og sjóvátryggingar, eins og felagið søkti um at fáa allar avmarkingar burtur í teimum loyvum, sum felagið frammanundan hevði fingið. Tryggingareftirlitið gekk umsóknini á møti treytað av, at kapitalgrundarlagið hjá felagnum varð styrkt.

Fyri at lúka hesa treyt varð í mars 1999 tikin avgerð um at leggja P/f Trygd og P/f FB Holding saman við Trygd sum tað framhaldandi felagið. Við hesum kom eginpeningurin hjá Trygd upp á 48,2 mió. kr. Eginpeningurin var 25 mió. kr., og tiltakspeningurin 23,2 mió. kr. Við samanleggingini av feløgunum kom Føroya Banki at eiga 96,2 pst.

Tann 31. mars 2000 innloysti Føroya Banki í samráð við nevndina í P/f Trygd teir síðstu minnilutapartaeigararnar. Bankin, sum nú átti allan partapeningin, avgjørdi í desember at hækka partapeningin við 15 mió. kr., sum vórðu teknaðar til kurs 400. Við hesum kom partapeningurin upp á 40 mió. kr. og eginpeningurin upp á 110 mió. kr. Trygd hevði nú fingið tað neyðugu fíggjarligu styrkina til at taka kappingina upp við gamla monopolið. Eisini innan sjóvátryggingar.

Tað var ikki ókeypis hjá Føroya Banka at fáa lív aftur í Trygd. Tryggingarsambandið, sum í tíðini við einkarrætti hevði savnað ein ómetaliga stóran eginpening, bjóðaði Trygd at vera vælkomið á marknaðin við at lækka síni tryggingargjøld munandi. Hjá tryggingartakarunum læt Trygd við hesum upp ein heilt nýggjan heim við lægri tryggingargjøldum og kapping um at veita bestu tænastuna. Í 2004 hevði Trygd vunnið sær 17 pst. av føroyska tryggingarmarknaðinum – ein eitt sindur størri part av privata marknaðinum og ein eitt sindur minni part av marknaðinum fyri vinnutryggingar.

## Endurreisingin av Trygd

| *Mió. kr.* | *1998* | *1999* | *2000* | *2001* | *2002* | *2003* | *2004* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld | 5,0 | 10,3 | 17,5 | 32,1 | 41,4 | 50,3 | 58,8 |
| Úrslit av trygging-arvirksemi | -7,6 | -4,4 | -6,2 | -4,4 | -0,7 | -0,7 | 1,4 |
| Rakstrarúrslit | -6,9 | 0,5 | -2,3 | 1,0 | 3,1 | 1,9 | 3,7 |
| Eginpeningur | 52,2 | 52,6 | 110,3 | 111,4 | 114,4 | 116,3 | 120,0 |

Sum tað sæst í talvuni omanfyri, hevði Trygd tey fyrstu seks árini, eftir at felagið varð vakt úr dvala, eitt hall upp á 24 mió. kr. av tryggingarvirkseminum. Tað var av hesi grund, at Føroya Banki í 2000 valdi at innloysa minnilutapartaeigararnar. Bankin átti ein so stóran part av partapeninginum, at minnilutapartaeigararnir ikki høvdu nakra ávirkan, og tí valdi bankin eisini sjálvur at bera útreiðslurnar av at endurreisa felagið.

Rakstrarhallið árini 1998-2003 umboðar eina sera konservativa roknskaparmannagongd. Hetta var ein politikkur, sum Trygd arvaði frá móðurfelagnum. Stovningarútreiðslurnar vórðu sum høvuðsregla avskrivaðar beinan vegin, og avsetingarnar til skaðaendurgjald vóru sera varnar. Rakstrarhallið í Trygd gav kortini bankanum orsøk til at umhugsa støðuna.

Niðurstøðan í bankanum var, at satsingin í Trygd hevði verið rímilig. Í 1997 metti Føroya Banki, at bankin helst var tann einasti, sum kundi bjóða tryggingarmonopolinum av. Gongdin síðan hevur váttað, at tað tap, sum føroyskir borg-

arar máttu bera sum partaeigarar við, at bankin gjørdist ánari av Trygd, vunnu teir fleirfalt aftur við lægri tryggingargjøldum og eini betri tænastu.

## Elektron

Elektron gjørdist síðst í 80- og í 90-árunum eitt evni, sum politisku ljóskastararnir vórðu settir á, og evnið fylti nógv í fjølmiðlunum og í bankanum. Ikki fyrr enn vit vóru komin langt inn í næsta tíggjuáraskeiðið, varð friður aftur um Elektron.

Tað var tann navnframi stjórin í Føroya Banka, Sv. Aa. Nonnegaard-Pedersen, sum í februar 1965 tók stig til tað, sum seinni gjørdist Elektron. Tann 9. september sama ár stovnaðu Tryggingarsambandið, Føroya Sparikassi, Føroya Banki og Sjóvinnubankin felagið. Tað tók tá hálvt annað ár at útvega EDV-útbúnaðin, og ikki fyrr enn á ólavsøku í 1967 kundi trýstast á knøttin, sum læt upp ein nýggjan heim. Nú kundi rentan roknast og afturatskrivast við maskinum. Hetta lætti nógv um arbeiðsbyrðuna hjá starvsfólkunum í bankunum.

Í 1976 fór Elektron undir eitt samstarv við Bankernes EDB Central (BEC) í Roskilde um at menna eina on-line skipan, sum peningastovnarnir tóku í brúk í 1979. Nú varð EDV brúkt til at avgreiða kundan heilt frammi við diskin. Frá kassaavgreiðsluni varð beinleiðis samband til høvuðs EDV-skipanina á Elektron. Nú var ikki longur brúk fyri holingarkvinnunum.

Í samstarvi við Føroya Landsstýri menti Elektron fyrst í 1980-árunum eina heilt framkomna kelduskattaskipan, sum varð tikin í brúk í 1984. Í hesum sambandi gjørdist landsstýrið partaeigari í Elektron. Eisini Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi gjørdust nú – umframt at vera kundar – partaeigarar í Elektron.

Men tað gekk eisini hin vegin. Í 1980 avgjørdi Tryggingarsambandið at útvega sær sína egnu EDV-skipan, og sum frá leið helt samstarvið hjá Tryggingarsambandinum við Elektron uppat. Í 1989 flutti Føroya Banki sínar EDV-uppgávur til BEC, tó so at Elektron varðveitti ein minni part av rakstraruppgávunum hjá bankanum. Hetta førdi til eina stóra óvissu í Elektron. Støðan gjørdist ikki betri, tá Sjóvinnubankin og Føroya Sparikassi í 1992 ikki fjaldu fyri, at teir hugsaðu um tað sama. Á heysti í 1992 fekk Sjóvinnubankin kortini annað at hugsa um.

Landsstýrið fylgdi væl við gongdini. Uttan peningastovnarnar, sum rindaðu 70-80 pst. av føstu útreiðslunum hjá Elektron, hevði landsstýrið komið í eina torføra støðu við skattaskipanini. Saman við Føroya Sparikassa vendi Sjóvinnubankin sær í februar 1993 til landsstýrið við uppskoti um, at partarnir í felag fóru undir eina verkætlan, sum hevði til endamáls at lýsa framtíðar samstarvs-



*Svend Aage Nonne-gaard-Pedersen 1909-1977*

*Svend Aage Nonnegaard-Pedersen vaks upp í Århus. Tá hann var liðugur við skúlagongdina, varð hann útbúgvin í Den danske Landmandsbank og starvaðist hann fyrst í høvuðssætinum í Keypmannahavn og síðan í deildini í Nykøbing Falster.*

*Í 1954 varð Nonnegaard settur sum stjóri í Føroya Banka. Her fekk hann, sum hann sjálvur orðaði tað, síni bestu ár saman við konuni Agnete, ið var útbúgvin bókavørður. Nonnegaard var ein góður stuðul hjá listafólkum, og hann fekk stóran týdning fyri tátíðar listafólkini í Føroyum: Ruth Smith, Stefan Danielsen, Ingálv av Reyni, William Heinesen, Zacharias Heinesen og Janus Kamban, fyri bert at nevna nøkur fá av teimum, hvørs listaverk framvegis prýða bankan.*

*Nonnegaard legði frá sær sum stjóri í Føroya Banka í 1969 og gjørdist pensjónistur. Hann og konan settu seg niður í Ellede, sum er ein lítil bygd við Kalundborg, og har høvdu hjúnini í eina tíð ein antikvariskan bókhandil.*

møguleikar innan Elektron. Hetta førdi til, at landsstýrið og teir báðir peningastovnarnir í framhaldi av aðalfundinum hjá Elektron tann 22. mars 1993 sendu út eitt tíðindaskriv, har partarnir váttaðu, at teir í einum positivum og jaligum anda vildu halda fram við tingingunum um framtíðar EDV-samstarvið. Tann støðuga umrøðan í fjølmiðlunum av viðurskiftunum millum Elektron og bankan fjaraði burtur. Men tað vardi ikki leingi.

Stúranin hjá landsstýrinum um framtíðina hjá Elektron fekk nýtt lív, tá Føroya Banki og Sjóvinnubankin í mars 1993 fingu sama høvuðspartaeigara. Tað var lætt at duga at síggja, at felags ognarrættur lættliga kundi føra til, at teir báðir bankarnir vórðu lagdir saman. Teir høvdu hvør sín EDV-veitara, og tí mátti annar teirra neyðturviliga skifta veitara.

Í august 1993, tá ætlanirnar um samanlegging komu á borðið, vendi Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sær til bankarnar. Hann vildi ikki vakna við kaldan dreym, og hetta var vorðið veruleiki. Hann vildi takast við upp á ráð, og hann minti á áhugan hjá landsstýrinum, sum var, at EDV-uppgávurnar hjá bankunum framvegis skuldu liggja í Føroyum. Bankarnir kundu vissa landsstýrismannin um, at viðurskiftini fóru at verða tikin upp í tingingum við sparikassarnar og landsstýrið, áðrenn nøkur avgerð varð tikin. Men hetta var ikki nóg mikið til at sissa tað politiska umhvørvið.

## *Lóg um privatar skráir*

Í mai 1994 samtykti løgtingið eina broyting í lógini um privatar skráir, sum gjørdi tað ólógligt at goyma og viðgera persónupplýsingar í útlandinum, herundir Danmark. Lógin, sum var ein lex Elektron, hevði eftir øllum at døma til endamáls at gera tað lættari hjá tí samanlagda Føroya Banka at velja EDV-veitara. Hetta var ein greið ábending. Lógin var sera víðgongd og fekk – ikki bert fyri bankan – avleiðingar, sum neyvan vóru tilætlaðar. Eitt samskifti millum partarnar hevði verið betri enn at leggja uppí við lóg. Eitt tílíkt samskifti fingu vit ikki, og bankin varð enntá ikki hoyrdur, tá løgtingið viðgjørdi lógaruppskotið.

Føroya Banki fekk freist til árslok 1995 at fáa viðurskiftini í rættlag. Í desember 1994 segði bankin upp sín limaskap í BEC, og í juni 1995 vórðu allar EDV-uppgávurnar hjá bankanum savnaðar á Elektron. Flytingin av EDV-uppgávunum til Elektron var fíggjarliga og fyrisitingarliga ein sera tyngjandi uppgáva fyri tann nýliga samanlagda bankan. Hinvegin var greitt, at EDV-uppgávurnar skuldu flytast so ella so. Soleiðis sum tað nú gekk, kostaði uppsøgnin av limaskapinum í BEC bankanum 10,3 mió. kr. Tað var ikki sum at siga tað!

Við samanleggingini í 1994 gjørdist Føroya Banki høvuðspartaeigari í P/f Elektron. Við 54,3 pst. av partapeninginum í Elektron kundi bankin avgera alt uttan broytingar í viðtøkunum. Í allari øsingini høvdu ikki øll verið greið yvir hetta. Bankin ynskti hinvegin ikki at sita við ábyrgdini sum høvuðspartaeigari, og í desember 1994 varð ein partaeigaraavtala gjørd við Føroya Sparikassa og Føroya Landsstýri um P/f Elektron.

Í sambandi við, at kapitalurin í Elektron varð øktur, avmarkaði bankin sín ognarpart til 34,3 pst., og við at eiga meira enn ein triðing hevði hann vetorætt. Landsstýrið og Føroya Sparikassi áttu hereftir ávikavist 28,3 og 25,4 pst. Tey írestandi 12 pst. áttu hinir sparikassarnir og tryggingarfelagið. Jørn Astrup Hansen gjørdist nevndarformaður í Elektron, og hann røkti hetta starv, til hann legði frá sær sum stjóri í bankanum á vári 2005. Í august 1995 tók Niels Chr. Nolsøe við sum stjóri í Elektron.

## *MVG-málið*

Í 1993 kom lógin um meirvirðisgjald (MVG) í gildi í Føroyum. Lógin er í høvuðsheitum ein beinleiðis umseting av samsvarandi donsku lógini. Samsvarandi hesum stendur eisini í føroysku lógini, at virksemið hjá bankum og sparikassum er ikki MVG-skyldugt. Peningastovnarnir krevja tí ikki inn MVG. Hinvegin kravdu myndugleikarnir MVG av teimum tænastum, sum peningastovnarnir



*Janus Petersen*
*1959-*

*Janus Petersen er føddur í Tórshavn í 1959. Hann tók studentsprógv í Hoydølum í 1978 og arbeiddi eftir hetta eitt skifti sum lærari í Tórshavnar Kommunuskúla og sum útvarpsvertur. Í 1986 tók hann prógv sum búskaparfrøðingur við lærda háskúlan í Keypmannahavn.*

*Janus Petersen var fulltrúi hjá Danmarks Statistik í 1986, børsanalytikari hjá Carnegie & Co. frá 1987 til 1989 og frá 1989 til 1993 stjórnarskrivari og seinni vinnukundaleiðari hjá BRFkredit, har hann eisini var nevndarlimur. Frá 1993 til 1994 var hann kredittleiðari í Føroya Sparikassa. Í 1992 tók hann enn eitt prógv á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, hesaferð sum løgfrøðingur.*

*Tá bankarnir vórðu lagdir saman 11. apríl 1994, tók Janus Petersen við sum stjóri í Føroya Banka, har hann myndaði stjórnina saman við Jørn Astrup Hansen, forstjóra. Tá Jørn Astrup Hansen fór frá sum forstjóri í mai 2005, gjørdist Janus Petersen forstjóri í bankanum. Hansara mál er at fáa bankan at vaksa á øllum økjum, eisini uttanlands.*

lótu Elektron avgreiða fyri seg. Tað sama var galdandi í Danmark, og bæði peningastovnar og myndugleikar fylgdu væl við gongdini í Danmark.

Í Danmark høvdu felags EDV-fyritøkurnar hjá peningastovnunum stevnt myndugleikunum við kravi um, at peningastovnsveitingar, sum vórðu veittar gjøgnum felags EDV-fyritøkur, áttu at verða frítiknar fyri moms. Henda ósemjan varð avgjørd í desember 1998 til fyrimunar fyri peningastovnarnar. EDV-fyritøkurnar skuldu ikki krevja moms av peningastovnsveitingum, og peningastovnarnir fingu endurgoldið eina milliardaupphædd fyri moms, sum teir høvdu goldið. Elektron og peningastovnarnir vildu hava, at sama rættarstøðan skuldi galda í Føroyum.

Lutvíst var lógin yvirhøvur tann sama, og lutvíst vildi alt annað hava gjørt teir føroysku peningastovnarnar veikari mótvegis útlendsku kappingarneytunum, sum høvdu fría atgongd til føroyska marknaðin. Sjónarmiðið vann ikki undirtøku hjá myndugleikunum, og fyri ikki at missa sín rætt av fyrning stevndi Elektron í februar 2000 Toll- og Skattstovu Føroya. Tann 5. desember 2000 segði Føroya Rættur dóm í málinum til fyrimunar fyri Elektron. Eftir avtalu millum partarnar tók rætturin bert støðu til prinsipiella spurningin. Rætturin avgjørdi, at tænastur, sum Elektron veitti vegna føroysku peningastovnarnar og fyri teirra rokning, ikki eru MVG-skyldugar.

Eftir metingini hjá peningastovnunum var dómurin eitt gott grundarlag fyri eini semju. Peningastovnarnir høvdu eitt dult krav móti Toll- og Skattstovu Føroya upp á 29,3 mió. kr., sum vórðu kravdar í MVG síðan 1993. Hesa upphædd høvdu peningastovnarnir greitt verið til reiðar lutvíst at siga frá sær, um Elektron í framtíðini varð frítikið fyri MVG av veitingum, sum vórðu latnar til og vegna peningastovnarnar. Men ongin semja varð gjørd. Landsstýrið kærdi dómin til Eystara Landsrætt. Heilt óvæntað fyri peningastovnarnar gav landsrætturin tann 18. oktober 2001 Toll- og Skattstovu Føroya viðhald.

Tað er í rættarmálum sum í nógvum ítróttargreinum. Avgerðin verður tikin eftir regluni: best av trimum. Elektron fekk loyvi til at skjóta málið inn fyri Hægstarætt. Her var nakað at fara eftir! Hægstirættur ásetti, at málið skuldi koma fyri tann 4. apríl 2003. Í mars 2003 samdust partarnir hinvegin um at heita á Hægstarætt um at útseta málið til januar 2004. Landsstýrið hevði givið Elektron og peningastovnunum lyfti um, at tað á heysti 2003 fór at leggja uppskot fyri løgtingið um, at tílíkar, serligar EDV-tænastur, ið verða veittar bankum og sparikassum, skuldu verða frítiknar fyri MVG. Hinvegin hevði Elektron givið landsstýrinum lyfti um, at samtykti løgtingið lógaruppskotið, vildi felagið fráfalla sítt endurgjaldskrav og taka málið aftur úr hægstarætti.

Og soleiðis varð. Tann 7. november 2003 legði landsstýrið uppskot fyri tingið um broyting í løgtingslógini um MVG. Uppskotið varð samtykt 1. desember 2003, og lógin kom í gildi 1. januar 2004. Eftir henda dag gavst Elektron við at krevja MVG av tænastum, sum náttúrliga eru partur av banka- og sparikassavirksemi. Og rættarmálið varð lagt niður.

## *GjaldSkipan*

Í mai 2001 samtykti løgtingið lóg um viðgerð av persónupplýsingum. Lógin avloysti 1. januar 2002 lógina um privatar skráir, sum sjey ár frammanundan hevði verið brúkt til at ávirka valið hjá Føroya Banka av EDV-veitara. Uppskotið til nýggju lógina varð sent Elektron og peningastovnunum til hoyringar. Uppskotið gav ikki orsøk til viðmerkingar. Men seinni varð sanniliga grund til at gera viðmerkingar. Tað vísti seg, at rættarnevndin undir nevndarviðgerðini hevði skoytt nakrar sera víðgongdar viðmerkingar upp í lógaruppskotið. Hesar viðmerkingar høvdu greitt til endamáls at stýra virkseminum hjá peningastovnunum.

Eftir lógini skuldi Dátueftirlitið geva loyvi til at flyta persónupplýsingar av landinum.

Landsstýrismaðurin, sum eftir lógini hevði heimild til at áseta nærri reglur um tílíkan flutning, staðfesti 17. desember 2001 eina kunngerð um rættin til at flyta persónupplýsingar av landinum. Kunngerðin kom í gildi 1. januar 2002.




*Gjøgnum Elektron hava føroysku peningastovnarnir samstarvað á fyrimyndarligan hátt um nógvar nýggjar skipanir*

Á heysti 2001 hevði Elektron avgjørt í samstarvi við PBS, har føroysku peningastovnarnir eru partaeigarar, at seta eina nýggja gjaldskipan í verk. Sum ásett varð, søkti Elektron í januar 2002 Dátueftirlitið um loyvi til í samstarvi við PBS at menna og reka GjaldSkipanina. Hetta loyvi fekk Elektron tann 13. juni 2002. Í Elektron høvdu tey grund til at halda, at avgerðin bygdi á gjølla umhugsan, tí eftirlitið hevði brúkt fimm mánaðir til viðgerðina.

Men nú var landsstýrismaðurin á gosi. Fyri opnari mikrofon boðaði hann frá, at hann var ósamdur í avgerðini hjá Dátueftirlitinum, og at hann við eini nýggjari kunngerð – og um neyðugt fleiri – fór at steðga GjaldSkipanini. Tað framgekk av samanhanginum, at landsstýrismaðurin hevði stykni til samstarvið hjá Elektron við PBS, sum sambært landsstýrismanninum var í stríð við politiska viljan.

Landsstýrismaðurin setti sær fyri við eitt høgg at steðga eini ítøkiligari verkætlan hjá eini ítøkiligari fyritøku. Tað kann tykjast, sum um ráðgevararnir hjá landsstýrismanninum høvdu svikið her. Teir áttu at hava sagt landsstýrismanninum, at tílík høgg ikki eru ein viðurkend løgfrøðislig lærugrein. Tann 22. januar 2003 var Løgmáláráðið til reiðar við eini nýggjari kunngerð. Uppskotið varð

sent 16 stovnum og felagsskapum til hoyringar. 15 av teimum tóku í ymsan mun og við ymsum grundgevingum frástøðu frá uppskotinum. Meira kom ikki burtur úr teirri kunngerðini.

Í februar 2003 legði landsstýrismaðurin tó uppskot fyri løgtingið um broytingar í lógini um viðgerð av persónupplýsingum. Uppskotið hevði yvirhøvur sama innihald sum uppskotið til kunngerð, sum hevði verið fyri eini ringari lagnu ein mánað frammanundan. Eftir fyrstu viðgerð varð tað beint í rættarnevndina, men tað kom ikki aftur haðani. Tá løgtingið fór í summarfrí, fall tað burtur.

Men nú tók landsstýrismaðurin málið í egnar hendur. Tann 16. juni 2003 staðfesti hann kunngerð nr. 94 um flyting av persónupplýsingum til útlandið. Kunngerðin, sum kom í gildi 17. juni 2003, hevði gildi frá 1. januar 2002 og avloysti kunngerðina frá 17. desember 2001. Hesuferð var ongin ivi um, hvørjum kunngerðin varð ætlað. Kunngerðin fevndi nú bert um persónupplýsingar hjá peningastovnunum, ið høvdu sum høvuðsendamál og -nyttu at avgreiða peningaflytingar. Soleiðis varð tað gjørt. Tað var óskiljandi, at landsstýrismaðurin eitt nú metti sjúkrakassagjaldið at vera serliga viðkvæmar upplýsingar.

Glantrileikurin tók ongan enda. Tann 6. oktober 2003 sendi Dátueftirlitið Elektron eitt uppskot um avgerð í málinum. Dátueftirlitið boðaði frá, at tað ikki ætlaði at taka aftur loyvið, sum Elektron hevði fingið tann 13. juni 2002 til at samstarva við PBS um GjaldSkipanina. Hetta fegnaðust Elektron og peningastovnarnir um, og teir søgdu eisini frá hesum alment. Tað skuldu teir ikki havt gjørt. Tí fýra dagar seinni boðaði eftirlitið frá, at soleiðis skuldi avgerðin ikki skiljast! Soleiðis sum eftirlitið nú tulkaði sítt egna skriv, var loyvið frá juni 2002 í veruleikanum tikið aftur.

Tann 28. oktober 2003 boðaði Dátueftirlitið so frá, at peningastovnarnir ikki kunnu leggja aðrar og fleiri upplýsingar í GjaldSkipanina enn tær, sum longu tann 28. oktober vóru skrásettar í skipanini. Hetta var ein bumba undir GjaldSkipanini. Elektron, sum ikki metti, at avgerðin hjá Dátueftirlitinum var í samsvari við løgtingslóg um viðgerð av persónupplýsingum, legði tann 30. oktober 2003 málið fyri Føroya Rætt.

Á løgtingsvalinum 20. januar 2004 fekk løgtingið ein nýggjan meiriluta, og 11 dagar seinni varð nýtt landsstýri skipað. Nýggi landsstýrismaðurin í innlendismálum legði á vári 2004 uppskot fyri løgtingið til broytingar í lógini um viðgerð av persónupplýsingum. Tann 17. mai samtykti løgtingið uppskotið, sum hevði við sær eina greiða liberalisering av lógini. Allar lógásettu forðingarnar fyri GjaldSkipanini og samstarvinum hjá Elektron við PBS vórðu tiknar burtur. Eisini hetta rættarmálið kundi leggjast niður.

Atgerðirnar hjá løgtinginum í 1994, sum vóru ætlaðar sum ein verja av Elek-

tron, komu í 2002 meira at minna um eitt kvørkratak. Elektron og peningastovnarnir hildu, at løgtingið var farið ov langt í síni umsorgan. Nýggja lógin frá 2004, sum gav Elektron munandi betri møguleikar at virka, varð tí væl móttikin í peningastovnunum og Elektron.

## Fiskasølan

Millum Føroya Fiskasølu og Sjóvinnubankan, sum við samanleggingini av bankunum kom at eita Føroya Banki, var eitt tætt samband í meira enn hálvthundrað ár. Tað var ein lagnufelagsskapur millum feløgini. Føroya Fiskasøla hevði ein týðandi leiklut í sambandi við endurreisingina av Sjóvinnubankanum í 1951-52.

Fiskasølan, sum kom at eiga ein triðing av bankanum, var tann partaeigarin, sum hevði størstu ávirkanina. Dánjal Niclasen, sum tók við sum nevndarformaður í Sjóvinnubankanum í 1956 eftir J. F. Kjølbro, gjørdist stjóri í fiskasøluni í 1958. Í 1969 tók Birgir Danielsen við sum stjóri í fiskasøluni, og hann tók eisini við sum nevndarformaður í bankanum, tá Dánjal Niclasen doyði í 1971. Frá 1956 til 1992 hevði fiskasølan avgerandi ávirkan í Sjóvinnubankanum.

Spírin til fiskasøluna varð lagdur í 1930-árunum. Eftir at einahandilin var tikin av í 1856, høvdu keypmenn og reiðarar tikið sær av føroyska útflutninginum av saltfiski og klippfiski.

Henda skipan fór fyri bakka í 1930-árunum. Ikki bert lækkaðu fiskaprísirnir, men teir báðir føroysku høvuðsmarknaðirnir í Italia og Spania sviku fullkomiliga. Sum eina avleiðing av abessinsku herferðini samtykti Fólkaforbundið í 1935 at seta altjóða handilsbann í verk móti Italia. Eftir einum degi fall hesin stóri útflutningsmarknaðurin fyri føroyskan saltfisk burtur. Fasistiska stjórnin í Rom svaraði aftur við at leggja hald á pening, sum útlendingar, og herundir føroyingar, áttu til góðar í Italia. Sama skilið var við útflutninginum til Spania, sum varð hart rakt av borgarakrígnum frá 1936 til 39. Tað bøtti tó eitt sindur um støðuna, at staturin yvirtók áognina, sum hald var lagt á í Italia og Spania.

Kappingin um at finna nýggjar keyparar, serliga í Portugal, men eisini í Grikkalandi, hevði við sær, at føroyskir fiskaútflytarar undirbjóðaðu hvønn annan í royndunum at fáa søluavtalur. Útflutningurin gav hall, og staturin mátti koma til hjálpar við at veita studning. Treytin fyri studninginum var, at útflytararnir tóku seg saman í eitt felag, sum fekk einkarrætt til at útflyta salt- og klippfisk. Hetta førdi til, at L/f Føroya Fiskaexport varð stovnað í september 1936. Felagið fekk einkarrætt til at útflyta salt- og klippfisk úr Føroyum. Men Føroya Fiskaexport fekk ikki nakað langt lív. Tá kríggið brast á í 1939, fór føroyski fiskiflotin heldur at sigla við ísfiski til bretska marknaðin. Við hesum fall grundarlagið undir Føroya Fiskaexport burtur, og felagið varð uppleyst í 1942.



*Birgir Danielsen*
*1928-2001*

*Birgir Danielsen varð føddur í Kvívík. Hann tók í 1954 prógv sum civilverkfrøðingur á Danmarks Tekniske Højskole, har hann síðan starvaðist sum undirvísari í trý ár. Í 1958 varð Birgir Danielsen knýttur at Kongaliga Grønlendska Handlinum sum rakstrarverkfrøðingur. Í 1961 fór hann í starv hjá Nestlé samtakinum, har starvaðist hann til 1969, tey síðstu fimm árini í Sveits. Meðan hann búði í Sveits, tók hann eftirútbúgving á IMEDE Business School í Lausanne.*

*Birgir Danielsen, sum frá 1969 til 1991 var forstjóri í L/f Føroya Fiskasølu, var í tíðarskeiðnum frá 1971 til 1992 nevndarformaður í Sjóvinnubankanum.*

*Í valskeiðnum frá 1990-94 umboðaði Birgir Danielsen Fólkaflokkin í løgtinginum.*

## *L/f Føroya Fiskasøla*

Føroyska ferskfiskaævintýrið í Bretlandi gjørdist kortini stutt. Stutt eftir kríggið fóru føroyingar aftur undir at útflyta salt- og klippfisk. Tørvurin á at samskipa útflutningin var tann sami sum fyri kríggið. Í juli 1948 varð L/f Føroya Fiskasøla stovnað. Eins og Føroya Fiskaexport gav landsstýrið Føroya Fiskasølu einkarrætt til at útflyta salt- og klippfisk.

Einkarrætturin førdi til nógv stríð. Landsstýrið vildi hava, at Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag skuldu hava umboð í umboðsnevndini og starvsnevndini hjá Føroya Fiskasølu. Tað vildi fiskasølan ikki vita av, og á vári 1953 segði landsstýrið einkarrættin upp til at fara úr gildi við árslok 1953. Men landsstýrið varð yvirhálað av eini mótuppsøgn, tá fiskasølan við gildi frá 1. juni 1953 avgjørdi at frásiga sær einkarrættin.

Spurningurin er hinvegin eisini, um fiskasølan hevði nakra nyttu av at hava einkarrætt. Fiskasølan varð stovnað sum eitt lutafelag. Reiðaríini og fiskavirkini vóru upprunaligu limirnir í fiskasøluni. Ein og hvør kundi velja at standa uttan fyri fiskasøluna, og limirnir kundu siga sín limaskap upp við eini uppsagnartíð upp á seks mánaðir. Hinvegin hevði ongin krav upp á at gerast limur. Umboðsnevndin tók í hvørjum einstøkum føri støðu til umsóknir um limaskap.

Men við limaskapinum fylgdu nógvar skyldur. Limirnir bundu seg til at selja alla framleiðsluna gjøgnum fiskasøluna, sum hinvegin bant seg til at selja allan fiskin og fiskaúrdráttirnar hjá limunum. Fiskasølan hevði í veruleikanum ognarrætt yvir framleiðsluni hjá limunum. Og sølugjaldið bar ikki til at tingast um.

Tað var 1 pst. fyri saltfisk, 2 pst. fyri rækjur og 3 pst. fyri frystar vørur, líkamikið hvør prísurin var. Hetta gjørdi helst sítt til, at fiskasølan hevði lyndi til at venda sær móti framleiðsluliðinum heldur enn søluliðinum. Felagið fekk eina fatan av, at framleiðararnir vóru kundar hjá felagnum.

Á hesum grundarlagi fekk fiskasølan eina máttmikla støðu í fiskivinnuni og í føroyska samfelagnum. Tá fiskasølan var í hæddini síðst í 80-árunum, stóð hon fyri einum útflutningi upp á 2 mia. kr., sum var tríggir fjórðingar av samlaða føroyska útflutninginum. Men fiskasølan var annað og meira enn bert eitt vanligt sølufelag. Hetta brotið úr 40 ára minningarritinum hjá fiskasøluni er helst ein góð mynd av, hvussu felagið uppfataði seg sjálvt.

*Samstundis sum Fiskasølan syrgir fyri søluni hjá limunum, stýrir hon teirra framleiðslu. Hon gevur boð um, hvat slag af vørum framleiðast skal, og hon gevur boð um, hvussu tær ymsu vørurnar skulu gerast.*

Fiskasølan hevði í stóran mun tað virksemi, sum tú roknar við, at eitt móðurfelag hevur í einum størri samtaki. Veitararnir ella limirnir fingu hvørja viku eitt á conto gjald. Endaliga avrokningin varð gjørd eina ferð um árið, uttan at hugt varð eftir, hvussu góðskan hevði verið á fiskinum. Allir limirnir fingu sama kiloprís.




*Lutafelagið Føroya Fiskasøla hevði sína stórtíð í sjeytiárunum og áttatiárunum, men yvirlivdi ikki kreppuna í nítiárunum*

Farið varð so langt, at allar vørur, sum vórðu framleiddar úr somu rávøru, høvdu sama avrokningarprís. Virkir, ið framleiddu tey dýru fimmpunds fløkini, fingu sama kiloprís sum tey, ið framleiddu í blokk, ið er ein munandi bíligari vøra. *Tá hetta verður gjørt, er tað* – sum sagt verður í minnisritinum – *fyri at stýra framleiðsluni, so hon hóskar til marknaðin og teir sátmálar, sum eru.*

Greitt er, at fiskasølan hevði ein týðandi leiklut á útflutningsmarknaðunum, og at føroyska fiskivinnan kann hava fingið gagn av hesum. Men Ráfiskagrunnurin og fiskasølan høvdu við sær, at reiðararnir og flakavirkini mistu alla kenslu av, hvat vendi upp, og hvat vendi niður á marknaðinum. Prísirnir endurspegl-aðu ikki marknaðarprísirnar. Prísirnir góvu ongi tekin um, at neyðugt var at laga seg eftir prísinum á marknaðinum. Støðan hjá reiðarunum og flakavirkjunum minti ikki so lítið um støðuna, sum ullaframleiðararnir vóru í undir kongaliga danska einahandlinum.

Ráfiskagrunnurin hóraði ikki undan í kreppuni fyrst í 90-árunum. Tað gjørdi fiskasølan, men ikki í tí líki, sum felagið higartil hevði havt.

Skrædlið í Sjóvinnubankanum á heysti í 1992 gav Føroya Fiskasølu eitt skot fyri bógvin. Partapeningurin hjá fiskasøluni í bankanum mátti niðurskrivast til einans 5 mió. kr., og hann varð seinni allur avskrivaður. Í 1992 mátti fiskasølan staðfesta eitt hall upp á 54 mió. kr. Men felagið, ið við árslok 1992 hevði ein bókaðan eginpening upp á 112 mió. kr., hevði – og fekk – aðrar og størri trupulleikar enn bankin.

Grundarlagið undir Føroya Fiskasølu syndraðist. Kreppan hjá limunum gjørdist ein kreppa hjá fiskasøluni. Á heysti 1993 hevði fiskasølan 160 limir. Herav vóru bert 37 virknir, 90 vóru óvirknir, 7 vóru undir trotabúsviðgerð ella undir avtøku, meðan 26 limir høvdu sagt sín limaskap upp til 1. januar 1994. Tiltaksgrunnurin, sum var ein av sterku síðunum hjá fiskasøluni, var vorðin ein hóttan móti felagnum.

Gjøgnum árini hevði fiskasølan afturhildið 1 pst. av søluupphæddini og sett peningin á konto hjá teimum einstøku limunum í tiltaksgrunninum. Reglurnar ásettu, at peningurin skuldi útgjaldast eftir 10 árum, og á kontuni hjá teimum einstøku limunum í fiskasøluni stóð sostatt støðugt ein upphædd, sum svaraði til 1 pst. av umsetninginum seinastu 10 árini. Men segði ein limur sín limaskap upp, fall upphæddin, sum limurin átti í tiltaksgrunninum, til gjaldingar. Teir 26 limirnir, sum høvdu sagt sín limaskap upp, áttu á heysti í 1993 tilsamans 45 mió. kr. í tiltaksgrunninum. Hesa upphædd hevði felagið ikki tøka. Fiskasølan, sum var komin í gjaldføristrupulleikar, var hótt av, at hesir limirnir fóru at krevja felagið á húsagang.

*P/f Faroe Seafood*

Við tí endamáli at verja tiltaksgrunnin avgjørdi umboðsnevndin í fiskasøluni eftir tilmæli frá leiðsluni í felagnum at avhenda ogn og skuld felagsins til nýstovnaða partafelagið Faroe Seafood tann 1. januar 1994. Tiltaksgrunnurin var eftir sum ein skylda í lutafelagnum. Í nevndina í nýstovnaða P/f Faroe Seafood komu Edmund Joensen, Jóhan Joensen, Jóhan Páll Joensen og Frank Uhrenholt. Bankasambondini hjá fiskasøluni, ið vóru Danske Bank, Hambros Bank, Føroya Banki og Sjóvinnubankin, settu Frank Uhrenholt í nevndina, og hann gjørdist nevndarformaður.

Partapeningurin í P/f Faroe Seafood, sum varð settur til eitt virði upp á 25 mió. kr., fall til tað gamla lutafelagið. Í 1994 varð lutafelagið upployst, og partabrøvini í P/f Faroe Seafood vórðu útlutað til limirnar, sum máttu sleppa sínum kravi móti tiltaksgrunninum. Vanliga høvdu bankarnir trygd í tiltaksgrunninum, og sostatt kom Føroya Banki í 1994 í veruleikanum at eiga 80 pst. av partapeninginum í P/f Faroe Seafood.

L/f Føroya Fiskasøla hevði higartil ikki veitt trygd fyri sínum bankalánum. Tá kreppan í Føroyum og í fiskasøluni gjørdist sjónlig í 1993, byrjaðu útlendsku bankarnir at taka seg aftur. Fyri at viðurskiftini millum bankarnar ikki skuldu avlagast, gjørdi fiskasølan í september 1993 eina sonevnda *standstill agreement* við sínar bankar, sum bundu seg til at frysta lánini í 3 mánaðir.

Í hesum tíðarskeiði góðtóku bankarnir at flyta lánini hjá lutafelagnum yvir í P/f Faroe Seafood. Í hesum sambandi minkaði skuldin til Føroya Banka og Sjóvinnubankan við tilsamans 68,5 mió. kr. til 115 mió. kr., meðan Hambros Bank og Danske Bank øktu síni lán við 92 mió. kr. upp í tilsamans 225 mió. kr. Roknað varð framvegis við, at fiskasølan sum drívmegin í føroyska fiskaútflutninginum fór at hava ein sera stóran fíggingartørv.

Meðan útlendsku bankarnir fingu veð í skuldarunum hjá Faroe Seafood, átóku føroysku bankarnir sær ein lutfalsliga størri tapsvanda við at seta helvtina av upphæddini sum ábyrgdarpening. Afturfyri fingu føroysku bankarnir eitt høvuðspant í partapeninginum hjá Fiskasøluni í dótturfelagnum í Grimsby, Faroe Seafood Company Ltd., og í 50 pst. av partapeninginum í P/f Føroya Fiskiídnaður, sum átti 75 pst. av partapeninginum í P/f Havsbrún.

Henda skipan vísti seg seinni ikki at vera til fyrimunar fyri føroysku bankarnar. P/F Faroe Seafood, sum ikki longur eins og í gomlu lutafelagstíðini hevði tryggar veitarar, kláraði ikki skerini. Felagið hevði í 1994 eitt rakstrarhall upp á 20 mió. kr., og bókførdi eginpeningurin var við árslok minni enn 5 mió. kr. Felagið stóð ikki til at bjarga. Ein fyritreyt fyri eini kapitaltilførslu hevði verið, at ognirnar vóru munandi meira niðurskrivaðar, tí tær vóru framvegis bókaðar til

eitt alt ov høgt virði. Mett varð, at ein niðurskriving upp á 50 mió. kr. var neyðug, og Faroe Seafood mátti sostatt metast at hava mist eginpeningin.

Føroya Banki strekti seg sera langt fyri at halda lív í P/f Faroe Seafood. Fyri at tryggja, at raksturin kundi halda fram, og at teir mongu veitararnir, sum áttu pening til góðar hjá felagnum, ikki liðu tap, veitti bankin seint á vári 1995, tá Faroe Seafood ikki longur kundi anda við egnari hjálp, 32 mió. kr. afturat í kreditti við veð í vørugoymsluni.

Bankin boðaði eisini frá, at hann í sambandi við eina endurreising av P/f Faroe Seafood var til reiðar frammanundan at avskriva ábyrgdarpeningin upp á 50 mió. kr., men bankin gjørdi samstundis greitt, at hann undir ongum umstøðum vildi luttaka sum partaeigari í eini endurreistari fiskasølu. Á hesum grundarlagi heitti leiðslan í Faroe Seafood á vári 1995 á  Framtaksgrunn Føroya um at umhuga at seta pening í felagið.

Danska stjórnin og landsstýrið stovnaðu Framtaksgrunnin í november 1994. Grunnurin hevði til endamáls at gera íløgur lutvíst í nýtt ella víðkað vinnuvirksemi í feløgum og projektum, og lutvíst í fyritøkur, sum høvdu verið ígjøgnum eina munandi bygnaðarbroyting ella skuldarumlegging. Framtaksgrunnurin fekk eina dugnaliga nevnd. Stjórnin valdi Niels Kristian Agner, stjóra í Dansk Kapitalanlæg, og Niels Larsen, stjóra í FIH, meðan landsstýrið valdi Heina Fosaa, Richard Thomsen og Sverra Hansen, sum varð valdur til nevndarformann.

Danski staturin fór burtur úr Framtaksgrunninum í 1998. Grunnurin varð lagdur undir vanliga eftirlitið við grunnum, og viðtøkurnar vórðu broyttar, so landsstýrið valdi alla nevndina fyri eitt ár í senn. Grunnurin gjørdist ein politisk kastibløka.

Tað varð lutfalsliga skjótt greitt, at Framtaksgrunnurin ikki var hugaður fyri at seta pening í P/f Faroe Seafood. Formliga fór felagið hereftir tann 7. juli 1995 í gjaldssteðg. Í veruleikanum hevði felagið longu í einar tveir mánaðir verið í einum stillum gjaldssteðgi. Undir navninum Faroe Seafood fór fiskasølan seinni á húsagang. Føroya Banki misti í hesum sambandi 59 mió. kr.

## *P/f Faroe Seafood Prime*

Tann 30. juni 1995 varð ein rammuavtala gjørd millum Framtaksgrunnin, P/f Faroe Seafood og bankasambondini hjá felagnum, sum hevði til endamáls at tryggja tann framhaldandi  raksturin hjá felagnum. Framtaksgrunnurin setti 50 mió. kr. í partapeningi í nýstovnaða felagið P/f Faroe Seafood Prime, sum eftir nærri avtalaðum treytum yvirtók tær góðu ognirnar hjá P/f Faroe Seafood. Føroya Banki veitti nýggja felagnum ein rakstrarkreditt upp á 50 mió. kr. uttan

nakra trygd, og teir útlendsku bankarnir játtaðu at taka sær av at fíggja skuldararnar.

Í nevndina í P/f Faroe Seafood Prime valdi Framtaksgrunnurin Tórmóð Djurhuus, Heina Fosaa, Sverra Hansen, Jóhan Joensen og Jákup Mørkøre. Tórmóður Djurhuus gjørdist formaður og Sverri Hansen næstformaður. Poul Michelsen varð settur sum stjóri í felagnum.

### *Faroe Sefood Co., Grimsby*

Tað førdi til hvassar atfinningar, tá nevndin í P/f Faroe Seafood tann 4. juli 1995 – tríggjar dagar áðrenn felagið fór í gjaldssteðg – seldi partapeningin í Faroe Seafood Company Ltd. fyri 30 mió. kr. til eitt felag, sum Frank Uhrenholt og Jóhan Páll Joensen áttu. Báðir vóru limir í nevndini í Faroe Seafood, og Jóhan Páll Joensen var harumframt formaður í nevndini í Føroya Banka, ið hevði tað avgerandi pantið í partabrøvunum, men sum annars ikki luttók í fíggingini av keyparunum.

Men hald var ikki í atfinningunum. Tað er rætt, at Uhrenholt og Jóhan Páll Joensen vóru ógegnigir, tá teir sum nevndarlimir í P/f Faroe Seafood luttóku í



Eidesgaard í øðini um Grimsby-søluna

Hasir menninir mugu steðgast

– Teir stýrdu Fiskasøluna á heysin
– Teir fóru við virkinum á náttartíð
– Teir gjørdu tað ikki fyri samfelagið
– Aðrir vóru áhugaðir at keypa
– Vit hava tikið upp eftur spekulantum í fimm ár – tað skal ikki endurtakast
– At krevja Jóhan Páll frá í Føroya Banka er tað minsta

síða 12

*Málið um Grimsby-virkið fylti nógv í fjølmiðlunum, og summir politikarar vóru ikki mjúkir at strúka*

søluni av partabrøvunum. Og tað gjørdi ikki støðuna betri, at teir umboðaðu ein meiriluta, eftir at Edmund Joensen í mai 1994 var farin úr nevndini í Faroe Seafood. Men Faroe Seafood var ógjaldført við eini stórari upphædd. Partabrøvini vórðu sett í veð fyri eina upphædd, sum var nógv størri enn teirra virði, og tá bankarnir, sum høvdu veð í partabrøvunum, ikki bert góðtóku søluna, men eisini virkið tóku lut í henni, var ikki grundarlag fyri áskoðanini um, at Uhrenholt og Jóhan Páll Joensen høvdu tikið avgerðir, sum gingu ímóti áhugamálunum hjá felagnum og ognarunum. Bankarnir vóru ikki bert stórir ognarar í P/f Faroe Seafood. Teir vóru eisini teir veruligu eigararnir av partabrøvunum í enska dótturfelagnum. Og bankarnir vóru førir fyri at taka sær av sínum áhugamálum.

Føroya Banki fekk kastað fyri, at hann ikki tryggjaði, at ognarrætturin til Faroe Seafood Company Ltd. varð varðveittur á føroyskum hondum. Til hetta er at siga, at hóast Føroya Banki var talsmaður hjá bankasamtakinum, ið hevði veð í partabrøvunum, so kundi hann formliga ikki taka avgerðir einsamallur. Tað vóru kortini ikki teir útlendsku bankarnir, sum forðaðu fyri, at føroyingar kundu varðveita ognarrættin til virkið í Grimsby. Tað var heilt einfalt ongin føroyskur keypari. Og tað avgjørdi málið.

Framtaksgrunnurin hevði frá byrjan lítlan áhuga fyri felagnum í Grimsby. Grunnurin hevði sett sum treyt fyri at luttaka í endurreisingini, at Faroe Seafood Company Ltd. rindaði eina millumrokning upp á 30 mió. kr., sum felagið hevði við A/S Faroe Seafood Finance, ið var eitt fíggingarfelag, sum var partur av P/f Faroe Seafood Prime. Men Faroe Seafood Company Ltd., sum hevði havt stórt rakstrarhall á vári 1995, var ikki eitt sterkt felag á sumri í 1995. Hambros Bank og Danske Bank veittu tó Faroe Seafood Company Ltd. 30 mió. kr., móti at nýggju eigararnir átóku sær at borga fyri samlaðu skuldini hjá felagnum upp á 70 mió. kr. Nýggju eigararnir bundu seg sostatt fyri 100 mió. kr. í Faroe Seafood Company Ltd. Tað var ein munandi størri upphædd, enn Framtaksgrunnurin kundi og hevði viljað brúkt upp á virkið í Grimsby.

## *Fiskasølan verður løgd saman við Fiskavirking*

Heldur ikki undir nýggja navninum, Faroe Seafood Prime, vann fiskasølan aftur sína gomlu styrki. Felagið fekk sín bana, tá systurfelagið P/f Føroya Fiskavirking í januar 1998 avgjørdi sjálvt at selja sína framleiðslu. Við eitt misti Faroe Seafood Prime 40 pst. av søluni. Tað kundi undra, at Framtaksgrunnurin, sum átti bæði feløgini, ikki beinan vegin gjørdi vart við seg. Og tað kundi hann havt gjørt á so nógvar ymiskar hættir.

Í desember 2001 tók Framtaksgrunnurin kortini stig til at samskipa síni áhugamál í teimum báðum feløgunum. Nevndin í fiskavirking varð eisini vald til

nevnd í fiskasøluni. Men longu eftir níggju mánaðir slepti grunnurin takinum. Fiskasølan fekk í september 2002 aftur eina nýggja nevnd. Hon helt í tvey ár.

Tann 1. januar 2005 vórðu fiskasølan og fiskavirking løgd saman við fiskavirking sum tí framhaldandi felagnum, men undir navninum P/f Faroe Seafood. Tað eydnaðist ikki fiskasøluni at fáa bæði beinini við inn í 21. øld. Eftir 57 ár lá hon eftirá. Bert navnið var eftir.

## Fiskiídnaðurin

Onga aðra staðni í føroyska búskapinum var fíggjarliga skrædlið fyrst í 90-árunum so stórt sum í fiskiídnaðinum. Við árslok 1992 vóru 21 flakavirkir í Føroyum. 20 av teimum vóru farin á húsagang við eini samlaðari skuld upp á umleið 900 mió. kr. Tapini skuldu vísa seg at gerast ovurhonds stór, áðrenn fiskiídnaðurin kom aftur á beint.

Tað stóð tíðliga teimum stóru ognarunum greitt, at eitt nýtt grundarlag mátti fáast til vega, um fiskiídnaðurin aftur skuldi gerast fíggjarliga burðardyggur. Tað stóð somuleiðis ognarunum greitt, at ein endurreising av fiskiídnaðinum mátti samskipast. Trupulleikin var, at tað vóru alt ov nógv flakavirkir í mun til rávørunøgdina. Tað gav onga meining hjá ognarunum at endurskipa eitt flakavirki uttan at vita, hvat fór at henda við hinum 20.

Í einstøkum førum royndu gomlu eigararnir at endurskipa virkini. Men tey uppskot, sum vórðu løgd fyri ognarnarnar, vóru ikki nøktandi. Møguleikarnir og viljin til at gera íløgur var ikki nóg stórur í 1993. Tað var ikki nakað nøktandi grundarlag fyri at gera avtalur við gomlu eigararnar. Tað var eisini óhugsandi, at ognararnir bara endurskipaðu virkini, og at vit so aftur fingu eina alt ov stóra framleiðsluorku. Tí so vórðu tað aftur ognararnir, sum komu at rinda fyri kappingina um tað avmarkaðu rávørunøgdina.

Hóttanin um húsagang gjørdi onga nyttu. Ein húsagangur hevði bert staðfest, hvør av lánveitarunum átti virkið. Keyparar vóru ikki til virkini, og gomlu eigararnir góvu, uttan um fútarættin, veðhavarunum heimild til at selja tey. Lánveitararnir áttu virkini, og lánveitararnir sótu við trupulleikunum. Tað hevði verið ov lætt at fáa almennan studning, og tað hevði verið ov lætt at fáa fígging. Tí hevði fiskiídnaðurin bygt upp eina alt ov stóra framleiðsluorku.

### *P/f Føroya Fiskavirking*

Føroysku bankarnir avgjørdu at ganga saman við donsku realkredittfeløgunum. Í oktober 1993 varð P/f Føroya Fiskavirking stovnað við einum kapitalgrundarlagi upp á 50 mió. kr. Føroya Banki, Sjóvinnubankin, Føroya Sparikassi og

Tryggingarsambandið komu við 10 mió. kr. í part. Fiskasølan luttók við 5 mió. kr., Skipafelagið við 3 mió. kr. og Fíggingargrunnurin við 2 mió. kr. Hetta vísir, at leikluturin hjá Fíggingargrunninum í stovnsetingini av Fiskavirking var stórliga yvirmettir.

Ove Munch, fyrrverandi stjóri í Ídnaðarráðnum, gjørdist formaður í nevndini, og hinir nevndarlimirnir vóru Dánjal Jákup Andreasen, Edmund Joensen, Poul Michelsen og Andreas Lava Olsen. Bjarti Mohr varð settur sum stjóri í felagnum.

Føroya Banki, Sjóvinnubankin, Fiskeribanken, Hypotekbanken, BRF Kredit og Realkredit Danmark lótu felagnum 19 flakavirkir. Samlaða veðskuldin í hesum virkjum var 659 mió. kr. Ognararnir avskrivaðu 319 mió. kr. av skuldini, meðan Fiskavirking yvirtók eina veðskuld upp á 340 mió. kr. Av hesi upphædd vórðu 113 mió. kr. settar sum lán við 1. veðrætti, ið skuldu afturgjaldast eftir 20 árum, meðan 227 mió. kr. vórðu settar sum lán við 2. veðrætti, ið skuldu afturgjaldast eftir serligum treytum. Nógv orka varð brúkt til at semjast um treytirnar fyri lánunum við 2. veðrætti, men tað skuldi seinni vísa seg, at henda orka varð brúkt til fánýtis.

### Fíggjarliga endurreisingin av 19 flakavirkjum í 1993

| *Mió. kr.* | *Skuld* | *1.veðr.* | *2. veðr.* | *Avskrivað* |
|---|---|---|---|---|
| Realkredit (DK) | 140,0 | 78,4 | 26,9 | 34,7 |
| Bankar (FO) | 518,8 | 34,6 | 200,1 | 284,1 |
| Tilsamans | 658,8 | 113,0 | 227,0 | 318,8 |

Áðrenn lánveitararnir kundu býta sól og vind sínámillum, høvdu føroysku bankarnir verið noyddir at yvirtaka frammanfyristandandi veðrættir upp á 10 mió. kr., sum hóttu við at forða fyri, at endurreisingin kom undir land. Umframt veðrættarlánið upp á 235 mió. kr. veittu bankarnir eisini Føroya Fiskavirking kredittir.

Tað eydnaðist ikki Fiskavirking at skapa ein lønandi rakstur. Longu í juni 1995 mátti felagið endurreisast fyrstu ferð. Fyri at rinda hallið avskrivaðu partaeigararnir 25 mió. kr., meðan lánveitararnir avskrivaðu allar eftirstøður av 1. veðrættarláninum og 187 mió. kr. av 2. veðrættarláninum. Men hetta var ikki nóg mikið. Tað varð sum frá leið greitt, at Fiskavirking mátti hava nýggjan kapital, og á sumri 1996 setti felagið seg í samband við Framtaksgrunnin.




*UPPHOPPARAR: Fleiri vístu flakavirkjunum áhuga, tá Føroya Fiskavirking á heysti 1996 fór í gjaldsteðg. Óli P. teknaði*

## *Framtaksgrunnurin yvirtekur Fiskavirking*

Stórur politiskur áhugi var fyri stovnsetingini av Føroya Fiskavirking í 1993. Landsstýrissamgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin skrædnaði upp á hetta málið. Aftur í 1996 var Fiskavirking orsøk til politiskan ófrið. Og aftur var tað Fólkaflokkurin, sum nú var í eini landsstýrissamgongu undir leiðslu av Edmund Joensen, ið sýndi felagnum serliga stóran áhuga.

Í vinnulívinum og í ávísum politiskum flokkum var tað eitt avgjørt ynski um, at ognarrætturin til flakavirkini aftur skuldi spjaðast. Av hesi orsøk tók Framtaksgrunnurin seg í oktober 1996 úr samráðingunum við Føroya Fiskavirking og lánveitararnar. Fiskavirking fór síðan í gjaldsteðg.

Nú vóru møguleikar hjá vinnuni sjálvari at sleppa framat. Men samráðingarnar endaðu úrslitaleysar. Føroya Fiskavirking og lánveitararnir tingaðust við eitt samtak av keyparum. Teir áhugaðu keypararnir vóru gingnir saman í Vinnu-

bólkin, sum gav eitt samlað boð upp á øll flakavirkini. Hetta gjørdi í forhond samráðingarnar truplar, og tá lánveitararnir ikki mettu boðið at vera nøktandi, slitnaðu samráðingarnar við Vinnubólkin í desember 1996.

Nú kom Framtaksgrunnurin aftur á vøllin, og í desember 1996 varð ein avtala gjørd millum grunnin og lánveitararnar. Lánveitararnir yvirtóku 11 av virkjunum, so 8 virkir vóru eftir í Føroya Fiskavirking. Lánveitararnir niðurskrivaðu síðan veðrættarlánið við 106 mió. kr. afturat, so tað kom niður á 44 mió. kr. Tó skuldu lánveitararnir eftir nærri ásettum treytum kunna fáa upp til 15 mió. kr. av einum møguligum avlopi hjá Fiskavirking. Í árunum, sum komu, rindaði Fiskavirking alla hesa upphæddina. Av samlaðu veðskuldini í flakavirkjunum upp á 659 mió. kr. mistu lánveitararnir sostatt næstan 600 mió. kr. Tapið varð nakað minkað, tá hini 11 virkini vórðu seld, men talan var ikki um stórvegis upphæddir.

Partapeningurin í Føroya Fiskavirking varð síðan avskrivaður, og sum partaeigari misti bankin 20 mió. kr. Ein neyðskuldarsemja upp á 25 pst. varð framd, og síðan setti Framtaksgrunnurin 60 mió. kr. í nýggjum partapeningi í felagið. Framtaksgrunnurin treytaði sær, at Føroya Banki uttan trygd veitti felagnum eina samsvarandi upphædd upp á 60 mió. kr. í kassakreditti. Sverri Hansen, formaður í Framtaksgrunninum, gjørdist nevndarformaður í fiskavirking, og Jákup Mørkøre varð settur sum stjóri.

Meinhard Jacobsen tók við sum stjóri í Føroya Fiskavirking í januar 1998 eftir Jákup Mørkøre. Við gildi frá 1. januar 2005 vórðu Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasøla løgd saman undir navninum P/f Faroe Seafood. Samanlagda


Nr. 204 – 23. OKTOBER 1996

John Petersen: Hetta er at misbrúka sína makt:

Føroya Banki spælir hund við Fiskavirking

*Letur Føroya Banki Fiskavirking fara á húsagang, er tað ein spurningur, um vi... ikki eiga at umhugsa at skifta bankaleiðsluna út, sigur landsstýrismaðurin ... fiskivinnumálum*

*Partar av politisku skipanini vildu spjaða Føroya Fiskavirking í smærri eindir í 1996. Føroya Banki var í skotlinjuni sum kreditorur*

felagið, ið Framtaksgrunnurin setti til sølu í oktober 2005, varð í mars 2006 selt til eitt íslendskt-føroyskt samtak.

## Bústaðarmarknaðurin

Í 1970 og 80-árunum vórðu bygd fleiri og størri hús í Føroyum enn árini frammanundan. Og húsini gjørdust dýrari. Í 1980 kostaði tað einar 500 tús. kr. at byggja eitt vanligt sethús. Í 1991 var byggikostnaðurin vanliga hækkaður upp í 1,3 mió. kr. Tann nógv økta byggingin og hækkaðu byggiprísirnir løgdu trýst á fíggingarskipanina.

Fyrr var vanliga sethúsafíggingin, at 40 pst. vórðu fíggjað við einum sparikassaláni við 1. veðrætti og 20 pst. við einum bankaláni við 2. veðrætti. Bankafíggingina veittu P/f Føroya Húsalán og Sethúsabankin, men teir veruligu útlánararnir vóru sjálvsagt bankarnir.

Longu í 1964 vórðu fíggingarmøguleikarnir víðkaðir, tá Húsalánsgrunnurin varð settur á stovn. Hann veitti 20 pst. í láni við 3. veðrætti, men setti tó sum treyt, at hansara veðrættur skuldi vera innan fyri 80 pst. av metingarvirðinum.

Men heldur ikki hetta var nóg mikið. Bankarnir fóru seinni at veita lán við 4. veðrætti, og vanliga vóru teir fýra veðrættirnir býttir sundur í lutfallið 40-20-20-20. Vanliga varð kravt, at tey, sum settu búgv, sjálvi skuldu hava 10 pst. í eginpeningi, men tað hendi av og á, at bankarnir eisini læntu til »eginpeningin«. Í 1991 fóru bankarnir at kappast við sparikassarnar um at veita sethúsalán við 1. veðrætti. Á heysti í 1993 var samlaða veðskuldin í føroyskum sethúsum tilsamans 4,7 mia. kr. Bankarnir fíggjaðu 33 pst., sparikassarnir 49 pst. og Húsalánsgrunnurin 18 pst.

Í Føroyum varð øll sethúsafígging veitt við skiftandi rentu. Húsaeigararnir høvdu tí stóra gleði av rentulækkingini, sum byrjaði í 1983. Men tað var ikki nóg mikið. Tá kreppan rakti Føroyar fyrst í 90-árunum við arbeiðsloysi og stórari fráflyting, fingu nógvir húsaeigarar trupulleikar. Serliga teir, sum høvdu bygt í teimum góðu tíðunum í seinnu helvt av 80-árunum, vórðu hart raktir, tá tíðirnar broyttust.

### *Skrædl á íbúðarmarknaðinum*

Nógv kláraðu ikki at gjalda rentur og avdráttir. Tað var í sær sjálvum ein stórur trupulleiki bæði hjá lántakarunum og lánveitarunum. Men verri var tað, at lántakararnir ikki kundu sleppa sær burtur úr skuldini við at selja húsið. Tær nógv broyttu tíðirnar og tann stóra fráflytingin gjørdu, at íbúðarmarknaðurin kom í ójavna, og hann endaði í einum skrædli.



*Nógv nýggj hús vórðu bygd í sjeytiárunum og áttatiárunum. Í nítiárunum kom kreppan, og hundraðtals hús fóru á tvang*

Tað er ein vælumtókt hugsan, at tað var Fíggjareftirlitið, sum kollrendi íbúðarmarknaðin í Føroyum. Men henda hugsan byggir á eina samanblanding millum orsøk og avleiðingar. Veruleikin er, at Fíggjareftirlitið í september 1993 kravdi, at trygdarvirðið á veðrættunum hjá bankunum skuldi niðurskrivast. Tá bankarnir gjørdu virðið á sínum veðrættum í sethúsum upp, settu teir vanliga virðið á einum sethúsum í Tórshavn til 900 tús. kr. og á bygd til 700 tús. kr. Hesi virðir kravdi Fíggjareftirlitið skuldu lækkast til ávikavist 500 tús. kr. og 400 tús. kr.

Tað er greitt, at tey broyttu trygdarvirðini høvdu við sær stórar avsetingar í bankunum. Men tað var eitt innanhýsis mál í bankunum. Trygdarvirðið av einum veðrætti í sethúsum er jú ikki tað sama sum søluvirðið. Tað vóru ikki avsetingarnar, sum førdu til, at sethúsaprísurin lækkaði. Tað var tvørturímóti príslækkingin, sum førdi til avsetingarnar.

Men tað er kortini sannlíkt, at herdu krøvini hjá Fíggjareftirlitinum til avsetingar og endurreisingin av bankunum í november 1993 gjørdu sítt til at gera støðuna á íbúðarmarknaðinum enn verri.

Tað stutta av tí langa er, at eftirlitið í september 1993 uttan iva fór ov langt. Herdu krøvini frá eftirlitinum førdu til, at avsetingar vórðu gjørdar upp á lán,

sum ikki vóru í eftirstøðu. Tað er ikki vanlig mannagongd í bankum. Tað má tykjast, sum um eftirlitið í september 1993 metti Føroyar sum eitt samfelag, ið var undir avtøku.

Gongdin á íbúðarmarknaðinum førdi til nógv umhugsni í bankanum. Í 1993 var nettofráflytingin úr Føroyum 1.800 fólk, og árið eftir kom talið upp á 1.928 fólk. Eftir tveimum árum vóru 8 pst. av fólkinum flutt av landinum. Í Havn og á bygd var ikki langt ímillum tey tómu húsini. Tað vóru serliga tey tómu húsini, sum fingu prísirnar at fella. Ikki átakið hjá eftirlitinum í bankunum í september 1993.

Við teimum mongu tómu húsunum gjørdist tvingsilssøluvápnið eitt tvíeggjað svør fyri lánistovnarnar. Sjálvsagt kundu lánistovnarnir yvirtaka húsini á eini tvingsilssølu, men ongin var at keypa húsini aftur, og lánistovnarnir høvdu onki ynski um at eiga eina rúgvu av tómum húsum. Tvingsilssølurnar gjørdu tó sítt til, at skrædlið á íbúðarmarknaðinum gjørdist enn størri. Tær mongu tvingsilssølurnar gjørdu, at prísirnir fullu sum ein steinur í vatni. Lánveitararnir høvdu stór tap. Tað sama høvdu teir eydnuleysu húsaeigararnir, sum máttu kasta alt frá sær.

Í 1993 vórðu kravdar ikki færri enn 856 tvingsilssølur, men tó vórðu »bert« 320 framdar. Í tíðarskeiðnum frá 1992 til 97 vórðu framdar tilsamans 959 tvingsilssølur, og av hesum vórðu 125 kravdar av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka. Bankarnir áttu sostatt bara hvørja áttandu tvingsilssølu. Tað vóru ikki bankarnir, sum settu fólk út á gøtuna. Tað vóru lánveitarar, sum høvdu veðrættir frammanfyri bankarnar, og sum høvdu betri trygd, ið fingu bóltin á rull. Í bankanum kundu vit viðhvørt hava ein varhuga av, at lánveitarar, sum sjálvir ikki høvdu nakran tapsvanda, tóku húsaeigararnar sum gíslar, fyri at bankin skuldi missa sítt.

Gongdin var ein hóttan móti fíggjarligu skipanini. Í ringum tíðum sært tú ofta, at tá húsaprísirnir í útjaðaranum eru komnir nóg langt niður, hava fólk aðrastaðni frá áhuga í at keypa. Nakað líknandi hendi av góðum grundum ikki í Føroyum, tí ongin var at flyta í tómu húsini. Heldur ikki vórðu tey tómu húsini í Føroyum – eitt nú sum tað hendi á Bornholm – keypt til summarhús hjá fólki í meginøkinum. Við tí skjótt vaksandi talinum á tómum húsum høvdu tey, sum ætlaðu at keypa sær hús, góðar grundir til at bíða við vón um, at prísirnir fóru enn longur niður. Íbúðarmarknaðurin var á veg inn í eina ónda ringrás.

Nógvir húsaeigarar, sum høvdu lyndi til at halda, at húsalánini ikki vóru ein persónlig skuldarábyrgd, høvdu ikki serliga góðan hug til at renta og avdraga tann partin av skuldini, sum lá uttan fyri søluvirðið á húsinum. Í bankunum var ótti fyri, at støðan kundi enda uttan tamarhald, og at hon kundi føra til eina vanliga gjaldsnoktan. Okkurt mátti gerast fyri at steðga teimum mongu tvingsilssølunum.

### *Fyrsta ognaravtalan*

Við hesum fyri eyga varð ein avtala gjørd tann 30. desember 1993 millum Húsalánsgrunnin, Føroya Sparikassa, Sjóvinnubankan og Føroya Banka. Lánveitararnir lækkaðu rentuna á sethúsalánum og avtalaðu sínámillum at víkja fyri frammanfyri standandi veðrættum, so sethús kundu endurfíggjast við eini longdari avdráttartíð upp til 30 ár. Eisini varð í eitt avmarkað tíðarskeið møguleiki fyri at fáa avdráttarskáa fyri ein part av skuldini.

Eisini avtalaðu lánistovnarnir, at ein peningastovnur, har húsaeigarin var dagligur kundi, kundi gera avtalu um at umleggja lánini, eisini vegna hinar lánveitararnar. Tað grundleggjandi í avtaluni var eins málsviðgerð, og at lánveitararnir sínámillum bundu seg til at víkja, tá ein frammanfyri standandi veðrættur skuldi endurfíggjast. Lánistovnarnir mettu, at rentulækkingin og leingingin av avdráttartíðini gav húsaeigarunum ein árligan gjaldførislætta upp á umleið 100 mió. kr. Avtalan var tíðaravmarkað, og lántakararnir kundu ikki gera avtalur um lætta í skuldini, sum rukku longur enn í 3 ár.

Hetta var tað, sum semja kundi fáast um. Serliga sparikassarnir vóru afturhaldandi, og teir báðir smáu sparikassarnir vóru als ikki við í avtaluni. Hetta var helst grundað á, at sparikassarnir, sum høvdu veitt lán við 1. veðrætti, ikki mettu seg at hava nakran tapsvanda av týdningi. Bankarnir mettu hinvegin, at kom eitt fullkomið skrædl á íbúðarmarknaðinum, so høvdu veðrættarstøðurnar ongan týdning.

Í 1994 fingu 1.200 húsaeigarar síni lán umløgd eftir avtaluni frá 30. desember 1993. Men tað var ein vanlig viðurkenning, at hetta var ikki nóg mikið til at fáa lív aftur í húsamarknaðin. Fleiri politikarar vendu eygunum móti avsetingarkontuni í Føroya Banka. Fatanin tóktist vera tann, at avsetingarnar skuldu avskrivast. Hetta varð eitt sjónarmið, sum veljarunum dámdi væl, men bankin tók ikki undir við tí. Hinvegin var bankin til reiðar at luttaka í teimum neyðugu rentulækkingunum og avtalum um longda afturgjaldstíð.

Á heysti 1994 álegði løgtingið landsstýrinum at virka fyri, at avsetingarnar hjá Føroya Banka upp á sethúsalán vórðu brúktar soleiðis, at tær komu húsaeigarunum til góðar. Á hesum grundarlagi vendi landsstýrið, sum løgtingið hevði givið freist til 1. mars 1995, sær til bankan. Tað var semja millum landsstýrið og bankan um, at tørvur var á at taka fleiri stig fyri at styrkja íbúðarmarknaðin, men tað var eisini semja um, at tørvur var á meira víðgongdum stigum, og at ein generell avskriving av skuldini neyvan kundi metast at vera heppin.

Myndugleikarnir og lánistovnarnir fóru sostatt hvør í sínum lagi undir at taka stig fyri at bøta um støðuna. Løgtingið hækkaði rentufrádráttin av sethúsalánum úr 40 upp í 48 pst., og marginalskatturin á meðal- og háinntøkum varð

lækkaður. Roknað varð eisini við, at kommunurnar við gildi frá 1. januar 1996 kundu lække kommunuskattin, eftir at kommunuskuldin var endurfíggjað.

## *Onnur ognaravtalan*

Tann 8. september 1995 gjørdu peningastovnarnir eina nýggja avtalu um sethúsaskuldina, sum kom í staðin fyri avtaluna frá 30. desember 1993. Nýggja avtalan kom í gildi 1. oktober 1995.

Virðið á sethúsum varð í Tórshavn mett til 650-800 tús. kr., í øðrum býum til 500-700 tús. kr. og á bygd til 400-600 tús. kr. Hesar metingar lógu sostatt nógv omanfyri metingarnar hjá Fíggjareftirlitinum í 1993. Lántakararnir fingu nú møguleika fyri at umleggja tann partin av skuldini, sum lá innanfyri metingina, til lán við føstum gjaldi yvir 30 ár. Skuld omanfyri hetta, sum lántakararnir vórðu mettir at klára at gjalda, varð umløgd til 10 ára seriulán. Tann skuldin, sum so var eftir, varð niðurfryst og rentufrítikin í 5 ár.

Avtalan hjá lánistovnunum og skattapolitisku átøkini vórðu mett at hækka tøka peningin hjá fólki við millum 20 og 25 pst. Talan var um eitt munandi átak. Íbúðarmarknaðurin varð settur í gongd aftur.



*Argja Kommuna var so illa fyri fíggjarliga í 1993, at hon bað um at sleppa í gjaldsteðg*

## Kommunuskuldin

Føroysku kommunurnar settu seg í 1980-árunum í eina sera stóra skuld. Ein stórur partur av skuldini var stutt- og millumfreistað. Tá kreppan brast á í Føroyum í 1992-93, vísti tað seg, at tað ikki longur var møguligt at endurfíggja hesi lán. Ein kommuna fyri og onnur eftir rendi seg fasta. Eftir eini vanligari meting høvdu tær flestu kommunurnar helst kredittvirði, men næstan allar vóru komnar í gjaldføristrot. Fyrst í 90-árunum var tað so at siga ógjørligt hjá eini føroyskari kommunu at fáa lán. Í 1993 var støðan ótolandi. Ruskið varð ikki heintað, gøtuljós vóru sløkt, og dagrøktarmammurnar fingu ikki løn.

Argja kommuna heitti í oktober 1993 á skiftirættin um at fáa loyvi til at fara í gjaldsteðg. Hesa áheitan gekk skiftirætturin ikki á møti. Kommunan skeyt úrskurðin inn fyri Eystara Landsrætt, sum gav skiftirættinum viðhald. Reglurnar í konkurslógini um gjaldsteðg vóru ikki gjaldandi fyri kommunur. Hetta mátti kommunan lata sær lynda, hóast Argja kommuna leyk øll verulig – men ikki formlig – krøv fyri at fara á húsagang.

Tær føroysku kommunurnar høvdu á heysti 1993 eina samlaða skuld upp á næstan 2 mia. kr. Herumframt høvdu kommunalu og interkommunalu feløgini eina skuld upp á 0,5 mia. kr. Minni enn helvtin av skuldini mátti metast at vera langfreistað.

Føroya Kommunufelag og tær størstu kommunurnar, sum høvdu tikið seg saman í Føroyska Kommunubólkin, bjóðaðu tann 6. oktober 1993 Tryggingarsambandinum, Føroya Banka og Sjóvinnubankanum til fundar at tosa um kommunuskuldina. Kommunurnar vildu hava føroysku lánveitararnar at luttaka í eini endurskipan av kommunuskuldini, fyrst og fremst við at leingja afturgjaldstíðina og at lækka rentuna. Landsstýrið hevði frammanundan mælt bankunum til at tosa við kommunurnar.

Umleið helvtin av kommunuskuldini var lænt uttanfyri Føroyar, og bankarnir gjørdu á fundinum greitt, at neyðugt var, at ein endurfígging av kommununum mátti fevna um allar lánveitarnar og ikki bert teir føroysku.

Kommunurnar heittu síðan á landsstýrið um at taka málið um kommunuskuldina upp í samráðingum við donsku stjórnina. Tað hevði landsstýrið ikki nakran serligan hug til, og tað var væl skiljandi. Í avtaluni millum stjórnina og landsstýrið frá 12. oktober 1993 stendur stutt um kommunurnar, *at Færøernes landsstyre vil tage initiativ til en forenkling af kommunestrukturen og til at stabilisere kommunernes økonomi uden at belaste landskassen.*

*Endurfíggingaravtalan frá 1995*

Seinni á heysti 1993 varð ein arbeiðsbólkur settur við umboðum fyri kommunurnar og tveimum umboðum fyri bankarnar. Bólkurin fekk til uppgávu at fyrireika samráðingar við ognararnar um eina endurfígging av kommunuskuldini. Longu tá gjørdu bankarnir greitt, at teir kundu ikki átaka sær at standa á odda fyri samráðingunum uttan so, at teir frammanundan fingu eina greiða samráðingarheimild bæði frá kommunalu felagsskapunum og landsstýrinum.

Bankarnir høvdu eisini gjørt kommununum greitt, at teir mettu tað nyttuleyst at venda sær til ognararnar um eina samlaða endurfígging av kommunuskuldini, uttan so at kommunurnar vóru til reiðar at átaka sær eina ávísa solidariska ábyrgd fyri skyldunum. Bankarnir mettu, at hetta var ein fyritreyt fyri at kunna fáa eina avtalu, sum eisini fevndi um tær kommunurnar, ið vóru ringast fyri.

Kommunernes Landsforening í Danmark gjørdi í mai 1994 eina frágreiðing um skuldartrupulleikarnar hjá kommununum. Frágreiðingin, sum varð løgd fyri kommunurnar og landsstýrið tann 1. juni, prógvaði greitt, at tørvur var á eini endurfígging av skuldini. Sjálvt um kommunurnar fingu eina sera góða skuldaravtalu, tóktust nakrar kommunur kortini at hava smáar møguleikar fyri at koma burtur úr trupulleikunum. Fíggjarliga virkisfrælsið fór at vera so avmarkað, at tað kommunala sjálvræðið fór at vera ein hvørvisjón.

Á hesum grundarlagi metti Kommunernes Landsforening, at ein endurskipan av kommununum átti at verða umhugsað. Við størri kommunalum eindum, eini varisligari kommunalari útjavningarskipan og við eini góðari skuldaravtalu, varð mett, at kommunurnar høvdu møguleika fyri at lækka skattin og at menna tað kommunala sjálvræðið.

Í mars 1994 fekk bankin eina samráðingarheimild frá Kommunufelagnum og Kommunubólkinum, og landsstýrið mælti bankanum til at taka av. Á sumri 1994 bjóðaði bankin teimum størru lánveitararunum til fundar at viðgera kommunuskuldina. Men tað gekst ikki sum ætlað. Serliga teir útlendsku lánveitararnir høvdu torført við at skilja, at tað bar til at tapa pening upp á eina kommunu. Nakrir lánveitarar fjaldu ikki fyri, at teir spekuleraðu í bara teir bíðaðu nóg leingi, so fór landsstýrið ella danska stjórnin at leggja upp í og hjálpa lánveitarunum úr knípuni.

Í oktober 1994 góvu donsku realkredittstovnarnir eitt felags svar. Stovnarnir vildu leingja avdráttartíðina innan karmarnar á realkredittlógini og eftir marknaðartreytum. Um allir lánveitararnir høvdu somu støðu, fór ikki at verða gjørligt at útvega kommununum tað neyðuga rásarúmið. Í november 1994 eydnaðist tað kortini Føroya Banka at vinna undirtøku fyri einum semingsuppskoti: Lánveitararnir skuldu eftir hesum uppskoti sjálvir velja, um teir vildu umleggja



*Landsstýrið ásetti í 2000, at kommunur við skuld størri enn eina álíkning kundu ikki seta seg í størri skuld uttan við loyvi frá landsstýrismanninum*

síni lán til *annaðhvørt* eitt 5-ára avdráttarfrítt lán við fastari rentu upp á 9 pst. *ella* eitt 5-ára lán til rentuna á peningamarknaðinum umframt 1 pst, men tó so, at bruttorentan ikki mátti fara upp um 10 pst.

Endurfíggingaravtalan minti um ein 5 ára avdráttarskáa, og ein nýggj avtala mátti tí gerast, áðrenn henda avtalan fór úr gildi. Donsku realkredittfeløgini lótu eisini upp fyri tí møguleika, at kommunurnar sum ein annan møguleika kundu velja beinan vegin at gera endaligar avtalur um at umskipa skuldina til lán yvir 30 ár við einum gjaldi upp á í mesta lagi 10 pst. um árið.

Afturfyri avtaluna skuldu kommunurnar í felag veita eina trygd, sum var avmarkað til 5 pst. av samlaðu skuldini, ið varð endurfíggjað. Við løgtingslóg høvdu kommunurnar fingu skyldu til at inngjalda 1 pst. av skattainntøkuni í ein kreppulánsgrunn, og hesin grunnur skuldi stigvíst yvirtaka trygdarveitingina, sum kommunurnar settu. Kommunurnar skuldu herumframt geva lánveitarunum transport í skattainntøkuni, og Føroya Gjaldstova skuldi umsita transportin.

Í januar 1995 høvdu ognarar, sum umboðaðu 99,5 pst. av samlaðu kommunuskuldini, boðað Føroya Banka frá, at teir góðtóku uppskotið. Bert tveir ognarar, sum áttu 10 mió. kr. til góðar, vildu ikki vera við. Bankin metti seg hereftir

at hava loyst sín part av uppgávuni, og tað varð latið upp í hendurnar á Halgir Winther Poulsen, advokati, kommunalu felagsskapunum og landsstýrinum at skriva tey neyðugu skjølini í málinum.

Við støði í avtaluni, sum Føroya Banki hevði tingað seg fram til við lánveitarnar, varð á vári 1995 gjørd semja um eina rammuavtalu, sum skipaði viðurskiftini millum kommunurnar og lánveitararnar. Lánveitararnir vórðu kunnaðir um avtaluna á fundi í Tórshavn tann 31. mai og í Keypmannahavn tann 2. juni. Tikið varð væl ímóti uppskotinum, og nú varð gjørt klárt til seinasta dansin.

Men mistilteinurin var ikki tikin í eið. Nú tóku heilt óvæntaðir trupulleikar seg upp. Landsstýrið og danska fíggjarmálaráðið høvdu veitt trygd fyri einum parti av lánunum, sum KommuneKredit hevði veitt teimum føroysku kommununum. Og nú boðaði danska fíggjarmálaráðið frá, at tað sum veðhaldari ikki kundi luttaka í avtaluni uttan so, at allir lánveitararnir luttóku í endurfíggingini. Fíggjarmálaráðið var í ferð við at geva tveimum lántakarum, sum bert áttu $^1/_2$ pst. av samlaðu skuldini, vetorætt. KommuneKredit boðar seinni frá, at tað var til reiðar at luttaka, um landsstýrið vildi átaka sær allan tapsvanda, sum ein endurfígging kundi geva KommuneKredit. Tað vildi landsstýrið ikki, og tað var væl skiljandi. Nú stóð aftur í botni.

Tað eydnaðist kortini at fáa semju um at broyta ábyrgdarskjalið, so at KommuneKredit eisini kundi luttaka í endurfíggingini, og í oktober 1995 varð avtalan undirskrivað og sett í verk. 42 kommunur, 2 kommunal feløg og 29 ognarar við einum samlaðum ágóða upp á 1,8 mia. kr. luttóku í avtaluni. Parturin hjá Føroya Banka var upp á tilsamans 365 mió. kr. Ein ómetaliga torfør uppgáva var umsíðir loyst.

Endurfíggingin av kommunalu skuldini fekk ta ætlaðu ávirkanina. Kommunurnar loystu gjaldføristrupulleikarnar og kundu aftur ráða í egnum húsi. Fleiri kommunur vóru førar fyri at lækka skattin, og kommunurnar kundu aftur geva sítt íkast til endurreisingina av føroyska búskapinum. Tá 5-ára avtalan gekk út 1. desember 2000, høvdu kommunurnar niðurgoldið skuldina við 550 mió. kr. til 1,25 mia. kr. Umframt tær 100 mió. kr., sum vórðu inngoldnar í felagskommunala veðhaldsgrunnin, høvdu kommunurnar spart upp 300 mió. kr. í tøkum gjaldføri. Framgongdin í búskapinum í seinnu helvt av 90-árunum hevði eisini við sær, at skattainntøkurnar hjá kommununum øktust munandi: úr góðum 500 mió. kr. í 1994 upp í meira enn 800 mió. kr. fimm ár seinni.

## *Endurfíggingin í 2000*

Landsstýrið ynskti at halda fast í góðu gongdini, og í kommunustýrislógini frá 17. mai 2000 varð ásett, at kommunur við skuld størri enn eina álíkning kundu

ikki seta seg í størri skuld uttan við loyvi frá landsstýrismanninum. Somuleiðis samtykti løgtingið á vári 2000 at veita teimum kommununum, sum vóru ringast fyri, 67 mió. kr. til at niðurgjalda skuld við. Ongin kommuna hevði hereftir eina skuld, sum var størri enn tríggjar álíkningar. Landsstýrið og Kommunali Veðhaldsgrunnurin rindaðu í felag tær 67 mió. kr. Luttøkan hjá veðhaldsgrunninum kundi minna um ognartøku. Nevndin í grunninum mótmælti, og landsstýrið varð seinni stevnt í málinum.

Í Føroya Banka var fatanin, at Kommunali Veðhaldsgrunnurin nú kundi verða upploystur, og at kommunurnar hvør sær kundu gera avtalur við ognararnar. Bankin bjóðaði sær kortini til at kanna møguleikarnar fyri at leingja felags endurfíggingaravtaluna frá 1995, tó so at atlit vórðu tikið til tær royndir, ið vórðu gjørdar hesi árini, og til tey munandi bøttu útlitini hjá føroyska búskapinum.

Fyrr í 2000 hevði Anfinn Kallsberg, løgmaður, tó biðið Landsbanka Føroya og Sp/f J.S.S Consult um at gera eitt uppskot til eina felags endurfígging av kommununum. Landsbankin og J.S.S. Consult høvdu ávikavist Unibank og Abn-Ambro Bank sum ráðgevarar. Hetta mátti vekja undran. Fíggingarstovnarnir í Føroyum stóðu í 2000 at bresta av gjaldføri. Hví var so neyðugt at fara til útlandið? Helst óttaðist løgmaður fyri, at serliga tær veikastu kommunurnar kundu fáa trupult við at endurfíggja skuldina til nøktandi treytir. Men var hesin ótti grundaður, var tað trupult at skilja, at vegurin til at loysa henda trupulleika skuldi vera at útgjalda verandi lán fyri tíðina.

Løgtingið samtykti tó, at veðhaldsgrunnurin ikki skuldu upploysast. Seinni avgjørdi landsstýrið, at stovnsfæið burturav skuldi brúkast sum trygd til Unibank, sum í samstarvi við landsbankan endurfíggjaði nakrar av teimum fíggjarliga veikastu kommununum. Tó fingu tær kommunurnar, sum ikki luttóku í fíggingini hjá Unibank, í 2000 útgoldið helvtina av tí, sum tær áttu í veðhaldsgrunninum.

Landsstýrið legði seg í 2000 út í endurfíggingina hjá kommununum á ein hátt, sum var sera kappingaravlagandi, og tað var torført at skilja, hví landsstýrið fór so nógv upp í hetta málið. Verkætlanin kom mest at minna um eitt stuðulstiltak til frama fyri Landsbanka Føroya. Í 2005 varð tann síðsti peningurin í Kommunala Veðhaldsgrunninum útlutaður til veruligu eigararnar, sum vóru kommunurnar. Undantaksstøðan hjá kommununum, sum hevði vart í 10 ár, var umsíðir sett úr gildi.

# Eftirskrift

Tá tað styttist til samanleggingina av teimum báðum bankunum á vári 1994, skeyt Fíggingargrunnurin frá 1992 upp, at skipað varð fyri eini navnakapping.

Metingin var, at nøvnini *Sjóvinnubankin* og *Føroya Banki* vóru slitin eftir skrædlið í bankunum í 1992-93. Harumframt høvdu bankarnir eisini gjøgnum árini kent hvønn annan sum fremstu kappingarneytar og ikki sum samstarvsfelagar. Tað var tí ikki nøkur sjálvfylgja at taka annað navnið fram um hitt. Sjóvinnubankin royndi at slætta sjógvin á vári 1994. Bankin gav sínum nýggju starvsfeløgum úr Føroya Banka eitt Sjóvinnubankaslips sum gávu. Tær næstu vikurnar gingu medarbeiðararnir í Føroya Banka við síðum slipsi, so teir kundu stappa búmerkið hjá Sjóvinnubankanum niður í buksurnar.

Neyðugt varð við einum nýggjum navni. Ein dómsnevnd við Jógvan Jespersen, Jóan Paula Joensen og Jørn Astrup Hansen – teir somu, sum hava havt ábyrgdina av hesum bókaverki – fekk 630 ymisk uppskot at velja ímillum. Nevndin valdi trý nøvn burtur úr: Atlantsbankin, FR-bankin og Eindarbanki Føroya. Hesi lógu leingi á borðinum, men vórðu so vrakað eitt fyri og annað eftir. Atlantsbankin tyktist eitt sindur uppgjørt. Tað var eisini eitt uppskot um, at bankin skuldi eita Bankin fyri Atlantshavið og økið uttanum. FR-Bankin tyktist heldur kynsleyst, og Eindarbanki Føroya skapti kanska eina hugmynd av planbúskapi og samvinnufeløgum. Stjórin í Sjóvinnubankanum var heitur fyri navninum Varðabankin, men tá hann hugsaði seg um, kom bankin á donskum at verða nevndur Varde Bank. Og tað var ikki so heppið. Danski Varde Bank, sum var 9. størsti bankin í Danmark, mátti á heysti 1993 undir óhepnum umstøðum lata sítt sjálvræði frá sær.

Nú vóru góð ráð dýr. Bert fáar tímar áðrenn aðalfundin tann 11. apríl 1994 avgjørdi nevndin í Sjóvinnubankanum, sum helt fram í tí samanlagda bankanum, at bíta høvdið av allari skomm. Tann framhaldandi bankin, Sjóvinnubankin, broytti navn til Føroya Banki. Tað var sjálvsagt ein røtt avgerð. Sverre Olsen, íspegilin í nevndini, royndi at sameina tey ymsu sjónarmiðini. Tað er, sum hann segði, jú ikki navnið, sum merkir barnið, tað er barnið, ið merkir navnið.

Í eini viðurkenning av, at ein má kennast við sína søgu, samtykti aðalfundurin at nevna samanlagda bankan fyri Føroya Banki. Takast mátti við arvi og skuld. Og tað er ikki minst galdandi fyri ein banka.

Henda uppfatan hevur merkt valið á evnum í fyrra parti av bókini, sum er um søguna hjá bankunum, Føroya Banka og Sjóvinnubankanum, í 100 ár. Málið hevur ikki verið at skriva *søguna* hjá bankunum, men heldur at skriva nakrar *søgur* um bankarnar, sum høvundurin hevur valt eftir síni egnu subjektivu meting.

Tað er greitt, at bankakreppan, sum var í hæddini í 1992-94, er komin at fylla nógv. Skrædlið hevði ómetaliga stórar og søguligar avleiðingar, og høvundurin hevur havt møguleika fyri at geva víðari eina beinleiðis vitan – eina innherja útgávu. Tað er greitt, at føroyska bankamálið, sum stjól politisku dagsskránna í árunum 1995-98, og sum fekk víðfevndar avleiðingar í dansk-føroysku viðurskiftunum, somuleiðis er komið at fylla nógv. Gamaní var pallurin í bankamálinum ikki í bankanum, men tað snúði seg tó um bankarnar, sjálvt um tú av og á kundi ivast í tí.

Høvundurin hevur somuleiðis valt at gera lutfalsliga nógv burtur úr vanlukkuligu støðuni hjá Sjóvinnubankanum í fyrru helvt av 1950-árunum. Hetta er ein tilburðargongd, sum higartil er sera avmarkað lýst. Men fyrra helvt av 1950-árunum, har ikki bert skrædlið hjá Sjóvinnubankanum, men eisini læknastríðið í Klaksvík fór fram, er ein týðandi partur av tí nýggjaru føroysku søguni. Helst er tað atlit til persónar, sum fyri langari tíð síðan eru farnir, og sum ikki í dag kunnu siga sína søgu, sum hevur havt við sær, at so lítið hevur verið gjørt við hetta millumstykkið í søguskrivingini.

Eftir metingini hjá høvundanum er hetta eitt misskilt atlit, sum bókin vónandi eisini vísir. Sjóvinnubankin varð stovnaður og stjórnaður av persónum, hvørs drívmegi var at skapa einar sterkari og meira óheftar Føroyar. Ein týdningarmikil fyritreyt fyri hesum var at styrkja høvuðsvinnuna, fiskivinnuna.

Tær góðu tíðirnar undir seinna heimsbardaga høvdu havt við sær, at ómetaliga nógvur kapitalur varð savnaður í Føroyum. Men tá kríggið var av, høvdu Føroyar ein niðurslitnan flota, sum eisini var nógv minkaður av krígsávum. Tey fyrstu árini eftir kríggið var Sjóvinnubankin drívmegin í eini útbygging av trolaraflotanum. Lokið varð tikið av kassanum. Trolarar vórðu keyptir fyri tað stóra innlánsavlopið. Men trolararnir komu í ódnarveður og kollsigldu fíggjarliga. Í 1951 tóku teir Sjóvinnubankan við í fallinum. Høvundurin hevur roynt at seta skrædlið í Sjóvinnubankanum inn í tann stóra samanhangin, sum tað var ein partur av.

Tá litið verður aftur á gongdina, má ásannast, at leiðslan í Sjóvinnubankanum í síni stremban eftir at menna fiskivinnuna gekk ov langt. Hon bleiv burtur í hesi gongdini og setti ikki bert peningin hjá partaeigararunum í váða, men eisini peningin hjá innlánarunum. Tað má ein bankaleiðsla ongantíð gera. Og tað bleiv leiðslan dømd fyri. Men Sjóvinnubankin varð ikki leiddur av ivasomum monnum, sum brúktu bankan til egið gagn. Tvørturímóti. Leiðslan stóð saman við bankanum í váða og vanda á ein tílíkan hátt, sum vit helst sjáldan hava sæð.

Bankar liva ikki í síni egnu verð, sjálvt um nøkur halda tað. Tá Sjóvinnubankin kom í trupulleikar á heysti 1992, segði Birgir Danielsen, nevndarformaður, at bankarnir eru ein spegilsmynd av samfelagnum. Ein eygleiðari, sum

eftir øllum at døma ikki var heilt samdur í hesum, helt, at samfelagið heldur var ein spegilsmynd av bankunum. Sannleikin er helst at finna eitt stað ímillum. Fram til árslok í 1993, tá banka- og sparikassalógin varð broytt, fyltu bankarnir ómetaliga nógv í føroyska samfelagnum. Tað er greitt, at bankarnir vóru førir fyri at ávirka samfelagið, men líka so greitt er tað, at bankarnir verða ávirkaðir av gongdini í samfelagnum.

Bankarnir steðgaðu upp í 1992, tá vinnulívið og restin av samfelagnum hevði rent seg fast. Politisku myndugleikarnir høvdu við skilaleysum studningi til fiskivinnuna og við uttan hógv at veita landskassaveðhald sett búskaparligu tyngdarlógirnar úr gildi. Úrslitið var ein brádligur vøkstur í íløgunum, sum var uttan tamarhald, og sum koyrdi bæði samfelagið og bankarnar um koll, tá peningurin var uppi. Men bankarnir vóru ikki bert ósek offur. Teir vóru farnir alt ov lætt um sína lánveiting. Og teir høvdu við einum misskiltum rentupolitikki gjørt sítt til at styrkja tær óhepnu avleiðingarnar av serføroysku rentuskattalógini.

Við atliti til at seta skrædlið hjá bankunum í ein størri samanhang, er greitt frá tí sera ekspansiva búskaparpolitikkinum frá 1975 til 89, sum var grundarlagið fyri skrædlinum í 1992. Bankakreppan í 1990-árunum var í nógvum førum lík kreppuni 40 ár frammanundan. Kanska hevði tað verið ein hjálp, um vit ikki høvdu tagt 1950-árini burtur.

Tað er vónin hjá høvundinum, at hetta íkastið til søguna hjá føroysku bankunum og føroyska samfelagnum kann verða eitt íkast til at skilja búskapin í einum viðbreknum monobúskapi. Sum tað framgongur, so er høvundurin ein atfinningarsamur eygleiðari av tí samanblanding av politikki og vinnu, sum fekk so vanlukkuligar avleiðingar í Føroyum í 1950-árunum og aftur í 1990-árunum.

# Yvirlit yvir nevndarlimir og stjórar

## Føroya Banki *(til 1994)*

### Nevndarlimir

| | |
|---|---|
| C. Bærentsen, Tórshavn *(formaður)* | 1906-1912 |
| Jacob Lützen, Tórshavn | 1906-1920 |
| Emil Glückstadt, København | 1906-1922 |
| Emil Rasmussen, København | 1906-1923 |
| N.J. Mortensen, Tvøroyri | 1906-1929 |
| Svenning Rytter, Tórshavn *(formaður)* | 1912-1918 |
| V. Stahlschmidt, Tórshavn *(formaður)* | 1918-1920 |
| E. Olrik, Tórshavn *(formaður)* | 1920-1929 |
| Jens Evensen, Tórshavn | 1921-1931 |
| Emil C. Hertz, København | 1922-1923 |
| H. Thrane, København | 1924-1932 |
| Richard Meyer, København | 1924-1950 |
| Hj. Ringberg, Tórshavn *(formaður)* | 1929-1936 |
| Th. F. Thomsen, Tvøroyri | 1930-1938 |
| Zacharias Heinesen, Tórshavn *(formaður 1936-1944)* | 1931-1945 |
| B. Husted-Andersen, Tórshavn *(formaður frá 1944)* | 1936-1950 |
| Poul Nolsøe, Tvøroyri | 1939-1959 |
| Edward Mitens, Tórshavn *(formaður frá 1950)* | 1945-1973 |
| Thomas Thomasen, Tórshavn *(formaður frá 1973)* | 1950-1982 |
| Mogens Lützen, Tórshavn | 1954-1982 |
| Debes Christiansen, Tórshavn | 1954-1983 |
| Johan K. Joensen, Tórshavn | 1963-1969 |
| Hanus við Høgadalsá, Tórshavn | 1969-1984 |
| Thomas Dam, Argir | 1973-1980 |
| Poul Johs. Johansen, Tórshavn *(formaður frá 1982)* | 1978-1993 |
| Olaf Olsen, Glyvrar | 1979-1990 |
| Egil Restorff, Tórshavn | 1980-1991 |
| Andreas Lava Olsen, Glyvrar | 1982-1993 |
| N.J. Mortensen, Tvøroyri | 1984-1991 |
| Klæmint Weihe, Tórshavn *(formaður mar.-nov. 1993)* | 1988-1993 |
| Olaf Olsen, Glyvrar | 1991-1993 |

| | |
|---|---|
| Svend Krosstein, Tórshavn | 1991-1994 |
| Flemming Duus, Gentofte *(formaður frá nov. 1993)* | 1992-1994 |
| Peter Fløe Jensen, Frederikssund | 1992-1994 |
| Vilhelm Johannesen, Tórshavn | 1993-1994 |
| Kjartan Hoydal, Tórshavn | 1993-1994 |
| Bjarni Olsen, Tórshavn | 1994-1994 |

## Stjórar

| | |
|---|---|
| C. Christensen | 1906-1910 |
| G.M. Havsteen | 1910-1921 |
| Steingrim Finsen | 1910-1918 |
| V. Gerhard | 1918-1922 |
| Leo Hessenschmidt | 1921-1935 |
| Knud Ludvigsen | 1922-1945 |
| Svend Hammerby | 1939-1949 |
| Peter S. Hansen | 1949-1955 |
| O. Hedegaard | 1953-1954 |
| Sv. Aa. Nonnegaard-Pedersen | 1954-1969 |
| Knud Petersen | 1969-1976 |
| Esbern Simonsen | 1969-1986 |
| Agnar Hansen | 1976-1981 |
| Hans-Jørgen Laursen | 1981-1993 |
| Johan Simonsen | 1986-1992 |
| Niels J. Nattestad | 1986-1993 |
| Tage Benjaminsen | 1993-1994 |

# Sjóvinnubankin *(frá 1994 Føroya Banki)*

## Nevndarlimir

| | |
|---|---|
| Chr. Holm Jacobsen, Tórshavn *(formaður)* | 1932-1951 |
| Jaspur A. Hjelm, Vági | 1932-1939 |
| Jacob Joensen, Tórshavn | 1932-1948 |
| Johs. Olaus Joensen, Tórshavn | 1932-1951 |
| Rikard Long, Tórshavn | 1932-1951 |
| Jacob Michael Jacobsen, Klaksvík | 1939-1951 |
| Jacob Pauli Christiansen, Tórshavn | 1948-1961 |
| Pauli Dahl, Tórshavn | 1951-1951 |
| J.F. Kjølbro, Klaksvík *(formaður)* | 1951-1956 |
| Petur Egholm, Tórshavn | 1951-1954 |
| Martin Djurhuus, Tórshavn | 1951-1962 |
| Dánjal Niclasen, Hoyvík *(formaður frá 1956)* | 1951-1971 |
| Jóhan Dahl, Vági | 1951-1971 |
| Óla Jákup Jensen, Tórshavn | 1954-1973 |
| Jákup Kass, Tórshavn | 1962-1992 |
| Birgir Danielsen, Tórshavn *(formaður)* | 1971-1992 |
| Marius Thomassen, Tórshavn | 1971-1988 |
| Høgni Mohr, Tórshavn | 1973-1992 |
| Jógvan Isaksen, Klaksvík | 1987-1992 |
| Jens Peter Arge, Tórshavn *(formaður frá 1992)* | 1989-1993 |
| Nils Sørensen, Torshavn | 1992-1993 |
| Poul Mohr, Tórshavn | 1992-1995 |
| Sverre Olsen, Humlebæk | 1992-1998 |
| Jørgen Ulriksen, Espergærde *(formaður 1993-94)* | 1992-1999 |
| Jóhan Páll Joensen, Klaksvík *(formaður frá 1994)* | 1993- |
| Niclas Joensen, Tórshavn | 1994-2001 |
| Ragnar S. Olsen, Søldarfjørður | 1994-2002 |
| Jógvan Jespersen, Tórshavn | 1994-2006 |
| Arne Poulsen, Tórshavn | 1995-1997 |
| Jógvan Z. Djurhuus, Hirtshals | 1997-1999 |
| Høgni Hansen, Tórshavn | 1998- |
| Jákup Jacobsen, Syðrugøta | 1999-2004 |
| Rúni M. Hansen, Tórshavn | 1999- |
| Sigmar Jacobsen, Argir | 2001-2002 |

| | |
|---|---|
| Magnhild Andreasen, Tórshavn | 2002-2004 |
| Johan Elkjær Hansen, Saltangará | 2002-2006 |
| Jóhannus Egholm Hansen, København | 2004- |
| Sigmar Jacobsen, Argir | 2004- |
| Olav Enomoto, Vestmanna | 2006- |

## Stjórar

| | |
|---|---|
| Thorstein Petersen | 1932-1951 |
| Roland Hansen | 1951-1952 |
| Henry Sølvsteen | 1951-1956 |
| Erik Elberling | 1956-1958 |
| Rasmus Olsen | 1958-1984 |
| Regin Olsen | 1977-1991 |
| Steingrím Nielsen | 1977-1992 |
| Jørn Astrup Hansen | 1993-2005 |
| Janus Petersen | 1994- |
| Súni Schwartz Jacobsen | 2006- |



## Jóan Pauli Joensen, høvundur

*Jóan Pauli Joensen er føddur 30. apríl 1945 í Sørvági, har hann eisini vaks upp. Hann var millum tey fyrstu, sum fingu preliminerprógv á Miðvágs-Sandavágs skúla í 1962. Nýmálsligt studentsprógv tók hann á Rønde Kursus í 1966. Hevur kandidatútbúgving í etnografi, fornaldarfrøði, fólkalívsfrøði og søgu frá lærdu háskúlunum í Århus og Lund. Í 1975 gjørdist hann fil. dr. við lærda háskúlan í Lund og í 1980 docentur sama stað. Gjørdist dr. phil við lærda háskúlan í Århus í 1987.*

*Jóan Pauli hevur verið universitetsstipendiatur, savnvørður á Føroya Fornminnissavni og síðani 1989 professari í fólkalívsfrøði og siðsøgu á Fróðskaparsetri Føroya. Hevur verið rektari á Fróðskaparsetrinum frá 1991 til 1998 og aftur frá 2004. Professari í etnologi við lærda háskúlan i Bergen 1998-1999 og formaður í Grundlógarnevndini, seinni Stjórnarskipanarnevndin, síðan 1999.*

*Hann hevur skrivað fleiri bøkur um føroyska fólkamentan og siðsøgu og latið úr hondum nógvar greinir í vísindaligum tíðarritum. Av bókum kunnu nevnast Færøske sluppfiskere 1975, Fiskafólk 1982, Fólk og mentan 1987, Fra bonde til fisker 1987, Fróðskaparsetur Føroya 1965-1990 1990 og I ærlige brudefolk 2003.*

## 2. partur

*Jóan Pauli Joensen*

# Føroyar í 100 ár

# Inngangur

Í seinna partinum av hesi bók verður dentur lagdur á at lýsa høvuðstættirnar í føroyska samfelagnum seinastu 100 árini, so lesarin fær eina fatan av meginpartinum av tí, sum er hent hesa tíðina. Tað, sum tikið er fram, er sjálvandi eitt val, onkur annar kundi gjørt tað øðrvísi. Hetta søguliga yvirlitið er ikki ætlað sum eitt vísindaverk við notum og tilvísingum, men kortini hevur kanningararbeiðið í sambandi við tekst og myndir verið drúgt og nágreiniligt.

Í hesum seinna partinum verður greitt frá, hvussu landið er skipað, og nortið verður við tættir úr politisku søguni. Eitt, sum serliga hevur broytt lívið hjá føroyingum, er sjálvt samskiftið bæði í Føroyum og við útheimin. Fyri tann einstaka man møguleikin fyri framhaldandi útbúgving hava havt nógv at siga. Tann tyngsti parturin í søgu okkara er kortini vinnusøgan, har fiskivinnan hevur størsta týdningin.

Fólk hava eisini livað sítt lív bæði til heilagt og gerandis í bygd og bý. Fólk hava arbeitt, bygt sær síni hús og skapað sær sítt egna lív, eisini andans lív. Roynt verður at lýsa hesar partar í lívinum hjá fólki tey seinastu 100 árini.

Bankar og fíggjarviðurskifti eru sjálvandi ein týdningarmikil partur av søgugongdini, men av praktiskum orsøkum verða hesi viðurskifti viðgjørd fyri seg í fyrra parti av bókini. Høvundarnir báðir hava í skrivingini lagað seg hvør eftir øðrum fyri ikki at troytta lesaran við ov nógvum endurtøkum.



*Nýggju og gomlu amtmanshúsini. Tey gomlu húsini eru enn ikki tikin niður*

# Land, amt og kommuna

Miðskeiðis í 1800-árunum hendi nógv, sum fekk stóran grundleggjandi týdning fyri tey samfelagsligu og politisku viðurskiftini í Føroyum. Aldargamla løgtingið, ið hevði umboðað føroyska fólkið í øldir, varð í 1816 niðurlagt, og eitt embætismannastýri við kongatilnevndum embætismonnum kom í staðin. Føroyar vóru vorðnar eitt danskt amt. Hóast fleiri skilamenn vóru millum embætismenninar, sum stýrdu hesum amti, menn, ið fingu nógv á skaftið, sum menti Føroyar, var tað ein veruleiki, at fólkið sjálvt varð sett til viks, uttan tey fáu fólkini, sum amtmaðurin leitaði sær ráð hjá. Hetta gjørdist ikki betri av teimum einstøku embætismannaknorlunum, sum ikki kendu sína vitjunartíð sum embætismenn, men førdu sín egna politikk.

Hinvegin var nú eisini sjálv einaveldishugsjónin komin í kreppu. Onnur og meira fólkaræðislig sjónarmið stungu seg upp allastaðni um, hvør skuldi stýra einum landi, og hvussu tað skuldi stýrast. Umframt eitt miðsavnað stýri skuldu fólk úti um landið í bygd og bý fáa ávirkan á tað, sum hevði við teirra gerandisdag at gera. Fólkaræði skuldi út í hvønn krók í landinum. Íslendingar, ið eins og føroyingar í longri tíð høvdu mist sítt alting, fingu tað aftur í 1843. Tá var enn einaveldi í Danmark. Natúrligt var tí, at tað eisini millum føroyingar vóru fólk, sum vildu hava aftur sítt gamla ting. Men rúm tíð gekk, áðrenn semja fekst um, hvønn leiklut hetta ting skuldi hava.

Meðan hesin spurningurin varð viðgjørdur, varð í Danmark sett eitt grundlógargevandi ríkisting. Chr. Pløyen, amtmaður, varð settur sum kongatilnevnt umboð fyri Føroyar í hetta ting. Persónsvalið kundi verið verri. Grundlógin kom í gildi í 1849, og tá eingin í Føroyum mótmælti, varð roknað við, at hon eisini var í gildi í Føroyum frá 1850 at rokna.

Tað løgting, sum varð endurreist í 1852, varð endurreist sum eitt amtsráð við víðkaðum heimildum og hevði lítið við gamla løgtingið at gera, sum var ein løgrættur. Tingmenn skuldu í nýggja løgtinginum veljast kring landið eftir einari ávísari skipan, sum varð broytt so við og við.

Annar táttur í nýggja fólkaræðinum var, tá fyribrigdið kommuna á fyrsta sinni kom inn í myndina. Havnin varð sum tann fyrsta kommunan í 1866 skipað sum ein býarkommuna, og í 1872 kom kommunulógin ella lógin um »de færøske Landkommuners Styrelse«. Frammanundan høvdu gomlu markatalsbygdirnar, við støði í jørð og við avgerðum á grannastevnum, verið skipandi grundarlagið undir bygdarsamfelagnum við óðalsjørð.

## Løgtingið

Løgtingið varð endurreist í 1852, og føroyingar fingu ein nýggjan stovn. Hesin stovnur fekk til uppgávu at ráðgeva donsku stjórnini viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum. Løgtingið fekk eisini til uppgávu at taka sær av ávísum viðurskiftum í Føroyum. Meðan tað gamla tingið var ein dómstólur ella ein løgrættur, var tað nýggja løgtingið eitt amtsráð, sum tó í fleiri førum hevði størri ræðisrætt enn tey donsku amtsráðini.

Við lógini frá 1852 varð ásett, at veljast skuldu 16 umboð í løgtingið. Streymoyar og Eysturoyar prestagjald skuldu velja hvør sínar tríggjar limir, meðan hini 5 prestagjøldini skuldu velja tveir limir í løgtingið hvørt. Tingið taldi tilsamans 18 limir, og tey bæði umboðini, sum enn restaðu í, vóru føstu umboðini prósturin og amtmaðurin. Nýtt tinghús 14 x 16 alin til støddar stóð liðugt í 1856 beint uttan fyri gomlu Havnina á sama staði, sum tað stendur í dag. Frá tí, hetta hús varð bygt, til í dag hava verið fleiri uppskot um nýtt tinghús, men onki er vorðið veruleiki. Í staðin er tað gamla útbygt, og í dag er bygningurin hjá Telefonverkinum tikin uppí sum arbeiðsrúm hjá løgtingsskrivstovu og løgtingsmonnum. Áðrenn tinghúsið kom, varð hildið ting í einum húsum í Gongini, sum seinni eru bygd upp í Müllershús.

Nýggja løgtingið varð sambært gamlari siðvenju sett á ólavsøku. Tað kom saman einar fýra vikur hvørt ár, men setan kundi leingjast, um helvtin av tingmanningini kravdi tað. Longu í 1854 kom ein nýggj lóg fyri løgtingið. Valda tingmannatalið varð hækkað úr 16 upp í 18. Tey tvey eyka umboðini fingu Eysturoyar og Streymoyar prestagjald, sum høvdu havt størsta fólkavøksturin. Føstu umboðini vóru tey somu. Løgtingið fekk sostatt 20 limir. Valskeiðið, sum áður hevði verið seks ár, varð sett niður í fýra ár, men val skuldi framvegis verða annaðhvørt ár, tá helvtin av tingmonnunum varð vald. Tá stóðu tó bert umboð, sum høvdu sitið á tingi í fýra ár, fyri vali.

Í 1902 legði amtmaðurin, Chr. Bærentsen, fram uppskot um ávísar broytingar. Eitt nú skuldi valrættur eftir hesum uppskoti ikki longur vera treytaður av sosialu og fíggjarligu viðurskiftunum hjá tí einstaka. Eisini varð skotið upp, at Suðuroy, sum helt fram at vaksa, skuldi fáa eitt umboð í løgtingið aftrat. Fyrr hevði tað verið so, at valevnini, sum høvdu flestar persónligar atkvøður, vórðu vald. Nú skuldu valevnini seta seg á ein lista, og so skuldi listin, sum fekk flestar atkvøður, fáa mannin. Hetta var í roynd og veru byrjanin til eina flokkaskipan. Eisini skuldu valini nú verða skrivlig og loynilig, so eingin fekk at vita, hvat hvør valdi. Løgtingið samtykti uppskotið, men ikki fyrr enn í 1906 kom tað úr aftur ríkisdegnum sum lóg.

Í fyrstani høvdu bara mannfólk yvir 30 ár, sum uppfyltu ávísar treytir, val-



*Fyrsta løgtingshúsið bygt í nýggjari føroyskum husasniði uttan fyri býin í 1856. Húsið hevði nú staðið í nøkur ár*

rætt. Í 1854 varð valrætturin lækkaður niður í 25 ár, og soleiðis varð, til valrætturin í 1944 varð settur niður í 21 ár. Í 1916 høvdu vit tó fingið vanligan valrætt uttan serligar treytir, og konufólk fingu eisini valrætt tá. Eftir hetta høvdu mestsum øll, sum vóru yvir 25 ár, valrætt. Í 1970 samtykti løgtingið at lækka valréttin niður í 20 ár, og í 1987 varð hann settur niður í 18 ár. Eisini samtykti løgtingið í 1992, at føroyingar, sum lósu uttanlands, skuldu hava valrætt.

Í 1924 kom nýggj løgtingslóg í gildi, sum var í gildi til eftir seinna heimsbardaga. Løgtingsval skuldi nú verða fjórða hvørt ár, og løgtingsumboðini sótu í fýra ár í senn. Prósturin fór úr løgtinginum, og amtmaðurin misti atkvøðuréttin og formanssessin, men fekk ein tingsess og talurætt. Tingmannatalið lá millum 20 og 23 alt eftir, hvussu atkvøðubýtið millum flokkarnar var. 20 limir vóru valdømisvaldir, og upp til tríggir limir kundu vera eykavaldir. Í 1930 varð talið á eykavaldum økt upp í fimm. Í 1944 vórðu eisini broytingar gjørdar. Talið á eykamonnum varð hækkað úr fimm upp í 10, so samlaða tingmannatalið gjørdist millum 20 og 30. Nú varð eisini tann regla sett í gildi, sum segði, at bert listar, sum høvdu minst ein umdømisvaldan lim, kundu fáa eykamann. Listar, sum

fingu 10% av atkvøðunum, kundu fáa eykamenn. Hetta datt burtur í 1948. Tá varð í staðin ásett, at flokkur, sum í øllum landinum fekk so nógvar atkvøður, ið svaraðu til meðaltalið fyri ein valumdømisvaldan tingmann, kundi fáa eykamann.

Latum okkum taka saman um støðuna hjá løgtinginum beint áðrenn seinna heimsbardaga við orðunum í løgtingssøguni hjá søgufrøðinginum, Hans Andriasi Sølvará:

*Samanuntikið kann sigast, at í tíðarskeiðnum frá 1906 til 1940 hendu ikki tær stóru broytingarnar í heimildum Løgtingsins, men fólkaræðisligu broytingarnar í løgtingslógini, sum vóru framdar í 1923, vóru formligu fortreytirnar fyri, at eitt fjøltáttað politiskt lív kundi mennast í Føroyum, sum umboðaði nærum allar bólkar í føroyska samfelagnum. Stórar fólkaræðisligar nýskipanir vórðu framdar, sum í sjálvum sær styrktu um myndugleika Løgtingsins, og fyrisitingarliga styrktist Løgtingið nógv, tá Landsnevndin og Løgtingsskrivstovan vórðu settar á stovn í ávikavist 1928 og 1935.*

Løgtingið var ikki lóggevandi. Tað kundi koma við tilmæli og ummæli, og danski ríkisdagurin setti lógirnar í gildi. Orðið lóg merkir enn í Føroyum lóg samtykt á danska fólkatinginum. Tað, sum løgtingið samtykkir, eitur løgtingslóg. Løgtingslógirnar, sum vit kenna tær, komu ikki fyrr enn við heimastýrislógini.



*Tingið er komið saman*

Undir seinna heimsbardaga tók seg upp stríð millum fyrst og fremst Fólkaflokkin og amtmannin um, hvussu Føroyar skuldu stýrast. Av tí, at Danmark var hersett og einki fekk gjørt, mælti Fólkaflokkurin til, at løgtingið fekk fult lóggávuvald. Hetta var danski amtmaðurin av prinsipiellum orsøkum ímóti, tí hann kendi seg at umboða bæði kong og ríkisdag í embæti sínum. Tað politiska talvið, har bretar stóðu ikki sørt maktmiklir við síðulinjuna, endaði við, at Føroyar fingu eina bráðfeingis stýrisskipan 1. mai 1940, sum gav amtmanninum saman við løgtinginum valdið í Føroyum.

Politikkurin hjá amtmanninum var frá byrjan at broyta so lítið sum gjørligt og lata sum mest av avgerðum bíða til eftir kríggið, men hetta læt seg ikki altíð gera. Støðan undir krígnum gjørdist sostatt tann, at løgtingið saman við amtmanninum fekk lóggevandi heimildir. *Hartil kom, at Landsnevndin, sum Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin høvdu sett á stovn í 1928, fekk avgerandi lut í valdinum í Føroyum. Meðan Løgtingið og amtmaðurin býttu lóggávuvaldið millum sín, so býttu Landsnevndin og amtmaðurin tað útinnandi valdið sínámillum*, sum Hans Andrias Sølvará so greitt sigur tað í løgtingssøgu síni.

Skipanin, sum kom undir krígnum, var galdandi líka til 1. apríl 1948, tá Føroyar fingu heimastýrislógina, sum ein meiriluti av føroyskum politikarum tók undir við. Hóast meirilutin av teimum, sum atkvøddu, var fyri loysing í 1946, hendi tað løgna, at kongur við støði í lógini fyri løgtingið frá 1924 nýtti heimild sína sum kongur at senda tingið heim og skrivaði út nýtt løgtingsval. Í nýggja løgtinginum var meiriluti móti loysing, og einki varð tí gjørt við henda spurning. Úrslitið av fólkaatkvøðuni fekk ongan týdning og varð ikki sett í verk av nýggja løgtinginum. Henda tvístøða í føroyskum politikki og í føroyska fólkinum sjálvum hevur sermerkt føroyskan politikk síðani. Úrslitið varð í 1948 heimastýrislógin. Ein nýggjur flokkur, Tjóðveldisflokkurin, varð stovnaður, ið var greitt ímóti heimastýrislógini og fyri úrslitinum av fólkaatkvøðuni í 1946.

Heimastýrislógin heimilaði føroyingum at yvirtaka ávís málsøki eftir serligum reglum. Hetta hevur eisini verið gjørt, men mest á økjum, har tað kostaði lítið. Við heimastýrislógini koma eisini nýggj heimastýrishugtøk sum løgmaður, landsstýrismaður og landsstýri.

Landsstýrið verður skipað við løgmanni og tveimum ella fleiri landsstýrismonnum. Henda kollegiala stýrisskipan var galdandi til 1996, tá Føroyar fingu nýggja stýrisskipanarlóg, sum gevur hvørjum einstøkum landsstýrismanni ábyrgd á sama hátt sum ráðharri í eini stjórn. Løgmaður er at meta sum forsætismálaráðharri. Her eru vit í løtuni í politisku menning Føroya.

*

Latum okkum taka eitt sindur aftur í ta fyrstu tíðina hjá nýggja løgtinginum. Umframt amtmannin gjørdist Føroya próstur fastur limur í tinginum, báðir við atkvøðurætti. Løgtingið varð skipað sum millumlið millum danskar myndugleikar og Føroyar, ið kundi umrøða donsk lógaruppskot og mæla til ella frá, um tey skuldu galda fyri Føroyar ella ikki. Eisini kundi løgtingið skjóta upp lógir til danska ríkisdagin. Hesum samskifti tók amtmaðurin sær av. Løgtingið kundi sum nevnt ikki gera lógir og heldur ikki skriva út skatt. Ta heimildina fekk tingið ikki fyrr enn í 1934. Rættiliga avmarkað var tí, hvørjar fíggjarligar møguleikar løgtingið hevði at menna og stýra landinum.

Løgtingið ráddi yvir eini fimm grunnum, sum peningur kundi játtast úr til ymisk endamál. Hesir grunnar vóru *Amtsrepartitionsfonden, Færø Amts Økonomisk fond, Amtsfattigkassen, Fonden for Forulykkedes efterladte* og ein kirkjugrunnur. Løgtingið hevði ábyrgdina av, at stovnsfæið í hesum grunnum varð varðveitt og økt, samstundis sum tað hevði ábyrgd av tí, sum útgjøld úr hesum grunnum skuldu brúkast til.

Tað, sum kom í *Amtsrepartitionsfonden,* kom í høvuðsheitum frá jarðarskatti og skatti álíknaður kommununum. Úr hesum grunni fingu tingmenn sína løn. Hon var í 1906 umleið 40-50 krónur fyri tær fýra vikurnar, tingsetan vardi. Tað, sum fløddi inn í *Færø Amts Økonomiske fond,* kom frá uppboðssølu av grind og seinni eisini stórhvalagjaldi, eftir at farið var at skjóta stórhval. Stórhvalagjaldið gav nógvan pening í kassan, tá hesin vinnuvegur var í hæddini. Úr hesum grunni fór eitt sindur til vegagerð, brýr og lendingar, og eitt sindur fór til mentanarlig endamál sum t.d. bókasavn og fólkaháskúla.

Í *Færø Amts Fattigkasse* fóru avgjøld av ymiskum slag, m.a. avgjøld av brennivínssølu, bøtur, arvagjøld og loyvisgjøld. Eisini kom eitt sindur í grunnin frá hvørjari grind. Úr hesum grunni varð goldið til tað, vit í dag rópa almannamál. *Kirkjugrunnurin* var tann parturin av tíggjundunum, sum fall til kirkjuna. *Skjútsgrunnurin* var grunnurin, sum amtið og kommunurnar fingu afturgoldið skjútsútreiðslurnar úr. Onkur hjálpargrunnur í sambandi við vanlukkur var eisini. Løgtingið umsat realskúlan og lønir og pensjónir til realskúlalærarar umframt okkurt aftrat. Tingið umsat eisini Telefonverk Føroya Løgtings og Bróstsjúkrahúsið í Hoydølum. Umsetningurin hjá hesum báðum vaks ár eftir ári.

Samlaðu upphæddirnar, sum løgtingið hevði ræði á ta fyrstu tíðina, vóru ikki stórar. Ein uppgerð frá 1906 vísir, at løgtingið hevði ræði á umleið 43.000 krónum. Um hetta mundið var upphæddin, sum kom úr ríkiskassanum, munandi størri, umleið 200.000 krónur um árið. Hóast politisk tiltøk av ymsum slag vóru ikki stórvegis broytingar í tingarbeiðinum fyrr enn eftir seinna heimsbardaga við heimastýrislógini, støðan undir seinna heimsbardaga tó undantikin.

## Embætismenn

Embætismenninir høvdu havt góða tíð at menna sína støðu í landinum, meðan einki ting var, og teir fingu eisini stórt vald í nýggju skipanini. Amtmaðurin var formaður í løgtinginum, og av tí, at tingið vanliga bara var saman fýra vikur um summarið, kundi amtmaðurin sjálvur taka nógvar avgerðir millum tingseturnar. Eisini var tað hann, sum tók sær av samskiftinum við donsku stjórnina og danska ríkisdagin. Av hesum fekk hann rættiliga stórt fyrisitingarligt vald. Tingmenn høvdu kortini við løgtinginum eitt ávíst eftirlit við bæði amtmanninum og hinum embætismonnunum, sum stríðið vísti millum meirilutan í tinginum og amtmannin, C. E. Dahlerup, ið endaði við, at hann mátti leggja frá sær í 1861. Dahlerup var ein tann fyrsti embætismaðurin, ið legði fótonglar fyri fólkastýrið í Føroyum.

Ta fyrstu tíðina og heilt fram til okkara tíð hava vit havt hesar embætismenn í Tórshavn: amtmann, fúta, dómara/sorinskrivara og próst. Umframt at vera ovasti fyrisitingarligi danski myndugleiki var amtmaðurin formaður í løgtinginum. Fútin stóð á odda fyri politivaldinum í Føroyum, og undir sær hevði hann sýslumenninar. Eisini hevði fútin frá byrjan ein týðandi leiklut í býráðnum í Tórshavn.

Sýslumenninir, ið vóru tann myndugleiki, sum fólk flest komu í samband við, høvdu uppgávur í sýslum sínum, sum t.d. at taka sær av deyðsbúgvum, skiftum, innkrevjing av tíggjund, tolli, mynstring, umsjón við grindadrápum og grindaskifti. Eisini høvdu teir eina tíð ábyrgdina av postinum. Sýslumenn høvdu sum fyrisitarar við politimyndugleika sínar reglur at ganga eftir uttan kortini at vera beinleiðis politistar og hava síðani 1851 verið fastløntir. Politistar gjørdust teir ikki fyrr enn í 1984. Tá kom ein nýggj skipan, har tað kravdist, at sýslumenninir høvdu politiútbúgving. Síðan tá hava teir eisini verið støðleiðarar. Sýslurnar hava í høvuðsheitum verið óbroyttar, men onkuntíð er ein sýsla býtt sundur í tvær.

Politistar komu ikki fyrr enn í 1903. Frammanundan tóku jekararnir á Skansanum sær av neyðugum handtøkum og øðrum tilíkum. Hetta broyttist so í 1903, tá fyrsti politistur varð settur í Føroyum. Vert er at leggja sær í geyma, at politiið í Føroyum hevur verið kommunalt líka til 1958, tá tað kom undir danska ríkið, *møguliga gott hjá tí einstaka politistinum og teimum føroysku kommununum, men ein tjóðskaparliga dapur og mannminkandi tilburður, tí ein tjóð ikki við egnum myndugleika er ikki ein tjóð,* sigur Hjartvard Skálagarð í politisøgu síni, sum kom út í 2000. Hetta man vera einasta yvirtøka tann øvugta vegin undir heimastýrislógini.

## Læknar og heilsuviðurskifti

Hóast bara landslæknin í dag kann roknast sum embætismaður, so man vera ruddiligast í hesum verki at lýsa læknar og heilsuviðurskiftini í høvuðskapitlinum undir landi og kommunum. Læknar og sjúkrahús eru týðandi partar í føroyska medvitinum, ikki bert úr einum læknafrøðiligum sjónarhorni, men eisini sum lokalpolitiskir markørar. Hjá teimum fólkum, sum komu væl burtur úr at hava ligið á hospitalinum, var tað eitt minni fyri lívið, sum ofta og títt varð tosað um. Tað var næstan sum at hava verið til skips at hava ligið á hospitalinum. Flestu minnast fólk, sum tosaðu um hana ella hin, tey høvdu ligið á stovu saman við. Tað hendi seg eisini meira enn so, at onkur, sum hevði fingið skurðviðgerð, gekk um alla bygdina og vísti skurðin, sum var talan um ein nýggjan samleika, ið hetta fólk hevði fingið av at hava ligið á sjúkrahúsi.

Tórshavn fekk sítt fyrsta hospital í 1829, sum helst tá hevur samsvarað við tíðarinnar krøv, men sum frá leið gjørdist alt annað enn tíðarhóskandi. M.a. varð hølið til nerva- og sálarsjúku sagt at vera sera vánaligt. Fólk við tílíkum sjúkum høvdu tað ikki gott í føroyska heilsuverkinum, men roknað varð ikki við, at tey sálarsjúku skuldu verða í Føroyum. Tey vórðu flutt til Danmarkar. Ikki fyrr enn í 1960-unum broytast hesi viðurskifti.

Dronning Alexandrines Hospital var longu mestsum ov lítið, tá tað varð tikið í brúk í 1924. Onkur høli komu aftrat so við og við, men farið varð ikki undir at byggja nýggja landssjúkrahúsið fyrr enn í 1962. Við ávísum steðgum inn í millum hevur verið bygt síðani. Klaksvík fekk sjúkrahús í 1898, og sjúkrahús kom á Tvøroyri í 1904. Hesi sjúkrahúsini vóru smá, men vaksið varð um tey seinni, í Klaksvík longu í 1927 og á Tvøroyri í 1950. Seinni er nógv bygt aftrat báðum sjúkrahúsunum, so tey í dag eru nýmótans. Eitt hospital, sum onglendingar áttu, var í Sandavági undir krígnum, men myndugleikarnir høvdu ongan hug at yvirtaka tað, so tað varð avmonterað.

Um aldaskiftið og langt inn í 20. øld doyðu nógv fólk av tuberklum í Føroyum, og gjørt varð tí av at byggja eitt bróstsjúkrahús ella sanatorium í Føroyum. Semja fekst ikki í fyrstu atløgu um, hvar hetta sanatorium skuldi liggja. Uppskot var um at leggja tað við Sørvágsvatn, men endin varð so, at Færøernes Amtkommunes Tuberkulosesygehus, vanliga nevnt Sanatoriið ella Bróstsjúkrahúsið, varð bygt í Hoydølum í 1908. Sanatoriið varð brúkt sum bróstsjúkrahús til fyrst í 1960-unum, tá Føroya Studentaskúli flutti niðan í Hoydalar, og húsini gjørdust skúlastovur og kostdeild. Nýggjur studentaskúli varð bygdur við síðuna av.

Sum nýggjari føroysk heilsusøgulig gransking vísir, hendi nógv á heilsuøkinum í 19. øld, sum gjørdist grundarlag undir heilsuverkinum í 20. øld, hóast talið á sjúkrahúsum varð minni enn upprunaliga ynskt. Góða sambandið í Før-



*Gamla hospitalið bygt í 1829 við síðuna av Müllers Pakkhúsi*



*Dronning Alexandrines Hospital tikið í nýtslu í 1924 sætt úr Sandagerði. Tað sæst í endan á Kápilhúsinum*

oyum nú ger tað munandi lættari at koma til Havnar. Hetta og menningin í læknavísindini ger, at størri eindir skapa størri fyrimunir á sjúkrahúsøkinum.

Umframt læknarnar í Havn og við sjúkrahúsini í Klaksvík og á Tvøroyri komu skjótt kommunulæknar kring landið. Tórshavn fekk sín fyrsta kommunulækna í 1901, kommunulækni kom á Sandi í 1903, á Eiði í 1912, Miðvági í 1913, Vági 1927, Saltangará 1928, Fuglafirði 1946, og í 1950 fekk Klaksvík umframt hospitalslækna kommunulækna. Útbúnar jarðarmøður vóru mestsum í hvørjari størri bygd alla 20. øld, men tær praktiseraðu privat og hoyrdu ikki beinleiðis undir heilsuverkið. Tað kom ikki fyrr enn seinni.

Eina tíð høvdu embætislæknarnir og summir kommunulæknar fleiri størv at røkja, bæði á sjúkrahúsunum og sum praktiserandi læknar, men hetta broyttist so við og við, so at enda høvdu hospitalslæknarnir síni størv á hospitalunum, og kommunulæknarnir virkaðu sum kommunulæknar. Síðani 1953 hevur bara verið ein embætislækni, landslæknin, í Føroyum.

Tað fyrsta apotekið, Svaneapoteket, kom í 1883 í Havn við Olafi Finsen sum apotekara. Tað var úti á Tinganesi. Tað fekk stuðul frá donskum apoteki. Olaf Finsen fekk sær í 1898 sítt egna apotek, men tað helt uppat í 1913, eftir at tað síðani 1911 hevði kappast við apotekið hjá Johs. Djurhuus, sum bar navnið Tjaldurs Apotek. Apoteksdeildir komu á Tvøroyri í 1931 og í Klaksvík í 1932. Áðrenn apotekini komu, høvdu læknarnir sjálvir heilivágin um hendi, og teir seldu hann eisini sjálvir. Í fleiri bygdum kundu ávísar apoteksvørur keypast sum hondkeyp, t.v.s. uttan resept. Eins og sjúkrahúsverkið hava apotekini ment seg eftir kríggið, so talið á apotekarum og øðrum starvsfólki er vaksið á sama hátt sum eitt nú talið á læknum og sjúkrasystrum.

Støðan í 1952 var, at í øllum Føroyum vóru 19 læknar, 26 deildarljósmøður og fimm tannlæknar, sum allir vóru í Havn. Sjúkrahúsini vóru trý við tilsamans 169 sengrum og eitt bróstsjúkrahús í Hoydølum við 57 sengrum. Talið á sjúkrasystrum og næmingum var nærum 60. Haraftrat vóru tvey ellisheim, eitt hvíldarheim, eitt barnaheim og tveir barnagarðar.

Landslæknin sigur í 1952: *Bústaðurin hjá fólki er almikið batnaður, húsini eru nú góð og tíðarhóskandi. Fólk sjálvi hava fingið skil á smittuvanda, skilja týdningin av reinføri, av nossliga viðfarnum mati og góðum drekkingarvatni, hóast nógv restar í. Bæði einstaklingurin og hitt almenna hava her nógvar uppgávur at greiða. Nátthúsviðurskiftini eru nógvastaðni vánalig. Fjósini myrk og skitin, og mjólkin verður ikki viðfarin, sum hon eigur. Enn liggja nógvar bygdir við opnum esjandi køstum og rennum, og flestu áir eru so køstakendar, at umframt smittuvanda hava rotturnar góðar dagar. Arbeiðslíkindini á sjógvi og landi eru nógv batnað. Talið á fólkum, sum eru deyð av vanlukkum, hevur verið og er støðugt minkandi. Sjógvurin krevur ikki tey mannalív nú, sum hann fyrr gjørdi at kalla hvørt ár.*



*Tuberklasjúkrahúsið í Hoydølum sætt úr Hoyvík. Ein tann fyrsti koyrivegurin í Føroyum varð gjørdur niðan í Hoydalar*

Nógv av hesum minnast eldri fólk, men eisini hetta er vorðið betri. Ikki minst viðurskiftini viðvíkjandi øllum ruski eru í dag skipað, og tvær brennistøðir eru bygdar í landinum.

Fyri at tryggja seg móti teimum útreiðslum, sum sjúka bar við sær, fóru fólk longu seinast í 19. øld at skipa seg í sjúkrakassar. Tann fyrsti føroyski sjúkrakassin kom í Havn í 1886, men tað tók sína tíð, áðrenn viðurskiftini millum sjúkrakassa og heilsuverk komu í rættlag. Tá tann fyrsti sjúkrakassin var komin, komu fleiri honum á baki. Sjúkrakassi kom til Klaksvíkar í 1906, Tvøroyri 1909 og Vági 1910. Ymisk fólk, m.a. Peter Jensen, meiaristur, gingu á odda at fáa fólk kring landið at skipa seg í sjúkrakassar, so tey ikki vóru um ein háls, um tey vórðu sjúk og løgd inn á sjúkrahús. Í 1937 eru allar bygdir, sum longu í 1912 høvdu skipað seg í eitt meginfelag, við í sjúkrakassaskipanini. Tá vit koma til 1952, gera sjúkra- og flutningskassarnir tað gjørligt hjá øllum at nýta ta lækna- og sjúkrahúshjálp, sum stendur í boði.

Seinni eru so uppaftur størri broytingar farnar fram í sjúkrahúsverkinum. Tað er nógv útbygt og mennist støðugt. Næstan á hvørjum ári er fíggjarjáttanin til heilsuverkið í minna lagi. Tilsamans eru 28 kommunulæknar í Føroyum. Á Landssjúkrahúsinum eru í løtuni 52 læknar, av hesum eru 27 yvirlæknar og ein læknastjóri. Restin er deildarlæknar og hjálparlæknar. Á sjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri eru tilsamans fimm yvirlæknastørv, aftrat koma so hjálpar-

læknar, sum fyri tað mesta eru vikarar. Umframt læknarnar eru sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar og onnur fólk innan heilsurøktina bæði á sjúkrahúsunum og kring landið. Flutningurin er góður millum oyggjarnar, og tað útbygda ferðslukervið ger, at skjótur sjúkraflutningur í øllum meginøkinum er ein partur av heilsuverkinum. Tað, sum fyrr tók dag ella dagar, tekur nú stutta tíð. Til ber eisini at koma á sjúkrahús í Keypmannahavn eftir fáum tímum. Sjúkraflutningsbátarnir *Medicus* og *Reyði Krossur* eru seldir fyri mongum árum síðani. Er neyðugt at flyta sjúklingar, taka strandfaraskipini sær av flutninginum.

Fleiri ellis- og røktarheim eru kring landið, og barnagarðar og vøggustovur eru mestsum í hvørjari størri bygd. Søkt verður mangan í bløðunum eftir námsfrøðingi ella petagoki. Hetta sigur so mikið, at heimaviðurskiftini hjá fólki eru broytt nógv seinastu mongu árini. Í dag er vanligt, at bæði foreldrini arbeiða, meðan børnini verða ansað á stovni ella í dagrøkt. Tey mongu ellis- og røktarheimini bera eisini boð um, at tað nú er uppgávan hjá tí almenna at taka sær av teimum gomlu og teimum, sum tørva røkt. Upp í hetta arbeiðið hoyrir eisini almenna heimarøktin. Hesar tænastur verða goldnar um skattin.

## Bygdir, markatal, prestagjøld og kommunur

### *Markatalsbygdirnar*

Eindin í tí gamla føroyska bygdarsamfelagnum var markatalsbygdin. Til hvørja av teimum 85 markatalsbygdunum hoyrdi jørð bæði innan- og uttangarðs, men markatalið kundi vera rættiliga ymiskt. Viðurskiftini hjá markatalsbygdini vórðu viðgjørd á grannastevnu, har hvør hevði ávirkan eftir, hvussu nógva jørð hann ella hon átti ella varðaði av. Í bygdini, sum fyri tað mesta eisini var ein markatalsbygd, livdu fólk sítt dagliga lív, og har funnu tey sín samleika. Hesin bygdasamleikin hjá føroyingum tykist ofta so sterkur, at hann ikki so sjáldan vinnur á tjóðarsamleikanum. Bygdasamleikin gjørdi eisini sítt til, at kommunurnar fóru sundur.

Í 19. øld vaks fólkatalið nógv, og okkurt mátti gerast, so fólk fingu okkurt at liva av. Eitt var, at fólk í bygdunum fingu traðir at útstykkja, í summum bygdum vóru serligar fátækratraðir, eitt annað var, at heil húski fluttu úr bygdini og settu seg niður á hóskandi staði í haganum hjá gomlu bygdini, har atgongd eisini var til sjógvin. Her fingu tey lagt inn traðir til bø og fingu grundstykkir at byggja á, so ein nýggj bygd skaptist. Hesar bygdir verða nevndar niðursetubygdir í mótsetning til tær gomlu upprunaligu markatalsbygdirnar, ið markatalsjørðin hoyrdi til.

Niðursetubygdirnar komu miðskeiðis í 19. øld. Fleiri niðursetubygdir eru í

Føroyum, t.d. Rituvík, Sandvík, Slættanes, Vatnsoyrar og Morskranes. Eingin uttangarðsjørð hoyrdi til hesar bygdirnar, men hvørt húski hevði eina ella fleiri traðir, og vanliga fingu fólk eisini loyvi til at reka neytini í hagan rundan um bygdina.

Skipanin í markatalsbygdini hoyrdi einari feudalari tíð til og ikki til tað staðbundna fólkaræðið, sum kom við kommunuskipanini í 1872. Tað, sum vit í dag nevna bygdir, er bæði tær gomlu markatalsbygdirnar og niðursetubygdirnar. Vanliga gera fólk ikki mun á teimum longur.

### *Prestagjøld*

Eitt annað uppbýti, sum kortini einki hevur við markatalsbygdirnar at gera, er frá gamlari tíð prestagjøldini. Tey vóru í mong Harrans ár sjey í tali umframt Tórshavn. Hvørt prestagjald hevði vanliga bert ein prest, men fleiri kirkjur. Teir sunnudagar eingin prestur var, las deknurin lestur, men barnadópi, brúðarvígslu og jarðarferðum tók presturin sær av. Prestarnir førdu eisini kirkjubøkurnar.

Prestagjøldini vóru hvørt sær býtt upp í sóknir. Ofta vóru fleiri bygdir í eini sókn. Tilsamans vóru umleið 40 sóknir í Føroyum. Umframt at vera arbeiðsøki hjá prestinum var hvørt prestagjald eitt serstakt fátækraøki, sum hevði ábyrgdina av teimum fátøku í einstøku sóknunum í prestagjaldinum. Her hevði prestur nógv at siga.

Tá vit koma til seinna heimsbardaga, eru prestagjøldini vorðin 10 í Føroyum, og í dag eru tey 14.

### *Kommunur*

Longu áðrenn einahandilin varð avtikin, var ein kommunuskipan fyri Føroyar upp á tal, men mong ár skuldu ganga, áðrenn Føroyar vórðu skipaðar í kommunur. Havnin varð sum tann fyrsta kommunan longu í 1866 skipað sum ein serlig býarkommuna. Fyrimyndin var Akuroyri í Íslandi, ið var skipað sum keypsstaður og kommuna longu í 1862. Bara menn, sum einki høvdu útistandandi við nakran, og sum kundu gjalda minst tveir ríkisdálar í kommunuskatti um árið, kundu veljast í býráðið. Meðan amtmaðurin var í løgtinginum, var fútin fastur limur í býráðnum í Tórshavnar kommunu. Embætismenninir vildu hava fingurin á pulsinum. Fútin var limur í býráðnum í Havn líka til 1908. Eftir tað vórðu allir býráðslimirnir fólkavaldir. Býráðið í Tórshavn hevur havt nógv at siga fyri menningina av býnum, og tey politisku endamálini hjá teimum ymsu býráðslimunum hava til allar tíðir verið ymisk.

Í 1872 kom lógin um »de færøske Landkommuners Styrelse.« Føroyar skuldu skipast í landkommunur, sum tað æt tá. Tann stóri spurningurin í sambandi við at skipa Føroyar í kommunur var, hvussu stórar kommunurnar skuldu verða. Amtmaðurin miðaði í móti at lata kommunurnar fella saman við teimum kirkjuligu sóknunum, men hesum vóru bæði løgtingið og danska innlendismálaráðið ímóti. Úrslitið gjørdist, at Føroyar vórðu skipaðar í sjey sokallaðar landkommunur, sum fullu saman við teimum sjey prestagjøldunum, ið tá vóru. Í hvørjari landkommunu vóru fleiri sóknir, tilsamans 37 sóknir. Fyrstu landkommunurnar vóru hesar:

1. *Norðuroya Prestagjalds Kommuna, 7 sóknir.*
    a. Klaksvík
    b. Húsar
    c. Mikladalur
    d. Kunoy
    e. Viðoy
    f. Svínoy
    g. Fugloy
2. *Eysturoyar Prestagjalds Kommuna, 7 sóknir*
    a. Nes
    b. Við Sjógv
    c. Gøta
    d. Fuglafjørður
    e. Oyndarfjørður
    f. Funningur
    g. Eiði

3. *Norðurstreymoyar Prestagjalds Kommuna, 6 sóknir*
    a. Vestmanna
    b. Kvívík
    c. Kollafjørður
    d. Hvalvík
    e. Haldórsvík
    f. Saksun

4. *Tær sameindu sóknirnar í Suðurstreymoyar Prestagjaldi, 4 sóknir*
    a. Kirkjubøur

b. Kaldbak
c. Nólsoy
d. Tórshavnar uttanbíggja sókn

*5. Vága Prestagjalds Kommuna, 5 sóknir*
a. Miðvágur
b. Sandavágur
c. Sørvágur
d. Bøur
e. Mykines

*6. Sandoyar Prestagjalds Kommuna, 4 sóknir*
a. Sandur
b. Skálavík
c. Húsavík
d. Skúvoy

*7. Suðuroya Prestagjalds Kommuna, 6 sóknir*
a. Hvalbøur
b. Froðba
c. Fámien
d. Porkeri
e. Vágur
f. Sumbøur

Tórshavn hevði sum nevnt sína egnu skipan. Fyri hvørja av hesum kommununum varð valt eitt *forstandaraskap*. Men fyri hvørja sókn skuldi eisini setast eitt *sóknarráð*. Formaðurin í sóknarráðnum var limur í forstandarskapinum. Sóknarráðini skuldu umsitast einsæris, og tey skuldu eisini hava um hendur síni egnu fíggjarviðurskifti. Løgtingið hevði eftirlit við forstandarskapinum, og amtmaðurin hevði myndugleika at broyta avgerðir hjá forstandarskapinum, um hann helt tað vera neyðugt. Her var sostatt enn ikki fult álit á tí staðbundna fólkaræðinum.

Tá tað ráddi um skúla- og fátækraviðurskifti, hevði prestur fast sæti og atkvøðurætt í sóknarráðnum og skúlanevndum. Eisini sýslumaðurin hevði í ávísum førum rætt til at reisa mál og taka lut í viðgerðini av teimum. Uppgávan hjá kommununi var at syrgja fyri, at øll børn yvir 7 ár fingu undirvísing og so annars at hava ábyrgdina av vegum og lendingum í kommununi. Kommunan hevði ábyrgdina av hesum, men tað var sóknarráðið, sum skuldi syrgja fyri, at arbeiðið

varð gjørt. Hvør sókn var eitt sjálvstøðugt fátækraøki, ið hevði umsorgan fyri teimum fátøku í sóknini. Forstandaraskapið gjørdi skattaálíkningina við støði í tilmæli frá sóknarráðnum, men metingina av hesum gjørdi sóknarráðið. Hetta var ein meting av markatalsjørð, ogn og vanligari avviging av støðuni. Eisini gjørdi forstandaraskapið av, um arbeiðið í kommununi skuldi gerast sum *pliktarbeiði* uttan løn, ella um skattur skuldi álíknast at gera ávísa arbeiðið fyri. Reiður peningur var ein mangulvøra hesa tíðina, so í nógvum bygdum var pliktarbeiði vanligt, t.d. var tað pliktarbeiði langt upp í tíðina at rudda gøtuna niðan á Skarðið í Gásadali.

Hetta nýggja fyribrigdið við kommunum var ein konstruktión, sum einki hevði við tann upprunaliga staðbundna samleikan hjá føroyingum at gera, tí samleikin hjá føroyinginum lá fyrst og fremst í teirri gomlu markatalsbygdini, seinni kanska eisini lutvíst í niðursetubygdum. Áhugin fyri viðurskiftunum í hinum bygdunum í kommununi var ikki altíð so stórur, fyri ikki at siga lítil og eingin. Hetta førdi við sær, at tær upprunaligu kommunurnar skjótt fóru sundur, tí bygdirnar vildu ikki so fegin gjalda fyri tað, sum varð gjørt í øðrum bygdum. Hvør var sær sjálvum næstur. Longu í 1876 fór Nólsoy burtur úr kommununi við teimum sameindu sóknunum í Suðurstreymoyar Prestagjaldi. Onkur nýggj sókn kom, men tað mest vanliga var, at sóknir fóru burtur úr teimum fyrstu landkommununum og skipaðu seg sum nýggjar sjálvstøðugar kommunur. Úrslitið varð at enda, at 100 ár eftir, at Føroyar í 1872 vórðu skipaðar við áttu kommunum, varð talið vorðið til í 50 í 1972.

Kommunurnar høvdu frá byrjan kunnað kravt inn skatt, men tað var ikki fyrr enn í 1923 og 1925, at kommunurnar fingu skattaskipanir, sum hóskaðu til eitt nútíðarpeningasamfelag. Skattaprosentið var ikki høgt, úr 0,7% upp í 21,9% fyri tær hægstu inntøkurnar, men tá skatturin var komin, fór hann so líðandi at hækka. Í 1938 vóru 6.000 av teimum 8.650 skattskyldugu inntøkunum í Føroyum undir 1.000 kr. Løgtingið fekk hinvegin ikki loyvi til at áseta skatt fyrr enn í 1934.

Landið og kommunurnar hava frá byrjan havt ymiskar uppgávur. Landið hevur tær yvirskipaðu uppgávurnar, meðan kommunurnar hava um hendi uppgávurnar, sum hava við sjálva kommununa at gera. Fremsta málið frá byrjan var at syrgja fyri skúla og undirvísing. Til 1958 var politiið eisini kommunalt, men politistar vóru bert í teimum stóru bygdunum, og flestu staðni vórðu teir ikki settir fyrr enn undir seinna heimsbardaga.

Seinnu árini er samfelagið nógv broytt, og uppgávurnar hjá kommununum eru vorðnar so mikið nógvar og stórar, at nú royna politisku myndugleikarnir av øllum alvi at fáa einstøku kommunurnar at leggja saman í størri kommunur, so tær orka at taka sær av teimum mongu nýggju avbjóðingunum og teimum økj-

um, sum landsumsitingin vil hava kommunurnar at umsita. Sambært Ál-manakkanum eru 34 kommunur í Føroyum í 2006. Ætlanin er, at tær skulu gerast munandi færri.

# Politikkur

Politikkur er ein spurningur um at taka avgerðir og fremja mál. Føroyskur politikkur er farin fram á danska ríkisdegnum, í løgtinginum og í kommununum. Sambært donsku grundlógini áttu føroyingar tvey umboð í danska ríkisdegnum, eitt umboð í fólkatinginum og eitt í landstinginum. Umboðið til fólkatingið varð valt á almennum vali, meðan løgtingsmenninir valdu umboðið í landstingið, líka til tað varð avtikið við grundlógarbroytingini í 1953. Eftir tað fingu føroyingar tvey umboð í fólkatingið.

Í mong ár vóru bert tveir flokkar í føroyskum politikki, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin. Sjálvstýrisflokkurin gjørdist tann meira radikali flokkurin, men helst hevur ikki verið tann stóri munurin á flokkunum, tá tað snúði seg um búskaparligar spurningar. Tað radikala stóðst mest av, at Tingakrossur stóð Sjálvstýrisflokkinum nær. Har skrivaðu eisini fólk, sum høvdu fingið íblástur av sosialismuni, ið var ein nýggj rørsla.

Javnaðarhugsjónin fór kortini ikki at gera um seg fyrr enn miðskeiðis í 1920-unum. Javnaðarflokkurin fekk serliga týdning á Tvøroyri. Har búði Petur Mohr Dam, ið sum ungur var ávirkaður av javnaðarrørsluni. Hann myndaði leingi flokkin bæði í landinum og ikki minst á Tvøroyri, har hann eisini var virkin í arbeiðarasamtøkum. Kanska vóru umstøðurnar í niðursetubygdini Tvøroyri eisini so, at gróðrarlíkindini fyri javnaðarrørsluni vóru betur har enn aðrastaðni, tí á Tvøroyri vaks fram ein serlig arbeiðaramentan kring býlingin Kirkwall ella Valin, sum hesin býlingur vanliga nevndist millum manna. Hinvegin var eisini ein rættiliga markant borgarlig mentan á Tvøroyri. Hana umboðaðu reiðarar og keypmenn.

Javnaðarflokkurin var hvørki sambandsflokkur ella sjálvstýrisflokkur. Hann var pragmatiskur í tilíkum spurningum, eins og hann enn tykist vera. Vinnuflokkurin, sum varð stovnaður í 1936, og sum seinni saman við Jóannesi Patursson rann saman til Fólkaflokkin, gjørdist mótsetningur hjá Javnaðarflokkinum. Fólkaflokkurin var ein høgraflokkur, sum stuðlaði privata initiativinum og var tjóðskaparligur. Hann gjørdi serliga vart við seg undir seinna heimsbardaga, ikki minst í stríðnum millum Thorstein Petersen og amtmannin.

Aðrir flokkar eru komnir á ting so við og við, eitt nú Framburðsflokkurin, Fiskivinnuflokkurin, Kristiligi Fólkaflokkurin og Miðflokkurin. Viðhvørt hava fleiri av hesum flokkum verið samansjóðaðir í ein flokk. Eftir kreppuna kom við valið í 1994 ein nýggjur flokkur, Verkamannafylkingin, á ting við trimum umboðum, men henda protestfylkingin stillaði ikki uppaftur til valið í 1998.

Tá tað snýr seg um politiska hugmyndafrøði, er í høvuðsheitum ikki so nógv broytt í føroyskum politikki. Enn sum áður er høvuðsspurningurin samband

ella fullveldi, har Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru ytst hvør sínu megin. Onnur viðurskifti eru komin upp í føroyskan politikk, men mest markanti spurningurin er framvegis spurningurin um sjálvstýri og samband, og tí skal hann verða viðgjørdur meira nágreiniliga.

## Sjálvstýri og samband

Sambandsflokkurin kom í 1906. Tvey ár seinni, í 1908, kom Sjálvstýrisflokkurin. Menn úr føroysku tjóðskaparrørsluni gjørdust nú mótstøðumenn hvør sínu megin eina politiska gjógv, sum ikki tóktist at vera komandi yvirum. Fríðrikur Petersen, ið hevði gingið á studentaskúla í Reykjavík, var ávirkaður av íslendsku tjóðskaparrørsluni og var millum teirra, sum tóku stig til at stovna Føroyingafelag. Hann yrkti nakrar av teimum bestu fosturlandssangunum og veitslusangunum, sum vit eiga, m.a. *Eg oyggjar veit.* Eisini Andreas Samuelsen hevði upprunaliga sínar røtur í tjóðskaparrørsluni. Tá brúkti hann viðhvørt navnið Andrass Sámalsson. Tey fyrstu 20 árini í føroysku tjóðskaparrørsluni fóru ikki fram á politiska pallinum, men í einum romantiskum og óspiltum høpi burtur frá politiska gerandisdegnum, uttan at gáað varð eftir, at føroyska tjóðskaparrørslan eins og aðrar tjóðskaparrørslur í sær sjálvum bar spíran til eina seinni meira álvarsama politiska gongd.



*Andras Samuelsen.*
*Føroya fyrsti løgmaður*

Tá hetta gjørdist greitt, fóru tey fyrstu sameindu tjóðskaparfólkini í tveir ymiskar bólkar, ein íhaldandi ella konservativan og ein meira ágangandi og tjóðskaparliga kravmiklan. Meðan summi fólk í tjóðskaparrørsluni fóru at rópa hart, gjørdust onnur meira varin og dámdu ikki, at farið varð ov skjótt fram tjóðskaparliga. Men fyri tað var ikki neyðugt at missa burtur endamálið frá 1888/89. Eitt var, at góða, mæta og gátuføra skaldið, Fríðrikur Petersen, próstur, mestsum straks helt uppat at yrkja, eftir at hann var komin upp í politikk. Men tað, sum kanska var uppaftur meira løgið, var, at hann eins og Andrass Samuelsen nú í nógvum førum tóktist vera beinleiðis ímóti tí, sum teir fyrr høvdu stríðst fyri. Søgumaðurin Hans Jacob Debes sigur í bók síni *Nú er tann stundin* frá 1983, at í *1906 var tjóðskaparrørslan, sum í langa tíð hevði verið eyðkend av spjaðing og klandri, endaliga sprongd. Í veruleikanum hevði rørslan síðani 1901 bert livað í tí radikala partinum, sum nú virkaði fyri einum slag av heimastýri, meðan hin parturin virkaði ímóti hesum politikki.*

Soleiðis kundi tað tykjast, men hetta er ikki fatanin hjá unga føroyska søgugranskaranum, Anju Andreassen, sum hevur roynt at greina hugsjónarliga grundarlagið undir Sambandsflokkinum í amtstíðini. Hon vísir á, at tað tykist sum, at Sambandsflokkurin hevur havt størri virðing fyri dagligu siðbundnu føroysku bygdamentan føroyinga enn sjálvstýrisrørslan, sum meira var áhugað í framburði, broyting og menning á øllum økjum. Anja Andreassen sigur í eini óprentaðari høvuðsritgerð, at *Rætt er ikki at siga, at flokkurin var ein móttjóðskaparlig fráboðan. Sambandsflokkurin var harafturímóti ein fráboðan móti tjóðskaparætlanunum hjá sjálvstýrisrørsluni, sum ikki vóru samsvarandi við tann tørv, sum fólkið hevði. Sambandsflokkurin var eisini ein fráboðan móti nationalistiskari einstáttan av verandi føroyskum samleika, sum fór at køva ta veruligu gerandismentanina, sum livdi millum fólkið í Føroyum. Tjóðskaparliga hugmyndafrøðin hjá Sambandsflokkinum var eitt bland av konservatismu, tjóðskapi og móttjóðskapi. Flokkurin var tí hvørki greitt konservativur, tjóðskaparligur ella móttjóðskaparligur, men harafturímóti »sambandskur«.*

Anja Andreassen heldur fram og sigur, *at hugsjónarliga grundarlagið, sum Sambandsflokkurin varð stovnaður á, ikki kann skiljast sum ein upptøka av nøkrum vanligum politiskum ráki ella ástøði, men heldur sum politisk nýhugsan. Endaliga skisman í tjóðskaparrørsluni var veruleiki í 1906, men nýggju flokkarnir stóðu neyvan serliga langt frá hvørjum øðrum hugsjónarliga. So hvørt sum hendingagongdin hevði eitt alt størri sundurlyndi við sær, broyttist hugsunarhátturin hjá báðum pørtum. Sjálvstýrisflokkurin varð alt meira loysingarsinnaður, Sambandsflokkurin vildi halda fast í einum óbroyttum sambandi við Danmark, sum tíðin og sjálvstýrisrørslan høvdu gjørt meira ósannlíkt. Tað er neyvan heilt av leið at siga, at við floksstovnanina í 1906 var sambandstankin tilevnaður, men enn so nýggjur, at*

*hann ikki var læstur fastur í eini endaligari sambandshugmyndafrøði. Menningin hendi líðandi yvir eitt langt tíðarskeið.*

Haraftrat kom tann veruleiki, at fleiri av donsku embætismonnunum, sum komu til Føroyar, kendu seg meira danskar í tí føroyska umhvørvinum enn teir donsku politikararnir og embætismenninir, sum livdu í Danmark og tí meira radikala hugaráki, sum summir av teimum vóru partar av. Danskir embætismenn sum t.d. Svenning Rytter fóru beinleiðis upp í føroyskan partapolitikk saman við sambandsmonnum. Helst hava teir gjørt hetta, tí teir á hendan hátt hildu seg umboða donsk áhugamál best.

## Á løgtingi og ríkisdegi

Føroyskur politikkur fór nú fram bæði í danska ríkisdegnum og løgtinginum. Tann radikala partin umboðaði serliga kongsbóndin Jóannes Patursson í Kirkjubø, ið fór upp í beinleiðis politikk beint eftir aldaskiftið. Fyri hann var ikki nóg mikið við politiska pallinum í Føroyum, hann vildi eisini sleppa í danska ríkis-



*Jóannes bóndi Patursson sum ungur maður*

dagin. Hann helt, at tað besta var at royna at fáa ávirkan í fólkatinginum, tí hann óttaðist fyri, at tað, sum hendi á løgtingi, munaði ov lítið, so leingi løgtingið ongar inntøkumøguleikar hevði. Munandi rúmari var til loftið og víðari til veggja á danska ríkisdegnum, har fatanin av hansara politikki eisini var positiv, so løgið tað ljóðar. Í 1901 eydnaðist honum at verða valdur á fólkating. Hann hevði eisini sagt, at hann vildi verða umboðsmaður løgtingsins á fólkatingi, og tí var eisini neyðugt hjá honum at koma í løgtingið. Tað kom hann, og hann sat á løgtingi líka til sín deyðadag í 1946.

Jóannes Patursson varð væl móttikin á fólkatingi, har hann gjørdist vinstramaður. Hann hevði fleiri politisk mál, sum hann vildi hava framd. Har vóru mentanarpolitisk mál sum at vinna føroyska málinum frama í skúlanum, og hann vildi eisini menna føroyska samfelagið búskaparliga og vinnuliga. Í mun til so nógvar aðrar føroyskar politikarar í hesi tíðini hevði hann eina greiða politiska støðu, sum hann kunngjørdi í bók síni *Færøsk Politik* frá 1903. Einasti skattur í Føroyum um hetta mundið var jarðarskatturin, sum fór í amtsgrunnin. Bøndur guldu soleiðis skatt, meðan tann nýggja høvuðsvinnan, fiskivinnan, við reiðarum, skiparum og fiskimonnum ikki rindaði skatt. Jóannes Patursson legði longu í 1902 fram uppskot á løgting, sum skuldi fáa henda ójavna burtur. Eisini legði hann fram uppskot um at leggja toll á brennivín. Øktur skattur og tollur skuldu útvega løgtinginum pening at byggja vegir og havnir og alt tað, sum skuldi til fyri at skapa framburð í samfelagnum. Føroyingar skuldu gjalda ein part sjálvir og fáa restina úr statskassanum. Tílíkir politiskir tankar vístu seg ikki at hava nakrar møguleikar á tingi í 1902. Eingin uttan Jóannes Patursson sjálvur tók undir við uppskotinum.

Jóannes Patursson var hugsjónarmaður. Frá tí degi, hann steig fram á politiska pallin, broyttist føroyskur politikkur, kanska mest tí at hann dugdi betur at greiða frá føroyskum viðurskiftum enn teir, sum áður høvdu umboðað Føroyar. Haraftrat varð hann sagdur at vera bæði sjarmerandi, edrúiligur, átrúnaðarliga sterkur, framúr góður kvøðari, og so var hann eisini skald. Umframt at hava fingið nógv í vøggugávu varð hann av foreldrunum miðvíst vandur upp til at duga at bera seg høviskliga og mentað at, har hann steig fram. Hann var eitt gott umboð fyri borgarligu mentanina tá á døgum. Hinvegin tykist hann eisini at hava verið ikki sørt eirindaleysur og stríðshugaður. Honum dámdi ikki, tá hann ikki fekk sín vilja. Hann ristist heldur ikki á hondunum, tá hann fyri sjálvur at koma framat sum løgtingsmaður trokaði tveir av viðhaldsmonnum sínum burtur. Hetta eru kortini ikki óvanlig politikaraeyðkenni. Hóast radikalur á summum økjum var hann afturhaldssinnaður á øðrum økjum.

Jóannes Patursson varð valdur í fólkatingið í 1901, og frá hesum palli fór hann straks at arbeiða fyri at fáa ment føroyska samfelagið til eitt meira fram-

komið samfelag, men til tess, at hetta skuldi lata seg gera, kravdist peningur. Sum bóndi hugsaði hann tó fyrst og fremst um landbúnaðin. Hann hevði tí eisini eina tíð landbúnaðarskúla í Kirkjubø.

Tað eydnaðist honum í 1903 at fáa játtanina til Føroya hækkaða við 57.000 krónum, og málið var eisini at fáa løgtinginum eina skattainntøku upp á 125.000 krónur, men løgtingið hevði um hetta mundið onga heimild at krevja inn skatt. Hugsast kann, at politiska sambandshugsjónin av álvara vaknaði til lívs av óttanum fyri, at við øktum sjálvstýri fóru at verða lagdar skattabyrðar á fólk. Keypmenn, útgerðarmenn, skiparar og øll onnur hava helst hildið, at peningurin hevði tað best í egnum lumma enn sum skattapeningur hjá løgtinginum. Keypmenninir vóru um hetta mundið eisini vanir við í langa tíð at hava ræði á stórum parti av løn og avrokning hjá verkafjøldini, eisini tí sum annars hevði verið goldið sum skattur.

Við bók síni um føroyskan politikk hevði Jóannes Patursson gjørt greitt, hvat hann vildi. Hann fekk fleiri viðhaldsmenn, sum tóku seg saman í Føroya Framburðsfelag í 1903. Við valið í 1905 vann Føroya Framburðsfelag stórsigur, so felagið saman við teimum sjálvstýrismonnum, sum vóru valdir í 1903, hevði helvtina av øllum løgtingslimunum. Jóannes bóndi Patursson var sostatt væl fyri, tá hann um veturin 1905-1906 fór aftur til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina um eina nýggja skipan fyri løgtingið.



*Sandavágur setti longu í 1902 forboð fyri útskeinking av rúsdrekka*

Tað, sum Jóannes Patursson fekst við í fyrsta umfari, var tað, sum nú verður rópt lobbyvirksemi. Her var hann ikki ólíkur Ólavi á Heygum, tá hann stríddist fyri at fáa Føroya Banka settan á stovn. Jóannes Patursson fekk tosað við fleiri danskar politikarar, fyrst og fremst við løgmáleráðharran P. A. Alberti, ið hevði Føroyar undir sær. Longu í apríl var komið so langt, at hann kundi fara heimaftur til Føroya við einum tilboði til løgtingið í skjáttuni, sum hann visti, at ein meiriluti av donskum politikarum fór at taka undir við. Men tað, sum nú hendi, ella kanska rættari ikki hendi, fekk týdning fyri Føroyar og menningina av føroyska samfelagnum í mong ár.

## Fráhald og rúsdrekka

Hvussu var og ikki, so hevði Jóannes Patursson ikki gáað eftir, at um hetta mundið var fráhaldsrørslan í øllum sínum margfeldni og virkistrá um at fáa fótin fastan í Føroyum uttan mun til politiska fatan annars. Ætlanin var at fáa gjørt lóg, sum avmarkaði rúsdrekkasøluna í landinum. Hetta var eitt fólksligt krav, sum kom í kjalarvørrinum á avhaldsrørslunum, ið eisini høvdu til endamáls at sivilisera føroyingar. Í 1905 høvdu føroysku fráhaldsfeløgini, sum vóru vaksin nógv hesa tíðina, savnað inn eina adressu við 5.600 undirskriftum fyri at avmarka rúsdrekkasøluna. Sjáldan man nakað mál hava havt so stóra undirtøku í Føroyum. Hetta vóru 65% av øllum teimum, sum vóru eldri enn 20 ár.

Løgtingið samtykti í 1905 at fáa gjørt avmarkingar í rúsdrekkasøluni. Ein av høvuðsmonnunum aftanfyri hetta var Oliver Effersøe. Tað tykist ikki sum, at tað var gingið upp fyri Jóannes Patursson, hvussu stórt álvarsmál hetta var millum fólk. Í fólkatinginum hevði hann einki gjørt fyri at fáa áheitanirnar frá løgtinginum samtyktar, og sum løgtingsmaður talaði hann beinleiðis ímóti uppskotinum um avmarkingar. Bóndin kom sostatt í andsøgn bæði við løgting og meirilutan av fólkinum, ikki minst við eini grein í Tingakrossi, skrivað úr Keypmannahavn, sum skaddi hann almikið. Í greinini háðaði hann ta adressu, sum hevði heilar 5600 undirskriftir. Hann segði seg ikki rokna við, at ríkisdagurin fór at samtykkja uppskotið frá løgtinginum, og haraftrat segði hann seg hava góða samvitsku, um kaggarnir rullaðu heim til Føroya enn sum áður. At gera tílíkt, sum hann gjørdi tá, høvdu vit í dag mett sum politiskt sjálvmorð. Nú var sera lætt hjá mótstøðufólkum hansara at seta *Brændevinspartiet* upp ímóti *Ædrueligheds-partiet*. Jóannes Patursson umboðaði nú brennivínsflokkin, hóast sagt varð um hann, at hann dugdi sera væl við brennivíni.

Tá Jóannes Patursson ikki vildi gera nakað við málið í fólkatinginum, valdu fráhaldsfeløgini og Rasmus Effersøe at fara til Keypmannahavnar við teimum 5600 undirskriftunum. Jóannes Patursson hevði rætt í tí, at donskum politikar-

um dámdi ikki lógaruppskotið, tí tað var ófrælst í eini liberalari tíð at nokta fólki at fáa sær snaps ella eina øl. Fyri danir, har ein øl og ein snapsur vórðu roknað sum partur av hugnaligari samveru manna millum, var eitt forboð heilt óhugsandi. Tað var tí mestsum bert av trýstinum úr Føroyum, at lógin um at avmarka rúsdrekkasøluna í Føroyum kom í gildi.

Ein kann undrast á, hví Jóannes Patursson var so tvørur í rúsdrekkamálinum. Kann vera, at eitt bann gekk ímóti hansara hugsjón um ein liberalan politikk, samstundis sum hann sá møguleikan at lata rúsdrekkaskipanina verða, sum hon var, tí við at hækka avgjøldini á rúsdrekka bar til bæði at tálma nýtsluni og samstundis fáa pening í løgtingskassarnar. Sama hvat hann hevur hugsað ella ikki, legði hann fót fyri sær sjálvum.

Mótstøðumenn hansara fingu Oliver Effersøe, sýslumann í Trongisvági, longu tíðliga á árinum at gera seg til reiðar at stilla upp til fólkatingið sum fráhaldskandidatur. Eitt var brennivínsmálið, men Oliver Effersøe hevði eisini onnur politisk sjónarmið, sum vóru øðrvísi enn sjónarmiðini hjá Jóannesi Patursson. Hann var ikki tjóðskaparmaður, men samríkismaður. Var konservativur, tá talan var um at vinna føroyska málinum størri rúm í skúlunum mótvegis donskum, og hann var ímóti, at løgtingið skuldi fáa fleiri inntøkur við tolli og skatti. Hann helt heldur onga orsøk vera til at loypa framav við at gera ov stórar íløgur í vegir og havnir. Hinvegin hevði hann sosial sjónarmið, sum fóru longri enn tey, sum Jóannes Patursson hevði. Eitt nú segði hann seg vilja arbeiða fyri, at smámenn fingu traðir burtur av kongsjørðini. Hesum var kongsbóndin Jóannes Patursson beinleiðis ímóti, og einki er at ivast í, at hann vildi vinna bóndanum neisur við hesum politikki.

## Tilboðið

Jóannes Patursson tykist hava livað í tveimum ymiskum hugaheimum, tí urbana og frælslynta fólkatingsheiminum í Keypmannahavn og tí meira tronga løgtingshugaheminum, sum ikki vildi skilja hann, og hvørs hugaheim hann kanska heldur ikki sjálvur rættiliga dugdi at skilja. Í eini røðu í fólkatinginum 23. mars 1906 segði hann, at skatturin í Føroyum var ikki meira enn 2 kr. upp á fólkið um árið, og at fortreytir áttu at verða skaptar fyri, at føroyingar í meðal kundu gjalda 30 kr. í skatti. Føroyingar vóru fátækir, men her vóru eisini kapitalistar, sum bara fingu úr ríkiskassanum, men sum einki lótu. Hann mælti til, at stjórnin álegði løgtinginum at krevja inn eina ávísa upphædd at ráða yvir sjálvt. Tá vit hugsa um, at hansara áðurnevndu uppskot um skatt og toll vóru fallin í tinginum, er lætt at skilja, at hann við tílíkari talu í fólkatinginum kundi fáa ilt

í mangan í Føroyum, eins og tá tjóðveldisfólk í dag vilja sleppa blokkinum av hondum og taka størri fíggjarliga ábyrgd sjálvi.

Føroyamálaráðharrin, Alberti, fagnaði hinvegin røðuni og segði, at fólkatingsmaðurin kundi *bringe det bud hjem til Færøerne, at den nuværende regering er fuldkommen til rede til en imødekommende forhandling med færingerne om en ordning og udvikling af øernes forhold i fremtiden, navnlig således, at de færøske myndigheder, deriblandt særlig lagtinget, får en større indflydelse på de lokale forhold og bliver i stand til ad selvstændig vej at skaffe de fornødne pekuniære midler frem, uden hvilke al fremgang er umulig eller I hvert fald meget illusorisk.*

At danir um hetta mundið vóru fyri eini nýskipan í føroysku viðurskiftunum og ikki himpraðust at játta føroyingum størri politiskt og fíggjarligt sjálvstýri, ið jú var tað, sum Jóannes Patursson stríddist fyri, gjørdi, at hann næstan ikki átti orð fyri síni frøi. Hann svaraði, at hann var sannførdur um, at føroyingar fóru at *føle sig i den dybeste taknemmelighed til justitsministeren og at der vil gå en jubel over Færøerne for de udtalelser, der er fremkomne fra den højtærede justitsminister i denne sag.* Haraftrat var hann ivaleysur í, at tilsøgnin fór at *nedslå de betænkeligheder, som ganske sikkert vil komme fra konservativ side deroppe.*

Tilboðið kom jú beint undan einum løgtingsvali, men jubilin var avmarkaður. Um sama mundið var tað hent, at løgtingslógin var broytt soleiðis, at atkvøðugreiðslan skuldi vera skrivlig og loynilig, at øll skuldu hava valrætt uttan mun til inntøku, og at Suðuroyggin skuldi hava tveir tingmenn aftrat, so samlaða tingmannatalið hækkaði upp í 20. Eisini skuldi alt løgtingið veljast í senn, og valevnini skuldu seta seg á listar.

Bæði løgmálaráðharrin, Alberti, og Jóannes Patursson vildu og vónaðu, at Tilboðið skuldi gerast høvuðsmál á komandi løgtingsvalinum. Á hesum vali skuldu allir løgtingslimirnir fyri fyrstu ferð veljast í senn. Fall valið soleiðis, at meiriluti fekst fyri Tilboðnum í løgtinginum, var stundin komin til endaligar samráðingar millum danir og føroyingar um tað neyva innihaldið í tí. Tíðindini um Tilboðið vóru í Føroyum undan Jóannes Patursson, og alt var ikki fyri tað góða.

Jóannes Patursson var alt ov bjartskygdur. Hann tóktist púra at hava gloymt tey veruligu viðurskiftini heima, tá hann góðtrúgvin kom aftur heim til Føroya í apríl 1906. Mótstøðumenn hansara vóru væl fyrireikaðir at taka ímóti honum og tí tilboði, hann hevði í skjáttuni. Men hvat var so høvuðsinnihaldið í Tilboðnum? Tingakrossur greiddi frá tí 11. apríl 1906:

1. Føroyingar skuldu hava fult ræði á øllum beinleiðis og óbeinleiðis skattum, so teir sjálvir ráddu yvir teimum inntøkum, sum landskassin fekk í Føroyum. Haraftrat var eitt tilboð um eitt árligt ríkistilskot, sum løgtingið og stjórnin skuldu áseta í samráð við hvørt annað.

2. Haraftrat varð litið upp í hendurnar á føroyingum sjálvum at gera av, um løgtingið skuldi vera fult demokratiskt, so amtmaður og próstur ikki longur skuldu vera føddir limir, og hvussu stórt lóggávuvald tingið skuldi hava. Somuleiðis skuldi verða greiður skilnaður millum føroyskt mál og ríkismál.
3. Fólkið skuldi taka avgerðina. Løgtingið skuldi verða upployst og nýval útskrivað.

Hetta var í roynd og veru ein nýggj stýrisskipan fyri Føroyar. Sjálvandi fataðu fólk hetta. Eitt tað fyrsta, sum mótstøðumenninir førdu fram, vóru allar tær stóru skattabyrðar, sum fóru at verða lagdar á føroyingar, og at hetta í roynd og veru var ein roynd at loysa Føroyar frá danska ríkinum. Men tað var mest skattin, fólk ræddust, ella sum Hans Jacob Debes í bókini *Nú er tann stundin* skrivar: *Matadorar og proletarar gingu saman móti teimum hóttandi skattunum í tilboðnum.* Haraftrat varð ivi sáddur um, um danir veruliga stóðu aftan fyri hetta tilboð, ella um Jóannes Patursson møguliga hevði uppfunnið alt sjálvur. Hetta førdi til, at amtmaðurin, Chr. Bærentsen, sendi stjórnini ein fyrispurning fyri at fáa fulla greiði á hesum.

Svarið kom 1. juni 1906 frá Alberti, sum skrivaði, at fólkatingsmaðurin hevði heimild at geva løgtinginum nevndu fráboðan, og at um tað var eitt breitt og alment ynski, so var stjórnin sinnað at samráðast um eina skipan, har telefon-, vega- og havnamál gjørdust amtskommunal málsøki, og har beinleiðis og óbeinleiðis skattir í Føroyum gjørdust amtskommunalar inntøkur. Løgtingið kundi eisini við loyvi løgmálaráðharrans áseta aðrar amtskommunalar skattir og avgjøld, sum kravdust til nevndu og aðrar amtskommunalar uppgávur.

Tað hevði ikki stórvegis áhuga hjá mótstøðumonnunum, at danir nú veruliga vóru sinnaðir at geva føroyingum størri sjálvræði. Í fyrstu atløgu vildu teir tryggja sær, at trýstið av tolli og skatti ikki fór at økjast í Føroyum. Eingin kundi tryggja teimum, at hetta ikki fór at henda, tí við uppskotinum fingu føroyingar sjálvir loyvi til at gera íløgur, men tær fóru at kosta bæði í tolli og skatti.

Brennivínstosið og tosið um øktan skatt og toll gjørdi, at Jóannes Patursson var rættiliga kroystur upp undir valið í 1906. Tað fyri Føroya framtíð so avgerandi valið um Tilboðið var tann 18. juli í 1906. Valið gjørdist ein sigur fyri mótstøðumenninar hjá Jóannesi Patursson. Sjálvstýrismenninir høvdu eftir valið bert 8 av 20 løgtingslimum. Valluttøkan var stór, so tað var fólkið sjálvt, sum hevði vrakað Tilboðið. Uppskotið fall, og ein meiriluti í løgtinginum samtykti síðani ikki at taka av Tilboðnum og boðaði donsku myndugleikunum frá hesum. Við hesum fall eitt mál, sum, um tað hevði verið samtykt, hevði kunnað broytt nógv viðurskifti í Føroyum nógv fyrr. Tað, sum hendi tá, kann samanberast við tað, sum hendi eftir fólkaatkvøðuna í 1946, men sum kortini førdi til

heimastýrislógina, og tað, sum hendi, eftir at fullveldissamgongan frá 1998 í samráðingunum við danir misti takið, so fullveldisætlanirnar eisini ta ferðina duttu niðurfyri. Synd er at siga, at føroyingar, tá tað snýr seg um sjálvstýri og fullveldi, nakrantíð eru lopnir framav. Tað, sum hendi í 1948, kundi longu verið komið í 1906.

## Rúsdrekkabann í 85 ár

Eitt, sum ikki gjørdi støðuna betri hjá Jóannesi Patursson sum politikara, var, at ein mánað undan løgtingsvalinum hevði verið fólkatingsval, har Jóannes Patursson so ruddiliga misti fólkatingssessin til fráhaldsmannin Oliver Effersøe, og haraftrat hevði meirilutin í løgtinginum valt próstin og sambandsmannin Fríðrik Petersen í landstingið. Hetta var ein vátur vøttur frammaná hjá sjálvstýrisfólki. Jóannes Patursson varð kortini valdur í løgtingið, har hann sat líka til 1946. Hann upplivdi ikki heimastýrið.

Greitt samband var millum fallið hjá Jóannesi Patursson sum fólkatingsmanni og hugburð hansara til rúsdrekka og fráhaldsrørslurnar. Rúsdrekkamálið hevði havt stóran týdning í valstríðnum til fólkatingið, sum var ein undanleikur til fólkaatkvøðuna um rúsdrekka í 1907. Øll, sum vóru 25 ár og eldri, sluppu at atkvøða. Hetta var fyrstu ferð, at kvinnurnar kundu fara á val í Føroyum. Tá valúrslitini komu, var stórur meiriluti fyri forboðunum. Landsúrslitið gjørdist, at 137 vóru fyri og 3558 ímóti at loyva sølu og útskeinking. Her var eingin ivi um, hvat fólkið vildi. Fyri nógv var hetta ein veitsludagur, og stór skrúðgonga við gentum og dreingjum gekk gjøgnum Havnarbý við fløggum og sangi. Fráhaldsrørslan skipaði fyri.

Dimmalætting metti, at fólk longu vóru farin at drekka minni, áðrenn forboðið var komið í gildi, meðan Tingakrossur vildi vera við, at menn tyrptust úr øllum hornum í Føroyum á teimum plássum, har brennivín enn fekst at keypa, fyri at fáa fatur á teimum seinastu dropunum. Goymslurnar í Havn tømdust mestsum beinanvegin. Longu tá vóru menn, ið seldu svart til teir, sum einki áttu, tá jólini komu.

Spurningurin er so, hvat tað var, sum hendi í Føroyum hesa tíðina. Undir einahandlinum var avmarkað, hvussu nógv rúsdrekka kom til bygdina. Brennivín varð mest drukkið til høgtíðir og brúdleyp. Við fríhandlinum gjørdist nógv lættari at fáa fatur á rúsdrekka. Tað kundi keypast í hvørjum handli, og handil var mestsum í hvørjari bygd. Handlarnir gjørdust mest átøkir vertshúsum. Handilsmenn fingu sær tann vana at skeinkja útróðrarmonnunum ein fiskasnaps, tá teir komu aftur av útróðri. Hvør handilsmaður royndi sum best at fáa útróðrarmenninar at avreiða til sín. Til hetta var ein snapsur góð hjálp. Ein maður varð

roknaður sum blíður, um hann skonkti, so tað hendi meira enn so, at onkur av hinum útróðrarmonnunum eisini sjálvur fann uppá at vera blíður, og tað minkaði um avrokningina.

Brennivín hevur altíð nakrar vanlagnur við sær. Hóast summir menn drukku burtur jørð og ogn, og nógvar søgur eru um brennivínsjørðina, sum keypmenninir tóku fyri, og ógoldnar brennivínsrokningar, so bendir einki á, at føroyingar drukku meira enn danir. Eitt annað, sum fekk fólk at venda sær ímóti rúsdrekka, vóru fráhaldsfeløgini, sum um hetta mundið komu til Føroya, og hvørs fortalarar á meistarligan hátt dugdu at siga frá vandunum við rúsdrekka og selja hugburðin um fráhald. Í Havn varð stovnað fráhaldsfelag í 1878. Seinni komu so eisini losjurnar, sum fingu sær hús í fleiri bygdum. Eisini kunnu vit nevna *Bláa Kross*. Rørslan ímóti brennivíni og brennivínssølu var sostatt væl skipað, og hon fevndi eisini um ein øðrvísi og meira siviliseraðan lívsstíl. Sum nevnt tók fólkatingskandidaturin, Oliver Effersøe, mótstøðuna ímóti rúsdrekka upp í sín politiska boðskap, meðan Jóannes Patursson ikki gjørdi tað, og tað kom honum so dyggiliga aftur um brekku.

Tað tykist kortini, sum rúsdrekkasølan var í minking seinast í 19. øld, og einki bendir á, at føroyingar hava drukkið meira enn onnur. Hagtølini vísa í 1906, at føroyingar í meðal drukku 4,4 pottar av brennivíni um árið, meðan nýtslan í Danmark varð mett til 10-11 pottar. Tað tykist eisini, sum fráhaldsfólkini beint eftir 1900 vóru nøgd við virksemi sítt, tí rúsdrekkanýtslan var fallandi í Føroyum, og Havnin var Føroya edrúiligasti staður. Avhaldshugmyndin hevði tí fest røtur hjá einum hópi av føroyingum, sum adressan við teimum 5600 undirskriftunum eisini bar boð um. Við hesum var eitt satt trýst lagt á danskar politikarar og Jóannes Patursson, sum ikki í fyrsta umfari vóru fyri at seta føroyingum bann móti rúsdrekka. Danir vildu fyrst hava tøl fyri, hvussu illa var statt í Føroyum, men tílík tøl funnust ikki.

Sannleikin var tann, at heldur ikki teir báðir, landstingsmaðurin Fríðrikur Petersen og fólkatingsmaðurin Oliver Effersøe, hildu, at føroyingar drukku meira, enn gjørt varð so manga aðrastaðni, men teir vístu á, at viðurskiftini vóru soleiðis háttað í Føroyum, at arbeiðslívið og samferðsluviðurskiftini gjørdu tað alneyðugt, at menn kundu nýta síni andsevni og likamsevni til fulnar.

Í november 1907 var fólkaatkvøðan. Fráhaldsfeløgini og losjurnar vóru sera virkin fyri at fáa fólk at atkvøða fyri rúsdrekkabanninum, men tað tóktist ikki sum, at kvinnurnar gjørdu munin. Eins nógvir menn og kvinnur atkvøddu. Minni enn 50% av øllum fólkinum fóru á val í 1907. Umleið 3500 atkvøddu, og bert gott 130 atkvøddu nei. Her er vert at minnast til, at heili 5600 skrivaðu undir adressuna í 1905.

Lógin varð endurskoðað nakrar ferðina, hol vórðu tett, og táttað varð í á øll-

um økjum fyri at tálma innflutninginum av rúsdrekka. Uppskot um einkarsølu komu eisini upp av og á, men tey vórðu feld, eitt nú í 1949, tá uppskot um einkarsølu varð tvinnað saman við, at rúsdrekkasøla skuldi verða loyvd í teimum kommunum, sum høvdu gjørt hetta av á fólkaatkvøðu. Í staðin samtykti løgtingið skamtanarkort til 9 litrar av brennivíni um ársfjórðingin. Til bar at fáa meira av víni og øli, sum ikki var skamtað. Samstundis kom eisini kravið um, at tann, sum kortið átti, skuldi hava goldið skatt. Rúsdrekkakortið var ógvuliga persónligt og kundi ikki latast ella lænast øðrum.

Yvirhøvur drukku føroyingar fyrr ikki nógv øl, teimum dámdi best brennivín, men frá 1960-unum fór innflutningurin av øli at vaksa, serliga sterkum øli. Hetta hongur saman við hugskotinum um ølklubbarnar, sum høvdu sín uppruna í Mjørkadali, og sum komandi árini gjørdust alt fleiri. Ølklubbarnir kravdu limaskap og høvdu funnið ein hátt at útvega limum sínum øl og annað sterkt uttan beinleiðis at bróta rúsdrekkalógina. Um somu tíð fóru føroyingar eisini at drekka meira vín. Alt var ikki valavín, men so við og við fingu føroyingar meira vínvit. Tað skapti felagsskap millum fólk, tá tey fóru at flyta inn vín í tunnum og tappa tað í fløskur, ella tá fólk tóku seg saman at flyta inn vín av ymiskum slag í stórum mongdum. Vanligt borðvín varð ongantíð skamtað, men í 1980 varð skamtanin eisini víðkað til at umfata heitvín og sterkt øl. Ikki bara ølklubbarnir óttaðust fyri, at rúsdrekkalógin fór at verða broytt. Eisini fleiri av teimum, sum nú høvdu vant seg við at kunna flyta inn vín undir skipaðum umstøðum, óttaðust broytingar, tí vínið var so ómetaliga nógv bíligari enn tað, sum tey sluppu at gjalda fyri í einkarsøluni seinni.

Ein fólkaatkvøða var um rúsdrekka í 1973, men hon broytti einki. Í 1991 setti løgtingið eina nevnd at fyrireika rúsdrekkalógina. Hesa ferðina var eingin fólkaatkvøða. Uttan at spyrja fólkið sjálvt samtykti løgtingið lógina um innflutning og sølu av rúsdrekka, og samstundis varð Rúsdrekkasøla Landsins sett á stovn í 1992. Nú bar aftur til at keypa rúsdrekka á hotellum og vertshúsum í Føroyum, sum hava søkt um og fingið skeinkiloyvi. Til ber eisini at keypa sær løg á ymsu rúsdrekkasølunum í landinum, sum fingu einkarrætt til hesa sølu.

Tey 85 árini við rúsdrekkabanni, øllum kreativiteti kring rúsdrekka og tí sonevnda kassamentalitetinum vóru farin. Ein stórbroyting er farin fram á hesum øki. Føroyingar eru vorðnir meira kontinentalir, og tey allarflestu duga nú at handfara rúsdrekka. Meðan tað fyrr var vanligt, at fólk tóku nógv til sín, tá tey ferðaðust millum lond í skipi og seinni í flogfari, so er hetta broytt. Fá síggjast nú ávirkað av rúsdrekka. Føroyingar eru farnir at drekka meira siviliserað, men samstundis eru bæði øl, vín og annað rúsdrekka nógv dýrkað samanborið við fyrr, tá hvør mátti innflyta sjálvur.

## Próstur, málið, fúla bók og Merkið

Tað tykist sum, at góður vilji var millum fleiri danskar politikarar at skilja føroysku sjálvstýrisrørsluna fyrstu tíðina eftir aldaskiftið, men hetta broyttist, tá Sambandsflokkurin saman við ágrýtnum donskum embætismonnum, sum beinleiðis førdu sambandspolitikk, fekk størri ávirkan, og øðrvísi ljós varð varpað á sjálvstýri í Føroyum, so sjálvstýrisfólk fóru at tykjast meira separatistisk, enn tey kanska í veruleikanum vóru.

Sjálvstýrisflokkurin stillaði ikki upp sum flokkur til fólkatingsvalið í 1915. Edward Mortensen, ið seinni fekk navnabroyting til Mitens, stillaði upp einsamallur. Hann varð m.a. væl stuðlaður av faðiri sínum, keypmanninum Niels Juel Mortensen, á Tvøroyri. Tað eydnaðist unga løgfrøðinginum at vinna á Sambandsflokkinum við teprum meiriluta. Tá hann var valdur, fór hann upp í Sjálvstýrisflokkin. Í Danmark stuðlaði hann teimum radikalu, sum tá høvdu forsætismálaráðharran, C. T. Zahle. Tað, sum nú hendi, var ein ikki sørt løgin politisk samanrenning, sum var heilt øðrvísi í danska ríkisdegnum enn í løgtinginum. Zahle hevði góðan hug at stuðla tí, sum Edward Mitens og Sjálvstýrisflokkurin stóðu fyri. Amtmaður í Føroyum um hetta mundið var Svenning Rytter, ið óivað var ein dugnaligur, men eisini ráðaríkur embætismaður. Hann hevði heilt aðra fatan og gjørdi alt, sum stóð í hansara valdi at varðveita sambandið við Danmark óbroytt. Rytter var ein sera virkin partur av Sambandsflokkinum. Millum henda umboðsmann dana í Føroyum og danska forsætismálaráðharran, Zahle, vóru viðurskiftini tí heldur ikki betur enn góð.

### *Próstamálið*

Hetta skuldi serliga vísa seg í tveimum málum. Fríðrikur Petersen, próstur, andaðist brádliga í 1917. A. C. Evensen loysti hann av sum próstur, men fáar mánaðir seinni doyði eisini hann. Í øðrum umfari vóru tveir kandidatar til starvið sum Føroya próstur. Teir vóru Jacob Dahl og Gullak Jacobsen. Eingin ivi var um, at Jacob Dahl var tann best skikkaði, men hann var sjálvstýrismaður og ágrýtin talsmaður fyri tí føroyska málinum. Hetta var stutt eftir, at Louis Zachariassen var koyrdur frá sum lærari, tí hann hevði undirvíst á føroyskum, og Svennig Rytter kundi tí ikki lata tað koma so vítt, at ein málstríðsmaður sum Jacob Dahl fekk starvið sum próstur. Sum sjálvvaldur tingmaður lýsti hann í tilmæli sínum Jacob Dahl sum eitt vánaligt próstaevni og mælti til at seta Gullak Jacobsen.

Kortini settu donsku myndugleikarnir Jacob Dahl í starvið sum Føroya próst. Eingin ivi man vera um, at Edward Mitens hjálptur av Zahle togaði í træðrirnar í hesum sambandi. Í øllum førum kendi Svenning Rytter tað so, at

hann sum embætismaður hevði fingið eitt rættiligt slag yvir fingrarnar frá Zahle. Men her var einki at gera. Rytter tapti, og Jacob Dahl varð verandi próstur til sín doyggjandi dag.

### *Adressumálið og fúla bók*



*Jacob Dahl próstur í prestakjóla í Sandagerði*

Eitt annað mál, sum setti dám á politikkin hesa tíðina, hevði sín uppruna í, at Jóannes Patursson royndi at ganga í fótafetunum hjá langabbanum Nólsoyar Pálli fyri at útvega føroyingum vørur undir fyrra heimsbardaga, tá vørur trutu í stórum tali. Hann setti seg á odda fyri eini adressuinnsavnan, sum tá ið avtornaði hevði 3.242 undirskriftir. Ætlanin var at senda eina áheitan til bretsku stjórnina um at lata skip sleppa undan at verða eftirkannað í bretskum øki, áðrenn tey komu til Føroya. Hóast bæði amtmaðurin Rytter og meirilutin í løgtinginum vóru ímóti hesum, varð adressan send avstað. Tó varð áheitanin ikki send beinleiðis til bretsku stjórnina, men umvegis danska sendimannin í London. Hetta gjørdi stóran mun, skuldi vísa seg seinni.

Hetta málið og mangt annað í sambandi við fólkatingsvalið í 1918 gjørdi, at tað av álvara kom ilt í millum danska radikala forsætismálaráðharran, Zahle, og vinstramannin og amtmannin í Føroyum, Svenning Rytter, sum eftir øllum at døma hevur verið ein politiskt sera viljasterkur maður, ið ikki kendi solidaritet við forsætismálaráðharranum. Úrslitið varð, at hann saman við fútanum og sorinskrivaranum segði seg úr starvi. Hetta rumblið førdi við sær, at landstingið, har partamenninir hjá Rytter ráddu, setti eina nevnd at kanna politisku viðurskiftini í Føroyum og atburðin hjá stjórnini í hesum sambandi. Teir radikalu svaraðu beinanvegin við at velja Jóannes Patursson sum umboð teirra í hesa nevnd, ið m.a. hevði til uppgávu at kanna Jóannes Patursson sjálvan.

Edward Mitens tapti fólkatingsvalið hetta árið, og Andrass Samuelsen varð valdur við teprum meiriluta. Á løgtingi fekk Sjálvstýrisflokkurin meirilutan, og tí varð Jóannes Patursson av løgtinginum valdur í landstingið.

Úrslitið av kanningini, sum landstingið hevði sett at kanna viðurskiftini í Føroyum, kom út í 1919 og fekk millum fólk navnið Fúla Bók. Á donskum kallaðist hon *Beretning til Landstinget afgivet af Den af Tinget i Henhold til Grundlovens § 45 nedsatte Kommission til Undersøgelse af forskellige færøske Forhold.* Aftrat sjálvari kanningini var ein bók við avhoyringum og øðrum. Spurningurin var, um Jóannes Patursson hevði framt landasvik ella ikki, so hetta var ógvuliga álvarsamt.

Zahle fekk eitt neps, og Jóannes Patursson varð ikki dømdur sum landasvíkjari, men fekk eina ábreiðslu fyri at hava sent adressurnar avstað. Tað fekk kortini onga ávirkan á hansara politiska leiklut í Føroyum. Heldur gjørdust fleiri fólk meira sjálvstýrishugað enn frammanundan.

Rytter sjálvur kom væl burtur úr øllum. Lagnunnar speisemi gjørdi, at Vinstra vann fólkatingsvalið í 1920, og tann av flokkinum væl umtókti Svenning Rytter var tá farin upp í politikk. Hann gjørdist løgmálaráðharri og fekk Føroyar sum sítt umsitingarøki. Hetta lætti helst ikki um at fáa føroyskt mál viðurkent í skúla og kirkju.

## *Mál og Merkið*

Ein spurningur, sum frá byrjan var eitt politiskt stórmál, var spurningurin um málið. Tað var eisini hetta, sum próstasetanin í roynd og veru snúði seg um.



*Merkið verður hongt út av vindeyganum í Tinghúsunum í 1930*

Danskt hevði í øldir verið tað mál, sum í Føroyum varð brúkt í kirkju, fyrisiting, dómsvaldi og skúla. Føroyska skriftmálið, sum Hammershaimb kom við, var ungt, og avmarkað var, hvussu nógv enn varð skrivað á føroyskum. Taka vit aftur í aftur tjóðskaparrørsluna, so hava sambandsmenn ikki verið ímóti føroyskum máli í gerandishøpi, men samstundis sum tjóðskaparrørslan fór í tvíningar, og politikkur kom í, vann fram millum sambandsfólk ein ræðsla fyri, at danskt skuldi verða koyrt á dyr, og føroyskt skuldi standa eftir einsamalt. Tað vildu sambandsmenn ikki, tí danskt mál var í teirra hugaheimi eitt týdningarmikið menningaramboð, sum eisini rætt var, so leingi eingilskt ikki var tað.



*Ein søgulig mynd, tá amtmaðurin rýmir frá tinginum í flaggstríðnum í 1930*

Sjálvstýrisfólkini hildu hinvegin, at sambandsmenn høvdu svikið tað føroyska málið. Soleiðis varð stríðið um málið sett upp, og tað vardi í mong ár. Føroyskir granskarar hava viðgjørt hetta stríð væl og virðiliga. Í skúlanum var spurningurin, hvat mál skuldi gerast høvuðsmál og tí eisini undirvísingarmál. Her var ósemjan stór, men í grein 7 í reglugerðini frá 1912 varð ásett, at danskt var høvuðsundirvísingarmálið fyri størri børn, men at lærararnir kundu tosa føroyskt við tey smærru, um hetta gjørdi tað læ ttari hjá teimum at læra. Ásetingin varð tikin í stórum álvara. Louis Zachariassen misti starvið uppá hetta, og Jacob Dahl fekk átalu, tí hann hevði tosað føroyskt í Millum- og Realskúlanum. Grein 7 varð ikki strikað fyrr enn í 1938, tá Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Vinnuflokkurin gjørdu bart og atkvøddu móti Sambandsflokkinum, sum sjálvt tá vildi varðveita grein 7.

Sama skilið var innan kirkjugátt. Frá 1903 var undir serligum umstøðum loyvt at prædika á føroyskum í kirkjunum, men ikki fyrr enn 13. mars í 1939 kundi hvør einstakur prestur gera av, um hann vildi tosa danskt ella føroyskt. Tað næsta var at fáa føroyskt til eisini at verða rættarmál. Hetta gekk eisini striltið, tí sambandsmenn vóru ræddir fyri, at tað fór at skapa trupulleikar, um føroyskt

skuldi týðast til danskt, tá sak varð appellerað til landsrætt ella hægstarætt. Føroyskt sum rættarmál kom ikki fyrr enn undir krígnum 4. januar 1944. Ein tann seinasti sigurin í málstríðnum var, tá tað í 1944 varð loyvt at giftast borgarliga á føroyskum máli. Hetta var heldur ikki uttan svørðslag, tí Hilbert, amtmaður, vildi helst útseta málið til eftir kríggið.

Sjálvstýrisrørslan í Føroyum hevði leingi arbeitt fyri einum føroyskum flaggi. Uppskotini vóru fleiri at byrja við, men frá 1918 var semja fingin um tað flagg, sum síðani hevur borið navnið Merkið millum føroysk tjóðskaparfólk. Men tað dámdi ikki dønum, at føroyingar í ymsum høpum lótu seg umboða av Merkinum fyri seinna heimsbardaga, og nógv stríð stóðst av hesum.

Undir krígnum hersettu týskarar Danmark, og Dannebrog kundi tí illa brúkast sum frámerki á føroyskum skipum. Bretar kravdu annað frámerki. Hilbert, amtmaður, ið einsamallur umboðaði kong og danska ríkisdagin, helt leingi fast um danska flaggið. Men bretar góðtóku tað ikki. Í øllum førum vildi hann í fyrsta umfari ikki hava, at Merkið kom á føroysk skip, tí fyri honum var tað eitt uppreistrarflagg. Eitt grønt flagg við hvítum krossi var eisini upp á tal og hóvaði honum helst betri, tí einki annað hekk uppi við hesum flagginum, men tá gjørdu Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin bart saman við bretum, og úrslitið varð, at Hilbert 25. apríl 1940, um hann vildi tað ella ikki, mátti kunngera, at nú var Merkið flagg føroyinga, og soleiðis hevur verið síðani.




*Undir krígnum fingu føroysk skip eftir kravi frá bretum Merkið málað á skipssíðuna*

Nú so nógv er skrivað á føroyskum máli, kann ein undrast á, hví so stór mótstøða var ímóti at lata føroyska málinum sín fulla rætt sum móðurmál, tí í dag duga ikki bara tey ungu væl føroyskt, men tey duga eisini danskt nógv betri enn fyrr, serliga tá tey tosa tað. Summi halda kortini, at vit eiga at varðveita tann serliga variantin av donskum í Føroyum, *gøtudanskt*, sum eitt serføroyskt eyðkenni, tí hetta mál tykist vera væl egnað í norðurlendskum høpi. Hinvegin halda fleiri, at rættast er at læra ungdómin enskt betur, enn gjørt verður í dag.

## Vinna og politikkur

Tær vánaligu tíðirnar í 1930-árunum gjørdu, at spurningurin um at menna vinnulívið og fáa fólki arbeiði varð settur fram um tjóðskaparliga spurningin. Danmark fekk sína fyrstu sosialdemokratisku stjórn í 1924, men sosialdemokratarnir høvdu tá ongar føroyskar politiskar samstarvsfelagar. Teir royndu, men eingin av teimum táverandi politisku flokkunum hevði somu stevnuskrá sum donsku sosialdemokratarnir. Danir fóru tí undir sjálvir at fáa sett ein sosialdemokratiskan flokk á stovn í Føroyum. Tað eydnaðist við Javnaðarflokkinum, sum í 1928 fekk tveir mans valdar. Lærarin Petur Mohr Dam var formaður í flokkinum frá 1934, til hann andaðist í 1968. Sjálvt um Javnaðarflokkurin bert hevði tvey umboð á tingi at byrja við, fekk hann straks ávirkan, og eftir ikki so langari tíð gjørdist hann ein av teimum stóru flokkunum í Føroyum.

Javnaðarflokkurin stóð aftanfyri at fáa í lag arbeiðsskapandi samtøk sum Ísvirkið á Tvøroyri, ið longu var í umbúna í 1926, og sum stóð liðugt 12. oktober 1929. Hetta kooperativ varð gjørt við statsstuðli, og umframt sjálvt frystivirkið og frystigoymslu vórðu íløgur gjørdar í nýggjar bátar. Ísvirkið hevði 9 bátar umframt eitt frystifarmaskip, sum bar tað góða sosialdemokratiska navnið *Th. Stauning.* Tíverri vóru tey búskaparligu viðurskiftini eftir krakkið í Wall Street í 1929 soleiðis í Føroyum í 1931, at virkið ongan møguleika hevði at forrenta seg og datt tí niðurfyri. Bátarnir vórðu seldir. Fyri javnaðarfólk á Tvøroyri fekk hetta stóran symbolskan týdning, og tað fekk næsta arbeiðarafyritøkan, Arbejdernes Trawlerdrift (AT), sum kom í 1939, eisini. AT keypti trolaran Leiv Øssursson, sum kláraði seg til eftir kríggið, tá hann eins og aðrir trolarar kom í trupulleikar. Hann fór á húsagang í 1952, men hetta var hann ikki einsamallur um. Tað gjørdi ein rúgva av øðrum trolarum, og húsagangirnir førdu við sær, at P/F Sjóvinnubankin í 1951 fór av knóranum.

Mótsetningur hjá Javnaðarflokkinum var Vinnuflokkurin, sum kom á ting fyrstu ferð við tveimum monnum í 1936. Hann var høgraflokkur. Fleiri av fólkunum í Vinnuflokkinum vóru tey somu, sum í 1932 høvdu sett á stovn Sjóvinnubankan við tí endamáli at fáa ein føroyskan banka, sum kundi fíggja end-

urnýggingina av føroysku fiskivinnuni og føroyskan framburð. Hetta verður viðgjørt nágreiniligari aðrastaðni í bókini.

Eitt annað mál, sum eins væl kann metast sum eitt almannamál heldur enn eitt vinnumál, var spurningurin um útstykking av traðum til ognarleys fólk. Leingi hevði verið ynski um at lata fólki traðir burtur av kongsjørðini til uppdyrkingar, so tey kundu velta epli og hava t.d. kúgv og fenað. Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og meginparturin av Sjálvstýrisflokkinum vóru fyri hesum, men Jóannes Patursson sjálvur, størsti kongsbóndi í Føroyum, var ímóti. Úrslitið varð, at hann av hesi orsøk í 1938 fór úr Sjálvstýrisflokkinum, og í 1939 stovnaði hann saman við Vinnuflokkinum ein nýggjan flokk, Fólkaflokkin, sum fekk stóran týdning undir seinna heimsbardaga, ið á mangan hátt var eitt slag av *time out* í Føroyum.

## Heimastýrið

Undir krígnum til august 1943 vóru Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin á tingi. Tá misti Sjálvstýrisflokkurin sína umboðan og fekk ikki mann á ting aftur fyrr enn í 1954. Fólkaflokkurin var eina tíð størsti flokkur undir krígnum. Hann fekk 12 mans valdar í 1943 og 11 í 1945, sum var nærum helvtin. Sambandsflokkurin var tann flokkur, sum fyri tað mesta dró somu línu sum amtmaðurin, meðan hinir flokkarnir førdu sín egna politikk í teirri fyribils stýrisskipan, ið var galdandi ikki bert undir krígnum, men líka til heimastýrislógin kom í gildi í 1948. Sum eitt úrslit av, at fólkaatkvøðan í 1946 ikki varð tikin til eftirtektar, kom ein nýggjur flokkur, Tjóðveldisflokkurin.

Við heimastýrislógini fekk landsstýrið útinnandi vald, ella rættari flokkarnir, sum við meiriluta skipaðu landsstýrið. Síðan heimastýrislógin kom í gildi, hava tilsamans verið 22 landsstýrir við ymiskum samgongum. Tey mál, sum fyrsta landsstýrið yvirtók, vóru mál, sum ikki kostaðu landinum nógv. Millum yvirtiknu málini vóru kommunalmál, meinigheitsmál, byggiviðtøkur, sløkkilið, reglur viðvíkjandi arbeiði, lærlingaútbúgving, beinleiðis og óbeinleiðis skattir, havnagjøld, bókasøvn, fornminnissøvn, skjalasøvn, friðing av bygningum og landslagi, ferðsluviðurskifti, landbúnaðarviðurskifti, fiskiskapur innan fyri fiskimarkið, viðurskifti viðvíkjandi føðivørum og príseftirliti, kunngerð av lógum, ferðamannamál, líkarættur, fólkaháskúlin og sjóvinnuskúlin. Hesi mál vóru A-mál. B-málini vóru útvarp og eftirlit við innflutningi og útflutningi.

Hóast alt sá bjart út fíggjarliga beint eftir kríggið, førdu skeivar íløgur í gamlar kolfýrdar trolarar landið út á sjógv. Tað næsta landsstýrið hevði nóg mikið at gera við at fáa landið á rættkjøl aftur, og síðani varð miðvíst farið undir at



*Føroyar fingu í 1992 rættin til undirgrundina. Á myndini teir tríggir føroysku samráðingarlimirnir. Dánial Nolsøe, dómari, Halgir Winther Poulsen, advokatur, og Martin Heinesen, jarðfrøðingur* *(Mynd: Dimmalætting)*

endurnýggja fiskiflotan við nýggjum skipum. Annað, sum setti dám á 1950-ini, var læknastríðið í Klaksvík og fiskivinnuverkfallið í 1954, sum m.a. endaði við, at formaður fiskimannafelagsins, Erlendur Patursson, varð settur fastur. Við valið hetta árið fekk Tjóðveldisflokkurin 6 mans á ting, millum teir var Erlendur Patursson, men Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin skipaðu landsstýri. Endurnýggjanin av skipaflotanum hevði verið ofta fyri á tingi, men í 1955 kom Realkredittstovnurin, sum fekk einar 10 milliónir av Marshallhjálpini í sín part. Realurin, sum nærri verður greitt frá seinni, fekk stóran týdning fyri endurnýggjan skipaflotans hesi árini.

Vælferðarpolitikkurin hjá Javnaðarflokkinum fór eisini at merkjast. Í 1958 fekk Javnaðarflokkurin 8 mans valdar, sum flokkurin vann uppá sín sosialpolitikk, serliga fólkapensjónina. Petur Mohr Dam gjørdist løgmaður frá 1959 til 1963, men eftir valið varð skipað ein sjálvstýrissamgonga, sum kortini gjørdi lítið við sjálvstýrið. Eitt av høvuðsmálunum hjá hesi samgongu var at fáa fiskimarkið út á 12 fjórðingar.

Tey komandi árini gekk alt búskaparliga framá í Føroyum. Okkurt politiskt rumbul var um NATO, tá støðirnar vórðu bygdar á Sornfelli, men tað fánaði burtur, tá Oyggjarvegurin kom, og koyrandi varð heilt norður til Vestmanna í 1965. Umleið 10 ár seinni var eitt annað týdningarmikið mál á dagsskránni. Tað

var spurningurin um viðurskifti Føroya við ES. Danmark fór eftir eina fólkaatkvøðu upp ES í 1972, men løgtingið samtykti at standa uttan fyri hetta samveldið, serliga tí roknað varð við, at limaskapur fór at skaða fiskivinnuna, sum føroyingar væntaðu at missa ræðið á. Her er einki broytt. Føroyar eru enn uttan fyri Evropeiska Samveldið, og einki rættiligt politiskt orðaskifti hevur verið um hetta mál síðan.

Í 1975 fóru Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin í samgongu, sum vardi til 1981. Fyri fyrstu ferð í mong ár varð nú aftur farið undir at fremja yvirtøkur. Partar av Almannastovuni og heilsuverkinum vórðu yvirtiknir í 1975, Postverkið í 1975 og fyrisitingin av undirvísingar- og skúlaverkinum í 1979. Higartil hevði danski parturin av útreiðslunum verið afturgoldin við eini refussiónsskipan, men síðan 1988 hava allar danskar útreiðslur verið goldnar til Føroya í einum við eini heildarskipan, sum manna millum hevur verið rópt *blokkurin.* Samstundis er eisini vorðið greiðari, hvussu nógvan pening danski staturin letur Føroyum.

Í 1964 varð føroyska fiskimarkið flutt út á 12 fjórðingar, seinni varð tað flutt út á 50, og í 1977 varð tað eins og øll fiskimørk kring onnur strandalond flutt út á 200 fjórðingar. Hetta gjørdi tað trengri hjá føroyska fiskiflotanum á fjarleiðunum, samstundis sum føroysk skip fjølgaðust á landgrunninum. Tað, sum



*Frá seinast í 19. øld og til í dag hava fakfeløgini havt nógv at siga í føroyska samfelagnum, og eftir kreppuna í 1992 fóru øll feløgini í eina felagskravgongu fyri at vísa sína ónøgd* *( Mynd: Dimmalætting)*



*Formaður Føroya Arbeiðarafelags, Ingeborg Winther, heldur røðu undir Tinghúsinum*
*(Mynd: Dimmalætting)*

hendi í føroyskum politikki eftir hetta, er sera áhugavert, tí alt tað, sum kynt varð undir í hesi tíð við búskaparligum og fíggjarligum politiskum eksperimentum, kollrendi í 1990-unum føroyska samfelagið búskaparliga. Tað gjørdi eisini, at álitið millum føroyingar og danir fór í botn.

Eftir at Føroyar vóru komnar so dánt fyri seg aftur, varð í 1998 aftur skipað ein fullveldissamgonga, ið eftir eini skipaðari mannagongd skuldi fáa Føroyum fullveldi, so føroyingar sjálvir kundu taka ábyrgdina av øllum sínum viðurskiftum. Men her var bara roykur og eingin grind. Einki kom burtur úr samráðingunum. Við valinum í 2004 varð skipað ein onnur samgonga, har fullveldið ikki stendur ovast á dagsskránni, hóast sjálvstýri tykist hoyra upp í tær visjónir, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja áðrenn 2015. Fleiri visjónir vóru eisini í føroyska samfelagnum fyri 100 ár síðan. Tær vóru ikki so umfatandi, men vóru kortini við til at skapa tað samfelag, vit hava í dag.

# Sambinding

## El, telefon og postur

Frá gamlari tíð var vanligt at ganga eftir vørunum á landi ella fara við báti við posti, boðum ella ferðafólki. Hetta var skjútsskyldan, sum hvør bygd hevði eftir gamlari siðvenju. Skjútsið var væl skipað við einum skjútsskaffara í hvørjari bygd, sum helt skil á, hvør átti tørn at fara. Tað, sum varð flutt við skjútsi, kundi vera brøv, boð og eisini fólk, vanliga embætismenn og oftast prestur.

Skjútsskyldan varð tikin av í 1922, men fyri prest var hon galdandi líka til 1936. Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at hvør bygd eisini hevði skyldu til at bera grindaboð víðari til næstu bygd. Tað lá eitt nú á bíggjarmonnum og sørvingum at fara við grindaboðum til Mykinesar, líka til radiotelefon kom til Mykinesar í 1928.

Vanlig fólk ferðaðust ikki so nógv fyrr, kanska til okkurt vetrargildi í grannabygdini ella í okkurt brúdleyp. Ikki fyrr enn vit koma út ímóti 20. øld, kemur størri røringur í fólk, og tá bar eisini betur til at ferðast. Tann lættasti hátturin at ferðast í Føroyum var eftir sjónum, tí allar bygdirnar lógu nær sjónum. Sambandið sjóvegis gjørdist tí fyrsta skipaða sambandið oyggjanna og bygdanna millum. Eitt, sum studdi undir hetta, var, at skipaða postsambandið, sum byrjaði seinast í 19. øld, var komið í fasta skipaða legu um aldaskiftið.



*Í 1906 fingu Føroyar telegrafsamband við útheimin. Mynd frá hátíðardegnum, tá kápilin kom í land í Sandágerði og varð lagdur í Kápilhúsið*

Nógv hendi úti í heimi seinna part av 19. øld, tá nógv varð uppfunnið, sum fór at gera nyttu í verki. Elverk gjørdust alt vanligari og fluttu elmegi gjøgnum káplar og leidningar, sum kundu fáa elperur at lýsa og eldrivnar lunnavognar at koyra í gøtunum. Telegrafurin var eisini farin at virka í alheimshøpi. Í 1866 varð ein kápul lagdur millum USA og Ongland, so tað bar til at morsa boð ímillum heimspartarnar. Bell hevði gjørt sína fyrstu brúkiligu telefon í 1876, og fimm ár seinni kom tann fyrsta telefonstøðin í Keypmannahavn. Eitt annað, sum hendi hesa tíðina, var, at londini samdust um at gera eitt heimspostsamband í 1874, har semja varð gjørd um postgjøld og frímerki. Eisini menna bankar á heimsplani sambandið sínámillum, og kekkurin ger, at peningur kann verða fluttur skjótt. Haraftrat fór at bera til at flyta pening við telegrafi.

Umframt alt hetta broytti ein ídnaðarlig og teknisk kollvelting allan heimin. Bæði svávulpinnar og dynamitt vórðu uppfunnin. Tað, sum hendi í Føroyum, var ein avleiðing av tí, sum hendi aðrastaðni, men sum so ofta gingu ávísir persónar á odda og fingu broytingarnar at henda. Ein teirra var vestmenningurin Ólavur á Heygum, sum longu tey fyrstu árini í 1900 hevði ætlanir um at gera eina turbinu við vatni úr Fossá í Vestmanna. Ólavur á Heygum var ein sera virkin og fantasifullur maður, sum var úti um seg og dugdi at síggja møguleikarnar, har teir vóru, bæði tá talan var um elektrisitet, telefon, trolaravirksemi og hvørt av sínum. Hann var bóndi, keypmaður, reiðari, og eitt skifti var hann eisini løgtingsmaður. Hann var eisini tann fyrsti, sum í 1905 gjørdi royndir við trolara, tí



*Fyrsta elverkið í Tórshavn.*
*Elverkið á Rundingi*

159 BRT stóra Lord Alfred Paget. Hetta gjørdi hann bara í eitt ár og mátti svíða fyri royndina fíggjarliga. Tað var eisini hann, sum tók stigið, ið førdi til, at P/F Føroya Banki varð stovnaður í 1906.

Hóast nógv varð arbeitt fyri at fáa elverk í Føroyum við fossamegi ella motormegi, komu tey fyrstu elverkini ikki fyrr enn í 1921, eitt motorverk á Rundingi í Tórshavn og eitt vatnorkuverk í Botni suðuri í Vági. Eftir hetta komu fleiri elverk, tey flestu við dieselmotorum, men í fleiri bygdum vóru eisini smærri vatnorkuverk við drívhjóli og dynamo, sum í flestu førum vóru privat.

Í 1946 varð tað stóra lopið gjørt, tá kommunurnar í Streymoy, Eysturoy og Vágum tóku seg saman í elfelagsskapinum SEV, sum fór undir at byggja vatnorkuverk í Vestmanna, har fyrsta turbinan á Fossáverkinum varð tikin í nýtslu í 1953. Skjótt komu eisini aðrar kommunur upp í SEV, sum síðani hevur staðið fyri allari elveiting í Føroyum. SEV hevur síðani Fossáverkið bygt fleiri onnur elverk, bæði vatnorkuverk á Eiði og oljudrivin motorverk, tað størsta á Sundi, umframt smærri verk aðrastaðni. Í dag hava allar bygdir í Føroyum elmegi.

Longu í 1902 fór Ólavur á Heygum at fyrireika telefonsamband millum Vestmanna og Tórshavn, og árið eftir fór hann at leggja linjuna. Í 1905 bar til at tosa í telefon millum bygdir fyri fyrstu ferð í Føroya søgu. Hetta var sama árið, sum Det Store Nordiske Telegrafselskab hevði fingið konsessión og lagt ein telegrafkaðal millum Hetland, Føroyar og Ísland, so Føroyar fingu telegrafiskt sam-



*Fyrsta vatnorkuverkið hjá SEV verður bygt í Vestmanna fyrst í 1950-árunum*



*Tann nýggja tøknin er vorðin loftborin* *(Mynd: Dimmalætting)*

band við umheimin. Løgtingið yvirtók linjuna frá Ólavi á Heygum í 1906, og Ólavur fekk tað aftur, hann hevði goldið fyri arbeiðið. Síðani tá hevur telefonsambandið hoyrt undir løgtingið, til tað í 1998 fór í alment partafelag undir navninum Føroya Tele. Í 1920-unum varð telefonnetið útbygt við tí tøkni, sum tey tá høvdu, men enn vóru onkrar oyggjar, sum ikki høvdu telefon, eitt nú Mykines. Hesar oyggjar fingu í staðin radiotelefon. Stórvegis broytingar vórðu ikki framdar á telefonøkinum fyrr enn væl eftir seinna heimsbardaga. Sjálvt í 1960-unum var tað ikki vanligt, at telefon var í hvørjum húsum.

Telex kom umleið 1960, *og tað var framburður við lít. Hugsa sær, nú kundu vit senda og fáa aftursvar í somu tilgongd, hóast tað gingu fleiri ár aftrat, áðrenn postgongdin varð økt. Av allari nýmótans tøkni í mínari tíð tykir mær telexmaskinuna at vera eitt hitt mest undrunarverda. Alnótin kann vera ta, hon er, men telexið breyt gjøgnum ein kaðal við eitt allar frástøðuforðingar. Ein skrivaði okkurt á telexið hjá okkum, og texturin kom eisini uppá pappírið á onkrum japonskum ella amerikonskum – ella hvagar ein nú hevði samband – telexi samstundis, og tey kundu svara aftur,* fortelur bankakvinnan Súsanna Dam í Dimmalætting í eini heilsan til Føroya Banka á 100 ára degnum.

Nýggj tøkni kom, sum gjørdi, at øll kundu fáa telefon, og nú hava Føroyar verið við í menningini nøkulunda samstundis sum restin av heiminum. Hetta er ikki minst galdandi í sambandi við fartelefonir, og tá talan er um teldur, ið knýta okkum upp í alnótina við øllum tí, sum har er at finna bæði av góðum og illum.

Var talan um eina stórhending, tá vit fingu Útvarp Føroya í 1957 og Sjónvarp Føroya í 1984, so er tað í 2006 av neyð, at vit hava lagt útvarp og sjónvarp saman í Kringvarp Føroya, tí annars er vandi fyri, at vit sum føroyingar við egnum samleika detta burtur ímillum í øllum tí elektroniska samskiftinum. Rættiliga long tíð gekk, áðrenn Føroyar fyri fyrstu ferð fingu alment sjónvarp. Nú hevur tað almenna eisini fingið privatar kappingarneytar á øllum samskiftisøkinum. Men lat tað liggja. Vit fara aftur til tíðina um aldaskiftið, tí Ólavur á Heygum var ikki einasti maður, ið hevði áhuga fyri nýggju tøknini. Júst um hesa tíðina høvdu teir báðir, amtmaðurin Christian Bærentsen og Jóannes Patursson, sett seg í samband við fólk og myndugleikar í Noregi, sum stóðu fyri ikki bert telefongerð, men eisini vegagerð. Teir fingu ein verkfrøðing, Hans Horn, við sær heim til Føroya at greiða frá møguleikunum fyri vegagerð og telefon í Føroyum.

Øll vóru ikki fyri tílíkum, heldur ikki tveir so heimsvandir menn sum Fríðrikur Petersen og Oliver Effersøe, ið javnan vóru í Keypmannahavn, sum um hetta mundið bæði hevði breiðar vegir, sporvognar og elektrisitet. Prósturin Fríðrikur Petersen hevði tá ta fatan, at *Køreveje ville aldrig komme til at spille nogen Rolle heroppe, da Havet er vor Landevej, og* partamaður hansara Oliver Effersøe segði við sama høvi, at *Kørevejene vil blive Landkommunikationen heroppe; det venter jeg og haaber heller ikke, at det skal blive.* Hinvegin helt sjálvstýrismaðurin Joen Hendrik Poulsen, at *Vel er Søen den billigste Landevej heroppe, men vi kan dog næppe i al Fremtid nøjes med den alene.*

Sum nevnt varð eitt heimspostsamband skipað í 1874. Tað fyrsta posthúsið læt upp í Tórshavn tann 1. mars 1870, á Tvøroyri 1. mars 1884 og í Klaksvík 1. mai 1888. Sýslumenninir tóku sær av postinum, men tað var ikki fyrr enn í 1903, at postviðurskiftini í Føroyum vórðu skipað við postavgreiðslustøðum ella



*Nýtt posthús varð bygt í Tórshavn í 1906*



*Tað gamla posthúsið í dag* *(Mynd: Dimmalætting)*

ið hvussu er við fólkum, sum høvdu ábyrgd av postinum í hvørjari bygd. Høvuðsposthúsið var í Tórshavn. Fyrst var tað í Villumsstovu í Gongini og síðani í Sjóbúðini í Tinganesi. Nýtt posthús bygt til endamálið í miðbýnum í Tórshavn læt upp í 1906. Samstundis varð alt tað føroyska postverkið uppgraderað, og C.C. Danielsen, ið áður hevði verið postavgreiðslumaður, fekk nú tað tignarliga heitið *postmeistari* frá 1908. Postverkið fekk eisini bæði postkontrollørar og postboð, men heilt so fín heiti fingu tey ikki úti á bygd.



*Postmaðurin í Gásadali er á veg til hús við postsekkinum á bakinum og postkasjetti á høvdinum. Hann hevði altíð fjallstav*

So seint sum í 1960 var um veturin *bert postsamband við útheimin 14anda hvønn dag, m/s Tjaldur hjá Skipafelagnum Føroyar var einasti postberi um veturin. Tað sigur seg sjálvt, at tað var sera umráðandi, at allur posturin fór avstað rættstundis, og tey allarseinastu brøvini fekk onkur nœmingur boð um at renna oman á kaiina við og koyra í postkassan, sum hekk á landgongini á »Tjaldrinum«. Tað var ikki so galið at vera tann, ið slapp á kaiina, beint áðrenn »Tjaldrið« fór, tí har hendi nógv tá. Nógv fólk vóru og søgdu farvæl ella bara og forvitnaðust. Rættilig gremjan og tannagrísl var í bankanum, um okkurt týðandi lá eftir, kundi vera ein kekk-advisering ella ein fiskasølurembursur, tá vart tú nærum tilreiðar at bjóða teg fram til at svimja inn á meginlandið við hesum, so stór tyktist ólukkan at vera,* sigur Súsanna Dam í heilsan síni til Føroya Banka á 100 ára degnum.

Skipanin frá 1908 var í høvuðsheitum í gildi, til postverkið varð yvirtikið í 1975, tá danska posthornið og reyðu búnarnir hjá postboðunum vórðu útskiftir við eitt stíliserað veðrahorn og bláar búnar og postkassar. Ein fortreyt fyri, at posturin hevur virkað væl í Føroyum, er eisini samskiftið bygdanna millum. Her hava Smyril, mjólkarbátarnir og hinir postbátarnir havt sera stóran týdning.

## Smiril og Smyril

Eitt grundarstøði undir postverkinum var samskiftið millum bygdirnar. Í einahandilstíðini mannaðu bygdamenn bátin nakrar fáar ferðir um árið fyri at fara handilsørindi til einahandilin. Tá fríhandilin kom, høvdu teir stóru keypmenn-

inir egin skip ella før at sigla við millum oyggjarnar, tí nøkur ár skuldu ganga, áðrenn fastar rutur komu millum oyggjar og bygdir. Tankin um at fáa regluliga rutusigling var frammi í løgtinginum fleiri ferðir, men einki hendi, fyrr enn A/S Mortensens Eftf. á Tvøroyri sjálvir tóku seg um reiggj og fingu sær eitt 162 BRT stórt dampskip bygt í Malmø fyri 70.000 kr. Skipið *Smiril* var liðugt í 1896 og var fyrsta rutuskipið í Føroyum. Mortensensmenn høvdu áður skipini *Føringur 1* og *2*, men hesi skip vórðu brúkt til farmasigling. Smiril sigldi 10 míl og røkti ikki bert sambandið millum Suðuroy og Tórshavn, men hevði eisini eina ferðaætlan til aðrar bygdir í Føroyum.

Í 1917 yvirtók amtið bæði skip og rutu. Í 1932 loysti ein nýggjur Smiril gamla Smiril av. Hann var bygdur í Fredrikshavn og lastaði dupult so nógv sum tann gamli. Hann var eitt snotiligt skip við fínari salong og hovmeistara, sum stóð fyri matgerðini umborð. Umframt at fáa at eta fingu ferðafólkini koyggju umborð. Hesin Smiril varð í 1967 avloysur av einum triðja Smyrli – nú stavaður við y. Hann varð bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju. Um hetta mundið var vegakervið so nógv útbygt, at eisini mátti vera pláss fyri bilum umborð. Púra natúrligt var tí, at skipið, sum avloysti triðja Smyril í 1975, var ein bilferja. Morten Mols varð keyptur úr Danmark og fekk eisini navnið Smyril. Hann hepnaðist so væl, at systirskipið Mikkel Mols varð keypt í 1980 og fekk navnið Teistin. Umframt at vera avloysaraskip hjá Smyrli varð Teistin eins og Smyril brúktur til uttanlandssigling og at leggja støðið undir farleiðina, sum Norrøna, ið Smyril



*Hesin Smiril varð bygdur í 1932 og røkti Suðuroyaleiðina til 1967*



*Nýggjasti Smyril á veg fram við boripallinum Stena Don, sum lá á Havnarvág summarið 2006*

Line keypti í 1983, fór at røkja. Fimti og higartil seinasti Smyril fór í sigling í 2005. Hann man vera eitt tað prýðiligasta farið í føroyska flotanum.

Fyrstu tíðina var langt millum túrarnar, og so seint sum í 1950-unum kundi taka einar 8 tímar at koma til Havnar, tí Smiril legði at allastaðni norðureftir. Tey mongu seinnu árini hevur Smyril siglt til Suðuroyar tvær ferðir um dagin. Harumframt varð um summarið eisini skipað fyri útferðum. Føroyingar fingu so við og við hug at verða turistar eisini. Ikki bara við Smirli, men eisini við øðrum bátum til aðrar bygdir ella á fólkafund, sum vanliga vórðu lagdir burtur frá bygdunum.

## Mjólkarbátarnir

Næsta stóra hendingin á strandferðsluøkinum eftir Smiril var, at Meiaríið ella Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik fór at sigla eftir mjólk til havnarfólk í 1908. Felagið gjørdi avtalu við postverkið um, at tað fyri eitt ávíst gjald eisini skuldi taka sær av postflutninginum. Byrjað varð við motorbátinum *Dan,* ið var fyrsti bátur, sum Laurits í Mortanstovu bygdi. Báturin varð skjótt skiftur út við 15 BRT lítla dampskipið *Ruth,* sum manna millum varð nevnt *Mjólkarbáturin.* Hetta lítla friðarliga dampskipið, sum stillisliga skar seg gjøgnum sjógvin og fór bygd av bygd, fekk skjótt onnur før aftrat sær. Í 1923 keypti Meiaríið motorbátin *Sigmund.* Hann varð bygdur á Skála í 1922 og fór at sigla til Húsa-



*Mjólkarbáturin Tróndur til vinstru og Streymur til høgru. Streymur var ein av teimum 9 ísvirkisbátunum á Tvøroyri. Hann varð keyptur til Havnar í 1932*

víkar og Skálavíkar eftir mjólk. Árið eftir fór hann eisini at sigla til Miðvágs. Longu í 1924 keyptu teir ein motorbát aftrat, *Dúgvuna*, ið Lias í Rættará bygdi í 1922. Dúgvan røkti siglingina til Nólsoyar, Skopunar og út í Hest. Seinni fór Dúgvan eisini at sigla til Víkar, Norðskála og Eiðis. Synd er at siga, at nakar serligur komfortur var við hesum motorbátunum, men komforturin kom so við og við. Í 1926 varð Ruth skift út við ein 6 ára gamlan norskan rutubát við fínari salong, sum fekk navnið *Tróndur. Streymur*, sum Meiaríið keypti í 1932,var ein av teimum 9 ísvirkisbátunum á Tvøroyri. Hann sigldi í Vágar og til Norðuroyggjar.

Hóast løgtingið fekk rætt til alla strandfarasigling í 1939, slapp Meiaríið at halda fram við sínum mjólkarbátum. Skipið *Ternan* kom í 1946 og sigldi Skálafjarðar- og Sundalagsleiðina umframt onkra aðra leið. Aftur í 1949 keyptu teir nýtt skip, sum tíverri rak á land og sorlaðist í Lítluvík í 1950, men sama ár keyptu teir ein nýggjan og meira komfortablan *Sigmund*, ið røkti siglingina, til bilferjan Tróndur kom í 1967. Tann fyrri *Sigmundur* varð longu í 1933 latin til Tvøroyrar, har hann sigldi sum mjólkarbátur í mong ár. Í nøkur ár sigldi skipið *Dúgvan*, keypt í 1985, millum Havnina og Skálafjørðin, men henda ruta varð niðurløgd, tá vegakervið var liðugt útbygt. Tá hevði leiðin í mong ár verið undir Strandferðsluni.

Hava Smyrlarnir havt ómetaliga nógv at týða fyri suðuroyingar, hava mjólkarbátarnir havt nógv at siga fyri fólk í Sundalagnum og á Skálafirði. Teir vóru mestsum sjálvur pulsurin í gerandisdegnum á hesum leiðum, og fyri fólk á Skálafjørðinum var tað sum, at pulsurin helt uppat, tá Tróndur og eftir hann

Dúgvan hildu uppat at sigla, og tað nýggja smidliga og meira ópersónliga sambandið við bussum gjørdist einasta álitið. Til bar ikki at fáa sama prátið í bussunum sum umborð á Trónda. Ei heldur gera bussarnir um seg á sama hátt sum mjólkarbátarnir.

## Aðrar leiðir

Burtursæð frá Suðuroyarleiðini var sjóvegis rutusamband yvirhøvur á privatum hondum, fyrst við opnum bátum og síðan við motorbátum. Úr Fuglafirði til Hellurnar, Oyndarfjarðar, Elduvíkar, Funning og Gjógv sigldu frá 1908 og fleiri ár fram motorbátarnir *Ragnhild* og *Anna.* Eisini sigldi motorbáturin *Guttaberg* úr Klaksvík til Kunoyar og Kalsoyar, eins og *Immanuel* frá umleið somu tíð røkti sambandið til Haraldssunds, Árnafjarðar og bygdirnar eystan Múla. J. F. Kjølbro fekk sær eisini rutubátar. Hann yvirtók rutuna millum Leirvík og Klaksvík í 1935, samstundis sum hann setti sluppina *Britons Pride*, ið neyvan livdi upp til navnið, í rutu millum Havnina og Klaksvík. Síðst í 1950-árunum avloysti nýggi *Pride* hesa sluppina. Hann varð bygdur til endamálið á Florø í Noregi. Tá vegakervið varð meira útbygt, fór ferðslan at ganga mest úr Klaksvík til Leirvíkar, har bilferjan *Ternan* varð sett í sigling í 1973. Ein nýggj Terna, bygd á Tórshavnar Skipasmiðju, varð sett inn í hesa rutu í 1980. *Dúgvan*, ið hevði siglt millum Skálafjørðin og Tórshavn, hevur eisini siglt millum Leirvík og Klaksvík. Eina tíð



*Bilferjan SAM røkti í mong ár leiðina millum Vestmanna og Oyragjógv. Henda leið fór í søguna, tá undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund kom í 2002* *( Mynd: Dimmalætting)*

røkti *Reynir,* sum Hans Pauli Joensen í Haldórsvík átti, sambandið millum bygdir í norðara parti av Sundalagnum, og meðan bíðað varð til, at Norðskálatunnilin skuldi verða liðugur í 1976, sigldi Sundaferjan úr Hósvík til Selatrað.

Í Vágum var fyrsta sambandið um Vestmannasund við opnum báti, men frá umleið 1920 sigldi motorbáturin *Helgi* og frá 1930 motorbáturin *Ólavur,* bygdur til endamálið, millum Fútaklett og Vestmanna. At ferðast av Fútakletti yvir á Streymoynna og víðari við mjólkarbátunum úr Kollafirði til Havnar róptu vágafólk at *fara yvir land.* Við sambandinum millum Oyrargjógv og Vestmanna og tí munandi størri bátinum *Bragd,* keyptur í 1965, gjørdist lættari at koma um Vestmannasund. Hetta var sama árið, sum Oyggjarvegurin varð opin fyri ferðslu. Fyri bilferðsluna var tað ein stórhending, tá fyrsti *Sam* kom í 1970, tí tá var bara at koyra umborð og í land aftur. Ferjulega var tá komin bæði í Vestmanna og á Oyrargjógv. Ein annar størri Sam kom í 1975.

Ferjusambandið millum Oyrargjógv og Vestmanna varð niðurlagt sama dag, sum Vágatunnilin læt upp fyri jól í 2002, og í 2006 er eisini koyrandi gjøgnum Norðoyatunnilin.

Meiaríið og aðrir høvdu fyrr siglt upp á Miðvág, men frá 1946 og líka til 1966 røkti *Vesturleið,* sum N. Niclasen í Sørvági átti, hetta ikki altíð so tespiliga og viðhvørt ógvuliga sjóverksliga sambandið. Vesturleið varð seldur til Norðoyggjar og sigldi frá 1971 í nøkur ár millum Leirvík og Klaksvík undir navninum *Kjógvin.* N. Niclasen røkti eisini sambandið til Mykinesar við motorbátin-



*Ein vanlig ferðamynd sjóleiðis við Vesturleið fyri eini 50 árum síðani*

um *Hamraberg*. Seinni tók landið yvir og setti motorbátin *Súluna* í hesa sigling. Ein bátur úr glasfipuri, ið eisini kallast Súlan, avloysti seinni hendan motorbátin. Nú er sambandið aftur latið upp í privatar hendur at røkja fyri eina ávísa upphædd.

Landsstýrið læt í 1949 byggja ein nýggjan rutubát, ið varð settur í sigling millum Nólsoy, Skopun og Hest. *Ritan* røkti hesa leið, til hon fekk sín deyðiliga koss frá Ternuni 26. mars 1968. Eftir hana kom ein nýggj *Rita*, sum mest siglir til Nólsoyar. Ferjusambandið millum Gomlurætt og Skopun røkti Tróndur, til nýggja bilferjan *Teistin* kom. Hon røkir eisini farleiðina út í Hest.

Rutusamband hevur eisini verið til aðrar útoyggjar. *Másin* hevur í mong ár røkt sambandið millum Hvannasund, Fugloy og Svínoy. *Barsskor* hevur røkt sambandið í Kalsoynna. *Ritan* hevur siglt til Nólsoyar, út í Hest og Koltur, og *Súlan* hevur siglt til Mykinesar. *Sildberin* røkir sambandið millum Sand og Skúvoy. Frammanundan røkti opni báturin Sigmundur hesa farleið.

Óivað fara nógvar av teimum bæði góðu og ringu upplivingunum, sum fólk hava havt við rutubátunum, nú í søguna. Men sama veg fer óttin fyri at ferðast, tí fyrr høvdu summi fólk sjóverk í fleiri dagar, áðrenn tey yvirhøvur vóru farin avstað. Tá var ferðing ikki sami stuttleiki sum í dag, nú til ber at fara við bili allastaðni uttan á útoyggj.

## Havnarløg og vegir

Havnarløgini knýta ferðsluna eftir sjógvi og landi saman. Rættiliga tíðliga vórðu í fleiri bygdum gjørdar brýr úr viði ella gróti til smærri før at leggja at á. Longu fyrst í 20. øld vórðu ætlanir lagdar um størri havnir í Føroyum, men kríggj og annað gjørdi, at steðgur kom í, so ítøkilig gongd kom ikki aftur á havnarmálini fyrr enn í 1920-unum. Tá komu havnir í fleiri bygdum eftir eini serligari ætlan. Har eingin bryggja var, kom bátur út til rutubátin eftir fólki og góðsi og førdi fólk og góðs í land. Tá seinni heimsbardagi brast á í 1939, vóru fleiri smærri havnarløg ella atløgubryggjur og sjey havnir, ið vóru nóg stórar til, at flestu stór skip kundu leggja at har. Hesar vóru Vágur, Tvøroyri, Vestmanna, Sørvágur, Miðvágur, Klaksvík og Tórshavn. Tórshavnar havn við mola og bryggjum innan fyri molan var liðug í 1929. Eftir seinna heimsbardaga komu eisini havnarløg í Kollafirði, Runavík, Strondum, Skála, Fuglafirði og á Toftum. Havnarløgini eru síðani bæði í Tórshavn og øðrum bygdum alsamt útbygd, so tey hóska til tann farmaflutning, sum nútíðin krevur. Umframt havnirnar er tey seinastu árini komin ein rúgva av lendingum og bátahylum. Havnirnar eru allar kommunalar. Fleiri halda, at nú er nóg nógv útbygt.

Í bóklinginum Fra Færøernes Næringsveie, sum kom út í 1918, gremur

Sverri Patursson seg um, at ringt verður at fáa vinnuligan framburð og framburð á landbúnaðarøkinum í Føroyum, so leingi ongir vegir eru millum bygdir og inn í dalarnar. Tað, sum var av vegum, var inni í bygdunum til hestavognar, og sjáldan vóru vegirnir meira enn hálvan annan metur breiðir. Ein tann fyrsti vegurin var Sanatoriivegurin í 1907 úr Havnini niðan til bróstsjúkrahúsið í Hoydølum. Næsti vegur millum bygdir var vegurin millum Skopun og Sand. Hann kom í 1914.

Frá umleið 1920 kemur gongd á. Um hetta mundið vóru bilar vanligir aðrastaðni, og í 1922 fingu føroyingar sjón fyri søgn, tá tann fyrsti lastbilurin hjá Júst Sivertsen kom. Áhugin fyri bæði akførum og vegum vaks, og longu 8-10 ár seinni vóru meira enn 100 bilar í Føroyum. Meginparturin var lastbilar og vøruvognar, men nakað var eisini av persónbilum.

Í 1925 kom í Vágum vegasamband millum Sørvág, Miðvág og Sandavág, og áðrenn 1935 varð sambandið longt yvir á Fútaklett. Í Streymoy var vegasamband millum Kvívík og Kollafjørð og millum Tórshavn og Kirkjubø. Í 1935 var eisini komið vegasamband millum Hvalvík og Saksun. Í Eysturoy var í 1925 vegur millum Fuglafjørð og Gøtu, og tíggju ár seinni var samband til Skálafjørðin heilt út á Nes. Eisini var tá vegur til Æðuvíkar. Í Sandoy var í 1925 vegur millum Skopun, Sand, Húsavík og Skálavík. Tá vóru eisini koyrivegir komnir í Klaksvík og kommunalir vegir í teimum stóru bygdunum í Suðuroy, men enn var vegasamband ikki komið millum bygdir í Suðuroynni. Hetta vóru alt vegir úr grúsi og eyri.



*Mestsum allir lastbilsjafførarnir í Havn hittast í Kongagøtu í Havn seinast í 1920-unum*



*Kaldbakstunnilin varð tikin í nýtslu í 1992. Við sjóleiðunum og bussleiðunum er nú komið eitt gott ferðasamband um alt landið*

Undir seinna heimsbardaga hendi ikki tað heilt stóra, tá talan var um vegir. Eingilskmenn bøttu tó munandi um vegakervið í Vágum. Har varð mestsum hvør vegastubbi asfalteraður, og so hevur verið síðan. Eisini gjørdu eingilskmenn flogvøllin í Sørvági undir krígnum. Í 1950 er aftrat tí vegasambandinum, sum var, komin vegur millum Kvívík og Vestmanna og gjøgnum alla Kollafjarðar bygd. Í Eysturoy var vegasamband millum allar bygdirnar á eystara armi á Skálafjørðinum og bygdirnar eystanfyri. Men einki vegasamband var um Skálabotn til hinumegin á Skálafjørðinum.

Í Suðuroy var vegasamband úr Vági til Sumbiar, men enn einki samband millum hinar bygdirnar. Tey fyrstu árini í 1950-unum broyttist lítið, men tá vit koma til 1965, eru fleiri broytingar framdar. Mestsum allar bygdirnar í Norðstreymoy eru bundnar saman í eitt vegakervi, og júst hetta ár verður Oyggjarvegurin latin upp, men enn er ikki koyrandi til Kaldbaks. Tunnil kom millum Tvøroyri og Hvalba í 1963. Borðoyartunlarnir komu árini 1965-67. Sandvíkartunnilin kom í 1969.

Í 1973 kemur brúgvin um Streymin, og í 1976 verður Norðskálatunnilin tikin í nýtslu. Nú eru allar bygdir í Eysturoynni bundnar saman við einum vegakervi. Kunoyartunnilin kemur í 1988. Í Norðoyggjum kom byrging um Hvannasund í 1975 og byrging um Haraldssund í 1986. Vágatunnilin kom í 2002 og Norðoyatunnilin og Gásadalstunnilin í 2006. Við Gásadalstunlinum er koyrandi til allar bygdir í Føroyum, har fólk búgva. Til ber sostatt í dag at koyra heilt av Viðareiði til Gásadals. Hartil hevur Landsverkfrøðingurin, nú Landsverk,

í mong ár breiðkað fleiri av landsvegunum til tvey spor og borað tunlar, sum stytta um ferðingina og gera ferðsluna tryggari. Hetta er gjørt við Leynartunlinum í 1977, Leirvíkartunlinum í 1985 og Kollafjarðartunlinum í 1992.

Áðrenn Strandferðslan fór undir regluligt busssamband í 1978, tóku hýruvognsfeløg og stakir hýruvognar sær av ferðaflutninginum á landi. Hóast bilarnir viðhvørt kundu vera ovfyltir, hildu fólk flest hetta vera ein rættiliga ómakaleysan hátt at ferðast, serliga tá hýruvognarnir avheintaðu og avreiddu fólk mestsum í teirra egna duri. Busssambandið varð tí fatað sum eitt afturstig. At hýruvognsførarararnir innanhýsis klandraðust um ferðafólkini, var ein partur av sjarmuni. Serliga av Oyrargjógv á flogvøllin áttu bilsjafførar við tí skemtiliga navninum *gribbarnir* farleiðina. Henda ikki sørt hugfarsliga tíðin endaði við regluliga busssambandinum. Hetta var eisini endin á sambandinum frá hurð til hurð við hýruvognunum.

Í Føroyum verður skilt millum kommunalar vegir og landsvegir. Allir vegir millum bygdir eru landsvegir. Samstundis sum vegakervið verður útbygt, dettur rutusambandið sjóvegis burtur. Skjótt verður bara siglt til Sandoy, Suðuroy og tær smærru oyggjarnar, so nú 100 ár aftaná kunnu vit ikki gera annað enn ásanna, at bæði Fríðrikur Petersen og Oliver Effersøe fóru dyggiliga skeivir í 1905, tá teir ikki roknaðu við øðrum sambandi enn sjóvegis sambandi. Til ber ikki longur at kasta sambandsmonnum fyri, at teir ikki vilja hava vegir og tunlar.

## Til útheimin sjóvegis og loftvegis

### *Skipasambandið*

Eftir fríhandilin var regluligt sjóvegis samband millum Føroyar og útheimin. Hetta samband var á donskum hondum og frá 1866 hjá Det Forenede Damp-



*Tað fyrsta Tjaldur kom til Føroya í 1925*




*Felagið Smyril Line keypti í 1983 bilferjuna Norrønu, sum hevur røkt sambandið millum Føroyar, Danmark, Ísland, Hetland og Noreg* *(Mynd: Dimmalætting)*

skibsselskab, sum hevði fleiri skip, ið sigldu til Føroya áðrenn 1900. Túratalið árliga var fast. Líka til 1937 sigldu skipini hjá DFDS upp á Leith í Skotlandi. Eisini var samband millum Bergen, Føroyar og Ísland. Tað skipið, sum helst hevur siglt longst millum Føroyar og Keypmannahavn, er *S/S Dronning Alexandrine,* ið sum nýtt skip varð sett inn á leiðina í 1927, til *Dronningin,* sum hon vanliga varð nevnd, sigldi sín seinasta túr í 1965. Eftir hana kom fyrst *M/S Kronprins Olav* og síðani *Kronprins Fredrik* – ella *Krúnprinsurin.* Eftir hann kom *England* frá 1974 til 1980 og at enda *Winston Churchill* frá 1981 til 1992. Eftir at hava røkt rutuna í 126 ár helt DFDS uppat í 1992. Hetta hekk alt sjálvandi saman við, at flogferðslan vaks so nógv hesi árini, men komst eisini av, at føroyingar sjálvir á egnum kjøli høvdu tikið upp aftur sjóvegis samband til londini kring okkum, fyrst við Smyrli og Teistanum og síðan við Norrønu.

Í 1925 kom Skipafelagið Føroyar upp í part við fyrsta *Tjaldrinum.* Hetta skip nevndist upprunaliga St. Thomas og hevði siglt í tí Karibiska Havinum. Hetta prýðiliga og stásiliga skipið fór eftir mikið alment hóvasták í sigling 17. apríl í 1925 og røkti sambandið, til bretar hertóku skipið til krígsendamál undir krígnum. Føroyingar fingu Tjaldrið aftur í 1946. Tá var tað pussað upp og sett í stand, men tað syrgiliga hendi, at longu sama summar sakk tað við Mjóvanes.

Næsta Tjaldrið var gamli Gullfossur, sum kom til Føroya í 1947. Hetta skipið sigldi til 1953, tá eitt spildurnýtt Tjaldur, bygt í Danmark, varð sett í rutuna. Skipið røkti leiðina millum Keypmannahavn og Føroyar til 1967, tá tað var selt til Kili. Ætlanin var at byggja eitt nýtt skip. Tað gamla slitna skipið *Astrea,* sum kortini bar dám av einum fyrrverandi stórbæri, varð sett í siglingina sum ein fyribils loysn, men einki skip kom í staðin.

Det Forenede Dampskibsselskab átti nú rutuna einsamalt til 1992, tá eisini hetta felagið helt uppat. Tá fóru føroyingar aftur at yvirtaka uttanlandssiglingina við Teistanum, sum var keyptur í 1980, og sum umframt at vera avloysari hjá Smyrli røkti uttanlandssigling saman við honum til Danmarkar og Skotlands, til *Norrøna* kom í 1983. Í 2003 kom ein nýggj Norrøna fyri gomlu Norrønu, ið varð seld av landinum. Báðar hava røkt rutuna millum Føroyar, Danmark, Noreg, Ísland og Hetland.

### *Flogsambandið*

Undir seinna heimsbardaga bygdu eingilskmenn ein flogvøll í Vágum. Beint eftir kríggið vórðu gjørdar royndir við flogferðslu millum Vágar og útheimin. Føroyingar í samstarvi við skotska felagið Scottish Aviation stóðu fyri flúgvingini, men hon bar seg ikki. Eisini varð roynt við flogfarinum *Erlu Kongsdóttir*, ið bæði kundi seta seg á sjógvi og landi við dupultum veingjum og hevði motor, ið vendi aftureftir. Nógv varð tosað um henda flúgvara í Sørvági, sum fór í knús og tí ongantíð kom í rutuflúgving. Hetta var ein sorgarsøga av sama slag sum søgan um tann nýgjørda flogvøllin, ið eftir kríggið lá í órøkt í mong ár og hendinga ferð fekk vitjan av onkrum flúgvara. Tann nýggi stóri hangarurin, sum bretar høvdu bygd, stóð har í besta standi, men so tók vindurin í jarnpláturnar, og at enda rustaði hangarurin í grund.

Í 1963 fór føroyska felagið, Flogfelag Føroya, saman við Icelandair at skipa fyri regluligum flogsambandi millum Føroyar og útheimin. Fleiri ymisk donsk-



*Mangt umskiftist á mansins ævi. Fyri 20 árum síðan áttu føroyingar onki flogfelag. Nú eiga vit tvey, Atlantic Airways og Faroe Jet*

føroysk flogfør flugu eisini fyrstu tíðina, men frá 1966 til 1971 røkti Icelandair rutuna. Flogið varð til Keypmannahavnar, Reykjavíkar, Bergen og Glasgow. Frá 1971 tók Danair, seinni Mærsk, yvir rutuna, og burtursæð frá einstøkum øðrum royndum hevði felagið ferðsluna einsamalt líka til 1988, tá Cimber Air fekk part í flogrutuni saman við Atlantsflog ella Atlantic Airways, sum kappaðist við Mærsk Air, til danska felagið gavst í 2004. Atlantsflog hevur í 2006 fingið kapping frá einum nýggjum føroyskum flogfelag, *Faroe Jet.*

Flogferðslan er økt ár undan ári, og nú er samband úteftir fleiri ferðir um dagin. Eisini eigur tyrluflúgvingin at verða nevnd. Hon byrjaði so smátt í 1981. Í 1985 yvirtók Strandferðslan flúgvingina fyri at røkja sambandið til útoyggjarnar og tær bygdir, sum einki vegasamband høvdu. Tyrluflúgvingin varð í 1994 løgd saman við Atlantsflog og er nú ein partur av hesum felag.

Í dag kemur meginparturin av ferðafólkinum framvegis til Føroya loftvegis, og henda ferðsla tykist bara at vaksa ár undan ári. Føroyingar eiga í dag tvey virkandi flogfeløg.



*Meðan Havnará enn lá opin. Fyri endan liggur tann gamli Millum- og realskúlin, sum nú hýsir H. N. Jacobsens Bókhandli*

# Skúli og útbúgving

Nógv er hent frá tí, at ein latínskúli var í Tórshavn, sum fyrireikaði næmingar at taka studentsprógv. Hann varð niðurlagdur fyrst í 19. øld. Ein almúguskúli var í Havn longu frá fyrst í 1800, og hann var, líka til kommunulógin kom fyri allar Føroyar, tann einasti almenni skúlin í Føroyum. Hann gjørdist eitt við Tórshavnar Kommunuskúla, sum fekk síni egnu prýðiligu skúlahøli í 1896 í teimum húsum, sum nú eru býráðshúsini í Havn.

Tann skúli, ið sum tann fyrsti av sínum slag fekk týdning fyri nútíðina, var Færøernes Mellem- og Realskole, ið varð settur á stovn í 1861. Hesin skúlin helt í byrjanini til í teimum húsunum, sum nú eru H. N. Jacobsens Bókhandil, men flutti í 1916 í nýggj høli longri uppi í býnum niðan fyri nýggja gula kommunuskúlan. Millum- og Realskúlin fekk eisini tann týdning fyri føroyskan skúla, at lærarar skúlans fyri eyka løn skuldu átaka sær at útbúgva lærarar til føroyska skúlaverkið frá 1870 á tí stovni, sum fekk navnið Færøernes Seminarium. Haðani kom meginparturin av teimum lærarum, ið undirvístu í bygdaskúlunum, sum við kommunulógini frá 1872 komu um alt landið.

## Læraraskúlin

Føroyar fingu læraraskúla í 1870. Hesin skúli hevði sum so mangan á skúla- og undirvísingarøkinum líka til okkara tíð ikki egin høli, men hjálptist við at fáa innivist í eitt nú Millum- og Realskúlanum og fylgdi við, tá skúlin seinni flutti í 1916. Realskúlin og Læraraskúlin verða nevndir saman her, tí so seint sum í 1962 hevði Læraraskúlin hvørki egnan rekara ella egnar lærarar. Læraraskúlin hekk uppi í Færøernes Mellem- og Realskole og teimum lærarum, sum undirvístu har. Teir høvdu Læraraskúlan aftrat. Kortini undirvístu eisini einstakir lærarar á studentaskeiðnum, sum byrjaði í 1937 á Læraraskúlanum. Hesa tíðina varð undirvíst uttan fyri vanligu undirvísingartíðina hjá realskúlanum, fyrst á morgni og so seinnapartar út ímóti kvøldi. Heldur ikki tók Læraraskúlin inn næmingar á hvørjum ári. Tað fór hann ikki at gera fyrr enn í 1970.

Fyrstu tíðina var bara ein útbúgving. Undirvíst varð á donskum, og lærugreinin føroyskt fanst ikki á tímatalvuni. Lærugreinirnar vóru fyrstu tíðina kristni, danskt, landalæra, rokning, skriving, sangur, fimleikur og so petagogikkur. Seinni komu eisini aðrar lærugreinir, eitt nú føroyskt, sum fyri fyrstu ferð kom á tímatalvuna í 1907. Hetta var tað, sum næmingar í føroyska fólkaskúlanum skuldu læra tey sjey árini, teir gingu í skúla. Ikki fyrr enn í 1962 gjørdist Læraraskúlin sjálvstøðugur skúli við egnum rektara og egnum lærarum, og ikki fyrr enn í 1968 fekk Læraraskúlin egin høli. Læraraskúlin hevur øll árini, líka til skúlaverkið varð yvirtikið í 1979, verið eitt danskt statsseminarium.

Í fyrstani tók læraraútbúgvingin 2 ár, í 1878 varð hon longd til 3 ár, og í 1938 varð útbúgvingin aftur longd við einum ári, so hon tók 4 ár. Í fleiri fakum vórðu læraraskúlanæmingar fyrstu tíðina undirvístir saman við realskúlanæmingum. Hetta sigur eitt sindur um fakliga støðið. Í 1947 vórðu upptøkukrøvini herd. Nýggj lóg kom í 1962, har upptøkukravið var realprógv, og tey, sum ikki høvdu tað, máttu ganga í fyrireikandi flokk fyrst. Í 1978 vórðu upptøkukrøvini aftur herd, so ein miðnámsútbúgving kravdist fyri at verða upptikin.

Í mong ár varð føroyska læraraútbúgvingin ikki mett at vera á sama støði sum aðrar norðurlendskar læraraútbúgvingar, men hesum varð arbeitt miðvíst fram ímóti, eftir at Læraraskúlin hevði fingið egnan rektara og fastar lærarar. Reglugerðin fyri læraraútbúgving er broytt fleiri ferðir og stendur í skrivandi løtu aftur til at verða broytt. Læraraútbúgvingin hevur seinastu 40 árini verið skift sundur í linjur og linjulærugreinir. Alt hetta fyri at kunna svara teimum krøvum, sum samfelagið setir fólkaskúlanum og framhaldsútbúgvingunum.

## Bygdaskúlar og framhaldsskúlin

Endamálið við læraraútbúgvingini var at undirvísa næmingunum í bygda- og kommunuskúlunum. Lærarar hava eisini altíð verið í føroyska skúlaverkinum, sum hava útbúgving av donskum læraraskúlum. Fyrsta takið hjá teimum nýggju kommununum ella sóknunum var at fáa bygt skúlar eftir 1872. Tað byrjaði í smáum, men í tíðarskeiðnum frá 1880-1910 vórðu nógvir skúlar bygdir. Hesir skúlar líktust nógv, vóru heldur lágir við stórum vindeygum og flagtaki. Alt eftir, hvussu stór bygdin var, høvdu teir eina ella tvær ríttiliga stórar skúlastovur. Skúlarnir høvdu eisini loft. Bústaður til læraran var vanliga eisini á skúlanum, ikki sjáldan á loftinum. Skúlaborðini og innbúgvið hildu í mong ár eins og skúlarnir, sum enn vóru í nýtslu í 1950-unum. Í fleiri av teimum smærru bygdunum verða teir nýttir enn tann dag í dag. Ikki fyrr enn seinnapartin av 1950-unum, tá framheildsdeildirnar komu, vórðu nýggir skúlar bygdir. Í onkrum bygdum vóru stórir skúlar bygdir áðrenn hetta.

Ikki øll vóru so fegin um skúlarnar. Eitt var, at skúlin tók børnini úr tí vanliga arbeiðinum í bygdini, har roknað varð við teirra arbeiðsmegi. Eitt annað var, at skúlin og lærarin kostaðu pengar. Svínoyingar søktu í 1900 um at fáa egnan skúla. Teir skutu upp, at lærarin skuldi verða løntur við fríum húsum, sum vórðu sett til eitt virði á 40 kr., 200 leypum av torvi, settir til eitt virði á 90 kr., 6 lomb, sett til eitt virði á 24 kr. og 30 kr. í reiðum peningi. Parturin hjá kommununi var við hesum 204 kr., og so roknaðu teir við, at staturin læt 200 kr. Hetta var í minna lagi, men lønirnar vóru ikki stórar hjá lærarunum. Í 1908 komu nýggjar fastar lønir í gildi fyri lærarar. Læraralønirnar í Tórshavn vóru størstar. Fyrstulærararnir í Havn fingu um árið 1600 kr. vaksandi til 3000 kr. Vanligir lærarar fingu 1100 kr. um árið vaksandi til 2100 kr., men lærarinnurnar fingu væl minni, einans 900 kr. um árið vaksandi upp til 1800 kr. Á bygd var læraralønin 700 kr. um árið umframt frí hús. Fyri lærarar vaks lønin upp í 1700 kr. um árið og fyri lærarinnur upp í 1500 kr. Hetta var kortini munandi meira, enn fiskimenn tjentu um árið um sama mundið. Í 1963 var lærarlønin umleið 10-faldað samanborið við 1908.

Í flestu bygdunum vóru tveir lærarar ella fleiri, men summar bygdir máttu skiftast um ein lærara, ið ferðaðist ímillum. Her fingu næmingarnir bara undirvísing aðru hvørja viku. Hesi viðurskifti hava fyri summar bygdir verið galdandi heilt, til tyrlan kundi flyta læraran úr einari oyggj í aðra.

Lærubókatilfarið var á donskum, og tað var vanliga eins ár eftir ár. Sum oftast vóru ikki fleiri enn 4 flokkar, so børnini gingu ofta fleiri ár í sama flokki, men summi dugdu so væl, at tey gingu flestu árini í seinasta flokkinum. Her er tíbetur nógv hent, tí fleiri og fleiri lærubøkur eru komnar á føroyskum máli.

Lærarin hevði nógv at siga í bygdunum hesa tíðina. Við lærarastarvinum fylgdi ofta deknastarvið, og dugdi lærarin at spæla upp á urgu, var lærarin eisini urguleikari. Ein lærari við stórari persónmensku setti ikki bara dám á lívið hjá børnunum í 7 ár, men lívið í allari bygdina.

## *Real- og preliminerprógv*

Færøernes Mellem- og Realskole var leingi einasti skúli av sínum slag í Føroyum og var ein sjálvstøðugur skúli, líka til hann í 1962 varð lagdur saman við Tórshavnar Kommunuskúla, tí tá bar eisini til at taka real- ella preliminerprógv á øðrum skúlum. Millumskúlaprógv loyvdi næmingi at halda fram á studentaskúla, og eitt realprógv gav tá í sjálvum sær stórar møguleikar í føroyska samfelagnum, eitt nú tá talan var um skrivstovustarv. Í 1923 kom ein 1. og ein 2. millumskúlaflokkur á Tvøroyri. Í 1925 kundu tey fyrstu taka *Almindelig Forberedelseseksamen,* eisini nevnd preliminerprógv, har. Longu í 1933 varð farið undir framhaldsútbúgving við Vágs Skúla, men árini 1933-1946 máttu næmingarnir til Tvøroyrar at taka prógv. Eftir hetta kundu næmingarnir taka preliminerprógv í Vági. Klaksvíkin vildi sjálvandi ikki verða eftirbátur. Bygdin var jú eins og bygdirnar í Suðuroy í stórari menning, so har fingu tey í 1935 millum- og realskúla. Løgtingið setti í 1937 á stovn eitt 2-ára studentaskeið, og eitt 2-ára preliminerskeið varð hongt uppí, tí krøvini at koma inn á studentaskeiðið var real- ella preliminerprógv. Fleiri byrjaðu tí á preliminerskeiðnum og hildu fram á studentaskeiðnum, men so komu ikki fleiri framhaldsskúlar fyrr enn eftir kríggið.



*Sankta Frants skúli varð settur á stovn í 1931 sum einasti katólski skúli í Føroyum. Nunna undirvísir børnum.*

Eftir heimsbardagan fekk Vestmanna framhaldsskúla. Í hesum sambandi er áhugavert at minna á, at myndugleikarnir um hetta mundið høvdu stórar útbúgvingarætlanir. Ætlanin var at savna mestsum alla fjølbroytta framhaldsútbúgving í Havn við kostskúla. Hetta varð av ongum, og í staðin komu fleiri framhaldsskúlar úti á bygd.

Í 1950-unum vildu fólk og kommunalpolitikarar í fleiri av teimum stóru bygdunum hava framhaldsskúla til sína bygd. Hesir skúlar, har næmingarnir nú kundu taka real- ella preliminerprógv, komu í Vestmanna, Fuglafirði og á Glyvrum. Í 1959 komu eisini framhaldsskúli í Sørvági og Miðvágs-Sandavágs skúli. Tey fyrstu árini samstarvaðu skúlarnir, so næmingarnir úr Sørvági gingu í Miðvágs-Sandavágs skúla seinasta árið og fingu preliminerprógv haðani.

Við nýggju skipanini frá 1962 fingu fleiri skúlar henda møguleika, men nú varð framhaldsskúlin skipaður eftir tveimum rásum. Onnur førdi til eitt realprógv, og hin gav næmingunum møguleika at ganga í 8., 9. og 10. flokki. Greitt var ikki fyri øllum tá, hvat hetta bar í sær, tí tann seinni møguleikin gav ikki rætt at halda fram á studentaskúla. Ikki øllum dámdi hesa skipan. Eitt sindur hjálpti tað, tá 10. flokkur gav møguleika at halda fram á HF, Hægri Fyrireikingarprógvi. Í 1979 varð øll skipanin broytt, og realskúlin fall burtur. Í Føroyum er bert tvungin skúlagongd í 9 ár, men tey flestu halda fram.

Hesar broytingarnar í fólkaskúlanum hendu í eini tíð, tá ferðslukervið, sum vit hava sæð, eisini mentist og broyttist, so tað gjørdist lættari at ferðast millum flestu bygdirnar og tí eisini lættari at samstarva á skúlaøkinum. Eitt nú koyrdi ein bilur næmingar fast aftur og fram millum Sørvág og Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1961, og soleiðis var yvirhøvur.

Í 1971 vóru 14 framhaldsskúlar í landinum. Teir skúlar, sum komu aftrat, vóru Venjingarskúlin í Havn, Stranda skúli, Tofta skúli, Sørvágs skúli, Oyrarbakka skúli og Sandoyar Meginskúli. Soleiðis hevur verið síðani. Umleið 90% av øllum ungdóminum kundu nú halda fram at ganga í skúla uttan at flyta heimanífrá. Hetta hevði sjálvandi nógv at siga fyri bygdirnar og fyri ungdómin, sum nú munandi lættari kundi velja eina aðra lívsleið, enn foreldrini høvdu kunnað. Eisini hevur hetta gjørt, at fleiri og fleiri næmingar hava fingið førleika at halda fram á miðnámsútbúgvingunum.

## Studentaskúli og miðnámsútbúgvingar

Meðan tey, sum høvdu tikið studentsprógv í eini meðalstórari føroyskari bygd um 1962, kundu teljast á einari hond, komu nú nógv fólk við framhaldsútbúgving til bygdina um árið. Bert eitt lítið tal av føroyingum tók studentsprógv fyri seinna heimsbardaga, tí skuldi tú hava tílíkt prógv, mátti tú av landinum.



*Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum* *(Mynd: Dimmalætting)*

Ein nýggjur møguleiki kom við 2-ára studentaskeiðnum, sum varð sett á stovn í 1937. Fyrstu tíðina bar bara til at taka nýmálsligt studentsprógv. Í 1939 tóku 7 studentar prógv. Matematiskt-náttúruvísindaligt prógv bar ikki til at taka fyrr enn í 1947. Eins og lærarskúlanæmingarnir hildu studentaskúlanæmingarnir í mong ár til í læntum hølum, t.d. í VBV-húsunum hjá *Vandbygningsvæsenet.* Í 1959 varð 2-ára skeiðið broytt til eitt 3-ára skeið, og í 1962 varð studentaskeiðið broytt til studentaskúla, samstundis sum skúlin flutti niðan í bróstsjúkrahúsið í Hoydølum, har nýggjur studentaskúli varð bygdur.

Í 1973 kom eitt alternativ til studentsprógv í Føroyum, nevniliga HF-prógvið. Tað tók tvey ár, og fólk við 10. flokki høvdu rætt til at fara á HF eins væl og tey við realprógvi. Nú vórðu politisk ynskir sett fram um eisini at fáa HF-útbúgvingar uttan fyri Havnina. Lagt varð til brots við 4 HF-flokkum í 1974, tveimum í Hoydølum, einum í Klaksvík og einum í Suðuroy. Í 1980 varð eitt HF-skeið sett á stovn í Gøtugjógv. Við hesum var grundarlag skapt fyri, at studentaflokkar fóru út um Havnina. Nýggjur studentaskúli, *Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið,* kom í 1982, fyrst við Gøtugjógv og seinni í nýggjum hølum á Kambsdali. Umframt studentaskúlan og HF-skeiðini við Gøtugjógv hoyrdu HF-skeiðini í Klaksvík undir henda skúla. HF-skeiðið í Suðuroy varð verandi undir *Føroya Studentaskúla og HF-skeiði* í Hoydølum. Á deildini í Suðuroy ber í dag til at taka studentsprógv og HF-prógv. Við hesum varð møguligt hjá einum stórum hópi at fara undir hægri lestur uttan fyri Føroyar. Seinnu árini

eru komnar fleiri aðrar miðnámsútbúgvingar, sum fyri tað mesta eru sprotnar úr líknandi útbúgvingum í Danmark á handilsskúlum og tekniskum skúlum. Ein serføroysk miðnámsútbúgving er kortini fiskivinnuútbúgvingin frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Spurningurin er so, um tað unga fólkið við hesi gongd hevur lært seg út av bygdini.

## Skipara- og maskinútbúgvingar

Teir, sum ætlaðu sær sjóvegin, fóru vanliga ikki á real- ella studentaskúla. Teir fóru aðrar leiðir. Tá sluppfiskiskapurin byrjaði í 1872, høvdu bert einstakir menn stýrimansútbúgving ella skiparaprógv, sum kundi brúkast. Skiparar vóru leingi ein mangulvøra. Men í 1892 bar til at fáa skiparaútbúgving í Føroyum. Royndir skiparar fóru nú sjálvir at hava privatskúla um vetrarnar fyri ungum fiskimonnum, sum gav teimum møguleika at taka skiparaprógv. Yvirmenninir á donsku verjuskipunum undir Føroyum vóru próvdómarar. Teir báðir, Viggo Ryving Jensen og Andreas Nielsen, søktu í 1906 um at fáa stuðul til ein sjómansskúla, sum eisini kundi lata stýrimansprógv. Tíverri fekk skúlin ikki nóg mikið av næmingum, og stýrimansskúlin helt uppat í 1909. Men húsini, sum hann bygdi, gjørdust seinni sjómansskúli, líka til nýggi sjómansskúlin varð bygdur í 1962.

Privatskúlarnir hildu fram, og í 1918 fekk skiparaskúlin hjá Jens Paula í Dali statsstuðul. Í 1928 varð Tórshavnar Navigatiónsskúli settur á stovn. Munur var á ymsu prógvunum, men tá farið varð at fiska við Grønland í 1925, var neyðugt at taka eitt prógv, *longdina*, aftrat skipararoyndini. Í árunum 1927-29 varð danin, H. A. Guldhammer, kapteynur, settur sum fyristøðumaður fyri Tórshavnar Navigatiónsskúla, og eftir hann kom Jens Pauli í Dali. Nú hesin skúlin var góðkendur, bar til at fáa fleiri ymiskar útbúgvingar á skúlanum, ið góvu ymisk rættindi, eitt nú settisskipara, longdina, stýrimansprógv, motor- og maskinpassaraprógv, radiotelegrafistprógv og undir krígnum eisini maskinistprógv.

Heimastýrið yvirtók í 1949 Tórshavnar Sjómansskúla undir navninum Føroya Sjómansskúli, har føroyskir skiparar og yvirmenn hava fingið útbúgving í meira enn 50 ár. Í 1962 flutti skúlin úr gamla sjómansskúlanum á Álakerstrøð, har hann nú stendur í nýggjum bygningi, sum seinni er útbygdur uppaftur meira.

Í 1964 var Føroya Maskinskúli, sum seinni fekk navnabroyting til Føroya Maskinmeistaraskúli, settur á stovn. Skúlin hevur, sum tykist hava verið vanligt fyri útbúgvingarstovnar í Føroyum, ongi føst høli havt. Tey fekk hann ikki fyrr enn í 1995 við Krákugjógv í Tórshavn. Skúlin hevur í mong ár útbúgvið bæði maskinistar og maskinmeistarar. Í 2005 varð hann saman við Føroya Sjómans-

skúla lagdur saman í ein stovn, ið skal geva fleiri útbúgvingar og nú eitur Vinnuháskúlin. Eftir kríggið kom eisini skiparaskúli og telegrafistskúli til Klaksvíkar. Her er nú eisini kokkaskúli.

## Aðrir skúlar og útbúgvingarmøguleikar

Samstundis sum føroyska heilsu- og sjúkrahúsverkið hevur ment seg, er tørvurin á útbúnum sjúkrasystrum alsamt vaksin, og tí varð Sjúkrasystraskúli Føroya settur á stovn í 1960. Í nøkur ár var neyðugt at fara til Danmarkar at taka part av útbúgvingini, men síðani 1976 hava sjúkrasystrarnar kunnað tikið alla sína útbúgving á Sjúkrasystraskúlanum. Í 1991 varð útbúgvingin ástøðiliga dagførd. Seinni eru framdar fleiri broytingar, so Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, sum skúlin í dag eitur, frá 2005 er ein hægri útbúgvingarstovnur á Fróðskaparsetri Føroya, sum letur sjúkrarøktarfrøðingunum bachelorprógv í sjúkrarøktarfrøði. Eitt er at útbúgva fólk til ávís størv, men fólk hava eisini longu frá fyrst í 20. øld kunnað gingið á kvøldskúla og tikið meira innan bæði ástøðiligar og praktiskar lærugreinir. Tíverri var stuðulin lítil og eingin fyrstu tíðina, og lærarar fingu nóg illa løn. Men í teimum vánaligu tíðunum fyrst í 1930-unum kom lóg um kvøldskúlar, har næmingar sluppu undan at gjalda fyri seg sjálvar. Hetta var nú eitt alment og kommunalt mál. Lærugreinirnar vóru vanligar skúlalærugreinir, men undirvíst varð eisini í fleiri praktiskum lærugreinum. Í 1932 vóru 27 góðkendir kvøldskúlar, og veturin 1936/37 vóru 41 kvøldskúlar.

Eftir kríggið var áhugin fyri kvøldskúlunum ikki so stórur, men seinni er hann vaksin nógv, og lýsingarnar um kvøldskúla á hvørjum heysti prógva, at áhugin er stórur. Seinni er eisini undirvísing í tónleiki vorðin partur av kvøldskúlunum, og síðan fyrst í 1980-unum hava útbúnir tónleikalærarar undirvíst børnum og ungum í ymiskum ljóðførum. Burtur úr hesum er sprottið ikki sørt av professionellum tónleikarum umframt allir amatørtónleikararnir. Kvøldskúlarnir eru fyri bæði ung og eldri, men musikkskúlarnir, sum eru í fleiri stórum bygdum kring landið, hava fyri tað mesta rættiliga ungar næmingar.

Umframt kvøldskúlar vórðu bæði handilsskúlar og tekniskir skúlar skipaðir sum kvøldskúlar í fleiri av teimum størru bygdunum fyrst í 1930-unum. Teknisku skúlarnir vóru ætlaðir lærlingum og handilsskúlar teimum, sum ætlaðu sær at arbeiða í handlum. Í 1949 fingu næmingarnir møguleika at taka eitt serligt handilsprógv, *handelsmedhjælpereksamen*, við ella uttan fremmand mál. Síðan 1960 hava bert verið tekniskir skúlar í Tórshavn og Klaksvík. Lærlingar á bygd mugu tí til Havnar ella Klaksvíkar, har skúlaheim var og enn er til teirra.

Í Føroyum eru lærlingarnir í læru hjá meistara, men teir skulu eisini ganga eina tíð á tekniskum skúla, so teir ástøðiliga eisini verða væl fyri. Er lærugrein

teirra ikki umboðað á teknisku skúlunum í Føroyum, gongur leiðin til Danmarkar, har teir eru av og á, meðan teir eru í læru. Teknisku skúlarnir skipa nú eisini fyri eini tekniskari miðnámsútbúgving.

Ikki fyrr enn í 1960-unum verður handilsskúlin rættiliga skipaður, og í 1967 kemur Føroya Handilsskúli. Umframt ta læru, sum hoyrir til lærlingaútbúgvingar, hava bæði Føroya Handilsskúli í Tórshavn, ið hevur eina deild á Kambsdali, og Tekniski Skúlin í Tórshavn og Klaksvík skipað fyri øðrum útbúgvingum á miðnámsstigi og uppaftur hægri útbúgvingum. Føroya Handilsskúli mennist støðugt.

Ein skúli, sum ið hvussu er tey fyrstu mongu árini fekk stóra ávirkan á føroyskt mentanarlív, var Føroya Fólkaháskúli. Hann varð fyrst lagdur í Brøttulíð í Klaksvík, men flutti í 1909 til Havnar. Nógv ung, sum ætlaðu sær at læra, byrjaðu á háskúlanum, ið var einasti skúli, sum í mong ár undirvísti á føroyskum.

Fróðskaparsetur Føroya kom í 1965. Hesin stovnur, sum byrjaði í tí smáa, hevur spakuliga ment seg til at vera eitt universitet, kanska heimsins minsta universitet, sum umframt gransking hevur fleiri útbúgvingar á hægsta stigi, m.a. í føroyskum, søgu og ávísum náttúrulærugreinum. Fróðskaparsetrið hevur frá byrjan samstarvað við aðrar granskingarstovnar í landinum, eitt nú Fiskirannsóknarstovuna, Føroya Náttúrugripasavn, Føroya Landsskjalasavn og Føroya Fornminnissavn. Í hesum samstarvi eru góðir møguleikar fyri gransking og hægri undirvísing. Umframt at undirvísa ungfólki hava skúlar og hægri lærustovnar eins og aðrir granskingarstovnar í landinum skapt tørv á væl útbúnum fólki til størvini á hesum stovnum. Landsstýrismaðurin við mentamálum hevur ætlanir um at leggja Fróðskaparsetrið, Sjúkarøktarskúla Føroya og Føroya Læraraskúla saman í ein lærdan háskúla ella eitt nýskipað fróðskaparsetur.

# Keypmenn og kontrabøkur

Sjálvt grundarlagið undir tí vinnuliga framburðinum í Føroyum fyrstu fríhandilstíðina var salt- og klippfiskaframleiðslan. At flekja, salta og turka fisk hevur verið kent í Evropa síðani 1500, serliga í sambandi við toskafiskiskapin í Ný Foundlandi. Haðani kom nógvur saltfiskur og klippfiskur til Evropa. Í Norðurlondum tók størsta klippfiskaframleiðslan seg upp í Møre í Noreg longu í 1600-árunum. Danski handilsmaðurin, Niels Ryberg, royndi í 1772 við skipum undir Føroyum fyri at kunna fáa rávøru at framleiða klippfisk, men tað miseydnaðist bæði at fáa føroyngar at standa á skipsdekki og at fáa framleitt nóg mikið av hesi handilsvøru. Hevði tað eydnast, kundi framburðurin í Føroyum kanska verið byrjaður eini 100 ár fyrr eins og í Hetlandi. Tá Chr. Pløyen, amtmaður, saman við trimum føroyingum gjørdi ta kendu ferðina til Hetlands í 1838, høvdu hetlendingar virkað klippfisk í mong ár. Sluppfiskiskapur teirra byrjaði í 1808. Teir fiskaðu m.a. undir Føroyum við sluppum og komu ofta í land at keypa. Tá skiltu hetlendingar og føroyingar væl hvør annan, og fleiri føroyingar fóru við hetlendskum sluppum um sumrarnar, sum eisini Jóannes Patursson sigur frá í endurminningum sínum.

Salt- og klippfiskaframleiðslan var sostatt byrjað í einahandilstíðini, men tað var ikki fyrr enn í fríhandilstíðini, at allar tær vinnuskapandi kreftirnar vórðu loystar úr hafti. Saltfiskur og klippfiskur gjørdust grundarlagið undir føroyska búskapinum, ikki bara til seinna heimsbardaga, tá skipini løgdu um til ísfisk, men langa tíð aftaná og eru tað lutvíst enn á øðrvísi hátt.

## Fríhandlarnir

Fríhandil kom í 1856. Nú gjørdist frítt hjá øllum, sum búðu í Føroyum, vóru yvir 25 ár og ikki høvdu ringt orð á sær, at søkja handilsloyvi. Í eini 10 ár, áðrenn einahandilin varð avtikin, fekk A.W. Skibsted, ið eins og Ryberg á sinni hevði havt tap av fiskiveiði undir Føroyum, loyvi at reka ávísan handil fyri at vinna tapið aftur. Hesin handil var tó meira til skaða enn gagn, tí hann seldi mest brennivín og aðrar marglætisvørur, sum ikki minst hetlendsku fiskimenninir, ið fiskaðu undir Føroyum, gjørdu sær dælt av.

Við avtøkuni av einahandlinum og tí, sum síðan hendi, fór helst fyrsta einskiljing fram í Føroyum. Vágsbotnshandilin ella Frederiksvaag keypti M. C. Restorff, ið var komin til Føroya í 1848. A.W. Skibsted og C. F. Siemsen keyptu handilshúsini úti í Tinganesi. T.F. Thomsen keypti úthandilin á Tvøroyri. Siemsen keypti eisini úthandilin í Vestmanna. Úthandilin hjá einahandlinum í



*Uttarihandil seinni AT á Tvøroyri. Oman fyri vegin telefonstøðin*

Klaksvík keyptu Jørgen Beck & Sønner. Hetta vóru alt útlendingar. Fleiri teirra lótu onnur taka sær av handlinum og komu ikki til Føroya sjálvir. Ein føroyingur var kortini við frá byrjan. Tað var Johan Mortensen úr Øravík. Hann byrjaði sum faktor hjá Jørgen Beck & Sønner í Klaksvík. Sjálvur fekk hann handilsbræv í 1858 og setti seg niður á Tvøroyri. Ætlanin var, at virkið frá byrjan skuldi verða eitt partafelag, sum fleiri skutu pening inní, men partafelag gjørdist tað ikki, tí Johan Mortensen roknaði innskotna peningin sum lán og gav góða rentu. Tá virkið var komið fyri seg, fingu tey, sum ynsktu tað, peningin afturgoldnan. Handilsvirkið hjá Johan Mortensen gjørdist skjótt eitt tað størsta í Føroyum, sum eftir deyða hansara í 1889 varð gjørt til partafelag undir navninum A/S J. Mortensen Eftf. Ein sonur, N. J. Mortensen, tók seg kortini burturúr og fekk egið handilsvirki í 1911.

Fleiri aðrir størri handlar komu í øðrum bygdum komandi árini. Nevnast kunnu Godtfred Heinesen í Miðvági, P. H. Dahl á Tjørn í Vági, Joen P. Olsen á Stongunum í Klaksvík, Jacob Dahl á Gørðum í Vági og S. P. Petersen í Fuglafirði. Umframt hesar stóru handlarnar vóru smærri handlar á bygd, men nógvir teirra fóru eisini at virka sum úthandlar hjá teimum stóru. Meginhandlarnir við øllum sínum úthandlum knýttu Føroyar saman í eitt handilsligt net, sum ikki bara fekk týdning fyri vøruflutningin í landinum, men eisini fiskivinnuna sum heild, tí úthandilsmenninir hjálptu teimum stóru handlunum við at keypa og

virka fisk og seinni eisini at útvega teimum fiskafólk. Í Klaksvík stovnaði J. F. Kjølbro egna fyritøku í 1915. Hann gjørdist skjótt ein av størstu reiðarum og keypmonnum í Føroyum.

## Skipakeyp

Handlarnir byrjaðu við at keypa útróðrarfisk, men skjótt fóru føroyingar eisini at fáa sær skip. Yvirhøvur var tað so í fyrstani, at einstakir fiskimenn, bøndur og keypmenn í felag keyptu skip, ið varð fíggjað við uppspardum peningi. Hóast okkurt skipakeyp varð fíggjað við peningi, sum var fingin til vega uttanlands, kanska sum lán við lagaligum gjaldstreytum, var um 1890 so mikið av peningi í Føroyum, eins og roknskapurin hjá Færø Amts Sparekasse vísir, at til bar hjá summum at leggja pening til viks. Ein orsøk var, at føroyingar fóru ikki at gjalda skatt fyrr enn í 1920, og tá var hann heldur ikki høgur. Tá vit koma til 1900, áttu íognarfeløg helvtina av øllum skipunum, meðan einstaklingar áttu hina helvtina. Íognarfeløgini hvurvu tó skjótt, og tað vanliga gjørdist, at einstakir persónar, serliga keypmenn, fóru at eiga skipini, men ofta saman við øðrum. Eitt gott dømi í hesum sambandi er J. F. Kjølbro í Klaksvík. Hann fór undir egnan handil í 1915, men longu tvey ár frammanundan hevði hann saman við bróðuri sínum, Dáva í Gerðum, keypt *Soli Deo Gloria,* og hann helt fram at keypa skip og bátar saman við øðrum. Í 1914 keypti hann *John Bull* saman við brøðrunum Jógvan og Karl á Høvdanum á Strondum, í 1919 sluppina *Kristionnu* saman við Alex Sivertsen, í 1922 *Carlton* saman við Jóan Jakku á Viðareiði og Jens Klæmint Isaksen, í 1926 *Polarstjørnuna* saman við Magnusi á Viðareiði, í 1927 Ernestinu saman við bróðurinum Dáva, í 1929 *Phi-Phi* saman við bróðurinum Dáva og Óla á Eiðinum, í 1929 *Liljuna* saman við Malviniusi í Vátutoft, í 1929 *Polo* saman við Símun hjá Póli og Jógvani Zachariassen, í 1936 skonnartina *Atlantsfarið* saman við Jógvani hjá Billu, í 1948 *Dragasund* saman við Erik Niclasen o.s.fr. Hetta var ein háttur at fíggja skipakeyp, sum eisini gjørdi, at búskaparliga vandamálið hekk á fleiri herðum. Eggini fóru ikki øll í eina kurv.

Samanborið við aðrastaðni tykist hava verið sera óvanligt í Føroyum, at tann vanligi fiskimaðurin átti part í skipi. Tað vanliga í bæði Danmark og Svøríki um hetta mundið var, at skipari og manning áttu skipini í felag, og sum oftast høvdu teir bara eitt skip, teirra egna arbeiðspláss. Hetta var so sjálvsagt, at í 1903 kom lóg um fiskivinnulán í gildi, sum hevði hetta sum fyritreyt. Tá talan var um motorbátar og árabátar, vóru viðurskiftini ikki tey somu.

Ólavur á Heygum visti um hesa lóg, og hann reisti málið í løgtinginum, so lógin eisini skuldi fáa gildi í Føroyum. Hetta var fyrstu ferð, at ein spurningur um lán til fiskivinnuna varð reistur á tingi í Føroyum. Danska lógin, sum var

hugsað til onnur viðurskifti, fekk ikki gildi í Føroyum, men ein onnur lóg, sum segði, at statslán kundi veitast útróðrar- og fiskimonnum, um í minsta lagi tveir fimtingar av ársinntøku teirra kom av sjónum, og um teir bátar ella skip, sum skuldu hava lán, kostaðu minst 1.000 kr. Rentan var 3% og afturgjaldstíðin 10 ár. Henda lóg fekk gildi í 5 ár, men varð endurnýggjað við ymsum broytingum, so lán kundu veitast tveimum triðingum av nýggju skipunum og helvtini av gomlu skipunum. Tey fyrstu 4 árini vórðu veitt 42 lán upp á tilsamans 168.000 kr. ella 4.000 kr. í meðal. Frá 1905-1914 vóru tilsamans 600.000 kr. tøkar til hesa lánsveiting, men lógin varð ikki nógv brúkt. Frá 1910 til 1914 vórðu bert 85.200 kr. læntar til 34 før.

Frá 1923 var lánsupphæddin hækkað upp í 400.000 kr., harav helvtin var bundin til trolarakeyp, men lógin varð eisini víðkað, so lán kundu veitast til umvælingar, umbyggingar og at seta motorar í gomul seglskip. Peningur varð mest læntur til hetta. Skipanin við almennum lánum til fiskiflotan fekk ikki stórvegis týdning fyri nýggja skipabygging hesa tíðina. Tað kom ikki fyrr enn nógv seinni.

Fyritreytirnar fyri at fáa lán samsvaraðu væl við donsku fiskivinnuna, har tað yvirhøvur var so, at skiparin saman við manningini átti bátin. Møguliga var tað ov langt at fara til Keypmannahavnar eftir lánum hjá útróðrar- og fiskimonnum, tí bara teir, sum áttu bát ella skip sjálvir, kundu fáa lán – ikki tær stóru handilsfyritøkurnar. Eisini var tað helst so, at sluppirnar høvdu verið bíligar at keypa við lagaligari fígging, og at tær hóast alt høvdu kastað so nógv av sær, at hugurin at fara undir at byggja nýggj skip ikki var nóg stórur. Haraftrat kemur so, at hóast egna »bankavirksemið« hjá stóru handilsfyritøkunum í Føroyum so líðandi svann burtur í 20. øld, lá kontrabókin ella tann sonevnda *truck-skipanin* enn sum eitt forsteinað grundarlag undir øllum búskapinum, ið torført tóktist at sleppa burturúr. Lat okkum hyggja nærri at hesi skipan.

## Kontrabókskipanin

Fara vit eitt sindur aftur í tíðina, ber til at siga, at Kongaligi Einahandilin eisini á mangan hátt var ein peningastovnur, tí har bar til at hava pening standandi sum í banka, og handilin gav eisini kreditt. Annars hevði handilin ikki tað stóra bankavirksemið. Í 1802 verður sagt, at tað kom mestsum ikki fyri, at nakar varð stevndur eftir handilsskuld. Hinvegin lótu tey, sum áttu pening til góðar, hann verða standandi í einahandlinum júst sum í banka. Húskallar og arbeiðskonur fingu fyrr meginpartin av lønini í vøru. Um 1870 var húskallalønin 16 dálar um árið umframt seyð, mat, tilfar til klæðir, húðarskógvar og annað upp á kroppin, sigur Jóannes Patursson í endurminningum sínum. Men longu í 1832 áleggur

amtmaðurin sýslumonnunum at fáa bøndurnar at síggja til, at teir geva húskøllum og arbeiðskonum tann reiða pening, tey høvdu rætt til. Hetta var sjálvandi fyri, at húskallar og arbeiðskonur skuldu kunna fáa eitt sindur av peningi at seta í tann nýstovnaða Færø Amts Sparekasse, ið hann sjálvur hevði verið fremsti forsprákari fyri. Aðalmálið hjá sparikassanum var at fremja sparsemi millum manna, serliga varð hugsað um arbeiðskonur og húskallar.

Tá fríhandilin kom til Føroya í 1856, gjørdist alt meira vanligt, at stóru handlarnir fóru at taka sær av peninginum hjá viðskiftafólkum sínum, sum vóru teir bankar. Í fyrstu atløgu bjóðaðu handlarnir fólki rentu ímóti at lata peningin standa í handlinum. Teir brúktu ikki bankabók, men kontrabókin fekk næstan somu funktión.

Tá teir stóru handlarnir høvdu fingið fótafesti, gjørdust teir ein týdningarmikil partur av fíggjarvaldinum í Føroyum. Eyðkent fyri fyrstu fríhandilstíðina er, at handlarnir eisini fara at virka sum bankar. Teir taka ímóti peningainnskotum og geva fólki rentu í kapping við sparikassan. Fólk tóku enntá pening úr sparikassanum fyri at seta hann inn í handlarnar, tí teir góvu munandi hægri rentu enn sparikassin. Sparikassin gav eina tíð 3%, meðan handlar góvu 6 % og onkur heilt upp í 9%.

At keypmenninir á hendan hátt høvdu ræði á einum ógvuliga stórum parti av øllum peningatilfeinginum í Føroyum, setti teir í eina serliga støðu, ikki minst tá skip skuldu keypast. Mett verður, at umleið 400.000 krónur stóðu inni hjá handilsmonnum í 1881. Meðalprísurin á einum skipi var 12.000 kr., so nógv skip kundu keypast fyri henda pening. Handlarnir tóku eisini lán í donskum bankum gjøgnum umboðsmenn, *kommissionerar,* í Keypmannahavn, og teir læntu eisini pening út. Tær stóru handilsfyritøkurnar røktu sostatt nógvar av teimum uppgávum, sum bankar plaga at røkja. Hetta sæst kanska einabest av, at í einari enskari hondbók fyri handilsfólk frá 1880 stóðu handilsvirkini hjá Mortensen og  Thomsen á Tvøroyri skrásett sum bankar. Dømi eru um, at menn spekuleraðu í rentuinntøkunum og tóku lán úr sparikassanum ímóti panti í jørð fyri at seta peningin inn í handlar fyri hægri rentu. At handlarnir læntu pening frá fólki, styrkti sjálvandi munandi um teirra gjaldføri og gjørdi teir førar fyri at menna virksemið uttan at taka fleiri lán enn neyðugt.

Í gamla bóndasamfelagnum var talan um ein sokallaðan moralskan búskap, ið var knýttur saman við einum undirstøðubúskapi. Hann vardi, heilt til einahandilin varð avtikin. Eftir hetta fáa vit ein ikki serliga kapitalsterkan handilskapitalistiskan búskap, sum kann samanberast við búskapin í øðrum útjaðaraøkjum í Norðurhøvum, har løn ofta varð latin í vøru, tí nóg nógv var ikki til av peningi.

Kontrabókskipanin, har løn varð latin í handilsvøru, varð regluliga nýtt mill-

um arbeiðsgevarar í Onglandi fyrst í 19. øld. Har varð hon nevnd truck-skipanin. Ein líknandi kredittskipan vaks mestsum av sær sjálvum fram í teimum peningaliga og fíggjarliga veiku útjaðarunum í Norðuratlantshavi, her handilskapitalisman á ymiskan hátt gjørdi seg galdandi. Soleiðis var í Íslandi, í Føroyum, í Vesturjútlandi, í Norðurnoregi, Hetlandi og ikki minst í Ný Foundlandi, har treytirnar vóru serliga harðar. Her fekk keypmaðurin høvuðsleiklutin í tí búskaparliga lívinum í bygdarsamfelagnum. Við kontrabókskipanini sat hann á peninginum, tí mestsum alt peningarenslið í bygdini fór í gjøgnum keypmannin. Viðhvørt vóru fleiri keypmenn, og teir kappaðust, men ofta var bara ein keypmaður á hvørjum staði. Hann var kongur á nesinum.

Keypmaðurin hevði veruligt vald í hesi skipan, sum hann kundi nýta á ymiskan hátt. Fleiri fataðu eisini keypmannin sum tann stóra róðursmannin, ið helt lív í bygdini, og sum hjálpti fólki, tá tey høvdu tað fyri neyðini, meðan onnur festu seg meira við tað, tey hoyrdu um valdsmisnýtslu hansara, og hvussu hann gjørdi sær dælt av bygdarfólkunum, ið vórðu tvingað til at lata honum fiskin og keypa hansara vørur. Í nógvum førum vóru keypmenninir sjálvir raskir bátsformenn og vóru millum bygdafólkið í øllum vanligum verki. Men eingin var í iva um teirra stýrandi leiklut. Teir settu tí eisini mark fyri, hvussu nógv fiskimenn kundu keypa fyri, og noktaðu teimum at keypa tað, teir hildu vera marglætisvørur, tí kreditturin kundi koma fiskimonnunum og at enda eisini keypmonnunum sjálvum í óføri. Tá var ikki so langt millum keypmann og fiskimann og mestsum heldur eingin mentanarlig fjarstøða. Hon gjørdi seg galdandi summastaðni, men ikki í teimum smæstu bygdunum.

Summir keypmenn vunnu so nógvan pening, at teir høvdu lívsstíl, sum skilti seg so nógv frá lívsstílinum hjá vanliga bygdarfólkinum, at teir livdu í einum heimi fyri seg. Eitt var, at keypmaðurin var peningaliga betur fyri enn fólk flest, men nú kom eisini til sjóndar ein mentanarligur klassamunur. Keypmansfólkini vildu ikki longur lata síni børn konfirmerast saman við hinum børnunum í bygdini og sendu børnini á betri skúlar í Noregi ella í øðrum londum. Bæði í bústaði, klæðum og verumáta skiltu tey seg burturúr. Tey bæði hildu seg vera fínari enn hini og vórðu eisini fatað so, og tey vóru fyri seg sjálvi. Henda mentanarliga gongd hevði við sær størri gjáir millum bygdarfólkini enn áður. Við sosialistisku rørslunum skaptist eisini eitt nýtt medvit millum verkafólk, ið gjørdi, at verkafólkini fingu eina nýggja fatan av sær sjálvum. Tey vóru nú partur av einum stættarstríði. Hetta hendi eitt nú á Tvøroyri.

Nógvastaðni í bygdarsamfeløgunum við strendurnar í Norðuratlantshavi er hugtakið stætt ella klassi tó meira at kalla ein kvalitetsspurningur enn ein kvantitetsspurningur, og mørkini millum fólk eru vanliga kám og liðilig. Hetta kemst av, at tey sosialu bondini í eini bygd vanliga eru vavd saman sum eitt fløkt snøri,

so ikki bert ríkidømi, men eisini persónligir eginleikar sum at vera raskur, dugnaligur og væl lýddur hava týdning fyri, hvussu fólk eru í metum.

## At fortjena og at skriva

Kontrabókskipanin setti sín serliga dám á føroyska samfelagið næstan heilt fram til seinna heimsbardaga. Ein tann størsti búskaparligi týdningurin av hesi skipan, ið hevði røtur aftur í einahandilin, men sum endurskaptist í fríhandilstíðini, var, at hon útvegaði keypmonnum og reiðarum tann likviditet, sum var neyðugur hjá teimum fyri at kunna keypa og reiða út tey skip, sum vórðu keypt í stórum tali seinast í 19. øld. Skipanin var eisini ein av orsøkunum til, at keypmenn og reiðarar í 1906 ikki høvdu stórvegis áhuga í einum nýggjum banka. Teir kláraðu seg kortini. Kontrabøkur vórðu tó ikki brúktar allastaðni. Í summum bygdum, eitt nú í Fuglafirði, nýttu tey lønarseðlar. Lønarseðilin høvdu fólk við til handils, og so varð trekt av, so hvørt sum tey keyptu. Meginreglan var kortini tann sama.

Lønin hjá teimum allar flestu heilt til seinna heimsbardaga var avrokningin. Onnur løn var tað, sum heimafólkið vann sær við fiskaarbeiði og av tí handverksarbeiði, ið var neyðugt í einum samfelag sum tí føroyska. Umborð á sluppunum varð støddin á avrokningini ásett eftir, hvussu nógv ein fiskimaður hevði fiskað. Hetta nevndu tey sjálvdrátt. Meðalinntøkurnar hjá fiskimonnum frá 1900 og til 1939 lógu millum 300-1800 kr. Fyri fyrra heimsbardaga varð tað hildið at vera góð inntøka, tá ið maður tjenti 300 kr. Bestu árini vóru eftir fyrra heimsbardaga. Í tíðini frá 1923 til seinna heimsbardaga lógu meðalinntøkurnar hjá fiskimonnum úr 500 upp í 800 kr. um árið. Raskar fiskagentur kundu vinna næstan tað sama sum fiskimenninir.

Hesar vánaligu tíðirnar førdu við sær, at fólk áttu næstan ikki reiðan pening. Tann størsta árliga peningahæddin, sum kom í húsið, um nakað annars var eftir, var árliga avrokningin hjá fiskimonnunum. Hon kom til jóla, um væl visti við, men kundi eisini koma seinni. Fyri teir pengar, sum maðurin roknaði við at vinna, kundi konan eftir avtalu við handilsmannin keypa upp á borg. Tá avrokningin var komin, varð farið til handilsmannin at vita, hvussu nógv var keypt fyri. Tann stóri spurningurin var nú, um fiskiskapurin dekkaði upphæddina, ið keypt var fyri, og hvussu nógv fór at verða eftir. Viðhvørt skyldaðu fólk, og viðhvørt áttu tey eitt sindur til góðar hjá handilsmanninum.

Vanligt var tá, at sjómenninir sjálvir fóru til Havnar við kekkinum at loysa hann út í bankanum ella sparikassanum. Tá ið teir so komu aftur, varð farið í handlarnar at gjalda tað, sum skrivað var. Fiskagentur, sum høvdu verið í aðrari bygd og arbeitt, fingu vanliga peningin við sær, tá tær fóru. Avbygdarfólk fingu

avrokning í kekki ella kontant, men soleiðis var ikki altíð hjá teimum, sum búðu í somu bygd sum keypmaðurin. Teirra peningur varð standandi hjá keypmanninum, seinnu tíðina uttan rentur.

Undan fyrra heimsbardaga tykist hava verið lætt at fáa peningin í hondina, men hetta gjørdist verri í 1920-unum, tá tíðirnar vóru ringar. Tá var vanligt, at fyri avreiddan útróðrarfisk fingu útróðrarmenn útgoldið eitt sindur fyri olju og annað neyðugt. Restin varð uppskrivað, og hetta máttu teir keypa fyri. Sjálvandi hevur verið munur á keypmonnum, men yvirhøvur var tað so, at vanligt var at skriva tað, sum ein keypti, og tað, ein tjenti. Minni fløkt gjørdist hetta ikki av, at tað eisini var sera vanligt at lata keypmanninum ull, troyggjur, egg, sundmagar og aðrar vørur fyri handilsvøru. Eisini fingu fólk ull frá keypmanninum og bundu fyri triðing, t.v.s. tey fingu ein triðing av virðinum sum løn.

Fyrr høvdu keypmenninir verið so væl fyri peningaliga, at teir høvdu ráð at lata eini hús skylda sær pening í áravís. Yvirhøvur vóru handilsmenninir rímiligir og bíðaðu eftir tí, teir átti til góðar, og kom eitt hús í skuld til keypmannin, kundu synirnir hjálpa upp á pápan, eftir at teir vóru farnir at fiska. Men hetta broyttist seinast í 1920-unum, tá fiskaprísirnir fóru í botn, og torført gjørdist at sleppa av við fiskin. Ógvuliga trupult var hjá fólki at fáa pening frá arbeiðsgevarunum. Við neyð og deyð fekst peningur til skatt, onkran pakka á posthúsinum og sjúkrakassa.

Í áhugaverdu bókini um Mortensensmenninar á Tvøroyri sigur Axel Mortensen, at frá tí, handilin gjørdist partafelag í 1889, og til 1921 hevði vinningur verið av virkseminum øll árini uttan nøkur fá. Tá virksemið hjá J. Mortensens Eftf. í 1926 varð umskipað í trý partafeløg og ognirnar gjørdar upp, sæst ikki, hvussu stór handilsskuldin er, men tað sæst, at útistandandi peningur er umleið 600.000 krónur. Hetta hevur helst verið virðið á tí, sum fólk høvdu keypt upp á borg ella skrivað. Helst hevur eydnast at fáa peningin inn, tí árið eftir hevði felagið 20.395 kr. í vinningi.

Virksemið hjá A/S Mortensens Eftf. gav undantikið okkurt ár vinning eitt langt tíðarskeið, men í 1920-unum taka trupulleikar seg upp av álvara, og summi ár eru tapini stór. Dømi eru eisini um menn, sum mistu nógvan innlánspening í 1920-unum, sum teir høvdu sett í handlar. Hetta vísir, at tað var í 1920-unum og 1930-unum, at kredittskipanin veruliga gjørdist tyngjandi bæði fyri løntakararnar og arbeiðsgevarar. Báðir partar vóru nú vorðnir fangar í fongsli kontrabókskipaninnar.

Arbeiðsmannafeløgini fóru so við og við at krevja, at verkafólkið skuldi kunna fáa løn sína goldna í hondina einaferð um vikuna. Fyrsta arbeiðsmannafelag í Føroyum var arbeiðsmannafelagið Enigheden á Tvøroyri, seinni *Fylking*, stovnað í 1915. Seinni komu onnur arbeiðsmanna- og kvinnufeløg. Fylking

fekk í 1934 fyrstu løngjaldsstovuna í Føroyum. Endamálið var, at løngjaldsstovan skuldi taka sær av allari lønarútgjalding til verkafólkið. Málið var at fáa kontantan pening, men hetta varð ikki uttan stríð. Trupulleikin var, at so lítið var til av peningi í føroyska samfelagnum.

Aftrat hesum var tað ikki sørt arbeiðskrevjandi at bókføra hvørt smáting, sum fólk keyptu, og trekkja frá løn og avrokning. Tveir keypmenn fingu tí tað hugskot at gera sær sínar egnu pengar. Fyrstur var S. P. Petersen í Fuglafirði. Hann fór í 1930 at gjalda løn og avrokning í egnum blikkpengum, sum teir høvdu fingið gjørt á eini verksmiðju í Spania, ið gjørdi polettir til spæliautomatir. Næstur honum var J. F. Kjølbro í Klaksvík. Hann læt sín pening gera úr aluminium. Nú gjørdist útgjaldið lættari fyri báðar partar. Fólk fingu pening í hondina, og keypmaðurin slapp frá øllum bókhaldinum. So leingi blikkpeningurin bert var ein spurningur millum handilsmenninar og viðskiftafólk teirra, blandaði eingin seg upp í tað. Trupulleikar stóðust ikki av hesum, fyrr enn aðrir handlar fóru at taka ímóti blikk- og aluminiumspengunum. Nú var einki annað



*Aluminiums- og blikkpengarnir hjá ávíkavist S. P. Petersen og J. F. Kjølbro fyrst í 1930*

*(Mynd:Føroya Fornminnissavn)*

at gera hjá løgregluni enn at steðga hesum serliga gjaldoyra og vísa til einkarrættin hjá Tjóðbankanum at framleiða myntir. Hetta var seinast í 1933, men tá høvdu teir verið til í stívliga trý ár.

Eftir at hetta gjaldoyra var bannað, varð farið aftur til kontrabøkur og lønarseðlar, men nú vóru handilsmenninir mikið strangari, enn teir høvdu verið fyrr. Øll sluppu ikki at skriva og keypa upp á borg, og summi vórðu svartlistað.

Kontrabókskipanin hevði einaferð verið góð fyri handilsmenninar, men tað var hon ikki longur. Tað stutta av tí langa var, at kontrabókskipanin hevði yvirlivað seg sjálva. Blikkpengarnir hjá S. P. Petersen og aluminiumspengarnir hjá J. F. Kjølbro vóru ein stokkut roynd at nýmótansgera skipanina, men tað gekk ikki. Líknandi royndir í Íslandi góvu sama úrslit. Kontrabókskipanin bant fiskimenn/arbeiðsfólk og keypmann/útgerðarmann alt ov fast saman í einum ov ótryggum neti. Teir, sum hóast útistandandi skuld fingu mest burtur úr hesi skipan, vóru keypmenninir, men at enda varð skipanin í tí rímiliga humana formi, hon hevði í Føroyum, eisini fleiri teirra at bana. Kontrabókskipanin gjørdist eitt haft um beinini á øllum, runnin í stein sum eitt búskaparligt fossil. Arbeiðsmannafeløgini kravdu lønina útgoldna í hondina, og eisini arbeiðsgevararnir og vinnulív vildu hava broytingar í viðurskiftunum. At ein banki hevði komið væl við í hesum samfelag, skuldi tí verið púra greitt, hóast ikki øll dugdu at síggja tað.

# Fiskimenn og fiskafólk

Fiskiskapur føroyinga hevur verið útróður við snøri ella líni og skipsfiskiskapur við snøri og snellu, onkuntíð eisini línu. Seinni eru so komnir snurriváðsbátar, garnaskip, trolarar og hekkutrolarar. Øll fiskiførini eru vorðin bæði betri og munadyggari við tíðini, men hetta hevur eisini gingið út yvir fiskin í havinum, samstundis sum tað er vorðið trengri og trengri hjá fiskimonnunum.

## Útróður og bátar

Fram til 1900 róðu føroyingar út við ára- ella róðrarbátum, sum teir høvdu gjørt í øldir. Um veturin róðu teir við 8-mannaførum og 6-mannaførum. Um summarið róðu teir við 4-mannaførum og ofta eisini við 6-mannaførum. Umleið 1905 komu motorbátarnir. Teir broyttu útróðurin nógv. Í 1920-unum fóru teir at seta motor í árabátarnar, sum teir tá ofta nevndu *innstalleringar.* Hetta gjørdi, at hvør bátur kundi klára seg við bert einum manni um neyðugt. Fiskiamboðini vóru snøri og lína, serliga norðanfyri varð línan nógv brúkt. Suðringar brúktu ikki nógv línu fyrstu tíðina. Tað er ikki fyrr enn seinni, at teir eru farnir at brúka línu. Línan kravdi nógv agn. Tað kravdi eisini nógv meira arbeiði at útvega agn til línu enn til snøri. Til línuagn varð brúkt fiskaagn, fuglur, fliður, gággur, øður, kræklingur, sild og eisini síl. Krækling kundu teir finna í fjøruni, øðuni dreggjaðu teir eftir. Gágguna fingu teir við serligari gággulínu við toskarhøvdum, har gággurnar settu seg á. Hetlendingar høvdu lært føroyingar at seta gággulínu. Gággurnar vórðu goymdar í gággukassum, sum lógu á sjónum. Sild var eisini gott agn, og fleiri firðir vóru, har væl bar til at seta sildagørn. Í so máta bar Skálafjørðurin av øllum. Her var nógv sild at fáa á hvørjum ári. Prísurin á agnsild kundi vera sera góður ta tíðina, eftirspurningurin eftir agni var stórur. Sildina royndu teir at goyma í íshúsum, so hon kundi halda sær longur. Ísurin varð borin inn í serliga væl bjálvað hús, sum eisini vórðu rópt íshús. Har goymdu teir ísin, sum teir so kundu brúka til at ísa sildina við.

### *Árabátarnir*

Útróðurin vaks alsamt í fríhandilstíðini. Í 1858 var veiðan komin upp á 874 tons, og í 1870 var hon komin upp á 3277 tons, men her helt tonsatalið sær. Fá ár heilt upp til 1900 vóru betri enn hetta árið. Øll tey fyrstu árini vóru serliga bygdirnar norðanfyri, eitt nú Oyndarfjørður, Gjógv, Eiði og Viðareiði, størstu útróðrarbygdirnar, tí hóast hesar bygdir vóru brimpláss, var stutt at rógva á fiski-

leið, tá veður var til tað. Viðareiði var av bestu fiskiplássum fyrr. Hjá trimum monnum í góðum veðri er eitt korter at rógva út á Viðareiðisgrynnuna. Útróður við árabáti er ein gamal partur av føroyskari vinnumentan. Eitt var at duga at rógva, men tað kravdist, at menn eisini dugdu at sigla við seglum, at teir høvdu skil á streymi og dugdu at finna til lands aftur, um teir komu í mjørka. Teir gomlu dugdu at tulka og lesa tann boðskap, sum náttúran sendi teimum, t.d. at sigla eftir alduni. Hetta var neyðugt, tí har var einki at líta á enn egnu sansir. Tað er ikki fyrr enn rættiliga seint, at teir fingu kumpassina. Eisini hevði útróðrarmaðurin arvað kunnleika um mið og plinkar frá undanmonnum sínum, og teir vistu, nær fiskur mundi vera at fáa har.

Tann útróðurin, sum hevði størstan týdning, var útróðurin í torratíðini og várfiskiskapurin norðanfyri. Tað kundi taka fleiri tímar at rógva á várleiðirnar. Hetta valdaðist kortini, hvussu høgligt útróðrarplássið var í so máta, men hjá nógvum kundi ein útróðrardagur vera einar 12-16 tímar. Andrass Mortensen hevur í frálíku bók síni *Hin føroyski róðrarbáturin. Sjómentir føroyinga í eldri tíð,* sum kom út í 2000, lýst bæði bátar, útróður og alt tað, sum hongur uppi í hesum, væl og virðiliga. Víst verður tí til bók hansara, sum gevur eina nágreiniliga lýsing av árabátinum í øllum sínum høpi.

## *Motorbátarnir*

Árabáturin ella róðrarbáturin var álitið hjá útróðrinum í Føroyum til eftir aldaskiftið 1900, tá hann fekk kapping frá motorbátunum. Ikki fyrr enn motorbátarnir komu, vaks útróðrarveiðan uppaftur meira. Í árunum 1918 og 1919 var veiðan yvir 10.000 tons um árið, men hetta vóru stak góð ár, sum komust av, at eingir eingilskir trolarar tá fiskaðu undir Føroyum. Grunnarnir fingu frið. Men so skjótt kríggið var liðugt, komu teir aftur, og tá fall veiðunøgdin niður á tað tonsatalið, sum hevði verið áðrenn 1900. Í fleiri ár var veiðan ikki meira enn stívliga 1000 tons og onkuntíð minni um árið. Millum heimsbardagarnar báðar hevði útróðurin í Føroyum ikki serliga stóran týdning samanborið við skipsfiskiskapin, men róð varð út øll árini kortini, so útróðrarfiskur kom upp á land mestsum allastaðni.

Tann stóra forðingin fyri útróðrinum vóru teir bretsku trolararnir, sum um hetta mundið trolaðu undir Føroyum. Kielberg, ið var prestur á Viðareiði í 1930-árunum, sigur í endurminningum sínum í 1946, at trolararnir oyðiløgdu útróðurin: *Trawlerne ligger i Massevis omkring Færøerne, til Tider kunne det se ud, som lå en hel oplyst By derude på Havet i de mørke Vinternætter. Det kunne godt ske, at man saa baade 30 og 40 Trawlere ligge og arbejde paa en Gang; saa det siger sig selv, at det gik haardt ud over Fiskebestanden.*

Vanliga verður sagt, at tann fyrsti deksbáturin varð bygdur í 1905. Onkur bátur varð kanska bygdur áðrenn til annað endamál. Bera vit okkum saman við íslendingar og norðmenn, vóru vit ikki eftirbátar á hesum øki. Íslendingar fingu sín fyrsta motorbát í 1902, og í 1903 vóru bert tríggir motorbátar í Noregi.

Føroyingar smíðaðu sjálvir motorbátarnar. Ta fyrstu tíðina vóru teir ymiskir í skapi. Summir vóru súðubygdir, og summir vóru slættir, notbygdir ella kravell, sum tað eitur. Summir høvdu flata, meðan aðrir høvdu runda hekku, og summir vóru spískir í báðum endum. Summir høvdu hálvdekk, og summir vóru fulldekkaðir. Teir bátarnir, sum vóru súðubygdir, vórðu bygdir á sama hátt, sum tá vanligur føroyskur bátur verður smíðaður, bondini verða sett í aftaná. Teir sløttu bátarnir vórðu bygdir eins og skip, bondini vórðu fyrst sett upp, og so vórðu borðini smíðað á aftaná. Teir súðubygdu bátarnir vórðu mest brúktir ta fyrstu tíðina norðanfyri, men suðuroyingar skuldu eisini hava fleiri bátar av hesum slag.

Teir bátarnir, sum Jákup bóndi á Biskupsstøð smíðaði, vóru súðubygdir. Hann var eisini í Íslandi og smíðaði bátar. Teir vanligastu motorbátarnir vóru kortini teir, sum vóru at líkna við sluppir í smálíki. Fleiri bygdu slíkar bátar, men teir, sum bygdu flestar, vóru Lias í Rættará í Havn og Laurits í Mortanstovu. Umframt at byggja føroyingum bátar bygdu teir motorbátar til íslendingar. Tann størsti báturin, sum Lias í Rættará bygdi, var um 45 tons. Hann varð bygdur til íslendingar. Til samanberingar var sluppin Fox 38 BRT, men yvirhøvur vóru bátarnir nógv minni. Teir smæstu vóru um 4 tons til støddar. Umborð á motorbátunum varð fiskað við somu amboðunum sum við árabáti og maskinbáti, snøri ella línu. Motorbátarnir vórðu eisini brúktir til postbátar.

Hetta vóru livandi før, hekkan hekk í leysari luft, tí kjølurin var ógvuliga stuttur, men teir flestu vóru sjógóðir bátar. Tað var tað sama við motorbátunum sum við sluppunum. Teir fingu ikki stýrhús fyrr enn seinnu tíðina. Róðursmaðurin mátti tí altíð festast, tá nakað var at, tí hann stóð so leysur. Motorbátarnir høvdu eina mastur, stórsegl, fokku og spryt at stinga út við, um teir vildu seta ein klyvara, tá siglast skuldi. Hetta varð brúkt, tá vindur var til vildar, ella tá motorsteðgur var.

Ta fyrstu tíðina vóru ofta trupulleikar við motorunum, men so við og við gjørdust menn kønir motorpassarar. Til bar eisini at læra at passa motor á skúla í Havn. Hóast motorarnir vóru smáir 10-12 hk, vóru teir flestu nøgdir við ferðina. Motorbátarnir høvdu tann fyrimun, at manningin slapp frá at rógva. Eisini høvdu teir eitt fitt lugar, har til bar at sita heitur. Flestu bátar høvdu eina lítla kabúss, so tað bar til at kóka sær ein drekkamunn. Eisini vóru beinkir at sita á, og tað kom fyri, at teir høvdu onkra heingikoyggju eisini. Til bar at fara longur við teimum, og teir toldu meira veður. Uppaftur betur gjørdust teir, tá teir fingu stýrhús, so tann, sum stýrdi, kundi standa undir taki. Tað var eisini nógv tryggari.

Hinvegin høvdu ikki allar bygdir møguleika at hava motorbátar, tí mótsett árabátunum kundu motorbátarnir ikki dragast upp á land, men máttu liggja fyri akkeri. Hetta læt seg ikki gera allastaðni. Óvanligt var ikki, at menn á brimplássi kortini royndu at hava motorbát. Kvívíkingar royndu tað undir fyrra heimsbardaga. Teir høvdu bátin í eitt ár, fiskaðu óført, men árið eftir sleit hann fortoyningina, fór á land og í smildur. Á Húsum royndu teir eisini at hava motorbát, men eigarin mátti alla tíðina ansa eftir honum og vera klárur at rýma til Klaksvíkar, tá illveður kom, at leggja hann har og so fara eftir honum aftur, tá farast skuldi til útróðrar. *Tað vóru ofta ótespiligar ferðir aftur og fram millum Húsar og Klaksvík í vártíð*, verður sagt frá hesi tíð. Vandin við at hava motorbát liggjandi á brimplássi hevur eisini vunnið sær innivist í bókmentum okkara, m.a. í *Tað lýsir av landi* eftir Martin Joensen og í *Nóatún* eftir William Heinesen. Tað var tí ikki at undrast á, at ein serlig motorbátatrygging varð stovnað við sæti í Sørvági í 1909.

Yvirhøvur var tað so, at tað setti ávís krøv at hava motorbát. Teir skuldu ankrast á góðkendum ankarplássi, og so skuldi helst vera ein brúgv, har teir kundu leggja at og leggja fiskin upp. Tað kravdi eyka arbeiði at føra fiskin í land við árabáti, men var neyðugt fleiri staðni. Motorbátarnir hóskaðu seg væl til várróðurin á Norðhavinum, har teir ofta vórðu brúktir um várarnar. Meira enn so hendi seg, at menn leigaðu motorbátar til várróðurin. Eisini kundu handilsmenninir í Suðuroy senda motorbátar norður til Skopunar at rógva út um várarnar, har bæði teir hjá Thomsen og teir hjá Mortensen høvdu úthandlar. Fyri kyrrupláss fingu motorbátarnir stóran týdning, hóast tey høvdu longri á fiskileið. Fyri at lætta um fóru menn undir at laga brýr til motorbátar úr gróti, so teir kundu leggja at. Hetta var t.d. galdandi fyri Sørvág, ið hevði nógvar motorbátar.

Motorbátarnir fingu størsta týdningin fyri útróðurin í Klaksvík. Klaksvíkin vaks serliga nógv í tíðini millum báðar heimsbardagarnar. Meðan talið á motorbátum minkaði í øllum øðrum bygdum, vaks tað í Klaksvík. Í 1937 var talið á motorbátum í øllum Føroyum komið niður á 110. Robert Joensen sigur í útróðrarsøgu síni frá 1946, at tað er *júst ta tíðina, tá J. F. Kjølbro fær fleiri bátar. Hetta kom at vera av alstórum týdningi, at Klaksvíkar bygd var toluliga væl útgjørd við útróðrarbátar, motorbátar, tá heimsbardagin brast á, tí tá fekst einki nýtt far uttanífrá, og tað, at aðrar bygdir við havnarlagið ikki kundu vinna so nógv av útróðri sum Klaksvík, var einamest av tí, at tær ikki høvdu so mikið av motorbátum, sum tær kundu manna. Einstøk góð útróðrarpláss fyri motorbátar høvdu so at siga eingi hóskandi før.*

Yvirhøvur var tað so, at handilsmenn ella útgerðarmenn í bygdini lótu motorbátarnar byggja. Einstakir menn kundu eisini lata bát byggja og eiga hann

uttan at vera útgerðarmenn, og tað kom fyri, at menn tóku seg saman um at keypa ein motorbát. Frá 1905 var møguligt hjá útróðrar- og fiskimonnum at fáa statslán at byggja ella keypa fiskifør. Henda lóg fekk ikki stóran týdning fyri skipabyggingina, men hon fekk stóran týdning fyri keyp og bygging av motorbátum. Hesi lán vórðu bert latin skiparum og fiskimonnum, sum sjálvir áttu bátin, og ikki teimum stóru handilsfyritøkunum. Um hesar so seinni kundu keypa part í bátinum, sigur søgan einki um.

Manningin á motorbátunum var vanliga 5-6 mans, og yvirhøvur vóru tað teir somu, sum róðu út saman. Í summum bygdum brúktu teir mest motorbátarnar til várróðurin, men teir vórðu eisini brúktir um veturin, tá skipsfiskimenninir vóru heima. Hvør motorbátur hevði ein formann, og tað var fyri tað mesta hann, sum bað fólkið. Átti annar enn hann bátin, hevði hesin eisini eitt orð at siga um, hvør skuldi rógva við bátinum. Tað hendi seg eisini, at menn tosaðu saman, um teir ikki skuldu fara at rógva út, og tað vóru altíð teir raskastu, sum funnu saman.

Tá motorbátarnir vóru í hæddini, hevði sluppfiskiskapurin eisini verið í nógv ár. Til ber ikki at siga nakað vist um, hvussu manningarnar á motorbátunum vóru samansettar, men skyldskapur og kennskapur høvdu stóran týdning.

Við áttamannaførum var vanligt at býta veiðina soleiðis, at hvør av manningini fekk ein part, báturin ein og línan ein. Hetta varð summastaðni eisini brúkt umborð á motorbáti, men vaksið varð um bátspartin. Agn og olja fóru vanliga av óbýttum bæði við snøri og línu, ein triðingur fór til bátin og tveir triðingar til manningina. Robert Joensen sigur, at í Klaksvík var tað so, at um 5 mans róðu út við einum báti, varð úrtøkan býtt í 9 partar, so hvør av manningini fekk 1 part og báturin 4 partar. Vóru 6 mans við bátinum, varð veiðan býtt í 11 partar, hvør av manningini fekk 1 part, og báturin fekk 5 partar. Men so við og við varð tað vanligt, at báturin fekk helvtina og manningin helvtina av úrtøkuni. Seinni fingu bæði bátsformaðurin og motorpassarin eitt sindur meira enn hinir.

## *Maskinbátar*

Heilt upp til umleið 1925 høvdu teir havt árabátar á útróðri síð um síð við dekksbátunum ella motorbátunum, men nú fingust eisini smærri maskinur, sum teir kundu seta í árabátarnar. Teir settu maskinur í bátar frá 4-mannafari og upp til 10-mannafør, men tær vanligu installeringarnar, sum tær eisini nevndust, vóru 5- og 6-mannafør. At seta maskinu í árabát, sum ikki upprunaliga var bygdur til maskinu, hevði sínar trupulleikar, tí teir vóru ikki nóg sterkt bygdir. Vóru ofta ótryggir og vátir. Til bar at hjálpa uppá hetta við at seta eitt borð omaná, men so vórðu teir verri at rógva við enn áður. So hvørt menn smíðaðu



*Installeringur við fullari ferð á maskinuni*

nýggjan maskinbát, varð hann lagaður til maskinuna. Tillagingar til maskinorkuna førdu við sær, at báturin ikki longur var róðrarbátur. Hann var hvørki góður at rógva ella sigla. Men tann nýggja framdráttarmegin hevði eisini við sær, at útróður kundi geva meira av sær.

Eins og við motorbátunum vóru ofta kvalir av maskinuni fyrstu tíðina, men so við og við dugdu menn betur og betur at fáast við maskinuna. Yvirhøvur varð væl dámt at sleppa frá at rógva, men onkrum av teimum gomlu dámdi lítið at fara á sjógvin at doyggja í kulda. Tað, at menn sluppu frá at rógva, førdi við sær, at teir fóru longur og løgdu ofta meira fyri. Leingi róðu maskinbátarnir út lið um lið við árabátunum, og teir høvdu ofta árabátar upp á sleip, tá teir komu aftur av útróðri, sjálvt um motorurin var lítil.

Hóast maskinan tyngdi nógv um bátarnar, kundu teir dragast upp. Men tað vardi ikki leingi, til menn fingu sær spæl at draga bátarnar upp við. Spølini komu umleið 1935, og næstan um somu tíð fingu menn sær drátt. Tá megnaðu tveir mans lættliga at draga bátin upp. Páhangsmotorar fingust longu umleið 1930. Á brimplássum norðanfyri fingu teir sær ofta páhangsmotorar í bátarnar. Teir kundu takast úr bátinum, áðrenn hann varð drigin upp. Hetta gjørdi tað munandi lættari at draga. Annars vóru maskinurnar, sum teir settu í installeringarnar, ikki stórar, frá trimum upp í 10 hk. Nøvnini á maskinunum vóru Perfekt, Gøta, Marna, Solo, Saab o.s.fr.

Stórar maskinbátar, sum mest vórðu brúktir til útróður, áttu menn yvirhøvur í felag, meðan einstakir menn kundu eiga smærri maskinbátar einsamallir. Teir, sum áttu bát saman, høvdu eisini ofta annað saman eisini, men yvirhøvur var tað so, at menn meira og meira fóru at eiga bát einsamallir. Tá teir ta fyrstu tíðina fóru at rógva út í Grønlandi, høvdu teir vanliga bátar við sær, t.d. 6-mannafør og 8-mannafør, men tá grønlandsútróðurin av álvara byrjaði eftir kríggið, fóru teir at byggja ógvuliga stórar maskinbátar, grønlandsbátar, sum kundu taka nógvan fisk. Fleiri av hesum róðu eisini út í Føroyum.

Teir fyrstu maskinbátarnir komu í eini tíð, tá útróðurin undir Føroyum var minkaður burtur, tí bretsku trolararnir trároyndu allar leiðir kring Føroyar. Hinvegin ber til at siga, at maskinbátarnir fingu stóran týdning fyri einstaka húsarhaldið, tí nú bar til hjá einum ella tveimum monnum at fara á flot ella skjóta fugl, seta gørn, á Skálafjørðinum serliga sildagørn, kalvalínu, ella hvat tað skuldi vera. Báturin gjørdist eisini tíðsfordrív og sportur, sum hann er hjá nógvum í dag, men nú á okkara døgum hava hesir bátar í stóran stíl fingið kapping frá øðrum bátum, ið eru gjørdir úr glasfipuri og øðrum kunstgjørdum tilfari. Flotin av smábátum, sum liggur við flótibrúgvarnar í Havnini og í bátahavnunum á bygd kring landið, er ógvuliga stórur.

## Fjarfiskiskapur

### *Sluppirnar*

Hóast royndir vórðu gjørdar áðrenn tað, verður sluppfiskiskapurin yvirhøvur roknaður at byrja í 1872, tá tríggir traðar- og útróðrarmenn úr Havn keyptu ta lítlu eittmastraðu sluppina *Fox* úr Scarborough í Onglandi fyri 7000 kr. Henda royndin eydnaðist væl, og sluppfiskiskapurin vaks spakuliga komandi árini, onkuntíð dragnaði, men tá vit koma til 1890, veksur skipaflotin næstan uttan íhald í mong ár.

Aðrar fiskiveiðitjóðir høvdu, tá føroyingar fingu tær fyrstu sluppirnar, fiskað á opnum havi í manna minni. Tá føroyingar komu upp í leikin og keyptu sluppirnar, vóru bretar farnir at fiska við kolfýrdum trolarum. Tað, at fremmandir guvutrolarar fór at trola heilt inni við klettin í Føroyum, fekk stórar avleiðingar fyri útróðurin í Føroyum. Útróðurin gav ikki Føroya fólki nóg mikið av arbeiði, tí vóru menn jú farnir at keypa skip. Pløyen, amtmaður, hevði verið í Hetlandi og kannað viðurskiftini har, og hetta gav føroyingum kunnleika um nýggjar veiðihættir. Størsta týdningin fekk tó helst beinleiðis sambandið, sum føroyingar fingu við hetlendskar fiskimenn, ið royndu við snøri undir Føroyum seinnu helvt av 19. øld. Alt meira vanligt gjørdist, at føroyingar fingu tjans við teimum.

Seinasta hetlendska sluppin hevði føroyska manning. Soleiðis lærdu teir seg at fiska frá skipi.

Tíðin var nú komin, at føroyingar vóru til reiðar at standa á skipsdekki. Hetta varð ikki bert stýrt úr erva, men minst líka nógv úr neðra frá fiskimonnunum sjálvum, sum sjálvir fingu hug at fáa sær skip eftir at hava lært, hvussu hetlendingar gjørdu. Tá *Fox* var komin, komu fleiri sluppir henni á baki, men skipaflotin vaks ikki skjótt ta fyrstu tíðina. Í 1891 vóru bert 14 skip í Føroyum. Ymiskar forðingar gjørdu, at fiskiskipaflotin vaks spakuliga. Ein var innflutningsgjald upp á skip keypt uttanlands. Hetta gjald var 3% av keypsvirðinum og fór í statskassan. Ikki fyrr enn í 1892 vórðu øll gjøld á innfluttum fiskiførum tikin av. Ein annar trupulleiki var, at lógin kravdi, at skiparin skuldi hava stýrimansprógv fyri at kunna sigla til Íslands, somu krøv sum vóru galdandi fyri handils- ella farmaskip. Bert hendinga maður hevði stýrimansprógv. Eisini hetta broyttist í 1892, tá eitt serligt fiskiskiparaprógv kundi takast í Føroyum, ið gav rætt til at føra fiskiskip mestsum á øllum høvum. Eisini var ógvuliga dýrt at tryggja skip – 9% og uppeftir av virðinum. Hesa upphædd høvdu nógvir ikki ráð at gjalda. Tað hjálpti, tá Føroya Sjóvátrygging varð stovnað ella Færøernes Gensidige Forsikringsforening for Sejlfartøjer til Fiskeribrug, sum var danska navnið. Eisini hetta hendi í 1892. Í 1903 fingu suðringar Suderø Fiskeriforsikring. Tryggingargjaldið lækkaði nú niður í 3%. Meðan 18 skip vóru tryggjað í 1893, var talið í 1904 komið upp á 120 skip.

Fleiri trupulleikar vórðu sostatt burturbeindir tey fyrstu árini eftir 1890. Bretar og skotar høvdu í mong ár trolað við segltrolarum, men nú fóru teir alt meira at gera íløgur í nýggjar guvutrolarar úr stáli, tí hesir kundu trola mestsum í øllum veðri, og teir kundu eisini fara nógv longri enn segltrolararnir. Bretar høvdu ein stóran fiskamarknað heima hjá sær sjálvum, sum nú fór at taka ímóti stórum mongdum av feskum fiski. Jarnbreytir vórðu lagdar út um alt Stóra Bretland, so tað eftir rættiliga stuttari tíð bar til at flyta feskan fisk mestsum út í hvønn krók í landinum. Til bar nú eisini at framleiða ís í stórum mongdum.

Prísfallið á feskum fiski hevði gjørt, at fólk yvirhøvur vóru farin at eta meira fisk, men prísfallið hevði ikki so nógv at siga fyri fiskimenninar, tí trolararnir kundu fiska mongdir av øllum sløgum av fiski. Eitt nú fóru hundraðtals tons av fiski til allar *fish and chips*-búðirnar, sum stungu seg upp allastaðni og mestum gjørdust partur av matmentanini bæði hjá skotum og onglendingum. Bretar og skotar dugdu sjálvandi eisini at framleiða salt- og klippfisk. Hetta er aldargamla virksemi teirra í Ný Foundlandi besta dømið um, og vert er at minnast til, at enn var eftir ein góður marknaður sunnanfyri bæði fyri saltfisk og klippfisk, men hann gjørdu bretar og skotar ikki so nógv við um hetta mundið. Tað var heppið fyri føroyingar.

Teir nýggju guvutrolararnir gjørdu, at ikki longur varð brúk fyri segltrolarunum, sum kundu fáast bíliga til keyps. Bæði føroyingar, íslendingar og fiskimenn á vesturstrondini í Svøríki keyptu hesi før. Segltrolarar av slagnum *smacks* høvdu *ketch*-rigning ella tann rigning, sum eisini fór at eyðkenna føroysku sluppirnar. Hesi før vóru rímiliga bílig. Tann vanligi prísurin fyri eina slupp var í byrjanini 10.000 krónur, men prísurin hækkaði so við og við, so hann í 1890 var 25.000 kr. og í 1910 heilar 100.000 kr.

Fyri føroyska sluppfiskimannin skipaði árið seg mestsum á sama hátt ár undan ári í eini fimti ár. Sonurin tók við somu skipan sum faðirin. Skipararnir bóðu sær manning fyri jól, og um mánaðarskiftið februar/mars fóru teir at rigga til, og so fóru skipini á Suðurlandið, komu aftur í mai fyri síðan at fara á Eysturlandið. Tá komið var til mikkjalsmessu, vóru skipini komin aftur ella á veg heim. Tað dagliga lívið umborð var at standa við vaðbeinið og draga snørið. Hetta dugdu mestsum allir menn uttan mun til andsevni.

Helst lærdu føroyingar frá hetlendingum at nýta sjálvdráttarskipanina umborð. Hvør maður fekk løn í mun til, hvussu nógv hann fiskaði. Skil varð hildið á hesum við lippunum, sum hvør maður skar og goymdi í lippukassanum. Talt varð upp eina ferð um vikuna. Henda sjálvdráttarskipan var ein ávirkan frá hetlendingum. Ein ávís sosial skipan ráddi umborð fram við vaðbeinunum á lúnningini, men hon var ikki har, tá gerast skuldi reint, og fiskurin skuldi flekjast og saltast. Her mátti maður, antin hann so fiskaði nógv ella lítið, gera sama arbeiði sum hinir.


*Sluppin er avhálað, og menn standa við snøri*

Ójavnin í avrokningini gjørdi, at ikki bara varð kappast umborð. Ein øgilig pátrúgv vaks fram umborð á sluppunum við tí fyri eyga at varðveita fiskieydnuna. Sluppirnar vóru fyrstu tíðina rímiliga góð skip samanborið við tað, føroyingar vóru vanir við. Men tíðin gekk, og skipini vórðu gomul og slitin. Fiskimenn ynsktu sær nýggjari og betri skip, men tey komu ikki fyrr enn eftir kríggið.



*Fiskimenn stóðu fram við lúnningini og fiskaðu við snøri. Plássini vóru ymist í metum. Besta plássið var aftast* *(Úr bókini Færøske Sluppfiskere eftir J. P. Joensen 1975)*

Tað ber eisini til at hyggja at sluppfiskiskapinum í einum størri samfelagsligum høpi. Eitt er, at tað gjørdist so friðarligt í bygdunum, tá øll mannfólkini í bestu árum fóru avstað. Sámal Joensen-Mikines lýsir hetta væl í fleiri av málningum sínum. Tað sigur seg sjálvt, at dagarnir vóru tungir beint eftir, at skipini vóru farin. Ein kvinna, ið hevur greitt frá hesum, sigur, at beint eftir, at skipini vóru farin, var lítið tos, fólk vóru tung í huga, men bóru alt inni við seg sjálvi. Serliga hjá ungum giftum fólkum var tað tungt. Ofta kom ikki fyri almenningin, at ungfólk vóru væl, fyrr enn gentan segði dronginum farvæl, tá hann fór avstað. Hjá teimum flestu var ikki annað at gera enn at hugsa frameftir, tí um tríggjar mánaðir komu teir aftur. Men saknurin fekk ofta konufólkini í huganum at leita hagar, sum fiskimenninir vóru:

*Meðalandsbuktin, sjask, hampiligt bakkveður, illveður, ódnarveður, avhálað, 7 pund niður, helst 2 toskar á við uppaftur, helst 30 pund hvør. Vindur. Eitt 7 punds lodd afturat. Hetta og mangt annað hevur tú hoyrt teir tosa um ella sjálv sitið og teskað við drong tín. Alt tað beiska, harða og ringa hugsar tú ikki um nú. Ikki fyrr enn teir eru reiðiliga farnir, fært tú aðrar tankar. Hvussu gott tað verður at fáa teir heimaftur. 3 mánaðir fáa ein enda. Segltíðin er farin, motorur er í. Royna teir á Grynnuni ella við Oyggjarnar, so slepst innundir, tá ódn er. Alt gerst meira bjart, so hvørt sum tú skræðir úr kalendaranum, at enda er tað eitt, sum fyllir tankar tínar: heimkoman, at hittast.*

Teir flestu ungu dreingirnir høvdu mestsum allan fyrrapartin av 20. øld ikki annað í at velja enn at fara til skips, tá teir høvdu fingið prestsins hond á høvdið, um teir ikki vildu ganga heima og mala. Ætlaði tú tær at læra okkurt, mátti tú ið hvussu so er minst til Havnar. Hinvegin var dreymurin hjá teimum flestu um hetta mundið helst at sleppa úr skúlanum og til skips.

*Longu frá barnadøgum var sum ein dreymur í sinninum hjá smádreingjunum hetta fremmanda, ovurhonds farið, sum vit hildu sluppina vera. Og við hvørt kom hon, áðrenn nakar vardi, siglandi inn fyri bygdina, koyrdi forseglini niður og ankraði. Bátur kom í land við fremmandum monnum. Tá vóru vit smádreingir longu á støðni burtur í tí, sum nú fór at henda. Vit sleppa umborð, verða væl móttiknir av ókunnumonnunum, fáa keks at eta og sleppa at ganga um skipið, kanna alt hetta ókenda, spyrja og fáa at vita, klíva upp í vantini klófastir og ágangnir. Menninir, sum komu í land, vórðu bodnir inn í hús at njóta blíðskap. Men hetta gekk sum eftir ráni. Vit óvitarnir vórðu settir aftur í land og høvdu upplivað eina stórhending. Tá vóru fremmandamenninir aftur á støðni og við teimum menn úr bygdini, sum skuldu við skipinum – eisini dreingir, sum vóru bert tvey, trý ár eldri enn vit.*
Soleiðis minnist Heðin Brú sluppirnar í bóndabygdini Skálavík.



*Fullfermdur føroyskur útróðrarbátur í Touqusaq í Grønlandi* *(Mynd Haldane Joensen)*

## *Til lands og grønlandsútróður*

Umframt at fiska frá skipi fóru føroyingar seinast í 19. øld til lands í Íslandi. Teir fóru við skipi, ikki sjáldan við teimum bátum, sum tá sigldu í rutu millum Føroyar og Ísland. Í 1880-unum vóru umleið 1000 fólk um árið til lands í Íslandi. Vísan um skipið *Vaagen* er frá eini slíkari ferð yvir um hav. Fleiri kvinnur vóru eisini við. Summar arbeiddu hjá teimum føroysku útróðrarmonnunum, meðan aðrar arbeiddu hjá íslendingum. Nóg mikið av arbeiði var til teirra bæði hjá føroyingum sjálvum og hjá íslendskum keypmonnum, sum tóku ímóti fiski. Rættiliga skjótt kom gott samstarv í lag millum føroyingar og íslendingar. Teir leigaðu seg inn hjá íslendingum ella bygdu sær egin hús at búgva í. Ymist var, hvat teir, sum vóru til lands, valdu at gera við fiskin. Summir avreiddu hann til íslendskar keypmenn, meðan aðrir saltaðu og flaktu hann og seldu hann sjálvir, ofta til føroyskar keyparar, sum so sendu skip eftir fiskinum. Føroyingar høvdu føroyskar bátar við sær, og skjótt vildu íslendingar útvega sær føroyskar bátar, sum teir so sjálvir brúktu. Hetta samstarv millum íslendingar og føroyingar helt fram í nógv ár og í fleiri førum langt inn í 20. øld, men tá í minni mátistokki.

Grønland hevði fyrsta fjórðingin av 20. øld verið eitt afturlatið land fyri føroyingum. Í 1926 fingu føroyingar loyvi til at brúka eina havn í Grønlandi. Eini 10 ár seinni fingu føroyingar loyvi at rógva út frá Tovqusaq og Føroyingahavnini

við bátum, men tað var ikki fyrr enn í 1938, at føroyingar av álvara fóru at rógva út í Grønlandi. Teir fingu loyvi at seta seg niður á ávísum plássum, har teir reistu skúrarnar, sum H. C. W. Tórgarð hevði teknað til teirra. Men útróðurin fekk ikki av álvara týdning fyrr enn eftir seinna heimsbardaga.

Ringar tíðir vóru miðskeiðis í fimmtiárunum eftir bankakreppuna í 1952. Tá leitaðu mangir føroyingar sær til onnur lond at tjena pening. Summir fóru til Íslands, aðrir við týskum trolarum sum flekjarar, uppaftur aðrir fóru til Noregs, men bjargingin hjá mongum var grønlandsútróðurin. Serliga í 1950-unum fóru føroyingar í hópatali til Grønlands at rógva út. Teir búðu í skúrum, sum tær settu upp á plássum, har teir høvdu fingið loyvi at vera. Teir flaktu og saltaðu sjálvir fiskin. Tað er hesa tíðina, at teir fara undir at fáa føroyskar bátasmiðir at smíða sær teir stóru grønlandsbátarnar. Tað er eisini um hesa tíðina, at Grønlandsfelagið ger íløgur í Føroyingahavnini. Nordafar byrjaði sítt virksemi í 1954. Eitt var, at føroyingar fiskaðu og saltaðu fiskin, har teir róðu út, men í 1959 fór Nordafar eisini undir at skera flak, ið varð fryst í blokk. Umframt bátar, sum Nordafar átti, fiskaðu aðrir bátar fyri Nordafar. Í 1962 og 1963 var útróðurin í Føroyingahavnini í hæddini, tá út ímóti 400 mans róðu út við 67 bátum. Teir avreiddu 5300 tons, og besta árið var 1966. Hesa tíðina hevur m.a. Jógvan Arge skrivað fleiri bøkur um, so til ber at finna fram til einstøku bátsmanningarnar.

Síðani 1974 minkaði virksemið, og umleið 1985 helt tað mestsum heilt uppat. Hinvegin hava føroyingar framhaldandi havt áhugamál í Grønlandi, og fleiri føroyingar hava fiskað við grønlendskum skipum sum yvirmenn. Eisini hava teir síðani 1969 fiskað rækjur við Grønland.

### *Trolarar og onnur skip*

Umframt trolarar lótu føroyingar byggja eini 5 snurriváðsbátar beint áðrenn kríggið. Teir vóru fyri tað mesta í ísfiski og seldu veiðina í Danmark og Bretlandi. Eisini eigur í hesum sambandi at verða nevnd tann roynd, sum í 1929-31 varð gjørd á Tvøroyri við Ísvirkinum, sum keypti 9 nýggjar snurriváðsbátar upp á 40-50 tons. Henda samtøka fekk eisini bygt eitt íshús, sum kundi frysta 100 tons. Harumframt keyptu teir eisini frystifarmaskipið *Th. Stauning*, sum skuldi føra ísfiskin til keypararnar í útlondum. Konseptið var gott, men tíðirnar júst um hetta mundið av teimum allar ringastu. Heimurin var í kreppu, og til bar ikki at forða fyri, at virkið fór á heysin, hóast helst hevur verið roynt.

Beint undan seinna heimsbardaga vóru 158 fiskifør í Føroyum, meginparturin sluppir og skonnartir, men frá 1934 fóru føroyingar at keypa trolarar av álvara. Tað tykist sum, at føroyingar hava dugað at lagað seg til viðurskiftini, tí fleiri føroyingar høvdu siglt við bretum sum flekjarar. Umframt at ísa fiskin fóru

trolarar fyrra part av 20. øld at salta fiskin niður í lastina fyri eins og føroyingar at flyta hann út til londini sunnanfyri. Men teir høvdu nú gloymt rætta háttin at hagreiða saltfisk, sum teir í síni tíð sjálvir brúktu í Ný Foundlandi. Fleiri føroyingar sigldu tí við eingilskum trolarum sum flekjarar. Teir fóru eisini í 1950-unum at sigla sum flekjarar við týskum trolarum, sum høvdu brúk fyri flekjarum. Hetta vardi kortini ikki leingi, tí týskararnir fóru at brúka portugisarar til flekjarar. Teir kravdu minni løn.

Fleiri føroyingar høvdu sostatt royndir frá trolfiskiskapi, tá teir fingu sínar egnu trolarar. Longu fyri fyrra heimsbardaga vórðu einstakar royndir gjørdar við trolarum í Føroyum. Vestmenningar høvdu ein trolara í 1905, og í 1912 kom trolarin Grani til Tvøroyrar. Hann var bert 126 BRT til støddar. Grani royndi við Føroyar og við Ísland. Sín seinasta túr gjørdi hann í 1914. Ikki fyrr enn í 1920-unum vórðu royndir aftur gjørdar við trolarum.

Í 1930 var bert ein trolari í Føroyum, men frá 1934 vaks talið á trolarum ár undan ári, so tá komið varð til 1939, var talið á trolarum komið upp í 10. Hesir trolarar vóru Skálaberg, Tórshavn, Leivur Øssurson, Tvøroyri, Stella Argus, Tórshavn, Norðstjørnan, Tórshavn, Tór I, Tórshavn, Næraberg, Klaksvík, Norðbúgvin, Tórshavn, Tór II, Tórshavn, Vesturvarðin, Sørvágur, og Nýggjaberg, Miðvágur. Støddin á trolarunum var úr 283 upp í 395 tons. Teir vóru allir gamlir, tá teir vórðu keyptir. Serliga nýggi Sjóvinnubankin fíggjaði trolarakeypini.

Trolararnir veiddu nógv meira enn sluppirnar, og longu í 1938, tá trolararnir enn bert vóru 5, veiddu teir 15% av allari føroysku saltfiskaveiðini. Trolararnir veiddu allir á fjarleiðum og vóru burtur mestsum alt árið. Trolararnir veiddu 6-700 tons um árið, og manningarpartarnir vóru fleiri ferðir tað, teir vóru umborð á sluppunum og skonnartunum. Tað sigur seg sjálvt, at gravgangur var eftir at sleppa umborð á trolararnar. Hóast strævið varð tað hildið at vera eitt betri lív enn at sigla við sluppunum, serliga tá tær fóru at sigla ta longu leiðina til Grønlands.

Trolararnir vóru upprunaliga bretskir lemmatrolarar, og veiðihátturin var tann sami, sum bretar høvdu brúkt. Hetta gongur ikki minst fram av øllum teimum bretsku orðunum, sum enn hanga við í øllum tí, sum hevur við trol at gera. Tað var munandi hugaligari at sigla við trolara enn við slupp. Hóast 30 mans vóru við, var rúmsáttari enn umborð á sluppunum, og trolið gjørdi, at eingin sjálvdráttur var, so tann vanliga manningin fekk somu løn. Men trolaralívið setti krøv til familjuna. Menn kundu vera so leingi burtur, at tey minstu børnini kendu teir ikki, tá teir komu aftur.

Heilt upp til seinna heimsbardaga var føroyski útflutningurin næstan bert saltfiskur og klippfiskur. Hetta steðgaði alt upp undir krígnum, tí tá veiddu bæði sluppir, trolarar og øll onnur før fisk, ið varð ísaður og førdur á bretska marknaðin at selja sum feskur fiskur. Ísfiskiskap nevndu føroyingar hetta. Umframt at

fiska sjálvir fóru teir til Íslands við skipum sínum at keypa fisk frá íslendingum, sum teir seldu aftur á eingilska og skotska ísfiskamarknaðinum.

Eisini lótu summir íslendingar um at selja fiskin, meðan føroyingar við skip og manning fluttu hann á bretska marknaðin fyri teir og fingu vinningin av flutninginum. Ísfiskur var so at siga einasta útflutningsvøra hesa tíðina.

Mestsum eingi nýggj skip komu til Føroya undir krígnum, men ísfiskiskapurin førdi við sær, at minni arbeiði varð at gera umborð, tí fiskurin varð ikki flaktur, men ísaður rundur. Neyðugt varð at broyta lastina, so skipini egnaðu seg betur til ísfisk, tí eina tíð var trupult at halda fiskin nóg feskan. Men yvirhøvur var tað so, at teir, sum høvdu tjans undir krígnum, tjentu nógvan pening, men ikki allir høvdu henda møguleika, og tí royndi fiskimannafelagið at fáa reiðararnar at skifta manningarnar út við ávísum millumbilum, so fleiri sluppu framat.

Teir, sum áttu skipini, og teir, sum sluppu við, tjentu nógvan pening, meðan teir, sum ikki sluppu upp í part, vóru arbeiðsleysir, um teir ikki fingu arbeiði hjá eingilskmonnum. Hinvegin var siglingin til Bretlands ein sera vandafull sigling, tí nógv skip vórðu søkt undir krígnum, og nógv skip, bæði sluppir og trolarar, sum tað sæst í bókini Víkingasynir eftir Jákup Joensen, próst, bóru ikki boð í bý.

Hóast hugurin var góður, og menn væntaðu sær nógv av trolaraíløgunum eftir kríggið, gjørdist hetta, sum aðrastaðni verður greitt frá, ein búskaparligur sorgarleikur, tí eftir fáum árum fóru teir flestu av hesum trolarunum á heysin og tóku P/F Sjóvinnubankan við sær.

Stígur kom nú í fiskivinnuna, men ein glotti var sildafiskiskapurin við gørnum í 1950-unum. Til garnafiskiskapin eftir sild kundu øll skip brúkast, eisini trolarar. Eyðkenni fyri sildaskipini vóru teir stóru tunnuhjallarnir við tómum tunnum aftast á skipunum. Sildin varð tá saltað í tunnur og umaftursaltað á bryggjunum, áðrenn hon varð seld sum matsild til Russlands, ið var tann stóri sildakeyparin. Føroya Sildasøla stóð fyri søluni. Tørvurin á tunnum førdi við sær, at eitt tunnuvirki kom í Tórshavn.

Tann uppaftur størri sildafiskiskapurin byrjaði í 1962 við kraftblokkabátunum, sum eisini skaptu grundarlagið undir fiskaídnaðarvirkinum Havsbrún, ið varð bygt í Fuglafirði í 1966. Tað var at meta við eitt gullnám at sleppa við einum kraftblokkabáti. Bæði yvirmenn og manning tjentu nógvan pening. Tað sama gjørdu teir, sum veiddu rækjur, men tá vit komu til hesa tíð, var nógv nýtt hent í føroysku fiskivinnuni. Realkredittstovnurin kom í 1955. Gongd kom á aftur, og ein verulig endurnýgging av skipaflotanum tók dik á seg. Føroya Fiskasøla tók í fleiri førum stig til, at nýggj skip vórðu bygd, m.a. gjøgnum Ognarfelagið í 1950-unum og P/F Marknaðarrøkt í 1970-unum.

Tey skip, sum nú komu, vóru mestsum øll nýggj skip, trolarar, línubátar, kraftblokkabátar, rækjutrolarar og so framvegis, sum gjørdu føroyskan fiskiskap

meira fjøltáttaðan, eisini tá talan var um fjarfiskiskap. Rækjufiskiskapurin byrjaði í Grønlandi í 1969. Her var vestmenningurin John Dam ein av undangongumonnunum. Hann ikki bara fann fram til rækjurnar, men fann eisini útvegir at kóka og frysta tær, áðrenn skip vóru serliga bygd til hetta endamál. Tað er galdandi fyri bæði rækjutrolarar og teir nýggju flakatrolararnar, at teir virka og frysta veiðina umborð, so hon er klár at fara á marknaðin, tá hon kemur í land. Eisini rækjuveiðan hevði sína tíð. Tey seinastu árini hevur rækjufiskiskapurin verið í kreppu.

Fleiri skipasløg komu, og fleiri ymisk fiskasløg vórðu veidd um alt Norðuratlantshav við ymiskum amboðum. Tað gamla snørið, sum teir høvdu brúkt bæði á útróðri og við sluppunum, varð miðskeiðis í 1950-unum mekaniserað til eina snellu við fleiri húkum fyri endan á snørinum við loddi niðast. Fyrst varð snellan drivin við handamegi, men hetta fiskiamboð mentist stigvíst til at gerast eitt teldustýrt háteknologiskt amboð, sum eisini føroyskar verksmiðjur framleiddu, t.d. OilWind í Miðvági. Trolfiskiskapurin hevur eisini verið fyri nógvum broytingum. Síðutrolið er avloyst av hekkutroli. Fyri ikki at tala um kraftblokkaskipini, sum í dag kunnu sigast at vera hátøknilig teldustýrd fiskiamboð.

Tó hevur ikki fiskitøknin, men marknaðarviðurskifti, fiskimørk og kvotur stýrt fiskivinnuni seinastu árini, eisini fiskiveiðini kring Føroyar, har roynt verður at minka um veiðitrýstið við fiskidøgum í staðin fyri kvotum. Ráfiskagrunnurin, óivað settur á stovn í bestu meining í 1975, gjørdi sítt til at beina fyri kappingarførinum hjá føroysku fiskivinnuni og lullaði føroyingar í eina vandamikla svøvntunga dreymatilveru, sum endaði við búskaparliga skrædlinum í 1990-unum. Men latum okkum leita aftur til ta tíðina, tá fiskurin gjørdist Føroya gull, sum tað stóð í teirri gomlu Per-bókini, lesibókini, ið nógv eldri fólk kenna frá skúlatíð síni.

## Fiskaarbeiði á landi

Við fríhandlinum komu nógv nýggj arbeiðspláss til bæði mannfólk og konufólk. Ein ógvuliga stórur partur av fiskinum kom upp á land í Føroyum. Hetta var galdandi fyri útróðurin, men eisini fyri meginpartin av tí, sum sluppirnar veiddu. Teir ella tey virki, sum tóku móti útróðrarfiski, høvdu føst fólk at flekja og salta fiskin, so hvørt sum hann varð avreiddur. Hann lá í pakkhúsinum og bíðaði, til umstøðurnar at vaska og turka hann komu vár- og summarhálvuna.

Fiskurin, sum skipini landaðu, varð saltaður umborð. Skipini komu vanliga aftur av Suðurlandinum mánaðarskiftið mai-juni og landaðu fiskin í Føroyum. Um hálvan juni fóru tey á Eysturlandið og Norðurlandið. Tá vit koma til 1930, gjørdist alt vanligari, at skipini fóru heilt til Grønlands tann seinna túrin.



*Saltfiskurin verður uppskipaður og vrakaður á bryggjuni í Havn*

Frá umleið september til umleið 1. mars vóru fiskimenninir heima í Føroyum, og skipini lógu fyri teymi. Trolararnir, sum komu seinast í 1930-árunum, vóru kortini til fiskiskap alt árið. Hetta vóru tey skip, sum seldu veiðina úr lastini sum saltfisk, men meginparturin varð heilt upp til seinna heimsbardaga og eisini eftir kríggið landaður í Føroyum og virkaður til klippfisk.

Vert er at nevna, at rættiliga stórur munur var á marknaðarkrøvunum til fisk. Spaniumenn vildu fyrst og fremst hava klippfisk, meðan italiumenn og grikkar helst vildu hava saltfisk. Undir spanska borgarakrígnum mestsum mistu føroyingar spanska klippfiskamarknaðin, og tað merkti, at fiskaturking í eina tíð fyri stóran part datt burtur.

Fiskaarbeiði var í mestsum hvørjari bygd, og í summum bygdum var serliga nógv arbeiði, t.d. suðuri á Tvøroyri og í Vági. Her manglaðu teir arbeiðsmegi, tí fóru nógv konufólk suður hagar at arbeiða í fiski. Tær arbeiddu vár og summar, og nógvar fingu innivist í serligum húsum, sum vóru bygd til fiskagentur at búgva í. At nógvir fiskimenn samstundis komu til hesar bygdir, gjørdi sítt til, at drongur og genta úr ymiskum heraðshornum í landinum hittust og í nógvum førum eisini giftust.

Rávørugrundarlagið undir salt- og klippfiskaframleiðsluni í Føroyum var sostatt bæði útróðrarfiskur og skipsfiskur. Útróðrarfiskurin varð flaktur og saltaður so hvørt í pakkhúsunum og vaskaður og turkaður úti um várið og summarið, so skjótt terri var. Útróðrarfiskurin lá tøkur í fiskapakkhúsunum um alt landið, tá

várið kom. Tað gjørdi eisini tann saltfiskurin, sum sluppirnar høvdu landað um heystið. So skjótt sum skipini vóru komin, varð farið at landa ella skipa fiskin upp. Hetta var eisini galdandi fyri trolararnar. Her kundu umstøðurnar vera rættiliga ymiskar. Bygdir sum Tvøroyri, Vágur, Fuglafjørður og aðrar bygdir við fingu atløgubryggjur rættiliga tíðliga, so har var lætt at landa fiskin. Var ikki atløgubryggja, so var ikki annað at gera enn at flyta fiskin í land við báti ella lossijakt. Ta fyrstu tíðina landaði manningin sjálv fiskin, men seinni varð hetta arbeiði latið øðrum fólkum, sum soleiðis kundu forvinna sær nøkur oyru við at landa fisk.

Fiskavrakarar stóðu fyri at vraka fiskin. Hetta vóru menn, sum høvdu hesa serligu uppgávu um hendi. Síðan varð fiskurin saltaður umaftur í pakkhúsinum. Fiskurin kundi verða vrakaður umborð, men eisini á landi. Tað valdaðist umstøðurnar. Har brúgv ella bryggja var – tá eru vit eitt sindur seinni í tíðini – varð vrakaraborðið sett upp á bryggjuni. Frammanfyri borðinum vóru vanliga 5 gentur, hvør við sínum fiskamáti ella fiskastikku, sum tær løgdu á hvønn ivingarfisk. Málfiskarnir vórðu lagdir á vrakaraborðið, meðan undirmálararnir og tey ymisku onnur fiskasløgini vórðu løgd í rúgvur fyri seg, til tey trongdu um arbeiðsplássið. Tá vórðu tey flutt burturfrá.

Hvør fiskur varð flokkaður sum nr. 1, 2 og 3, og hvør flokkur varð vigaður fyri seg. Tá 100 pund vóru komin á vektina, varð rópt »Vekt av stórum«, »vekt av millumfiski« og »vekt av smáum.« Vrakararnir og bestimaðurin, sum umboðaði skipið, svaraðu aftur fyri at vátta, at teir høvdu hoyrt vektina. Alt varð skrivað upp og eftirkannað. Soleiðis helt tað fram allan dagin. Innímillum varð rópt »fullfavn«, sum so varð uppafturtikið. Tað var, tá 5 strikur vóru komnar á fjølina. Teir, sum kontrolleraðu, vóru vrakarin, bestimaðurin og so eitt umboð fyri reiðaran. Farið varð ógvuliga væl um fiskin. Tá allur fiskurin var landaður, varð úrslitið gjørt upp.

Fiskurin fór í pakkhúsið, har hann varð stakkaður og lagdur í salt. Tá stundin var komin, varð hann vaskaður og turkaður. Frá tí, føroyingar byrjaðu at virka klippfisk, broyttist framleiðslan. Fiskavasking og fiskaturking vóru yvirhøvur konufólkaarbeiði, men partar av hesum virksemi vóru mannfólkaarbeiði. Ta fyrstu tíðina var útgerðin lítil. Fiskurin kundi verða vaskaður niðri í fjøruni ella á einum bretti í eini á. Seinni komu fiskakørini. Fyrst avkappaðar tunnur ella rund kør, seinni stór trækør til fleiri fólk, sum vóru gjørd til endamálið. Tey høvdu eitt kar, har vatn kundi koyrast í miðskeiðis, og so breiða trom framvið, har til bar at vaska og handfara fiskin. Amboðini vóru annars knívur og ein fiskabust. Royggj, livurrestir og annað, sum var á fiskinum, varð tikið, skorið ella bustað burtur.

Fiskavasking var konufólkaarbeiði. Kalt og ótýdligt var at standa úti og vaska, men konufólkini royndu at hylja seg sum best við klæðum og fiskamáttum.

Munandi frægari varð, tá tær komu undir tak at vaska í fiskakjallaranum ella aðrastaðni. Fiskavasking var akkordarbeiði. Ein ávís upphædd varð fingin fyri hvørjar 25 stórar og hvørjar 50 smáar fiskar. Ymist var, hvussu nógv kom burturúr hjá hvørji einstakari kvinnu. Hvør vaskaði millum 300-600 fiskar um dagin. Tann vaskaði fiskurin varð stakkaður uppaftur í fiskakjallaranum og lá undir fargi í einar tveir dagar, so vatnið skuldi seta úr honum. So varð bíðað eftir fiskaterra. Ta fyrstu tíðina vórðu allar hellur fram við strondini nýttar at breiða fisk á til turkingar, men rættiliga skjótt varð farið undir at gera fiskapláss ella fiskastykki, sum hetta varð rópt. Hetta vóru stór steinsett øki. Steinarnir lógu ikki tættari enn so, at gjóstur slapp í millum teir. Fiskastykkir vóru í øllum teimum bygdum, har fiskaarbeiði hevði týdning.

Vanliga bóru mannfólk fiskin út á fiskaplássið, men konufólkini breiddu hann fyri tað mesta. Farast mátti væl um fiskin, og ansast mátti eftir, at hann ikki brotnaði ella loyptist av sólini. Tann nývaskaði bleyti fiskurin toldi ikki nógva sól, so hann mátti ikki fáa ov nógv at byrja við, men so hvørt, sum hann tornaði, toldi hann meira. At turka fisk úti minti ikki sørt um at hoyggja. Trupulleikarnir vóru teir somu. Ampin av regni var har alla tíðina. Regn mátti ikki koma í fiskin. Var regn í væntu, var einki annað at gera enn at stakka fiskin sum skjótast. Kortini vóru góðir dagar, har alt gekk, sum tað átti. Fiskurin varð vanliga stakkaður, meðan hann enn var turrur, men sjálvandi ikki ov heitur. Lá hann ov leingi, var vandi fyri, at hann ránaði uppaftur. At virka klippfisk var jú ein aldargamal framleiðsluháttur, so forskriftir vóru fyri, hvussu alt skuldi gerast, og arbeiðið var yvirhøvur væl skipað. Tað ráddi um at fáa fiskin breiddan rættstundis og fáa hann samanaftur rættstundis. Vanliga stílaðu eitt ella fleiri mannfólk fyri arbeiðinum, men keypmaðurin helt eisini sjálvur eyga við øllum.

Tvær gentur vóru um fiskabøruna, tá tær bóru fiskin út á fiskaplássið, og fiskurin skuldi leggjast soleiðis á fiskaplássið, at skjótt var at fáa hann samanaftur í stakk, um regn skuldi komið. Vanliga varð fiskurin breiddur soleiðis, at eitt sindur var ímillum hvønn fiskin, men í fyrstani, tá hann enn var vátur, brúktu tey bæði sterta- og sporlabreiðing. Tá vórðu stertur og sporl løgd soleiðis, at tey vóru vard fyri sólini. Arbeiðsdagarnir kundu vera langir, og upp undir regn kundi nógv standa á fyri at fáa fiskin saman. Einki er at siga til, at teir, sum fiskin áttu, gingu við nervum í ivaveðri, tí kom regn, gjørdi tað óbótaligan skaða sum tann dagin suðuri í Vági.

Skýggj hevði ikki verið fyri sól allan dagin, men so fór lúðurin av álvara at ýla. Ikki bert komu fiskafólkini rennandi, men eisini øll onnur, sum vóru í starvi hjá keypmanninum við keypmanninum sjálvum á odda. Keypmaðurin stóð og rópti: »Kastið saman, kastið saman!« Her var ikki tíð til at stakka fiskin, hann varð blakaður saman í smáar rúgvur við skræðuni upp, og roynt varð at fáa lagt

oman yvir hann. Keypmaðurin rak alt á dyr, bæði krambakallar og krambagentur, alt út at kasta saman. Hetta grimdarregnið kom óvæntað, og tað oysti av himli nakað so ræðuligt, at nærum allur hesin turri fiskurin varð gjøgnumbloyttur. Øll virkini í bygdini vóru fyri somu vanlagnu henda dag. Trupulleikin var, at fiskurin mátti vaskast umaftur. Varð hann ikki tað, kundi hann gerast gulur á liti og fella í prísi. Kom regn í fiskin, var tað altíð eitt tap, størri ella minni. Fiskaturking í tí føroyska veðurlagnum var sostatt eitt spennandi og eitt ikki sørt nervaslítandi arbeiði hjá bæði fiskafólki og reiðara.

Tann turkaði fiskurin varð borin í stakkar hvørt kvøld, gjarna fýrakantaðar. Fyrst vórðu eini tvey løg av máttum løgd oman á stakkarnar, og so vórðu presendingar av segldúki bundnar rundanum, so tær huldu allan stakkin, sum hann var. Regn ella væta máttu ikki sleppa til. Tey stóru fiskaplássini í Suðuroynni høvdu fløgg og vrelarar at kalla fólk til arbeiðis við, tí veðrið kundi vera rættiliga skiftandi. Konufólkini arbeiddu í sjálvari bygdini, so børnini kundu koma til teirra. Summar mammur høvdu bita við, sum tær kundu geva børnunum at eta, um tey vóru svong.

Fiskurin varð ikki turkaður longur enn neyðugt. Allur fiskur skuldi ikki vera líka turrur, tí ymist var, hvussu fiskakeypararnir vildu hava hann. Skilt varð ímillum fisk, ið var fullvirkaður, 7/8 virkaður og 3/4 virkaður. Eitt merki at halda seg til, tá metast skuldi, um fiskurin var nóg turrur, var at taka í nakkan á einum fiski, so bert tummulin var omaná og hinir 4 fingrarnir inniundir. Fiskurin varð



*Fiskur breiddur út á fiskastykkið. Fiskastykkir vóru í øllum teimum stóru bygdunum*

lyftur upp soleiðis og hildin útfrá vatnrættur. Boygnaði fiskurin ikki, var hann fullturrur ella fullvirkaður, boygnaði fiskurin eitt sindur, var hann $^{7}/_{8}$, og boygnaði hann heilt niður, var hann $^{3}/_{4}$ turrur. Fiskurin mátti ikki vera bleytari enn hetta. Tann fiskur, sum fór til Danmarkar, skuldi ikki vera ov turrur, tí tað vildu teir ikki hava. Serligar forskriftir vóru tí fyri fiski, sum skuldi *keypmannahavnarvirkast.*

Tað ráddi sjálvandi um at sleppa av við fiskin so skjótt sum gjørligt, eftir at hann var nóg turrur. Meðan bíðað varð eftir fiskadamparanum, lá klippfiskurin í pakkhúsinum. Klippfiskurin varð fyrst og fremst fluttur til Spania, men eisini til Italia, Grikkalands og Portugal, seinni keyptu hesi trý seinast nevndu londini eisini saltfisk. Ta fyrstu tíðina varð fiskurin fluttur gjøgnum millumhandlarar í Danmark. Í 1924 fór góð helvtin av øllum fiski fyrst til Danmarkar, áðrenn hann fór víðari. Føroyingar fingu tí ikki tað burturúr, sum teir áttu. Bert 32% fóru beinleiðis til Spania, men teir fingu sær eisini umboðsmenn í Føroyum og sendu skip beinleiðis eftir fiskinum. Upp til umleið 1920 fór fiskurin leysur avstað, men eftir hetta fóru menn at pakka fiskin í pakkar, sum vigaðu 50 kg. Fiskurin varð buntaður saman og pakkaður í hessian, sum varð seymað rundanum. Hvør fiskapakki varð merktur við einum serligum frámerki. Hann varð ikki pakkaður fyrr enn, beint áðrenn hann fór avstað. Vanliga komu fiskadamparar eftir fiskinum.

Til felagsskapurin Føroya Fiskaeksport varð stovnaður, var fiskaútflutningurin ikki samskipaður, men við hesum felagsskapi royndu fólk at fáa útflutningin samskipaðan, so sum besti prísur fekst fyri hann. Fyri at fáa sum mest burturúr fiskasøluni varð Føroya Fiskaeksport stovnað í 1936. Hesin felagsskapur gjørdi, at nú fóru føroyingar at standa saman og ikki undirbjóða hvør annan, tá teir seldu fisk. Føroya Fiskaeksport fekk serliga týdning, eftir at spanski klippfiskamarknaðurin eina tíð fall burtur, og neyðugt varð at finna nýggjar marknaðir fyri saltfisk, m.a. í Grikkalandi og Portugal. Eftir kríggið funnu teir eisini ein marknað í Brasilia.

Fyrstu tíðina varð fiskurin ikki vrakaður. Lógin um fiskavraking kom í 1913. Í fyrstani varð fiskurin vrakaður, áðrenn hann varð sendur av landinum, men seinni kom lóg í gildi, sum segði, at fiskurin eisini skuldi vrakast, longu tá hann var landaður. Føroyskur klippfiskur varð roknaður sum ein sera góð framleiðsla, men við tí skiftandi veðri, vit hava í Føroyum, kann ein undrast á, at tað yvirhøvur bar til at fáa fiskin turkaðan úti í sólini, men tað bar til. Hinvegin vórðu royndir longu frá byrjan gjørdar at turka fisk inni.

Tær fyrstu royndirnar vóru einfaldar royndir við petroleumsovnum og fiski, sum varð hongdur upp. Men turkiteknikkurin gjørdist alt betri og betri, og fleiri turkihús komu. Í tíðarskeiðnum 1900-1918 vórðu 4 turkihús bygd á Tvøroyri.

Hesi vórðu øll gjørd meira tíðarhóskandi í 1920-unum. Annars vórðu bygd 5 turkihús í Vági frá 1922-1932. Í Tórshavn komu eini trý turkihús frá 1920-1933, men skjótt vóru turkihús í teimum flestu størru bygdunum. Í fyrstani brúktu teir kolvognar ella koksvognar, sum teir settu inn í turkihølini, har fiskurin var hongdur upp. Summir brúktu eisini ribbur at leggja fiskin á. Tað næsta var, at teir fóru at brúka dampmaskinu, so dampurin varð leiddur gjøgnum rør, sum lógu inn í turkirúmið. Fiskurin lá á leysum ella føstum ribbum. Dampketilin stóð vanliga uttan fyri húsini.

Tað var ikki fyrr enn beint undan og so eftir seinna heimsbardaga, at teir fóru at byggja hús við *turkikanalum,* sum teir settu fiskin inní. Ikki fyrr enn við hesum teknikkinum fekst fult tamarhald á innanduraturkingini av fiski. Men hvussu var og ikki, so dámdi fiskakeyparunum best tann sólturkaða fiskin og kravdu at fáa váttan, um fiskurin var sólturkaður ella inniturkaður. Tann sólturkaði fiskurin fekk betri prís.

Fiskaarbeiði setti dám á mestsum allar bygdir heilt upp til seinna heimsbardaga, tá steðgur kom í, tí føroyingar løgdu um til ísfisk, sum teir seldu á bretska marknaðinum. Eftir kríggið fóru føroyingar aftur undir at turka fisk, men tá var tað skjótt, at mestsum alt varð turka inni í turkihúsunum. Samstundis hvurvu eisini tær bygdamyndir, sum høvdu eyðkent Føroyar í ein mansaldur. Nú sást tann hvíti fiskurin, sum um várið og summarið varð breiddur til turkingar á fiskastykkjum um alt landið, ikki longur.

Eftir kríggið tók salt- og klippfiskaframleiðslan seg uppaftur. Hetta var fiskiskapur, sum kravdi stórar íløgur, ikki minst í salt, og tí varð brúk fyri útgerðarlánum. Upp til 1948 varð mestsum alt útflutt sum saltfiskur, men hetta broyttist so við og við eftir 1948, tá farið varð undir aftur at virka klippfisk. Eisini verða nú funnir nýggir marknaðir til klippfiskin sum t.d Brasilia, ið keypti nógvan klippfisk úr Føroyum líka til 1970, tá prísviðurskiftini broyttust. Tá vit koma til 1950, var útflutningsvirðið av klippfiski størri enn av saltfiski, men eisini eftir kríggið hava føroysk skip javnan selt ísfisk á bretska marknaðinum, og tað gera tey enn.

## *Fiskafløk og flakavirki*

Eftir at elektrisitet var vorðið partur av føroyska gerandisdegnum, skaptust fleiri nýggir møguleikar. Ikki um at tala, tá fiskafløkini avloystu salt- og klippfiskin sum nýggj vøra – eitt nýtt brand, sum føroyingar kappaðust at framleiða við grannar okkara. Flakavirki vórðu bygd næstan í hvørjari bygd. Tá talið á flakavirkjum var upp á tað hægsta, vóru yvir 20 flakavirkir í landinum.

Seinna helming av 1950-árunum fóru føroyingar at framleiða fryst fiskafløk.



*Nýmótans alibrúk*

Fyrstu ferð, fryst fiskafløk eru skrásett sum útflutningsvøra, er í 1955. Ta fyrstu tíðina vórðu fløkini skorin við hond, men so við og við varð henda framleiðsla mekaniserað, og mestsum alt varð framleitt á maskinum. Lat tað straks verða sagt, at eisini verksmiðjutrolarar framleiddu flak, so framleiðslan var pakkað og klár at senda á marknaðin, tá trolararnir komu aftur.

Fyrstu tíðina varð fyrst og fremst útróðrarfiskur skorin til flak, pakkaður og frystur í blokkar ella pakkaður á annan hátt, alt eftir hvat marknaðurin kravdi, og sum innstruksirnar frá Føroya Fiskasølu vóru, tí tað var Føroya Fiskasøla, sum hevði fingurin á pulsinum. Eins og fiskaarbeiði við saltfiski og klippfiski hevði givið nógv arbeiði í síni tíð, gav flakavinnan bæði mannfólki og konufólki nógv arbeiði. Fleiri bygdir fóru tí at seta fram ynski um at fáa flakavirki.

Bæði arbeiðarafeløg og kommunur stuðlaðu hesum við peningi fyri at skapa arbeiðspláss. Eftir at fiskimarkið var flutt út á 200 fjórðingar í 1977, kom eisini størri trýst á fiskileiðirnar kring Føroyar og samstundis eisini meira fiskur til flakavirkini. Hetta fekk ein galnan enda, tí við mongu flakavirkjunum var framleiðsukapasiteturin alt ov stórur, og torført var tí at fáa flakavirkini at bera seg. Úrslitið varð, at Ráfiskagrunnurin kom í 1975 og gav stuðul eftir forskriftum, sum reguleraðu ávís viðurskifti, men sum vóru fatal fyri onnur viðurskifti. At enda fóru mestsum øll flakavirkini á heysin í sambandi við kreppuna í 1990-unum. Tann partin lata vit liggja eina løtu og leita enn eina ferð aftur í tíðina. Yvirhøvur gjørdu bygdafólk og kommunur sítt til at fáa arbeiðspláss til bygdina, um so talan var um flakavirki ella fiskifør, og bæði kommunur og einstaklingar settu pening í fyritøkurnar eftir førimuni.

# Til Havnar vit fara

Øll jørðin í Havnini er kongsjørð, har er eingin ogn. Kortini høvdu fleiri ognarleys í Havn longu um 1800 fingið traðir til leigu burtur av kongsjørðini, men í 1863 kom so tann lógin, sum gav havnarmonnum høvi at fáa traðir til ognar burtur av festijørðini, so fleiri tá kundu hava seyð, neyt og annað á trøð síni. Hesir áttu sjálvandi ikki so nógv kjøt sum bøndur á bygd, men teir blóðgaðu knívin, og stórvegis munur mundi ikki vera á teimum vanligu havnarfólkunum og bygdafólki. Havnarmenn gingu í húðarskóm, rotiskóm og tuflum. Leðurskógvar ella danskar skógvar fingu fólk ikki, fyrr enn tey vóru konfirmerað. Tuflur, leypar og tráður úr viði vóru hentir lutir tá, tí leyparnir vóru íløtini, ið nýtast skuldu til torvið og til tøðini, og tráðurnar vóru tá dyrgingar- og seiðabergsamboð. Torvið var tá tað einasta, ið havnarfólk høvdu at kóka og verma við. Tí var torvleypurin á ryggi manna á morgni og tøðleypurin um kvøldarnar, tá menn bóru tøðini á traðirnar.

Fiskiveiða og fiskaarbeiða vóru í Havn eins og á bygd, men Havnin var høvuðsstaðurin, og til Havnar kom meginparturin av øllum nýggjum, um tað so var verkligt ella andaligt. Til Havnar vit fara við tráð og við nál, verður sungið. Her vóru fleiri, sum dagliga gingu í fínum kjólum ella í kragatoyi og undir hatti. Her vóru fínir lokkandi handlar við framsýningarvindeygum, sum høvdu sína tølandi atdráttarmegi. Havnin dró sum allir høvuðsstaðir um allan heim fólk til sín. Munurin á Havnini og bygdunum var eisini embætisfólkini, sum tosaðu danskt, og so tey fólk, sum í kjalarvørrinum á fríhandlinum høvdu havt møguleika at fáa sær handlar og annað vinnurekandi virksemi, og sum høvdu lært seg ta somu mentan, sum vit finna í líknandi umhvørvi í londunum kring okkum um somu tíð.

## Miðstaður og keypstaður

Á kortinum, sum Johan Poulsen, *blikkensláarin,* kallaður, teknaði av Havnini í 1867, lá realskúlin, núverandi H.N. Jacobsens Bókhandil, ovast í býnum. Longri uppi hinumegin Havnará lá tinghúsið bygt í 1856 einsamalt. Sjálvt um Havnin ikki altíð hevur verið so stór, so var tað tann tíð, tá Havnin var størri enn Reykjavík. Leingi høvdu gomlu amtmanshúsini, handilshúsini úti á Tinganesi og kanska prestagarðurin í Sandagerði verið tey størstu húsini í Havn og har umleið, áðrenn tey nýggju amtmanshúsini vórðu bygd. Hesi húsini reistu seg tá sum ein borg millum tey smáu havnarhúsini, sum mestsum krupu saman undir hesi borgini. Longu í 1894 fingu amtmanshúsini kapping frá kommunuskúlan-



*Hús fram við Tinghúsvegnum í Havn fyrst í 1900*

um, sum í dag er ráðhúsið í Tórshavn. Bæði húsini eru lagað upp av føroyskum grótmonnum. Havnin broyttist alsamt, so hvørt fólkatalið øktist. Bygt varð fyrst á tær nærmastu traðirnar og á jørð, sum kommunan keypti frá festunum, men gomlum havnarmonnum dámdi ikki at missa traðirnar, sum høvdu so stóran týdning sum lívsgrundarlag teirra.

Henda fyrsta sethúsabyggingin í Havnini var væl fyriskipað, sum fotomyndir av Tinghúsvegnum um aldaskiftið eru besta prógvið um. Húsini í Havn hava frá heilt gamlari tíð verið øðrvísi enn úti á bygd, tí lívsgrundarlagið var ikki tað sama. Í Havn var glasstovan vanliga væl størri enn roykstovan, og ofta høvdu húsini í Havn eisini loft og eitt kjallaraskapilsi, men tey vóru minni enn húsini úti á bygd. Tey húsini, sum fólk fóru at byggja sær um aldaskiftið, var eitt nýtt húsaslag, sum eisini gjørdist vanligt á bygd. Meðan tey vanligu gomlu føroysku húsini á bygd vórðu bygd sum lonir, vóru hesi nýggju húsini hægri og breiðari við lofti og kjallara. Á Tinghúsvegnum búðu fólk, ið vóru væl fyri, eitt nú skiparar, keypmenn og trúboðarar. Eisini fekk Havnar Klubbi, ið varð stovnaður í 1799, sær nýggj hús á Tinghúsvegnum. Byggimyndugleikarnir í Havnini kravdu, at urtagarðar handan grótgarðar vóru frammanfyri hvørji sethús.

Hetta var jú tann tíðin, tá áhugin fyri urta- og blómugørðum vaks fram í Føroyum, ikki bert í Havn, men skjótt eisini í teimum størru bygdunum. Fleiri fólk løgdu dent á at hava tað vakurt og prýðiligt rundan um seg. Hesi fólk løgdu eis-

ini dent á at bera seg at á ein hátt, sum sømdi seg mentaðum fólki. Kortini eiga vit at minnast til, at sjálvt í Havnini var beint fyri 1900 neyðugt at bera vatn til húsarhaldsbrúk úr Havnará og øðrum áum í býnum, tí tað var ikki fyrr enn í 1898, at farið varð undir at leggja fyrstu vatnleiðingina í Havn. Í fyrsta umfari varð ikki roknað við, at vatn skuldi leggjast inn í húsini, men settir vórðu upp fleiri vatnpostar kring um so høgliga, sum tað nú einaferð læt seg gera. Hagar kundu fólk so fara eftir vatni, men skjótt varð eisini rennandi kranavatn lagt inn í húsini. Hetta var eitt stórt tiltak tá, eins og tað eisini hevur verið tað seinni, so hvørt sum tørvurin á vatni er vaksin.

Yvirhøvur høvdu tey flestu meira ella minni ein farra av hesum borgarliga mentaidealinum, sum kom til sjóndar í urtapottum, gardinum, húsapynti av ymiskum slag og tí, sum varð brúkt til at eta við og á og at seta á sjálvt borðið. Nips og skálir stóðu allastaðni, eisini á borðinum í stovuni, við fotografium í, sum gestir kundu hyggja eftir. Mentanarfrøðiliga er talan um eitt borgarligt tíðarskeið, sum hevði sínar líkar í londunum rundan um okkum, tí nú var klassamunurin eisini vorðin ein mentanarmunur. Tær gentur, sum fóru til Havnar at tæna, tóku nógv av hesum nýggja við sær í teirra egnu heim, tá tær giftust. Hetta eru tí mentanardrøg, sum vit ikki bert finna í Tórshavn, men eisini í teimum størru bygdunum, ikki minst á Tvøroyri, har fínir menn gingu og spákaðu eftir vegnum við stokki ella stavi í hond ella tóku sær av løttum viðhvørt við seglbátum og kajakkum á fjørðinum, um teir ikki drukku sær ein drekkamunn í *havanum* ein fagran sunnudag. Yrkadagar varð arbeitt hart, so sunnudagurin kom væl við, tá skiparar, keypmenn og reiðarar á Tvøroyri eftir ein góðan sunnudagsdøgurða *trak sig tilbage med Kaffen, de snirklede Glas og den tre-stjernede Hennesy. En interessant Passiar, Skyer af Cigarrøg og en lille Cognac kunne Kjelnes absolut goutere.* Helst hevur ikki verið stórt øðrvísi hjá tí betra slagnum í Havn. Í øllum førum er nógv fínt innbúgv og leysafæ at finna á eini uppgerð frá Degns húsum í Havn í 1891. Har var bæði silvurbestikk og ein rúgva av koppum, tallerkum og gløsum av ymiskum slag. Kortini hevur tann vanligi havnarmaðurin ella lossingarmaðurin, sum Erland Viberg Joensen hevur viðgjørt so fyrimyndarliga í bók síni um lossingarmenn í Havn, ikki sitið og drukkið konjakk sunnudag seinnapart. Sjónligi munurin á fólki fjaraði so við og við burtur, nærri vit koma okkara tíð, ikki bert á Tvøroyri, eisini í Havnini, men húsini hjá embætismonnum og keypmonnum talaðu kortini sítt mál.

Bygt varð ikki bara við skynsemi fram við Tinghúsvegnum, men eisini aðrastaðni, sum húsabyggingin fram við Tróndargøtu enn ber dám av. Sjálvandi hugsaði eingin tá um alt tað pláss, sum bilar og akfør fóru at krevja seinni. Umframt vanlig sethús vórðu bygd fleiri onnur hús, eitt nú tey prýðiligu bretsku konsulshúsini í 1901, sum nú hýsa KFUM. Heldur ikki eiga vit at gloyma tann

ásýniliga sjómansskúlan, sum Ryving Jensen fekk bygt á Álakerstrøðni í 1905. Hesi skúlahúsini, sum nú eru skrivstova hjá Tórshavnar Skipasmiðju, mundu um tað mundið vera millum tey størstu húsini í Havnini.

At peningavaldið var komið til Føroya fyri at verða, bóru nýggju bygningarnir hjá ávíkavist Færø Amts Sparekasse og hjá tí nýstovnaða Føroya Banka boð um. Sparikassin flutti inn í nýggj hús í januar 1905. Húsini vóru lagað upp av gróti og øll, sum tey vóru, gjørd av føroyskum handverkarum. Kristin í Geil dugdi at síggja tað nýggja, sum hesin bygningur bar í sær, *Thi mere stilfuld og i sin Art elegantere offentlig Bygning ejer Byen ikke. Dette gælder maaske knapt saameget dens Ydre, der desværre beskæmmes af den uheldige Beliggenhed, men saa er dens Indvortes til Gengæld... den solideste Elegance, saa gennemført, som aldrig noget offentligt Lokale her til Lands har kunnet opvise Magen til. Og hvilken forandring: fra Amtsbibliotekets lejede Kammer med det lillebitte Venterum, som knap tillod to Besøgendes samtidige Nærværelse, til denne forsirede Stenbygning, hvorfra »Færø Amts Sparekasse« lyser i gyldne Bogstaver, og hvor et lyseblaat Venteværelse, stort som en lille Stue, med massive Egetræsmøbler, smykket og dekoreret, byder Kapitalister og Laansøgere til Sæde, indtil de stedes for »Banksalens« skinnende Mahognidisk. Lydløst glider de selvlukkende Døre op og i, mens Mønten klinger og Indskud og Laan, Renter og Afdrag protokolleres paa det majestætiske Skrivebord i Salens Midte. Dette store, dæmpet grønne Lokale gør et – efter færøske Forhold – næsten imponerende indtryk.*



*Havnin eftir 1905. Stásiligi grótbygningurin hjá Sparikassanum setur dám á býarmyndina*



*Gróthúsini á Debesartrøð. Húsini, sum vórðu bygd í 1932, hýstu bæði bókasavni, skjalasavni og forngripasavni. Ein mentanarborg í síni tíð, har fyrisitingin hjá Fróðskaparsetrinum heldur til í dag*

*Men det mest storstilede i Pengetemplet er dog vistnok det »allerhelligeste« hvor al Adgang er uvedkommende, om ikke forbudt, saa dog næppe tiltænkt. Det er Direktionsværelset, hvis Udstyrelse i Hvist og Guld ganske sikkert er noget hidtil ukendt heroppe...*

Sparikassahúsini kostaðu tilsamans knappar 30.000 krónur. Longu árið eftir í 1906 flutti Føroya Banki inn í nýggj hús í Tórsgøtu. Hesi húsini vóru ikki minni stásilig og kostaðu tað dupulta av sparikassahúsunum, 60.000 kr. Yvirhøvur roknaðu fólk Føroya Banka at vera tann fínara peningastovnin, har vanlig fólk ikki høvdu sína gongd. Eisini tey, sum arbeiddu har, vórðu roknað sum ikki sørt fínari enn onnur, bankastjórin sjálvur ikki um at tala. Myndugleikarnir bygdu eisini amtslæknanum eini prýðilig hús í 1913, sum ikki stóðu aftan fyri onnur stórmannahús í Havn. Her var ein týðiligur munur á fólki.

Tann maður, sum setti stóran dám á húsabyggingina í Tórshavn fyrru helvt av 20. øld, var arkitekturin H.C.W. Tórgarð, sum umframt at tekna sethús teknaði fleiri almennar bygningar. Hann teknaði realskúlan, sum varð bygdur í 1916. Á gamla hospitalinum, sum varð bygt í 1829, høvdu umstøðurnar tá leingi verið sera vánaligar. Tað nýggja Dronning Alexandrines Hospital, ið varð bygt í árunum 1921-23, hevur Tórgarð teknað. Av øðrum bygningum, sum




*Sjónleikarhúsið bygt í 1926. Húsið gjørdist karmur um nógv mentanarligt virksemi frá tí degi, tað kom í nýtslu*

Tórgarð teknaði, kunnu vit nevna Sjómansheimið frá 1923 og Sjónleikarhúsið frá 1926.

Samstundis sum Tórgarð teknaði hús, teknaðu aðrir Tórshavnar havn og mola. Fyrsta skip, sum legði at hesum nýggja mola 18. desember 1929, var sjálvandi Tjaldur. Havnin hevði tá longu verið brúkt í 2 mánaðir, men hetta var veitsludagurin, og veitsluhølið Tjaldrið lá við bryggjuna. Síðani tá er Tórshavnar Havn vaksin ár undan ári. Tá vóru eisini komnir fleiri bilar í Havnini, sum koyrdu oman og niðan gjøgnum havnargøtur.

Tað, at føroyingar í teimum vánaligu tíðunum í 1931 fingu reist eini avbera prýðilig hús bygd úr føroyskum gróti, ið kundu hýsa bókasavni, skjalasavni og forngripasavni, var eitt megnartak. Eisini hesi húsini hevur H.C.W. Tórgarð teknað. Tey eru enn millum tey vakrastu húsini í Havnini og hýsa nú Fróðskaparsetri Føroya. Ein tann virðiligasti bygningur í hesum landi, ið hevur uppiborið at hýsa okkara hægsta lærdómsstovni.

Tórgarð teknaði eisini Ellisheimið í 1935, ið leingi var einasta ellisheim í landinum, og hvíldarheimið Naina í 1936. Hann helt fram at tekna fleiri hús eftir kríggið, bæði almennar bygningar og sethús, eitt nú Barnagarð Drotning Ingridar í 1950, húsini hjá KFUM í 1951 og Hotel Hafnia í 1951. Summir bygningar eru hepnaðir betur enn aðrir.

Eftir H.C.W. Tórgarð teknaði Olaf Mortensen, arkitektur, fleiri bygningar, Telefonverkið 1950, Nýggja Sjómansskúlan 1957 og Studentaskúlan í Hoydøl-

um í 1962 umframt onnur hús. Kommunuskúlan teknaðu og bygdu byggifelagið Lamhauge og Waagstein í 1954-56. Arkitektarnir gjørdust fleiri og fleiri, sum settu sín dám á byggingina, ikki bert í Havn, men eisini úti á bygd. Ein teirra er J. P. Gregoriussen, sum umframt at vinna eina kapping um sethús, ið Sparikassin stóð fyri í 1962, eftir hetta teknaði fleiri stór hús, m.a. Landsbókasavnið og Útvarpshúsini.

Fyri Havnina hevur Plantasjan ella Viðarlundin verið eitt eyðkenni, síðan hon av fyrstan tíð í 1903 varð plantað, ein vakur staður, har fólk kundu spáka sunnudagar, og har tey ungu kundu leita á ástarfund eitt sunnukvøld í plantasjuni. Plantasjan liggur í dag sum ein millumliður á veg niðan í Gundadal, sum síðani 1911 hevur verið ítróttarøki hjá havnarfólki og alsamt verður útbygt.

Umframt at vera fyrisitingarligur miðdepil gjørdist Havnin miðstøðin fyri so mangt annað. Skuldi tú læra nakað, so var at fara til Havnar. Havnin hevði eisini fleiri dansistøð, kaffistovur og gistingarhús, men vertshús, har tað bar til at keypa sterkan løg, vóru eingi eftir 1907. Tey komu ikki aftur fyrr enn fyri rættiliga stuttari tíð síðan. Skuldi tú drekka nakað, mátti tú hava tað við sjálvur, men tað hevur eisini víst seg at bera til.

Í Havn settu sjómansskúlanæmingar, læraraskúlanæmingar, háskúlanæmingar og seinni eisini studentaskúlanæmingar sín dám á býin, ikki minst dansin,




*Í Havnini vóru nógvir handlar, m.a. Sápuhúsið*

bæði tann føroyska og tann enska, har livandi orkestur spældi. Konufólkini í Havn kundu velja millum fremmandar sjómenn og marinararnar sum dansikavalerar. Havnin var heldur ikki størri enn so, at hvør einstaklingur, um tað var skald, rithøvundur, tingmaður, vinnulívsmaður, fráhaldsmaður ella hittinorðaður havnarmaður, setti sín dám á býarlívið.

Til Havnina hoyrdi sjálvandi alt havnaumhvørvið við pakkhúsum, brúgvum og seinni eisini molanum, men ikki minst Skansanum og Tinganesi. Bandið, sum knýtti býin saman við útheiminum, vóru tey stásiligu skipini, sum sigldu millum londini, og sum við jøvnum millumbilum komu á Havnina. Hesi kombineraðu ferðamanna- og farmaskipini vóru einasta bindiliðið millum Føroyar og útheimin, til flogferðslan byrjaði úr Vágum í 1963.

Havnin hevur altíð verið ein dragandi miðdepil, sum hóvliga mentist, til heimsbardagin var av í 1945. Tá kom eitt annað lag á. Vit endurgeva William Heinesen í hansara útgávu av bókini hjá Jørgen Frantz Jacobsen, *Færøerne. Natur og Fólk: Uden at fornærme nogen kan man vist godt slå fast, at Tórshavn har temmelig ondt ved at holde trit med sin egen udvikling. Den nye bebyggelse præges ofte af kaos; husene ligger hulter til bulter, gaderne, som iøvrigt er asfalterede, er altfor smalle til den hektiske trafik.*

Myndugleikarnir sleptu í nøkur ár endanum. Teir gloymdu at halda fast um ta gomlu hugsanina um, at alt skuldi verða bygt vakurt og við skili. Men í 1972 fekk Tórshavn eina yvirskipaða byggiskipan, so tað, sum er bygt eftir hetta, er fyri tað mesta bygt við skili og skynsemi. Roynt er at bjarga so nógvum av tí gamla sum gjørligt, so tað í dag er vorðið mondent at búgva úti á Reyni til dømis. Hóast hóttafall onkuntíð hevur verið á, hevur eydnast teimum, sum skipa fyri, at fáa Havnina til ein vakran og sera hugnaligan bý.

Meðan tað, sum nú eitur Vaglið, fyri stórt hundrað árum síðan lá uttast í býnum, er nú Vaglið sentrum í sjálvum *down town* í Havnini. Býurin Tórshavn gongur í dag frá Hamrinum á Argjum út í Norðasta Horn og langt niðan í Hoyvíkshagan, har ætlanir nú eru um at byggja ein heilt nýggjan býarpart við háhúsum, sølumiðstøð, venjingarmiðstøð, dansihallum, kirkjum og samkomuhúsum. Skjótt fara at búgva munandi fleiri fólk í Hoyvíkshaganum enn í Føroya næststørsta býi, Klaksvík, sum nú við Norðoyatunnlinum ikki er longri enn ein tíma frá Havnini.

Havnin er í dag ein livandi býur við matstovum, vertshúsum, dansistøðum og einum virknum samkomulívi. Tað er, sum um alt Føroya fólk songløtuna á Vaglinum ólavsøkunátt finnur saman í eini samansjóðing av landi, høvuðsstaði og fólki, áðrenn hvør fer aftur til sín.

# Til sálar og likams

Eitt eru tær stóru hátíðarløturnar, annað er tað dagliga lívið, sum við sínum stríði og strevi fyri at fáa mat á borðið, klæði upp á kroppin og tak yvir høvdið altíð er farið við meginpartinum av tíðini hjá øllum vanligum fólki. Men menniskjan livir ikki av breyði eina. Menniskjan hevur altíð býtt tíðina upp í eina heilaga tíð og eina gerandistíð. Ta heilagu tíðina verður ikki arbeitt, í hesi tíð verður sambandið við Gud og medmenniskjuni røkt, tað fyrra við bøn og sangi og tað seinna við leiki og spæli. At frítíðarvirksemi hevur stóran týdning, er eingin orsøk at ivast í, tá vit lesa bløðini, har helvtin av blaðsíðunum fyri tað mesta er ítróttartíðindi og um annað frítíðarvirksemi. Menniskjan hevur ein livandi hugaheim. Ein heim, sum vit verða fødd inní, men eisini ein heim, sum kann broytast og endurskapast, og sum eisini letur seg ávirka av teimum hugmyndum, sum eru uppi í tíðini. Allir tankar og allar hugsanir hava sínar forsprákarar og undangongumenn, sum bera fram boðskapin, eisini tann boðskap, sum tykist hava verið har altíð. Hetta er uttan mun til, um talan er um trúarlív, tjóðskap, fráhald, politikk, mentan ella ítróttarretorikk.

Fyrr í tíðini upptóku onnur viðurskifti enn alnót, sjónvarp og cyberspace fólk. Tey løgdu eitt annað yvirnatúrligt lív í náttúruna og í umhvørvið alt, í heyggjar, stórar steinar, vøtn og tjarnir, og fólkaðu alt við yvirnatúrligum verum sum dvørgum, ið dugdu at smíða teir vakrastu lutir, huldukonum í teimum vakrastu stakkum, álvagentum og huldugentum, sum kundu lokka ungar menn í óføri, fáa teir at drekka óminnisdrikk, so teir gloymdu øll síni. Har vóru teir fittu vættrarnir, sum vildu øllum væl, men máttu virðast. Har vóru eisini tann tølandi nykurin og marmennilin, sum lokkaðu fólk til sín, fyri ikki at gloyma niðagrísin, hetta lítla neyðardýr, sum ikki hevði fingið navn og tí lá og rullaði fyri fótunum á fólki fyri at gera vart við seg. Tað yvirnatúrliga var ein partur av lívinum, og rannsóknir vísa, at nógv av hesum hevur livað sítt lív í huganum á fólki okkara langt upp í okkara tíð. Eitt var smátrúgvin í tí dagliga, meira álvarsom var gudstrúgvin. Andaligu broytingarnar í føroyska samfelagnum hendu samstundis sum tær vinnuligu broytingarnar.

Her hendi so nógv um eina leið. Eitt annað var tjóðskaparrørslan, sum kom rættiliga fyri seg seinna part av 19. øld. Ein rørsla, sum í eina tíð savnaði mestsum allar føroyingar og legði lunnar undir ein føroyskan samleika, sum mentist og styrktist bæði í bundnum og óbundnum skaldskapi og einum nýggjum vinnulívi. Í næstu brotunum skal fyrst verða komið inn á gudstrúnna í kirkju og samkomum, tann heilaga partin, áðrenn farið verður undir tann rituella partin av

gerandisdegnum. Frá at hava eina eindarmentan, tá tað ráddi um Gud, er gudstrúgvin í dag vorðin eitt margfald av persónligum upplivingum og framburðum.

## Kirkjan

Tað var tann tíð, tá tað veruliga bar til at tosa um eina eindarmentan í Føroyum, eina eindarmentan, har tann lutherska læran við lestrunum hjá Jesper Brockmand og lærubókini hjá Martin Luther tvinnaðu saman kristnilív og bygdarlív bæði í heimi og kirkju. Tá samfelagið broytist við fríhandlinum, finna ikki bert fleiri nýggjar vørur vegir fram á tað føroyska torgið, men eisini fleiri andans hugmyndir. Eitt nú komu fleiri og øðrvísi lestrarbøkur til landið við øðrum boðskapi enn tí, sum Brockmand boðaði. Skjótt komu eisini prestar, sum høvdu ein annan og í fleiri førum meira ágangandi boðskap, ið kravdi, at kirkjufólk og onnur tóku eina persónliga støðu, sum fór nógv longri enn at ganga í kirkju og til altars við føstum millumbilum. Tann gamla eindarmentanin samantvinnaði fyrst í 20. øld ikki longur einsamøll tað kristiliga í bygdarlívið sjálvt, sum hon fyrr hevði gjørt. Eins og í vinnulívinum og ikki minst við sjálvdráttarskipanini umborð á sluppunum, sum gjørdi ítøkiligan mun á einstøku fiskimonnunum, var einstaklingurin í aðrar mátar komin so nógv í fokus, at eisini í tí nýggja trúarlívinum ráddi um persónliga trúgv og um eitt persónligt samskifti millum



*Fleiri nýggjar kirkjur eru bygdar tey seinastu árini. Gøtu Kirkja stóð liðug í 1995, og í sambandi við vígsluna vóru fleiri fremmandir prestar komnir til landið* (Mynd:Dimmalætting)

tann einstaka og Várharra. Sjálvdrátturin var nú mestsum eisini vorðin eitt andaligt fyribrigdi, uttan at nakað ilt skal verða lagt í tað.

## Brøðurnir

Sum longu víst á fiskaðu fleiri føroyingar við hetlendskum sluppum, áðrenn føroyingar sjálvir fóru undir henda fiskiskap. Teir veiddu í stórum tali undir Føroyum hesa tíðina. Ein skotskur trúboðari, William Gibson Sloan, úr eini samkomu, sum varð nevnd *The Plymouth Brethren*, starvaðist um hetta mundið í Hetlandi. Hann hevði tosað nógv við hetlendingar, sum høvdu verið í Føroyum, og fekk tí sjálvur áhuga at fara til Føroya sum trúboðari.

Hetta eydnaðist honum 1865, tá hann slapp við einum hetlendskum skipi til Føroya. Sloan var vanur at prædika, men bert á enskum máli, hann dugdi hvørki danskt ella føroyskt. Um hetta mundið vóru ongar orðabøkur í føroyskum máli, so um hann skuldi læra eftir bók, mátti hann læra seg danskt, sum hevði orðabøkur. So við og við lærdi hann so mikið av donskum, at hann helt seg til at prædika. Hóast hann eftir tí, sum sagt verður frá, var ein dámligur, spakførur og lítillátin maður, virkaði hann við sínum boðskapi á sínum einfalda danska máli fremmandur í føroysku bygdunum. So skjótt fólk skiltu, at hann hevði ein annan boðskap enn kirkjunnar boðskap, vildu fleiri ikki lata hús til boðskap hansara ella at geva honum innivist. Men so við og við góðtóku fólk mannin sjálvan. Hann varð ikki hildin at vera so vandamikil, tí virksemi hansara bar ikki stóran ávøkst fyrstu tíðina.



*William Gibson Sloan kom til Føroya í 1865, men tað var ikki fyrr enn væl eftir 1900, at fleiri fóru upp í brøðrameinigheitina*

Tað fyrsta sjónliga úrslitið av virksemi hansara var, at hann í 1879 fór undir at byggja samkomuhús í Tórshavn. Tað skuldu ganga heili 14 ár, áðrenn Andreas Isaksen ella Dia í Geil sum tann fyrsti læt seg doypa 31. oktober 1880. Dópurin var á Eystaruvág í Tórshavn. Sloan

doypti ikki sjálvur, men ein hjálparmaður hansara, A. P. Macdonald. Hesin óvanligi endurdópur í oktober mánaði á Eystaruvág skapti ikki sørt av øsing í Havn. Tað sama varð, tá tvey tey næstu vórðu doypt í Hoydalsá. Men hesin útidópur helt ikki fram á sama hátt, tí so skjótt *Sloan's salur* var liðugt bygdur, varð doypt í dópsbrunninum í salinum.

Sloan giftist í 1881 við Elspu Isaksen í Geil, ið var systir Dia í Geil. Samkoman var ta fyrstu tíðina ikki størri enn, at hon kundi teljast á einari hond, men Sloan helt áhaldandi fram og fekk so við og við fleiri viðhaldsfólk, men samkoman vaks ikki skjótt. W. G. Sloan andaðist í 1914. Eftirmenn hansara kendu betri til føroysk viðurskifti og dugdu tí betri at fáa boðskap sín fram á føroyskum máli. Ein teirra var Victor Danielsen, sum, meðan hann las til lærara í Havn, fyrst varð vaktur av Heimamissiónini, men seinni fann seg betur til rættis í Brøðrasamkomuni. Victor Danielsen var ein sera gløggur, men til tíðir eisini hvassorðaður prædikumaður, sum dugdi at bera fram sín boðskap. Tað er serliga í 1920-unum og 1930-num, at Brøðrasamkoman kemur fyri seg av álvara. Tá vit koma til tíðina eftir seinna heimsbardaga, tykist Brøðrasamkoman at vera komin í fasta legu. Brøðrasamkoman hevur so við og við vaksið seg til at vera størsta samkoma uttan fyri fólkakirkjuna, og limirnir í hesi samkomu hava gjørt seg galdandi í øllum samfelagsviðurskiftum her á landi – ikki minst við sínum calvinistiska anda í vinnulívinum. Her skal serliga J. F, Kjølbro, sum fekk ómetaliga stóran týdning fyri vinnulívið í Klaksvík, verða nevndur.

## Heimamissiónin

Mótsett brøðrunum var føroyska heimamissiónin frá byrjan partur av fólkakirkjuni. Tey fyrstu umboðini fyri heimamissiónina vóru danskir prestar sum t.d. teir báðir, E. M. Riise, ið var prestur í Tórshavn í eini tvey ár frá 1895, og Busch, ið byrjaði sum prestur í Hvalba í 1896. Riise hevði lítið gott at bera bæði vanakristindóminum, ikki bert hjá føroyingum sjálvum, men eisini hjá fleiri av prestum teirra. Busch var hóvligari maður enn Riise. Hesin seinni mælti heimamissiónini í Danmark til at senda trúboðarar til Føroya. Tann prestlærdi Axel Frederik Moe kom til Føroya í 1904 sum fyrsti heimamissiónski trúboðari. Hann fekk seinni prestastarv suðuri í Vági í 1906. Hann var ein bersøgin prædikumaður. Vert er eisini at nevna, at sjómansskúlin, sum teir báðir Viggo Ryving Jensen og Andreas Nielsen fingu bygt í 1905, bygdi á heimamissiónska grund. Tað tóktist eina tíð sum, at tað fór at renna saman millum heimamissiónina og brøðurnar, men so varð ikki.

Brøðrasamkoman, sum hevði sín uppruna í Bretlandi, gjørdist óheft av donskum viðurskiftum og danskari mentan og menti seg í staðin so við og við til



*Fólk frá heimamissiónini fyrireika seg til at fara út á bygd at halda møti uttan fyri gamla navigatiónsskúlan*

eina serføroyska samkomu. Eitt nú umsetti Victor Danielsen Bíbliuna til føroyskt mál – Nýggja Testamenti í 1937 og øll Bíblian í 1949. Heimamissiónin gjørdist heft at Indre Mission í Danmark og legði ikki sørt av donskum mentanartrýsti á føroyingar fyrstu tíðina, helst tí teir fyrstu donsku trúboðararnir ikki skiltu so væl føroysk viðurskifti, men hetta batnaði munandi seinni, tá føroyingar sjálvir tóku yvir.

Summar partar av gomlum føroyskum mentanarlívi brýggjaðu hvørki Brøðrasamkoman ella Heimamissiónin seg um. Millum teirra var føroyski dansurin ella dansur yvirhøvur. Tá talan var um kvæði og føroyskan dans, tóktist sum, at syndin lá í stevinum. Eisini vóru tær sjálvandi ímóti øðrum viðurskiftum kring dansistovurnar sum t.d. óhepnari brennivínsnýtslu. Heimamissiónin er partur av føroysku fólkakirkjuni og tí ikki skrásett fyri seg, so torført er at vita, hvussu nógv fólk Heimamissiónin telur. Brøðrasamkoman hevur sum meginreglu ikki at skráseta limir, so har eru eingi hagtøl. Eins og Heimamissiónin er ein virkin partur í ungdómsarbeiðinum í Føroyum, hava limir í Brøðrasamkomuni ein virknan lut í føroyskum samfelagslívi.

Umframt brøður og heimamissiónsfólk komu katolikkar til Føroya. Teir

settu í 1931 á stovn Skt. Frans Skúla. Hesin skúli flutti í 1933 inn í nýggj høli við Varðagøtu. Skúlin var ikki stórur at byrja við, men er síðani vorðin nógv størri. Í fleiri ár bæði fyri og eftir kríggið var skúlin eisini kostskúli, sum hevði 50 kostnæmingar, tá hann var størstur. Skt. Frans Skúli ella Nonnuskúlin, sum hann eisini varð nevndur, hevði í árunum 1935-40 eisini húsarhaldsskúla. Pláss var til 10 gentur, sum kundu búgva á skúlanum. Umframt katolikkar hava adventistar, Hvítusunnusamkoman, Frelsunarherurin og Jehova Vitni fingið fótin fastan í Føroyum. Adventistarnir fingu egnan privatskúla í 1966. Samanrenningin av bólkum í føroyska trúarlívinum hevur eisini skapað nýggjar stórar samkomur ella fríkirkjur, sum tey seinastu árini hava bygt nýggj og stór samkomuhús.

## Aðrar rørslur

Tjóðskaparrørsluna er skrivað nógv um. Henda rørsla fekk stóran týdning fyri framburðin í Føroyum, men eisini aðrar rørslur hava ávirkað samfelagið. Tann, sum kanska hevði størstan týdning av øllum, var fráhaldsrørslan ella avhaldsrørslan, sum longu er umrødd fyrr í hesi bók. Hon gjørdi sítt til, at vit meginpartin av 20. øld høvdu rúsdrekkabann her á landi. Rørslurnar bjóðaðu ungdóminum onnur alternativ enn at drekka. Í Tórshavn og í fleiri bygdum vóru



*Gentufimleikur í Tórshavn*

losjur við egnum húsum, har ungdómurin kundi hittast. Losjurnar vóru eisini dansistøð, men uttan rúsdrekka. Í hesum sambandi kunnu vit eisini nevna *Bláa Kross*, sum hevði sama endamál.

Upp í hesar rørslur hoyrdi eisini ítrótturin. Um aldarskiftið eru fleiri, sum hugsa um heilsuna hjá fólki. Ítróttur í dagsins merking er ikki komin fyrr enn seinni, men roysni og kappabrøgd vóru ikki ókend fyrr, tá tað eisini var vanligt at glímast og takast, tá fólk komu saman t.d. í brúdleyp. Nakað fyri aldarskiftið verður manna millum farið at tosa um fimleik, svimjing og fótbólt. Tvøroyrar Bóltfelag varð stovnað longu í 1892, so frammarlaga var Tvøroyri tá, og leingi hevur Sevmýri verið teirra fótbóltsvøllur. Í Havn fóru teir at spæla fótbólt á Lützenstrøð í 1903. Hetta var árið fyri, at HB varð stovnað í 1904. Eisini spældu teir fótbóltsdyst móti TB á vølli í Hoydølum í 1909, men longu tá var ætlanin at leggja fótbóltsvøll í Gundadali á fløtuni har. Kommunan keypti økið frá festunum báðum, og fyrsti fótbóltsdystur varð leiktur í Gundadali 18. juni 1911. Gundadalur hevur síðan tá verið ítróttarøki hjá havnarmonnum, og ár undan ári eru gjørdar størri og størri íløgur á staðnum, sum í dag umframt graslíkisvøllir og stadion hevur stóran svimjihyl. Aðrastaðni, eitt nú í Vágum, spældu teir í mong ár á sandinum, til teir seinni í øldini fingu rættiligar fótbóltsvøllir. Miðvágspresturin Johansen var tann fyrsti, sum legði teimum lag á at spæla fótbólt. Í árunum 1935-1954 varð sett eitt starv sum ítróttarráðgevari fyri at menna ítróttina í skúlunum, har ítrótt frá 1950-árunum gjørdist lærugrein alt árið, serliga eftir at skúlarnir fingu fimleikahallir.

Meira skal ikki verða gjørt burtur úr ítróttarsøguni uttan at vísa á, at tá ítrótturin var komin, vaks hetta virksemið ár undan ári og gjørdist alsamt størri partur av samfelagslívinum. Umframt fótbólt komu aðrar ítróttargreinir sum svimjing, kappríðing, hondbóltur og frælsur ítróttur so við og við. Fleiri av ítróttarfeløgunum hava seinastu árini givið út minningarrit, har tað ber til at lesa um gongdina hjá hvørjum einstøkum felag.

Fyrr varð vanliga dansað í roykstovuni, men um aldarskiftið komu dansistovur í flestu bygdum. Eitt var, at føroyski dansurin helt fram í dansistovuni, men nú kom eisini ein nýggjur dansur, sum føroyingar undir einum rópa eingilskan dans. Hann kravdi, at spælt varð uppá okkurt. Álitið í fyrstani var fyrst og fremst harmonikan, men í Tórshavn høvdu teir heili orkestur, sum spældu til dans. Lív hevur altíð verið í Havnini, har eitt nú jazzorkestur spældu góðan tónleik, m.a. Scott Joplin í hansara egnu samtíð, langt áðrenn tónleikur hansara gjørdist alment kendur við filminum *The Sting*. Seinni komu so eisini grammofonirnar, men tað var ikki fyrr enn við elmegini, at rættiligt glið kom á við elektriskum gittarum og øllum tí, sum har hoyrdi til, og sum kundi geva tónleikinum kraft og bót. Nú er tað, at ungfólk taka seg saman og gera orkestur

við sjáldsomum nøvnum, sum fara at spæla til dans í dansistovum og øðrum hóskandi hølum kring landið. Summi vórðu veruleiki, men onnur gjørdust bert dreymurin um *The Evening Stars* sum hjá nøkrum gentum á Toftum. Tað er ikki av ongum, at trýssini standa sum nakað stórt hjá fólki, tí tá høvdu fólk vant seg við útvarpstónleik og grammofontónleik. Nógv var plagiat at byrja við, men eisini á hesum øki er føroysk mentan vorðin til autentiskan føroyskan tónleik. Munnu ikki *The Faroe Boys* enn standa sum ein varði millum teir stóru í føroyskum tónleikalívi? Tað er ikki av ongum, at fólk fara aftur í trýssini.

# Gerandisdagur í eina øld

## Undirstøðan

So seint sum fyrst í trýssunum var kúgv enn í kjallaranum í fleiri húsum úti á bygd og hjá onkrum í Havn eisini. Men tað gamla bygdarlívið sang nú uppá sítt seinasta vers. Undirstøðubúskapurin hevði sítt støði í tí, sum hoyrdi gamla bygdarbúskapinum til. Hetta vóru landbúnaður, neytahald, seyðahald, grindaveiða, fuglaveiða og tað at kunna fara á flot ella út at skjóta fugl. Hetta var eisini galdandi fyri traðarmenninar í Havn, sum helst ikki vildu lata traðir til byggigrundir fyrstu tíðina, tí tað hevði so stóran týdning fyri teir at kunna hava kúgv. Síggja vit burtur frá Vestmanna, har jørðin varð útskift í 1927, og nøkrum bygdum í Suðuroy, har útskift varð í 1928-35, so varð innangarðsjørðin í restini av Føroyum ikki útskift fyrr enn eftir seinna heimsbardaga. Í hoyna gingu fólk enn væl eftir seinna heimsbardaga og reikaðu um allan bøin, hoyggjaðu eitt jarðarstykki her og eitt har.

Tey flestu høvdu góðar stundir at velta, hóast tað ikki gav nógvan pening av sær, men tíverri hendi tað eftir góðu fiskiárini undir og beint eftir fyrra heimsbardaga, at teir ungu menninir, sum Heðin Brú so væl lýsir tað í bókini *Feðgar á ferð*, mistu hugin til jørð og at velta. Hartil er at siga, at nógvir teirra áttu heldur onga jørð at velta í.

Mjólkarframleiðslan í Føroyum hesa tíðina fór fram í smáum. Í 1930 vóru skrásettir 2147 neytaeigarar í Føroyum. Av hesum høvdu 1494 eina kúgv í part, 458 høvdu tvey neyt í part,185 høvdu 3-5 neyt í part, átta høvdu 6-8 neyt, meðan bert tríggir høvdu yvir 10 neyt í part. Helvtin av øllum neytaeigarunum hevði sostatt bara eina kúgv. Til hetta er at siga, at eisini var sera vanligt, at fýra familjur vóru um eina kúgv. Hetta róptu tey *at fóðra uppií*. Kúgvin stóð í kjallaranum hjá einum av teimum, sum vóru felags um hana, og so skiftust tey øll um at ambæta neytinum og mjólka. Mjólkin varð býtt í fýra lutir, og hvør av teimum fýra familjunum fekk sín lut. Mjólkin hevði ómetaliga stóran týdning, tað var ein stórur dagur, tá kúgvin kálvaði, og mjólk aftur kom í húsið.

Áseyðatalið hevur hildið seg á mestsum sama støði í øldir og er enn lítið broytt. Bara tey, sum sótu við festi ella áttu jørð, fingu seyð. Í teimum smærru bygdunum høvdu tey, sum ongan jarðarteig áttu, kortini møguleika at blóðga knívin við at ganga á fjall fyri onkran ella vinna til eitt hoylamb sum hoykonur.

Tey, sum onga jørð áttu, høvdu ikki rætt til torvheiðar uttan so, at onkur forbarmaði seg yvir tey. Ofta soleiðis, at kravt varð eitt ávíst arbeiði av teimum fyri at fáa loyvi at skera torv. Í summum førum bar til at gjalda fyri at sleppa at skera

torv. Í nøkrum bygdum varð eisini samtykt á grannastevnu, at rætturin til torvskurð fylgdi við grúgvuni. Hevði tú fingið hús, hevði tú eisini rætt til at fáa torv.

Kornvelting hevur ikki havt stóran týdning í 20. øld, men tað kom fyri, at fólk veltu korn, serliga undir fyrra heimsbardaga, tá ikki nóg nógv mjøl fekst uttaneftir. Hinvegin høvdu eplini stóran týdning, serliga eftir 1925, tá miðvingar høvdu uppfunnið flagveltuna. Henda nýggja landbúnaðartøknin gjørdi tað lætt hjá fólki at velta sær epli. Fólk komu eftir 1925 úr øðrum bygdum til Miðvágs at læra seg henda nýggja veltingarhátt. Eplaframleiðslan vaks eisini ógvuliga nógv tey komandi árini. Amtslæknin sigur eisini í frágreiðingum sínum, at summi vóru farin at velta gularøtur og annað grønmeti. Nøgdirnar vóru smáar, men ikki uttan týdning fyri tey, sum veltu. Gularøtur og annað grønmeti vaks væl, har sandur var, t.d. á oyrasandinum í Sørvági.

Úrslitið av fuglaveiðini á fuglaplássunum øktist nógv í 1930-árunum, og hartil er at siga, at menn síðan seinast í 19. øld eisini vóru farnir at fleyga havhest um veturin, sum fekk stóran týdning fyri einstøku húsarhaldini. Grindirnar høvdu sjálvandi stóran týdning serliga hjá teimum, sum fingu jarðarhval, men hetta varð avtikið í 1934. Í eini 10 ár fingu festararnir tó gottgjørt væl av tí, teir mistu við jarðarhvalinum. Grind hevði ómetaliga stóran týdning í tí einstaka húsarhaldinum, tí hon fekst mestsum ókeypis, og so bar tað til at goyma hana leingi, um hon so var saltað ella turkað.

Framleiðsluvøksturin í heimavinnuni í bygdunum svaraði ikki til fólkavøksturin. Tað var t.d. ov lítið av mjólk til, at øll kundu fáa nóg mikið. Mjólk fekst næstan bert um summarið og næstan ikki um veturin, tá neytini vóru slept. Turrmjólk og blikkamjólk kundu keypast longu tá, men hon var yvirhøvur alt ov dýr. Fyri havnarfólk hjálpti tað, tá Meiaríið varð sett á stovn í 1908. Tá fóru mjólkarbátarnir at sigla í Sundalagnum. Teir førdu mjólk úr bygdunum til Havnar, sum varð seld í Meiarínum. Halarnir av fólki við spann, sum vildu hava mjólk, vóru ógvuliga stórir uttan fyri Meiaríið. Hetta var skilið langt eftir seinna heimsbardaga. Sjálvt í 1960-unum var tað sera trupult hjá fólki at fáa nóg mikið av róma til brúdleyp og konfirmatiónir

## Arbeiðsmøguleikar

Peningainntøkurnar komu í høvuðsheitum frá fiskivinnuni, um tað so var á sjónum ella í fiskaarbeiði á landi. Síggja vit burtur frá teimum, sum høvdu fasta løn og fast starv, vóru aðrir møguleikar at tjena pening smáir og fáir. Handverkarar og arbeiðsmenn kundu tjena til lívsins uppihald í teimum størru bygdunum, har okkurt var at gera í sambandi við skipini og pakkhúsini. Onkrar havnir

vóru í gerð í 1920-unum, men í teimum allarflestu kommununum var einki slíkt arbeiði. Hetta kom alt so við og við, og arbeiðið at byggja vegir og havnir gav nú annað arbeiði enn bert fiskaarbeiði.

Í flestu kommunum var tað kortini langt upp í 20. øld talan um *pliktarbeiði,* har maður læt sína arbeiðsorku og tíð til kommununa í staðin fyri t.d. at gjalda skatt. Tíðin 1900-1914 var ein góð og jøvn tíð hjá føroyska fiskimanninum. Árið hjá sluppfiskimonnunum var skipað soleiðis, at tað bar til hjá teimum at koma heim i mai-juni at skera torv, og nógvir fingu gjørt ein stóran part av váringini, áðrenn teir fóru. Teir komu aftur til mikkjalsmessu, og teir fingu, um ikki veðurlambsskurðin, so klippingina við. Hevði terrin ikki verið góður, kundu sjómenninir hjálpa til at bera hoyggið inn, tá teir komu aftur. Eisini skuldu eplini takast upp. Til hetta er kortini at siga, at í teimum allarflestu bygdunum var nóg mikið av fólki til at gera tað arbeiði, sum var at gera heima. Fólk hjálptu eisini hvørjum øðrum. Sjálvandi broyttist eitt og annað, konufólkini kundu t.d. átaka sær at gera okkurt, sum annars hevði verið roknað sum mannfólkaarbeiði.

Eitt sindur av vøru varð framleitt í teimum einstøku húsarhaldunum. Hetta vóru vørur, sum keypmaðurin tók ímóti og seldi víðari. Hetta var t.d. ull, troyggjur, lýsi, mjólk, egg og gæs. Eisini eigur at verða nevnt, at børnini tóku sundmagan úr fiskinum, turkaðu hann og lótu keypmanninum hann. Sundmagarnir vórðu so fluttir út, og tað, sum vit nevna husblas, varð gjørt burtur úr teimum. Tann vøra, sum kortini hevði størstan týdning, var ull og ullvørur. Eitt var, at fólk spunnu og bundu troyggjur burtur úr teirra egnu ull, men kvinnur vóru eisini, sum fingu ull frá keypmanninum og bundu troyggjur fyri triðing av virðinum. Hetta róptu tey triðingsgerð. Serliga tey, sum høvdu høvi at selja mjólk til Meiaríið í Havn, tjentu pening upp á mjólkina, men mjólk varð eisini seld úti á bygd. Størri inntøkur var ikki talan um, men alt gjørdi mun, tá samanum kom.

## Inniløga

Frá umleið 1900 fóru norðmenn at seta upp hvalastøðir í Føroyum. Føroyingar yvirtóku seinni onkrar av hesum hvalastøðunum og hildu fram at skjóta hval til langt upp í 1950-árini, tá Sjóvinnubankin eina tíð royndi at bjarga hesum vinnuvegi, sum so datt niðurfyri endaliga. Umframt tann vinnuliga týdningin fingu hvalastøðirnar stóran týdning fyri tann vanliga føroyingin, tí til bar at keypa stórhvalatvøst ógvuliga bíliga. Hetta kundi lata seg gera við at fara beinleiðis til hvalastøðirnar við báti ella keypa frá teimum monnum, sum ferðaðust kring landið og seldu hvalatvøst. Hvalatvøstið varð saltað í lakatunnur. Í summum húsum var hvalatvøst næstan tað einasta, tey høvdu ráð til at eta seg mett av,



*Grind deyð á Miðvágssandi, og hvalirnir verða drignir upp á land*

verður sagt í heimild frá hesi tíðini. At enda vóru bert tvær hvalastøðir eftir við Áir og í Lopra. So seint sum í 1970-árunum hava teir tikið stórhval upp við Áir.

Innløga í víðastu merking hevur altíð verið ein týðandi partur av húsarhaldinum, tí umframt at rógva út fyri at tjena pening hevur tað altíð verið vanligt at fara á flot fyri at fáa feskt til egið húski. Her hevði allur fiskur týdning, men tað, sum kanska var mest spennandi, var at reka eftir kalva ella at fara við kalvalínu. Seiður hevði stóran týdning fyri húsarhaldið – kanska tann fiskur, sum mest var av yvirhøvur – um hann so varð fingin á seiðabergi, við dyrging ella við nót. Bæði tað at fara á seiðaberg og út at dyrgja varð roknað sum fittligt arbeiði, har konufólk eisini kundu vera við. Nótin kravdi góða fyriskipan, hóskandi stað at draga upp á land og so bæði bátar og fólk, men afturfyri kundi fáast nógv við nót. Í onkrari bygd høvdu teir eina lítla nót, sum nøkur fá fólk kundu draga. Eitt var, at seiðurin hevði týdning sum matur, men livurin hevði ikki minni týdning, tí hon kundi seljast og smeltast til lýsi. Summir komu at kryvja fyri seiðakroppin, meðan eigarin hevði livrina eftir.

Eisini var tað vanligt, at skipsmenninir høvdu nógvan ræstan fisk við sær í land, tá teir komu aftur av skipi og við trolarunum ofta eisini turkaðan rikling, sum var skorin burtur úr kalva. Skiparnir áttu lippurnar, sum teir saltaðu í tunnur, men teir kundu eisini lata manningini av hesum, um teir hildu tað. Í hesum sambandi er vert at nevna, at umborð á teimum skipum, har provianturin varð

býttur millum manningina, var tað ikki óvanligt, at menn høvdu fitt av sukri, margarini og øðrum heim aftur við sær. Tey spardu, meðan teir vóru umborð.

Gás er ein umtóktur fuglur bæði fesk og turr, men í mongum bygdum var ikki loyvt at hava gæs, tí roknað varð við, at tær fóru ikki so væl við grasinum. Hinvegin høvdu øll, sum vildu, loyvi til at hava høsn og dunnur, og etin vórðu minst líka so nógv egg í Føroyum sum í nøkrum øðrum landi, sigur amtslæknin í 1931. Tá varð roknað við, at meira enn ein høna var upp á fólkið, og hesar hønur vurpu tað, sum svaraði til umleið 80 egg. Hetta er kanska ikki nógv at reypa av samanborið við eina nýmótans verpingarhønu á Velbastað í dag. Aftrat hesum koma so dunnueggini, men talið á teimum finna vit ikki í hagtølunum frá hesi tíð. Tað var tí ikki av ongum, at fólk høvdu dunnur og høsn gangandi í túnunum, men hinvegin vóru nógv fólk í Føroyum, sum ikki ótu høsnakjøt, men blakaðu bæði yvirskot av hanum og gamlar hønur á øskudungan.

## Lívskorini

Í 1936-37 varð gjørd ein kanning av livikorunum hjá føroyingum. Henda kanning bar heitið *P. Carl Petersens Ernæringsekspedition til Færøerne 1936-1937.* Henda kanning fór fram í bygdunum Mykines, Elduvík, Gjógv og Koltri og í »býunum« Fuglafirði og Tvøroyri. Í kanningini verður síðani bert skilt millum bygd og bý. Havnin fell uttan fyri rannsóknina.

Henda rannsókn gevur okkum nøkur tøl og nakrar metingar av viðurskiftunum. Taka vit bygdirnar, so var í meðal 1,3 kúgv upp á húsið, meðan tað í býnum bert var 0,2 kúgv upp á húsið og á Tvøroyri bert 0,1 kúgv. Í bygdunum vóru 18,6 seyðir upp á húsið, meðan tað í býnum vóru 1,4 seyðir upp á húsið og á Tvøroyri bert 0,8 seyður upp á húsið. Hinvegin vóru nógv fleiri høsn og dunnur upp á húsið í býnum enn í bygdunum. Í bygdunum vóru 5,4 upp á húsið og í býnum 6,6. Á Tvøroyri var høsnatalið 6,9 upp á húsið. Egg hava sostatt havt stóran týdning í býnum. Tá talan var um mjólk, drukku tey í bygdunum í meðal 956 gramm av mjólk um dagin og í býnum 221 gramm um dagin. Á Tvøroyri drukku tey í meðal ikki meira enn 127 gramm av mjólk um dagin. Eisini tá talan var um feitt og spik, varð etið meira av hesum í bygdunum enn í býnum. Hóast Tvøroyri var grindavág, varð etið minni av spiki har enn í bygdunum.

Tá talan var um sukur, var nýtslan munandi størri í býnum enn í bygdunum. Hetta hongur helst saman við, at bæði putursukur og siroppur vórðu nógv brúkt oman á breyðflís. Sukurtalið á bygd var 70 gramm og í býnum 97 gramm. Her var Tvøroyri hægst við 111 gramm av sukri um dagin. Munurin á, hvussu nógv breyð varð etið á bygd og í bý, var ikki stórur. Á bygd var talið 225 gramm av

rugbreyði og 72 gramm av hveitibreyði um dagin, meðan talið í býnum var 243 gramm av rugbreyði og 89 gramm av hveitibreyði, men á Tvøroyri var talið á etnum rugbreyði um dagin 223 gramm og hveitibreyði 76 gramm. Næstan eingin munur var á, um fólk drukku te ella kaffi á bygd ella í bý, men eisini her var eitt sindur øðrvísi á Tvøroyri, har drukkið varð dupult so nógv kaffi sum te.

Spurningurin er so, hvat vit kunnu brúka hesi hagtølini til. Jú, tey vísa, at tey yvirhøvur fingu meira at eta á bygd enn í býnum, og at tað var meira til av góðum heimagjørdum føroyskum mati á bygd enn í bý. Í býnum var nógv av tí gamla siðbundna matinum um at hvørva. Hetta var ikki tí, at fólk ynsktu tað so, men tí fólk í bý ikki áttu tað sama ella høvdu møguleika at fáa tað sama, sum tey fingu á bygdunum.

Hinvegin høvdu keypmenninir í býnum tað sama í hjallinum sum tey á bygd. Edward Mitens fortelur í endurminningum sínum, at foreldur hansara høvdu tvey neyt, høsn, dunnur og viðhvørt eisini ein grís. Har var stórur kjøthjallur, har kjøtið var hongt upp, sumt varð etið ræst, annað varð turkað. Eisini fortelur hann frá lakaíløtunum við grind og spiki og frá fugli um summarið og harum um veturin. Haraftrat høvdu tey fisk hangandi uttanfyri á hjallinum. Munur var sjálvandi á hesum hjalli og á eggunum, grindini og seiðinum, sum var tað einasta hjá nógvum fólki.

Bera vit saman rannsóknarúrslitini við tað, sum amtslæknin skrivar í frágreiðingum sínum, er niðurstøðan tann sama. Tann dagligi kosturin hjá vanliga fólkinum var seiður og annar fiskur, hvalatvøst, grind og eplir. Turt kjøt og skerpikjøt vóru bert høgtíðsmatur hjá teimum flestu, men tey, sum áttu nógv kjøt, kundu sjálvandi eta tað oftari, men heldur ikki hjá teimum var tað yrkadagskostur.

Hóast ull kanska ikki longur var Føroya gull, so hevði ullin enn stóran týdning. Bæði skinnullin og ullin frá roytingini varð brúkt. Ullin varð vaskað, karðað, nappað og spunnin og virkað til klæðir. Sjómenninir høvdu brúk fyri bæði undir- og yvirklæðum, men summi sendu ullina niður at spinna ella á Spinnaríið í Havn, sum kom um aldaskiftið. Seinni komu onnur spinnarí í Føroyum. Øll konufólk lærdu at binda, flestu dugdu at seyma, og nógv dugdu at veva. Tær fyrstu bindimaskinurnar komu longu um aldaskiftið 1900, og sum frá leið, og komið varð upp í fyrra part av 20. øld, fingu fleiri og fleiri sær bindimaskinu og fóru at binda fyri fólk. Hóast fríhandil var, og til bar at *bestilla* vørur úr príslistunum, ið komu til landið, gingu tey flestu í rotuskóm. Heldur ikki húðarskógvar hjá mannfólkunum vórðu burturlagdir. Seyðaskinnini vórðu tí barkað til roð og skorin til rotuskógvar. Vanligur fótbúni hjá konufólki var rotuskógvar við reyðum tveingjum og tuflur. Mannfólkini brúktu vanliga hvítar tveingir. Tað var sjálvandi skomm at ganga rivin og skræddur, men at ganga í stoppaðum hosum og bøttum klæðum var dugnaskapur.

Føðslurannsóknin frá 1936-37 kom til ta niðurstøðu, at fólk í bygdunum yvirhøvur gingu í betri klæðum enn í býnum í Føroyum. Á bygd gingu vanliga umleið 66% í heimavirkaðum klæðum, meðan bert 8% gjørdu hetta í stórbygdunum, har bestiltar hosur ikki vóru óvanligar. Serliga mannfólkini gingu í heimavirkaðum klæðum, meðan konufólk og yngri fólk høvdu størri hug til at fylgja mótanum og gingu tí heldur í keyptum ella bestiltum klæðum.

Síggja vit føroysku bygdirnar sum á einum tráð, har bóndabygdirnar eru í øðrum endanum og fiskimannabygdirnar í hinum, so er ein bygd sum Tvøroyri – her verður sæð burtur frá Froðba og Trongisvági – uttast á fiskimannabygdaendanum, meðan t.d. bygdir sum Skálavík ella Velbastaður eru uttast á hinum. Men eisini hesar bygdirnar høvdu samband við fiskivinnuna. Neyvan mundi vera ein einasta bygd í Føroyum, sum bert hevði jørðina at líta á. Hinvegin var tað heldur eingin, sum bert hevði fiskivinnuna á at líta.

## Ringar tíðir

Undir fyrra heimsbardaga og til 1919 veksur fiskivinnan nógv, meðan tíðin 1920-1940 er ein long óstøðug tíð við rættiligum kreppuárum innímillum, hóast tað júst í hesum árum ikki vóru sørt av broytingum í samfelagnum. Tað, sum nú verður púra greitt, er, at føroyska samfelagið ikki longur er eitt innibyrgt bygdarsamfelag, ið bygdi á tað, sum jørðin og landið góvu, men at samfelagið nú veruliga eisini er bundið at heimsmarknaðinum. Tað tykist sum, at tað er í 1930-árunum, at tíðirnar eru ringast í Føroyum. Eitt var tann stóra búskaparkreppan í 1929. Tað, sum hendi í kjalarvørrinum á henni, ávirkaði eisini Føroyar. Úrtøkan hjá fiskimonnunum datt niður í lítið og einki – einar 500 krónur fyri alt árið, tá væl stóð til.

Tað var ikki nógv at liva av. Tað, sum gjørdi munin hesa tíðina, var, um menn høvdu jørð, so teir kundu velta epli, hava neyt, seyð og høsn og gleða seg, til kúgvin hevði kálvað. Roynt varð tí at fáa menn at velta upp úr nýggjum, og løgtingið samtykti at lata stuðul til teirra. Teir, sum onga trøð áttu, royndu tí at fáa sær eina trøð. Tá spurningurin varð tikin upp í løgtinginum um at lóggeva fólki fleiri traðir at velta, settu bøndurnir seg ímótu hesum. Álitið, sum varð lagt fram í hesum sambandi, varð millum manna nevnt Gráa Bók. Tilmælið gekk beinleiðis móti áhugamálunum hjá kongsbøndunum, og henda lóggáva frá 1938 var ein av grundunum til, at Jóannes Patursson fór úr Sjálvstýrisflokkinum, tí flokkurin atkvøddi fyri lógini.

Eitt var, at fiskiskapurin kundi vera ójavnur, men hartil kom, at í 1936 datt spanski marknaðurin heilt burtur, tí borgarakríggj var í landinum, og trupult var at finna nýggjar marknaðir. Italiumenn og grikkar keyptu mestsum bert saltfisk,

so við hesum duttu nógv arbeiðspláss burtur, nú fiskurin ikki skuldi turkast. Hetta vóru ringar tíðir hjá fólki bæði á landi og sjógvi, sum amtslæknin so væl greiðir frá í ársfrágreiðing síni fyri 1936. Hann sigur, at fólk eru *grebet af en sjælelig Depression og synes at hava mistet Troen på Fremtiden. Troen på at lyse dage atter vil oprinde. Under Suk rinder dagen ud, og under Fortvivlelse gryer den næste Dag. Mødre tør ikke give Livet til nyt Afkom, og Fødselstallet daler, trods det at Befolkningen er i Tilvækst.*

Tað tykist eisini at vera greitt fyri teimum flestu, at føroyingar ikki nóg stundisliga hava fingið endurnýggjað síni skip og veiðihátt, sjálvdrátturin og snørisfiskisskapurin tykjast nú teimum flestu at vera meiningsleysir. Ein kensla av at hava ligið sjóvarfallið av sær tóktist ráða øllum. Stríð og strev, og einki kemur burturúr. Samstundis hevur eingin møguleika at royna nýggjar leiðir, tí, sum amtslæknin sigur í ársfrágreiðing síni, *Det er ogsaa uhyre vanskeligt at sætte nye Foretagender i Værk. Alle Virksomheder synes at skulle give Underskud, og de Folk, der endnu har lidt Penge, er bange for at vove og tabe deres sidste Sparepenge, noget der er forstaaeligt, men ikke samfundsgavnligt. Hvis ikke alle vil gaa sammen for dette at genrejse Erhvervslivet, saa at de, der arbejder deri, kan tjene nok til deres daglige Brød, saa vil der gaa lange Tider, inden den nuværende Tingenes Tilstand bliver forandret.*

Árið 1937 var lítið betri, kortini hómaðist ein glotti, sum amtslæknin tilskrivar Føroya Fiskaeksport, ið hevði fingið skipað søluarbeiðið betri, serliga søluna av saltfiski.

Tað, sum broytti alt, var seinni heimsbardagi. Føroyar vórðu hertiknar av bretum, teirra virksemi gav nógv arbeiði í summum bygdum, men tað gjørdi størsta munin, at føroyingar nú fóru at selja ísfisk á bretska marknaðinum. Tá tjentu fleiri føroyingar nógvan pening, summir so nógv, at teir eftir einum túri kundu gjalda út sparikassalánið í húsunum, sum teir høvdu stríðst við í áravís.

Til ber kortini ikki at siga, at einki varð roynt hesi árini, tí í 1930-árunum var loðdjórahald farið at taka seg upp sum vinnuvegur ymsastaðni í Norðurlondum. Teir fyrstu revagarðarnir komu í Kvívík og á Trøllanesi í 1936, og skjótt komu revagarðar mestsum um alt landið. Í 1939 vóru sostatt 53 revagarðar í Føroyum, flestir vóru í Hvalvík, heili 6 revagarðar. Eisini hevði onkur minkar. Arbeiði varð væl fyriskipað og framt uttan stórvegis stuðul, og føroyngar fingu kønan mann úr Noregi at hjálpa sær at fáa skinnini so góð sum gjørligt. Teir, sum fyrstir vóru, fingu eisini væl burturúr. Tá høvuðsmarknaðurin fyri loðskinn varð London, settu bretar høgan toll á fremmand skinn, og tað gjørdi enda á hesum vinnuvegi, men revagarðarnir stóðu sum eitt minni um hesa tíð í fleiri bygdum til langt eftir kríggið.

## Eftir kríggið

Alt hetta broyttist so við og við eftir kríggið, men ikki so ógvuliga skjótt, tí nógv av tí gamla bygdarlívinum helt fram. Til heilt upp í 1960-ini var ikki óvanligt at skera torv. Men um hesa tíðina komu eisini nýggir komfýrar, ið gjørdu, at fólk eisini fóru brenna bæði kol – eingilskt ella føroyskt kol – og koks. Fyri húsarhaldini var tað ikki sørt av eini kollvelting, tá tað seinast í 1950-unum bar til at fáa sett oljufýring í komfýrin. Í staðin fyri at skera torv, lempa kol og koks kravdist nú ikki annað enn, at tú fórt við petroleumsdunkinum í handilin at pumpa hann fullan. Primusurin var eisini hentur, um skjótt skuldi berast at, ella at seta undir bakarovnin, sum nógv bestiltu gjøgnum príslistar, ið tá komu í hvørt hús. Nøkur hús í Tórshavn og kanska aðrastaðni við høvdu miðstøðuhita áðrenn seinna heimsbardaga, men vanligur gjørdist miðstøðuhiti ikki fyrr enn eftir 1960. Tá gekk tað eisini skjótt fyri seg.

Elmegin ella SEV, sum hjá nógvum er vorðið samheiti fyri elektriskan streym, fekk ómetaligan týdning. Ikki bert fingu fólk ljós úti og inni, men tey fingu orku, sum kundi brúkast til komfýrar, bakarovn, vanligar elovnar at hita rúmini upp við, og so fáa vit frystiboksirnar og frystiskápini, har tað bar til at frysta mat niður at brúka seinni. Eitt sera væl dámt ískoyti til hjallin og lakatunnurnar. Tað er ikki bara í Havn, at urbaniseringin er farin fram, men eisini úti á bygd, og tað stóra lopið hendi eftir 1960, tá bygdarlívið broyttist, og fólkið fór at klumpa seg saman í Havn og teimum stóru bygdunum, meðan útoyggjarnar og fleiri av teimum meira fjarskotnu bygdunum hava mist meginpartin av fólkinum. Við tí virðisgrundarlagi, sum føroyska fólkið nú hevur fingið, er ivasamt, um tær fara at mennast aftur til tað, tær einaferð vóru.

# Hús og bústaður

Eini føroysk hús fevna um bæði sethús og úthús. Síðani landnámsmenninir á sinni settu fótin á land í Føroyum, hava verið trý sethúsasløg í Føroyum, tann gamli skálin frá víkingatíðini, tey gomlu føroysku húsini við roykstovu og glasstovu og so tey seinni so vanligu húsini, har ikki nýttist at siga annað enn, hvussu nógvar alin tey vóru, fyri at tú skuldi fáa eina fatan av húsunum. Men longu áðrenn kríggið og serliga eftir kríggið er komið eitt nógv størri fjølbroytni í húsameingið í Føroyum, sumt fyri tað góða og annað fyri tað verra. Eina tíð vóru mestsum øll hús svørt, men so komu litirnir, og í summum bygdum var næstan einki mark fyri kolorittinum, til húsini aftur fóru at fáa teir vanligu svørtu, brúnu og reydligu træverjulitirnar, men hetta er so aftur broytt til aðrar nýggjar litsamansetingar. Tað kom meira enn so fyri, at hús bygd í 1950-unum ikki vóru bygd við baðiverilsi, men náttkassa í kjallaranum. Tó vardi ikki leingi, til ið hvussu so er vesi kom í hvørt hús.

## Tey gomlu húsini

Tey gomlu føroysku húsini vórðu bygd til ein lívsform, har tætt samband var við ta framleiðslu, ið var neyðug til lívsins uppihald. Bert eitt bróst var millum fjós og roykstovuna. Viðhvørt høvdu fjós og roykstova somu inngongd. Fríhandilin og tann tíðin, sum kom, førdi nógv nýtt við sær, eisini ein nýggjan hugburð. Longu um 1840 sæst, at summi fólk halda ikki, at roykstovurnar eru nóg fínar. Lukturin av neytum og royki og onkrum høsnalorti á roykstovugólvinum hóskaði seg ikki longur í einum bústaði. Fleiri fóru tí at gera gongd millum ávíkavist fjós og roykstovu og millum roykstovu og glasstovu.

Nýggir siðir, nýggj tíðarrák og nýggjur hugburður vóru komin til landið, og hetta gjørdi alt meira vart við seg. Hetta var mentan, ið var øðrvísi enn bygda- og bóndamentan. Henda mentanin kom úr býnum og tí nýggja borgaraskapinum, sum vann fram og verður vanliga nevnd borgarlig mentan. Í Føroyum hendi nú tað sama, sum var hent í Evropa og eisini í hinum Norðurlondunum. Í Havn høvdu altíð búð embætisfólk og tey, sum starvaðust við kongaliga handilin, og onkur onnur eisini. Hesi høvdu sínar siðvenjur, men við fríhandlinum gjørdust tey uppaftur fleiri, tí nú komu keypmenn, banka- og sparikassastjórar, skrivstovufólk, handilskallar og onnur, ið livdu eitt rættiliga øðrvísi lív enn úti á bygd. Summi tosaðu eisini danskt hvønn dag. Hesi fólk høvdu ein borgarligan siðaarv, sum onnur so við og við eisini lærdu at kenna og lótu seg ávirka av. Eina

tilíka góða gamla borgarliga mentan finna vit umframt í Tórshavn á Tvøroyri millum keypmansfólkini har.

Úti á bygd fór tann borgarligi siðaarvurin eisini at gera seg galdandi, fyrst hjá teimum størstu bøndunum og so við og við eisini hjá øðrum. Soleiðis var í Danmark, Svøríki, Noregi og aðrastaðni við. Henda borgarliga mentanin kom til sjóndar í klædnadrakt, húsum, innrætting, borðskikki og øðrum lívsins viðurskiftum. Umframt tað ítøkiliga materiella vóru sosialar broytingar. Fólk fóru nú at gera meira mun á hvørjum øðrum, enn tey høvdu gjørt fyrr. Sjálvandi hevur altíð verið munur á fólki. Altíð hava verið nøkur, sum hava havt vald, og so tey, sum eru undirgivin valdið. Tað, sum nú hendir, er, at munur verður gjørdur á fólki. Hetta eru fleiri dømi um. Fyrr høvdu húsfólkið og arbeiðsfólkið etið við sama borð í roykstovuni, men nú henda broytingar. Munur verður gjørdur á arbeiðskonum, húskøllum og fínari fólki. Dømi eru um, at bert tað, at ein arbeiðsgenta setti føtur sínar í tuflurnar hjá húsbóndanum, var nóg mikið til, at hon fekk ein undir vangan. Dømi eru eisini um, at matmóðirin mest helt til í glasstovuni. Roykstovan, kjarnin í teimum gomlu húsunum, har so nógv hendi, fær lægri status, og hildið verður, at tað ber ikki til, at fínir fremmandir gestir skulu ganga gjøgnum roykstovuna fyri at koma í glasstovuna. Tí byggja fyrst tey, sum eru hægst í metum í bygdini, og sum hava ráð til tað, ein tilbygning í endan á glasstovuni við eini serligari inngongd, sum vórðu róptar bakdyr. Hóast eitt ikki sørt misvísandi navn gerast bakdyrnar nú inngongdin til tann fínara partin av húsunum, serliga roknaður fínari fólki. Hesin parturin av húsunum, har gingið varð inn gjøgnum bakdyrnar, var fyrst og fremst umboðandi, representativur.

Sum altíð, tá okkurt verður móti, fylgja fleiri við. Har tikið var rívan til, var tilbygningur við eini nýggjari glasstovu aftrat, kamari, køki og eini forstovu, har bakdyr vóru. Í køkinum var fýrstaður, sum kundi brúkast til matgerð og gera matin kláran at seta á borðið. Haðani bar eisini til at leggja glóðir inn í bileggarovnin í glasstovuni. Matgerð yvirhøvur fór kortini fram í roykstovuni.

Prestur hevði stóran týdning í føroyska bygdarsamfelagnum. Teir varðaðu av fleiri kirkjum. Ikki altíð var so lætt at ferðast, so teir lógu vanliga nátt, tá teir komu. Prestur hevði vanliga fast tilhald í ávísum húsum, og hann fekk sjálvandi tað besta kamarið. Hann kom inn gjøgnum bakdyrnar og helt til í glasstovuni og svav í kamarinum við bakdyrnar. Stovan varð tí ofta rót prestastovan og kamarið prestakamarið. Tað var ikki ein og hvør, sum slapp at sova í prestakamarinum. Eini hús við bakdurum bóru boð um, at fólkini har høvdu ein ávísan status ella vildu hava ein ávísan status, tí bæði prestastova og prestakamar skaptu móta. Tey fækstu høvdu ráð at byggja eina heila nýggja glasstovu aftrat, men vóru nøgd við prestakamar og bakdyr. So langt komu tey gomlu føroysku hús-

ini, men tá vit koma til umleið 1900, hildu fólk uppat at byggja sær tílík hús. Eitt annað húsaslag var komið í staðin fyri.

## Siðalagsbroytingar

Týski ferðamaðurin C. J. Graba, sum var í Føroyum í 1828, sigur frá einum kvøldi, hann móður og troyttur ætlaði sær at leggja seg. Hann hevði fingið innivist í stovuni hjá einum bónda. Fleiri konufólk eru í stovuni og fáast við eitt ella annað. Hann var ikki sørt smæðin og kom sær ikki at lata seg úr klæðunum, meðan tey vóru har. Hann roynir at gera ymist fyri at vísa á, at hann ætlar sær at leggja seg. Vil hava konufólkini at fara út. Men tær lótust ikki um vón, skiltu einki og hildu fram við tí, sum tær fingust við. At enda var Graba so móður, at hann gjørdi av at lata seg úr og leggja seg uttan mun til, um konufólkini vóru har ella ikki. Hann sovnar straks. Tá hann vaknar næsta morgun, eru konufólkini longu aftur har. Tær fóru ikki út, so hann varð noyddur at raka og vaska sær, meðan tær sóu. Býarbúgvin Graba, ið var vandur til annað, kendi seg heilt illa av hesum. Tað fyrsta, hann ger, tá hann møtti prestinum í bygdini, var at siga honum frá sínum líðingum. Prestur helt ikki, at tað var nakað at grenja um, soleiðis var tað bara. Presturin segði honum eisini, at tað var sera vanligt, at bæði húskallar og arbeiðskonur svóvu í somu song bert við eini fjøl ímillum. Tað, sum serliga fekk Graba at undrast, var, at hóast henda nærleika vórðu ikki fødd fleiri enn eini 3-6 børn uttan fyri hjúnalag í øllum Føroyum um árið.

Fyrra part av 19. øld var tað púra natúrligt, at mannfólk og konufólk svóvu í sama rúmi, uttan at tað nýttist at føra til kynsliga samveru. Har vóru so nógv eygu, sum ansaðu eftir. Men soleiðis helt tað ikki fram at vera. Bøndurnir mistu so við og við tað vald og tann týdning, sum teir áður høvdu havt. Húskallar og arbeiðskonur fingu so við og við møguleikar at koma sær fram. Við fríhandlinum og tí vaksandi fiskivinnuni var møguleikin stórur fyri at kunna fáa fótin undir egið borð. Saman við eitt sindur av jørð og eini peningainntøku bar hetta væl til. Kynið læt seg ikki longur binda niður. Tað áhugaverda er, at um vit samanbera vøksturin í fólkatalinum við broytingarnar í húsunum, er greitt samsvar ímillum, at tess fleiri rúm koma í húsini, tess fleiri børn fáa fólk.

Siðalagið broyttist so nógv, at nú var ikki longur ráðiligt at lata húskall og arbeiðskonu sova í sama rúmi, tíansheldur við bert eini fjøl ímillum. Rúm varð skildrað burtur av roykstovuni til arbeiðskonurnar at sova í, meðan húskallarnir framhaldandi svóvu í kovunum í roykstovuni. Tað er nú, at tað einskilda lívið, ella privatlívið, verður uppfunnið í Føroyum. Vaksandi vinnumøguleikar hjá fólki góvu eisini bæði monnum og kvinnum størri kynsligt áræði. Fólkatalið vaks ár eftir ár. Nú vóru eisini aðrir møguleikar hjá ungum fátøkum fólkum enn



*Nýggj hús í gerð umleið 1914. Eini tey mest vanligu húsini á bygd heilt upp til 2. heimsbardaga* *(Privat mynd. Per á Hædd)*

fyrr. Húskallarnir fóru til skips, og konufólkini fóru nógvar, ið hvussu so er, tá ið tær enn vóru ungar, í fisk at arbeiða.

Fólk, sum enn búðu í húsum av tí gamla slagnum, løgdu ikki longur sama dent á at hava prestastovu og prestakamar. Tey vildu heldur hava betri rúm at sova í. Bakdyrnar hvurvu, og í staðin fyri prestakamar, forstovu og køk komu tvey sovikømur við inngongd frá glasstovuni. Í roykstovuna fingu tey flestu sær komfýr og kranavatn. Tað var eisini skjótt, at tað gamla heitið roykstova hvarv, fólk fóru at tosa um køk í staðin fyri. Roykstovan varð bæði hampiligari og ruddiligari. Pyntihandklæði kom í køkin, kappar og blondur á tallerkarekkju og í erva yvir komfýrinum. Gardinur komu sjálvandi eisini fyri vindeyguni eins og urtapottar í vindeygakarmin. Hend var ein mentanarbroyting í húsunum, ein fagurgerð, sum ikki hevði verið fyrr. Hetta sást bæði í teimum gomlu húsunum, men eisini í teimum nýggju, sum nú vórðu bygd.

## Nýggj hús

Byggisiðurin í Havn hevði frá gamlari tíð ikki verið júst tann sami sum úti á bygd. Her búðu bæði embætisfólk og fátøk fólk, sum ikki áttu jørð, men livdu

av lønararbeiði og útróðri. Húsini á Tinganesi og úti á Reyni vóru minni enn húsini á bygd, men ofta var glasstovan størri enn roykstovan. Embætismannahúsini vóru eftir tátíðar meti stór og prýðilig hús. Men nú kom eitt nýtt húsaslag fram við teimum nýggju vegunum, sum vórðu gjørdir í Havnini, ið longu er greitt frá. Hetta eru hús, sum vit í høvuðsheitum kenna aftur í Noregi, og tey eru innrættað á ein hátt, sum var vanligur í Danmark. Hesi nýggju húsini høvdu ymiska støðd, men vóru annars rættiliga lík í byggisniði.

Hetta slag av húsum gjørdist eisini alt vanligari úti á bygd frá umleið 1900. Í Haldórsvík t.d. komu tey fyrstu umleið 1910. Í fyrstani høvdu tey flagtak, men so fingu tey jarntak, og tey fóru at byggja hægri millum loft og gólv. Húsini høvdu tríggjar hæddir: kjallara, miðhædd og loft. Kaminan var lagað miðskeiðis upp í gjøgnum húsini og var vanliga í aðrari stovuni. Teir berandi veggirnir í miðhæddini skildraðu tey sundur í 4 mestsum eins stórar partar. Eingin spurdi eftir, hvussu húsini skuldu innrættast ella smíðast, tað lá fast. Spurningurin var bert, hvussu stór húsini skuldu vera. Her vóru nøkur føst mát: 9 x 11, 9 x 12, 10 x 12, 11 x 14 alin. Innrættingin var tann sama í øllum húsunum, munurin var bert tann, at rúmini vóru eitt sindur størri í teimum stóru húsunum.

Í kjallaranum, hvørs veggir vóru lagaðir av gróti, var hæddin einar tveir metrar upp til loftið. Kjallarin hevði stóran týdning, tí arbeiðið, sum fyrr hevði gingið fyri seg í roykstovuni, var nú flutt oman í kjallaran. Har vóru vanliga tvey rúm. Annað rúmið var fjós, har fólk høvdu kúgv, seyð og høsn. Hitt rúmið varð brúkt til at vaska klæðir í og til verkstað. Bukkan var í kjallaranum. Hon kundi standa afturundir onkustaðini, men vanliga var eitt lítið rúm avskildrað til hana. Vesi hevur ikki verið vanligt fyrr enn eftir seinna heimsbardaga, hjá nógvum ikki fyrr enn í 1950-unum og seinni. Úr einum lemmi í forstovuni gekk trappa niður í kjallaran. Fleiri dømi eru um, at fólk hava innrættað helvtina av kjallaranum til køk við komfýri og kranavatni, samstundis sum tey høvdu køk í miðhæddini, men tá brúktu tey dagliga mest køkin niðriundir, sum vanliga eisini var rúmsáttari.

Alt eftir, hvussu stórur jarðarmunurin var, kundi vera trappusteinur ella trappa inn til úthurðina í stovuhæddini. Tú komst fyrst inn í eina forstovu, øðrumegin var ein hurð inn í eitt kamar og hinumegin hurðin inn í stovuna, og gekst tú beint fram, komst tú til hurðina inn í stovuna. Einar trappur vóru eisini upp á loftið. Í miðhæddini vóru vanliga tvær stovur, men tað kom fyri, at onnur stovan varð tikin upp í køkin, sum so varð tað størri. Í køkinum var eitt fast køksborð við vaski og vatnkrana. Hetta borð stóð vanliga framman fyri vindeyganum. Við endan á hesum køksborði var spísikamarið. Í spísikamarinum var eitt eittfaksvindeyga. Fram við endavegginum var ein bonkur, og framman fyri beinkinum stóð spísiborðið. Hetta var viðhvørt eitt slagborð, sum kundi sláast upp á veggin, so

betri pláss var á gólvinum. Nærhendis komfýrinum, sum stóð inni í horninum móti kaminuni, stóð torvkassin. Krakkar og stólar vóru eisini í køkinum.

Tað vanliga var at hava eitt kamar burtur av gongini. Inni í hesum kamari var ein song, klædnaskáp og servant, tí hetta var tað kamarið, sum varð brúkt sum gestakamar, men vanliga svóvu húsfólk har. Komu gestir, fluttu tey aðrastaðni í húsunum at sova.

Tað bar til at koma beinleiðis inn í dagligstovuna gjøgnum gongina. Hurð var eisini inn í spísistovuna frá køkinum, og so var hurð millum stovurnar báðar. Uppi á loftinum vóru vanliga tvey kømur.

Hetta vóru tey vanligu húsini, men eisini vóru størri hús av sama slag. Á miðhæddini var munurin bert tann, at rúmini vóru størri. Øðrvísi var á loftinum. Stór hús kundu hava trimpul og eisini kvist ella bæði trimpul og kvist. Loftið gjørdist tá ógvuliga rúmligt, og 4-6 kømur kundu vera á loftinum.

Meðan bakdyrnar fyrr søgdu frá einum valahúsi, gjørdu trimpul og kvistur tað í slupptíðini. Hesi stóru hús vórðu í fleiri bygdum nevnd skiparahús. Tey flestu húsini vóru timburhús, men summi vórðu eisini stoypt. Innrættingin var tó tann sama. Tey høvdu upprunaliga øll flagtak. Seinni fingu tey ikki bert jarntak, tí alt meira vanligt varð eisini at klæða húsini við jarnplátum ella rukkublikki, ein byggisiður, sum eisini var vanligur í Íslandi. Fyrr vóru húsini vanliga tjørað, men seinni í tíðini, ja, heilt upp til okkara tíð varð alt meira vanligt at seta bjartari litir á húsini. Ein føroysk bygd kann í fleiri førum vera eitt satt koloristiskt upplivilsi. Hesi húsini, sum her eru umrødd, eyðkendu føroyskan byggisið mestsum alla fyrru helvt av 20. øld og fleiri ár eftir seinna heimsbardaga, men tá vóru fólk eisini farin at byggja hús við øðrvísi og meira fjølbroyttum sniði.

## Stovurnar

Í hesum húsunum, sum her eru umrødd, varð ikki tosað um roykstovu ella glasstovu. Tað var eitt sindur ymist, hvussu fólk umrøddu stovurnar. Summi brúktu landafrøðilig heiti som norðara stova, sunnara stova ella navn sum góða stova ella stovan inn frá køkinum. Tey mest vanligu nøvnini vóru kortini spísistova og dagligstova. Hesi nøvn eru at meta við danismur í føroyska málinum, sum tí eisini boða frá tí mentanarliga høpi, hesar stovurnar upprunaliga hoyra heima í.

Dagligstovan var í einum vanligum sokallaðum borgarligum umhvørvi ætlað til familjuna í tí dagliga – eitt hugnarúm at lesa í og at gera okkurt smávegis handarbeiði í hjá konufólkunum. Her var eitt blankt polerað borð, ein reyð plyssofa og einir tveir lenistólar eisini klæddir við reyðum plyssi. Litirnir á sofuni kundu sjálvandi vera eitt sindur ymiskir, men reytt plyss var ógvuliga vanligt. Í

stovuni vóru urtapottar á onkrum uppstandandi og í vindeygunum. Á veggjunum hingu keyptar myndir og annars fotografi av familjuni. Óvanligt var heldur ikki at hava smærri fotografi liggjandi í eini glasskál við fóti á. Okkurt oljuprentið kundi eisini hanga uppi á bróstinum. Hetta var í roynd og veru ikki stórt øðrvísi, enn vit kenna tað aftur í meginpartinum av øllum góðustovunum í Føroyum. Eisini í Føroyum gjørdust urtapottar vanligir fyrst í 20. øld.

Hesi húsini vóru innrættað soleiðis, at tað bar til at koma beinleiðis inn frá gongini og inn í dagligstovuna og frá dagligstovuni inn í spísistovuna. Spísistovan var av góðum grundum næst køkinum. Har stóð eitt spísiborð við stólum. Borðið stóð vanliga framman fyri vindeyganum, men kundi flytast út á gólvið, um brúk var fyri øllum fýra síðunum. Á einum veggi var eitt dekktoyskáp, og pláss var eisini fyri eini divan fram við bróstinum. Eins og í dagligstovuni hingu myndir og kanska okkurt oljuprentið á bróstinum.

Fremmandir gestir nýttust soleiðis als ikki at koma inn í køkin, men vórðu bodnir beinleiðis inn í góðustovu ella dagligstovuna at sita og haðani inn í spísistovuna, um teir skuldu til borðs. Hurð var ímillum stovurnar, so húsmóðirin kundi seta á borðið í friði og náðum. Tað bar til hjá gestunum at fara út aftur sama veg, sum teir komu, uttan at órógva tey, sum vóru í køkini. Var talan um kend fólk, varð farið léttligari um.



*Stova við lampu undir loftinum. Á Krákusteini í Tórshavn*

Einki forgjørt er í at hugsa sær, at tær broytingar, sum komu í teimum gomlu føroysku húsunum seinast í 19. øld, vóru royndir at tillaga hesi gomlu húsini til nýggjar normar og nýggj virði, sum vit seinni eisini finna í stovuhæddini í teimum nýggju húsunum. Tað tykist sum, at tørvurin at signalisera status var vorðin størri í hesum bæði sosialt og mentanarliga røriliga samfelagnum, ið kom eftir einahandilin. Men hóast fólk tóku eftir og fingu nýtt innbúgv og aðrar lutir, so var tað ikki vist, at tað merkti, at fólk høvdu fingið ein øðrvísi lívsstíl, tí satt at siga brúktu fólk ikki dagligstovuna

dagliga. Tað var mest bert til høgtíðir, at kynt varð upp í ovninum í bestustovu, serliga um jólini, men stovan inn av køkinum – spísistovan – varð brúkt meira, tí har var vanliga ein divan, og seinni høvdu fólk eisini radiotólið standandi inni har, tá tað kom. Køkurin var tað rúmið, har húsfólkið helt til.

Tað var veruliga soleiðis, at um tendrað varð ljós í góðustovu í einum húsum, løgdu fólk merki til tað, og bygdin fór at undrast á, hvør nú mundi vera komin. Stórur munur var ikki á stovunýtsluni í teimum nýggju húsunum og nýtsluni av prestastovuni í teimum gomlu føroysku húsunum. Stovurnar og serliga besta stova vórðu fyrst og fremst roknaðar sum karmur um gestablídni. Tað eru helst fleiri, sum hava havt ørindi á bygd, ið minnast at hava sitið í eini kaldari góðustovu, har júst var lagt í ovnin, men har hiti ikki náddi at fylla rúmið, fyrr enn tíð var til at fara avstað aftur. Øðrvísi var kortini um høgtíðirnar, tá vórðu stovurnar báðar brúktar meira.

Fleiri av teimum, sum skrivað hava um Føroyar í eldri tíð, greiða frá stórum gestablídni. Presturin P. A. Holm sigur í 1828, at føroyingar tóku ímóti gestum upp á sama máta, sum tey gjørdu á døgum Ábrahams. Heðin Brú, sum hevur skrivað so nógv um tað gamla bóndasamfelagið, greiðir eisini sera væl frá, hvussu tikið varð móti gesti fyrst í 20. øld. Hetta var í gomlum føroyskum húsum. Gesturin varð bjóðaður vælkomin og fekk ein sess á beinkinum í roykstovuni at byrja við. Verturin prátar við gestin, tað var hann, sum átti at vera blíður og práta. Meðan prátið gongur í roykstovuni, er konan farin inn í glasstovuna, fyrst leggur hon gløður í bíleggarovnin, og so fer hon at seta á borðið. Tá sett er á borðið, verður gesturin boðin inn í glasstovuna, har alt tað góða, sum húsið kann bjóða, stendur á borðinum. Gesturin etur einsamallur, men hini sita rundan um og práta við gestin, meðan hann etur. Soleiðis var eisini seinni í teimum nýggju húsunum heilt upp til nýggjastu tíð. Sjálvandi var tá sum nú munur á gestum. Summir gestir vórðu mestsum roknaðir sum húsfólk, meðan øðrum tók húsið sær betur av. Eingin var gestur leingi. Vóru fólk leingi, ótu tey saman við hinum í húsunum, og so vórðu tey ikki at rokna sum gestir longur. Hartil er at siga, at fyrr var tað vanligt, at bygdafólkini ofta komu inn á gólvið hjá hvørjum øðrum, men tey vóru ikki roknað sum gestir. Vanliga fingu tey boðið ein drekkamunn, um ketilin var heitur, og kaffikannan stóð á komfýrinum. Tað gjørdi hon fyri tað mesta. Tey sótu har, sum pláss var. Sjálvt um øll helst vildu hava, at ein stova stóð ruddað og klár at taka ímóti gestum hvønn dag, kundu umstøðurnar gera, at neyðugt var at brúka eina av stovunum at sova í, men um tey svóvu í aðrari stovuni ella ikki, trokaðust húsfólkini tað mesta av tíðini í køkinum, tí har var komfýrurin og tí mestsum altíð heitt. Enn eru nógv til av teimum gomlu húsunum, men sniðið á sethúsunum broyttist nógv eftir kríggið. Tá var tað eisini sera vanligt at stoypa húsini upp úr betong. Summi høvdu nakað av tí gamla

sniðinum uppi í sær. Tað er eisini í tríatiárunum og seinni, at tað koma funkislíknandi hús við stjørnutaki, knekkaðum sperrum og hvørjum av sínum. Á Skálafjørðinum høvdu tey ein arkitekt, sum æt Niels Pauli Hansen, ið teknaði fleiri hús av funkistýpu, m.a. húsini, sum í dag hýsa fornminnissavninum í Runavík. Tey sethús, sum eru bygd seinastu árini, eru ógvuliga ymisk, og í dag er ikki bert ein formur sum fyri 70 árum síðani, nei, hvør roynir at vera so ymiskur í húsabyggingini sum gjørligt, ikki minst eftir at møguleikarnir at fáa lán eru vorðnir alsamt betri. Flestu sethús í dag eru annaðhvørt innflutt ella føroysk týpuhús ella arkitektteknað hús, har hvørt hús hevur síni sereyðkenni. Hetta sæst best við at ganga og hyggja at margfaldinum í føroyskum húsasmíði.

Innbúgvið er vorðið meira og fjølbroyttari, stovurnar fínari, køkurin betri útgjørdur við fleiri hentleikum, og hiti er sjálvandi í øllum húsunum. Meðan eitt radiotól í 1950-unum stóð í stovuni, hava vit í dag sjónvarpstólið ikki bert inni í stovuni, men eisini saman við tónleikakervunum inni hjá teimum ungu, har teldan eisini hevur sítt pláss. Telefon er sjálvandi í hvørjum húsi, men hon hevur ikki tann stóra týdning hjá teimum ungu, tí tey hava fartelefonina í lummanum, sum bæði kann smsa og taka myndir og tónleik. Samband er allastaðini.

## Onnur hús

Fyrr var roykstovan eisini eitt arbeiðsrúm, har seyður varð flettur, seiður kruvdur, og har mangt annað fór fram. Í teimum nýggju húsunum fór tílíkt fram í kjallaranum ella í hjalshjallaranum, sum summi høvdu. Til eini føroysk hús hoyrdi um hesa tíðina eisini ein hjallur og kanska eitt hoyggjhús eisini. Hjallurin kundi standa nærhendis húsinum, men hann kundi eisini vera aðrastaðni í bygdini á staði, sum fólk hildu vera hóskandi til hjallar, serliga kjøthjallar. Umframt at hýsa bátinum kundi maður goyma eitt og annað í neystinum og á neystaloftinum. Her er ikki so nógv broytt. Men taka vit kirkju, sethús, hjall, hoyggjhús, sornhús og kanska okkurt leyst fjós, so vóru ikki nógv fleiri hús í eini føroyskari bygd. Við fríhandlinum koma fleiri hús, mest pakkhús, fiskakjallarar og aðrar goymslur og so kanska krambúð ella handil. Onnur hús vóru ikki. Dansurin um vetrarnar var í eini leigaðari roykstovu, sum varð brúkt til dansistovu, eisini brúdleyp vórðu hildin í vanligum sethúsum. Vóru eini hús ikki nóg mikið, bar til at læna grannahúsini eisini. Men eftir 1900 kom so við og við broyting í. Dansurin flutti úr roykstovuni og í dansistovurnar. Hann varð fluttur úr tí privata umhvørvinum í eitt alment umhvørvi, har ikki longur bar so væl til at halda skil á øllum, ið fór fram. Umframt at brúkast til at dansa í hóskaði dansistovan til samkomur og fundir av ymiskum slag. So hvørt sum Brøðrasamkoman og Heimamissiónin komu fyri seg í teimum ymisku bygdunum, reistu

hesar trúarrørslur sær egin samkomuhús. Umframt hesi samkomuhús vórðu avhaldslosjur reistar í einstøkum bygdum. Losjurnar kundu í summum bygdum gera somu nyttu sum dansistovurnar, men har var ikki loyvt at drekka rúsandi løg – ikki alment ið hvussu er. Síðani eru komin bygdahús, ítróttarhallir og hvørt av sínum, og tað er heldur ikki so langt síðani, at eisini vinnufyritøkan, flakavirkið, var stoltleikin í bygdini, men tað er nú søga í nógvum bygdum sum so mangt annað.



*Margfeldnið í nýmótans føroyskum húsasniði í dag er sera stórt*

# Samandráttur

Í hesum seinna partinum av bókini eru lýstar tær samfelagsbroytingar, sum so smátt tóku dik á seg fyrst í 18. øld og førdu við sær, at einahandilin varð avtikin, og at vit fingu fríhandil í 1856. Hesar broytingar, sum byrjaðu í smáum, vóru um aldaskiftið 1900 vorðnar alt sjónligari. Landið broyttist alsamt. Tað, sum nú eyðkendi landslagið kring bygdirnar um summarið, var tann hvíti saltfiskurin, ið var breiddur út til turkingar, og so øll fiskafólkini, ið vaskaðu og turkaðu fiskin. Um veturin sóust tær avriggaðu sluppirnar, ið høvdu verið til fiskiskap summarhálvuna, men sum lógu fyri teym og bíðaðu eftir várinum, til tíðin at rigga til aftur var komin.

Enn varð róð út við árabátum, hóast drátturin kundi vera tungur í fleiri bygdum, og ókyrt var. Stutt var at rógva á fiskileið mangastaðni. Motorbátar, ið komu frá umleið 1905, bar ikki til at hava á brimplássi, men teir høvdu fyrimun sum útróðrarbátar á kyrrum firðum. Hetta førdi við sær, at aðrar bygdir enn tær gomlu útróðrarbygdirnar mentu seg sum útróðrarpláss – eitt nú Klaksvík. Sálmasangurin frá áttamannafarinum varð nú avloystur av tí fjølbroytta dunkinum og roykringunum frá teimum einstøku motorbátunum, sum vórðu alt fleiri og fleiri. Lendingaviðurskiftini vórðu gjørd soleiðis, at tey riggaðu til motorbátarnar. Nú er tað, at tær mongu brúgvarnar lagaðar upp av grjóti koma. Onkustaðni vóru tær eisini av viði. Fiskaarbeiði gav bæði mannfólki og konufólki løn og pening at keypa fyri.

Tað nýggja modernaða samfelagið var kanska kámt, men tað var í eygsjón. Brátt vóru eisini barnaskúli og lærari komin í hvørja bygd. Privatu skiparaskúlarnir komu frá 1892, og tá vit komu eitt sindur inn í 1900-talið, vóru eisini fleiri læknar í landinum. Sjúkrakassarnir, sum gjørdu tað lættari at fara til lækna, komu eisini. Postur og telegrafur komu áðrenn aldarskiftið, og telefonin kom longu fyrst í øldini. Tórshavn og Vágur fáa elmegi í 1921, og skjótt fáa eisini aðrar bygdir hesa orkukeldu. Í 1946 er SEV veruleiki, og nú fær mestsum alt landið streym. Hetta var ein fyritreyt fyri at menna flakavirkini, sum komu seinast í 1950-árunum, og annars meginpartin av øllum samfelagnum.

Frá aldarskiftinum hevur ferðslukervið áhaldandi verið ment. Fyrst var tað sjóvegis, tí tað var lættari. Havið bant tá meira saman, enn tað skilti sundur. Frá 1921 koma vegir millum bygdir. Bilar høvdu leingi verið veruleiki aðrastaðni, og teir fyrstu komu nú eisini til Føroya. Fyrr høvdu framhaldsskúlar bert verið í Tórshavn, men nú koma realskúlar eisini til tær størstu fiskivinnubygdirnar, og studentaskúli kom í Havn í 1937. Alt hetta boðaði frá nýggjum tíðum og einum

nýggjum samfelag, ið koma skuldi, og sum gav teimum ungu fleiri møguleikar at velja í.

Tað gamla siðbundna bygdarsamfelagið helt kortini fram til langt eftir seinna heimsbardaga, og nógv í gerandisdegnum var enn sum fyrr. Men tá vit koma til umleið 1960, fara tær mentalu broytingarnar og broytingar í siðalagnum at vísa seg ítøkiliga. Tað gamla vælsignilsið, kúgvin í kjallaranum, verður í hesum flytiføra og broytta samfelagnum eitt haft um beinið á tí einstaka. At lærdómur var lættur at bera, vísti seg soleiðis, at tey ungu nú fingu høvi at halda fram í skúlanum eftir 7. árið, tí gjørligt gjørdist nú hjá næstan 90% at fáa framhaldsútbúgving uttan at flyta heimanífrá.

Í roynd og veru hava árini frá aldaskiftinum og heilt fram til tíðina eftir seinna heimsbardaga verið tann besta tíðin fyri allar tær føroysku bygdirnar og fyri sjálvt bygdarlívið – eisini bygdirnar á útoyggj. Tað gamla hvarv ikki alt, men helt fram at vera har sum ein týdningarmikil undirstøða í bygdarsamfelagnum. Tað nýggja kom aftrat og gjørdi lívið liviligari hjá teimum flestu. Tað var eisini tí, at fólkatalið vaks so nógv hesi árini.

Ikki fyrr enn alt landið er við at vera bundið saman í eitt kervi, og upplivingarnar verða størri og margfaldari í miðøkinum, flyta fólk av útoyggjunum, tí nú verða tey verri fyri enn hini og fáa ikki sama lívsinnihald. Seinni heimsbardagi var eitt slag av *time out*. Tað ber næstan til at siga tað sama um fyrstu trolaratíðina eftir kríggið, sum ikki skapti tann búskaparliga vøksturin sum væntað – heldur hinvegin. Men frá síðst í 1950-unum kemur ferð á búskapin, og steðgað verður ikki á fyrr enn í 1992 og tað so hart, at stórur partur av lessinum fór framav.

Eitt eyðkenni fyri Føroyar hevði verið, at hvørki fakfeløg ella politikarar hildu tað vera neyðugt við arbeiðsloysisstuðli í Føroyum. Arbeiðsloysisstuðul og ALS komu ikki fyrr enn eftir kreppuna í 1992, tá føroyski búskapurin fór í sor. Hetta førdi við sær eina mentanarbroyting til at hava arbeiði ella ikki. Frammanundan kendi eingin seg arbeiðsleysan.

Um 1900 vóru føroyingar farnir at kenna seg sum eina tjóð, ið loystist upp í máli, list og sangi, ikki minst tá Føroya Fólks Songbók kom út fyrstu ferð í 1913. Men tá var Smyril longu komin í staraflokkin, tí yrkadagurin gjørdist politiskur, og støða skuldi takast til búskaparlig og vinnulig mál. Tá hvarv tjóðskaparliga sakloysið. Longu frá fyrsta degi gjørdist føroyskur politikkur ein blandingur av tí, sum eitur vinstra og høgra, og tí serføroysku tvørsøgnini sjálvstýri og sambandi, sum hevur sett dám á alt tíðarskeiðið líka til henda dag. Tann breiða politiska semjan um tjóðskaparlig viðurskifti hevur ikki eyðkent føroyskan politikk. Tvørsøgnin er ein samansjóðaður partur av føroyskum politikki, eitt tað mest føroyska, vit hava.

Umframt tað politiska komu onnur hugarák hendan vegin, sum fóru at fylla tann partin av tíðini og huganum hjá fólki, ið ikki var arbeiðstíð. William G. Sloan legði lunnar undir Brøðrasamkomuna í Føroyum, eins og Heimamissiónin við sínum denti á persónliga trúgv um sama mundið gjørdi vart við seg innan kirkjugátt. Einstaklingurin kom nú í fokus og fekk størri týdning, ikki bert í samfelagslívi og vinnulívi, men eisini í trúarlívinum.

Rák vóru eisini í tíðini, sum mest hugsaðu um ta sál og tað likam, sum ikki bert skuldu arbeiða, men eisini brúkast í øðrum høpi. Hugtakið frítíð fær týdning. Avhaldsrørslur, ítróttur, nýggjar politiskar áskoðanir, nýtt tíðsfordrív og annað tílíkt gera vart við seg, so at enda er tað, sum fyrr var grundarlagið undir føroyska bygdalívinum, eisini vorðið hobby. Nógv av tí nýggja kravdi egin høli og egin pláss sum t.d. dansistovur og ítróttavøllir. Eisini gjørdi tann nýggi elektriski teknikkurin, at kvæðini, tann føroyski dansurin, harmonikudansurin og gággudansurin í Havn fingu kapping frá grammofonum og tónleiki í útvarpi. Skjótt komu eisini orkestur í hvørja bygd, ikki at gloyma The Faroe Boys, sum settu Føroyar upp eftir einum enda.

Tað tók eitt sindur longri tíð hjá føroyingum at koma við í nýmótans heimin enn hjá øðrum. Men so hvørt sum ferðin á samfelagsbroytingunum er økt, er eisini munurin millum tað, sum hendir í øðrum londum og Føroyum, minkaður, so skjótt gongur alt við somu ferð her á landi sum aðrastaðni. Tað eru partar av hesi gongd, sum roynt verður at lýsa í hesum partinum av bókini. Hetta er karmurin um søguna hjá tí Føroya Banka, sum varð stovnaður í 1906, og sum í 1932 fekk kapping frá tí meira bygdasliga Sjóvinnubankanum. Báðir bankar fóru í søguna í senn. Eitt av úrslitunum av kreppuni í 1992 var, at bankarnir báðir eftir mangar dramatiskar hendingar vórðu sjóðaðir saman í ein banka í 1994. Sum fuglurin Føniks reistist Føroya Banki aftur úr øskuni við búmerkinum hjá Sjóvinnubankanum. Hesin bankin er ikki meira enn 12 ár, men hann ber báðar hinar gomlu bankarnar í sær.

# Navnayvirlit

Agner, Niels Kristian 135
Alberti, P.A. 187, 189, 190
Als, Roald 114
Andersen, Svend 45
Andreasen, Christian 121
Andreasen, Dánjal Jákup 139
Andreasen, Jens Pauli 24, 228
Andreasen, K.T. 54
Andreasen, Magnhild 159
Andreassen, Anja 183
Andresen, Anton 54
Arge, Jens Peter 93, 102, 158
Arge, Jógvan 253

Beck, Jørgen 232
Bell, Alexander Graham 205
Benjaminsen, Tage 94, 102, 157
Biskupsstøð, Jákup á 243
Bjørnsen, Mette Kofoed 111
Breckmann, Óli 117
Brockmand, Jesper 273
Brogaard, Jacob 90
Brú, Heðin 251, 280, 296
Busch, prestur 275
Bærentsen, Christian 21, 156, 165, 190, 208

Christensen, C. 18, 157
Christiansen, Debes 156
Christiansen, Jacob Pauli 58, 59, 158
Churchill, Winston 30

Dahl, Jacob 232
Dahl, Jákup 194, 195, 195, 197
Dahl, Johan 43, 46-48, 158
Dahl, P.H. 232
Dahl, Th. Pauli 58, 158
Dahlerup, C.E. 170
Dam, Atli P. 68, 69, 72, 94
Dam, Johan 256
Dam, Petur Mohr 48, 50, 51, 181, 199, 201
Dam, Súsanna 207, 209
Dam, Thomas 156
Danielsen, Birgir 130, 131, 153, 158
Danielsen, C.C. 209
Danielsen, John P. 107
Danielsen, Jóhan 48
Danielsen, Stefan 124
Danielsen, Victor 275, 276
Debes, Hans Jacob 183, 190
Degn, Anton 266
Djurholm, Bjarni 112
Djurhuus, Hákun 49
Djurhuus, Johs. 173
Djurhuus, Jógvan Z. 158
Djurhuus, Kristian 42, 43, 46, 48
Djurhuus, Martin 47, 158
Djurhuus, Tórmóður 136
Djurhuus, Tróndur 109
Duus, Flemming 90, 93, 102, 102, 157

Effersøe, Oliver 187, 188, 191, 192, 208, 218
Effersøe, Rasmus 187
Egholm, Petur 47, 158
Eidesgaard, Jóannes 114, 115, 117
Eiðinum, Óli á 233
Eken, Arne 42, 43, 45, 46, 58, 61

Elberling, Erik 64, 64, 159
Elkær-Hansen, Niels 45, 65
Ellefsen, Jógvan 107
Ellefsen, Pauli 68
Ellemann-Jensen, Uffe 112, 113
Enomoto, Olav 159
Eriksen, Erik 48, 64
Evensen, A.C. 194
Evensen, Jens 156

Finsen, Olaf 173
Finsen, Steingrim 157
Fossádal, Helgi 84
Fosaa, Heini 135, 136

Geil, Andreas í 274, 275
Geil, Elspa í 275
Geil, Kristin í 267
Gerðum, Dávur í 233
Gerhard, V. 157
Glückstadt, Emil 21, 156
Glückstadt, Isak 21
Graba, C.J. 291
Gregoriussen, J.P. 270
Grønborg, Jørgen 111
Guldhammer, H.A. 228
Gørtz, Erik 110

Hammerby, Svend 157
Hammershaimb, V.U. 197
Hansen, Agnar 157
Hansen, H.C. 63
Hansen, Høgni 158
Hansen, Ivar 115, 117
Hansen, Johan Elkjær 159
Hansen, Jóhannus Egholm 159
Hansen, Jørn Astrup 14, 94, 99, 103, 121, 125, 126, 152, 159
Hansen, Niels Pauli 297
Hansen, Peter Sofus 43, 48, 157
Hansen, Roland 42, 43, 44, 45, 52, 59, 60, 159
Hansen, Rúni M. 158
Hansen, Sverri 135, 136, 141
Harryson, Leivur 112
Havsteen, G.M. 157
Hedegaard, O. 157
Hedtoft, Hans 65
Heinesen, Godtfred 232
Heinesen, Knud 107
Heinesen, Martin 201
Heinesen, William 35, 124, 244, 271
Heinesen, Zacharias (e) 156
Heinesen, Zacharias (y) 124
Hertz, Emil C. 156
Hessenschmidt, Leo 157
Heygum, Ólavur á 18, 187, 205-208, 233
Hilbert, C. Aa. 31, 32, 55, 62, 198
Hilduberg, Jalgrím 104
Hjalt, J.H. 24
Hjelm, Jaspur A. 26, 28, 58, 158
Holm, Martin 48
Holm, P.A. 296
Horn, Hans 208
Hoydal, Kjartan 71, 102, 105, 157
Husted-Andersen, B. 156
Høgadalsá, Hanus við 156
Højgaard, Louis 44
Høvdanum, Jógvan á 233
Høvdanum, Karl á 233

Isaksen, Jógvan 158
Isaksen, Jens Klæmint 233

Ísakson, Finnbogi 108, 124

Jacobsen, Asloy Holm 28
Jacobsen, Chr. Holm 24-26, 25, 28, 28, 46, 52, 53, 55, 58-60, 61, 119, 158
Jacobsen, Gullak 194
Jacobsen, Jacob Michael 58, 158
Jacobsen, Jákup 158
Jacobsen, Jóan Jakku 233
Jacobsen, Jørgen Frantz 271
Jacobsen, Meinhard 141
Jacobsen, Sigmar 158, 159
Jacobsen, Súni Schwartz 159
Jensen, Harald 45
Jensen, Óla Jákup 158
Jensen, Peter 174
Jensen, Peter Fløe 93, 157
Jensen, Viggo Ryving 228, 267, 275
Jespersen, Jógvan 103, 152, 158
Joensen, David 24
Joensen, Edmund 115, 134, 137, 139, 140
Joensen, Erland Viberg 266
Joensen, Hans Pauli 214
Joensen, Jákup 26, 28, 58, 158
Joensen, Jákup, próstur 255
Joensen, Johan K. 104, 156
Joensen, Johs. Olaus 26, 28, 59, 158
Joensen, Jóan Pauli 152, 160
Joensen, Jóhan 134, 136
Joensen, Jóhan Páll 102, 103, 115, 134, 136, 137, 158
Joensen, Martin 244
Joensen, Niclas 103, 158
Joensen, Robert 244, 245
Joensen-Mikines, Sámal 251
Johannesen, Jens Chr. 43, 45, 51
Johannesen, Vilhelm 96, 103, 157
Johansen, Carl 278
Johansen, Poul Johannes 96, 156
Joplin, Scott 278
Jørgensen, Erik Holst 111

Kallsberg, Anfinn 115, 151
Kamban, Janus 124
Kampmann, Viggo 52, 65, 66
Kass, Jákup 158
Kirkholm, Ingolf 42, 45, 46
Kjølbro, J.F. 26, 47, 48, 51, 66, 130, 158, 213, 233, 239, 239, 240, 244, 275
Klinte, Bent 95
Krag, Jens Otto 65
Kristensen, Thorkil 46
Krosstein, Svend 103, 157

Larsen, Niels 135
Laursen, Hans-Jørgen 94, 99, 102, 157
Long, Richard 24, 26, 28, 43, 58, 158
Ludvigsen, Knud 157
Luther, Martin 273
Lützen, Jacob 21, 156
Lützen, Mogens 156
Lykketoft, Mogens 98, 108, 113

Madsen, Niels 52
Magnússon, Guðmundur 110
Meiner, Henrik 45, 46
Meyer, Richard 156
Michelsen, Poul 136, 139
Mikkelsen, Richard 104, 104, 107, 113
Mitens, Edward 76, 156, 194, 195, 285
Moe, Axel Frederik 275
Mogensen, Ebbe 111
Mohr, Bjarti 139
Mohr, Høgni 158

Mohr, Poul 93, 103, 158
Mortansstovu, Laurits í 211, 243
Mortensen, Andrass 242
Mortensen, Axel 238
Mortensen, Johan 232
Mortensen, Josefina 76
Mortensen, N. 54,
Mortensen, Niels G. 52, 55, 60
Mortensen, Niels Juel (e) 21, 76, 156, 194, 232
Mortensen, Niels Juel (y) 76, 156
Mortensen, Olaf 269
Munch, Ove 139
Mølgaard, Eigil 88, 90, 113
Møller, Michael 110
Mørkøre, Jákup 136, 141

Nathan, Ove 112
Nattestad, Niels Juel 102, 157
Neystabø, Helena Dam á 112
Niclasen, Dánjal 43-49, 51, 51, 130, 158
Niclasen, Erik 233
Niclasen, N. 214
Nielsen, Andreas 228, 275
Nielsen, Chr. C. 121
Nielsen, Niels 24
Nielsen, Olaf 52
Nielsen, Steingrím 94, 159
Nielsen, Thomas 118
Nolsøe, Dánial 201
Nolsøe, Niels Chr. 125
Nolsøe, Poul 156
Nonnegaard-Pedersen, Agnete 124
Nonnegaard-Pedersen, Sv.Aa. 123, 124, 157
Nólsoyar Páll 195

Olrik, Elias 156
Olsen, Andreas Lava 96, 139, 156
Olsen, Bjarni 103, 157
Olsen, Erling 114
Olsen, Joen P. 232
Olsen, Olaf 91, 96, 156
Olsen, Ragnar S. 103, 158
Olsen, Rasmus 44, 64, 64, 67, 159
Olsen, Regin 159
Olsen, Sverre 93, 94, 103, 152, 158
Otbo, Henrik 112

Patursson, Erlendur 201
Patursson, Jóannes 17, 181, 184, 184-192, 195, 196, 200, 208, 231, 234
Patursson, Sverri 216
Petersen, Fríðrikur 182, 183, 191, 192, 194, 208, 218
Petersen, Janus 103, 126, 159
Petersen, Knud 157
Petersen, Marita 94, 95, 96, 97, 106
Petersen, Óli 70, 92, 97, 111, 140
Petersen, S.P. 232, 239, 239, 240
Petersen, Thorstein 25, 25, 26, 28, 31, 41-46, 49-62, 119, 159, 181
Pløyen, Chr. 164, 231, 247
Poulsen, Arne 158
Poulsen, Halgir Winther 150, 201
Poulsen, Joen Hendrik 208
Poulsen, Johan 48
Poulsen, Johan, blikkensláarin 264
Poulsen, Wilhelm 19, 20

Rasmussen, Emil 21, 156
Rasmussen, Poul Nyrup 94, 96, 98, 111, 113, 114, 118
Rekling, Michael 111
Restorff, Egil 156

Restorff, M.C. 231
Reyni, Ingálvur av 124
Reyni, Jens av 47
Riise, E.M. 275
Ringberg, Hjalmar 156
Rógvi, Eyðun á 97
Ryberg, Niels 231
Rytter, Aage L. 50, 52
Rytter, Svenning 156, 184, 194-196
Rættará, Lias í 212, 243

Samuelsen, Andras 182, 182, 183, 195
Sandall, T.B.W. 30
Schlüter, Poul 92, 94
Siemsen, C.F. 231
Simonsen, Esbern 83, 157
Simonsen, Jóhan 94, 157
Sivertsen, Alex 233
Sivertsen, Júst 216
Skálagarð, Hjartvard 170
Skibsted, A.W. 231
Skaale, Sigfried 63
Sloan, William Gibson 274, 275, 301
Smith, Ruth 124
Stahlschmidt, V. 156
Straarup, Peter 98, 108
Sundstein, Jógvan 87, 90, 91
Sølvará, Hans Andrias 110, 117, 167, 168
Sølvsteen, Henry 48-51, 64, 159
Sørensen, Knud 98
Sørensen, Nils 93, 102, 158

Thomasen, Thomas 46, 47, 156
Thomassen, Marius 47, 158
Thomassen, Thomas M. 24
Thomsen, Hans Georg 20
Thomsen, H.L. 52
Thomsen, Richard 135
Thomsen, Richard B. 17, 20
Thomsen, T.F. 19, 20, 231
Thomsen, Th.F. 156
Thrane, H. 156
Tórgarð, H.C.W. 268, 269
Trolle, Eskil 104
Tveede, Alexander 52, 53

Uhrenholt, Frank 134, 136, 137
Ulriksen, Jørgen 93, 94, 102-104, 158

Vagn-Hansen, C.Aa. 46
Vátutoft, Malvinius í 233
Vestergaard, Niels 110

Weihe, Klæmint 96, 102, 156
Weiss, Birthe 114
Wessel-Aas, Stein 111
Winther, Ingeborg 202
Waagstein, Eigil 110
Waagstein, Jógvan 27
Waagstein, Leif 42, 51, 51, 52, 55, 60

Zachariasen, Louis 26, 194, 197
Zachariassen, Jógvan 233
Zahle, C.T. 194-196

## Føroyar og bankarnir í 100 ár

Henda bók er útgivin í sambandi við, at 100 ár eru liðin, síðan Føroya Banki fór undir sítt virksemi 1. mars í 1906.

Í fyrra parti lýsir Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi stjóri í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, søguna hjá bankunum farnu øldina. Greitt verður frá, tá Føroya Banki varð stovnaður í 1906, og tá Sjóvinubankin kom í 1932. Høvundurin lýsir eisini gjølla truplu støðuna hjá Sjóvinnubankanum fyrst í fimtiárunum og rokmiklu bankabjargingarnar í nítiárunum.

Í seinna parti lýsir Jóan Pauli Joensen, professari og rektari á Fróðskaparsetri Føroya, landsins søgu og fólkalív tey 100 árini, Føroyar hava havt bankar. Høvundurin gevur lesaranum neyvt innlit í politisku, mentanarligu og vinnuligu menningina farnu øldina. Tær mongu og stóru samfelagsligu broytingarnar verða lýstar í leikandi løttum teksti og forkunnugum myndum

FØROYA BANKI